*Løgtingsins umboðsmaður*

*Ársfrágreiðingin 2009*

# LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

## *Ársfrágreiðingin 2009*

Tórshavn 2010

Løgtingsins umboðsmaður
Ársfrágreiðingin 2009
© 2010 Løgtingsins umboðsmaður
Umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent

ISBN 978-99918-969-8-4

Svanamerktur prentlutur 541 705

# *Innihaldsyvirlit*

I. Um embætið . . . . . . . . 9
II. Gongdin í 2009 . . . . . . . . 11
III. Hagtøl . . . . . . . . 12
IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2009 . . . . . . . . 21

***10 Málsviðgerðartíð*** . . . . . . . . 21
10.1 Drúgv málsviðgerðartíð á Almannastovuni av umsókn um fyritíðarpensjón . . . . . . . . 21
10.2 Viðgerðartíðin í Innlendismálaráðnum, av uppsagnarmáli . . . . . . . . 47

***11. Innlit*** . . . . . . . . 54
11.1 Partvíst noktandi innlit frá Mentamálaráðnum í mál um eftirskúla . . . . . . . . 54
11.2 Noktan av innliti frá Mentamálaráðnum í starvsfólkamál . . . . . . . . 61
11.3 Noktan av innliti frá Mentamálaráðnum í uppsagnarmál . . . . . . . . 66
11.4 Noktan av innliti frá Mentamálaráðnum í mál, sum ikki var liðugt avgreitt . . . . . . . . 70
11.5 Noktan av meirinnliti í innanhýsis arbeiðsskjøl . . . 73
11.6 Handfaring hjá Uttanríkisráðnum av innlitsumbøn . . . . . . . . 79

***21 Kommunu-, Umhvørvis-, Byggi-/leigumál og Friðing*** . . . . . . . . 90
21.1 Avgerð hjá Innlendismálaráðnum at nokta sundurbýti í eigaraíbúðir . . . . . . . . 90
21.2 Avgerð hjá Innlendismálaráðnum viðv. kommunuvalinum 2008 í Kvívíkar kommunu . . . . 127

***22 Skattur og Avgjøld v.m.*** ....................... 146
22.1 Viðgerð av umsókn um eftirgeving av MVG-skuld ............................... 146

***28 Starvsfólkamál v.m. og arbeiðsmarknaðarmál***... 178
28.1 Setan av stjóra á Búnaðarstovuni............... 178
28.2 Handfaring hjá Uttanríkisráðnum av setan av deildarstjóra á Løgmansskrivstovuni ........... 198

VI. Skjøl.......................................... 245
1. Umboðsmanslógin............................... 245
2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann......... 249



# *Til Løgtingið*

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2009. Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2010.

Frágreiðingin er býtt upp soleiðis:

I. Um embætið
II. Gongdin í 2009
III. Hagtøl
IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2009
V. Eftirlitsvitjan
VI. Skjøl
   1. Umboðsmanslógin
   2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann

Tórshavn, mai 2010

*Sólja í Ólavsstovu*

# *I. Um embætið*

Løgtingið valdi tann 23. november 2005 meg sum Løgtingsins Umboðsmann fyri tíðarskeiði 1. janaur 2006 til 31. desember 2010. Eg tók við embætinum tann 1. janaur 2006.

Umframt meg sjálva er embætið mannað við løgfrøðiligu medarbeiðarum mínum, Biritu Ludvíksdóttur, ráðgeva og Jóhannu Arge, ráðgeva og Lailu Egholm, skrivstovufulltrúa.

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4,stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.( § 4, stk. 5 ).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5).

Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4).

Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5).

Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins

vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. (§ 8).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann at álvarsligt mistak ella vatnsketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10).

Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá. ( § 12 ).

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru viðheft ársfrágreiðingini sum skjøl.

Adressan er Traðagøta 43, Postsmoga 2008, FO-165 Argir, og teldupostadressan er lum@lum.fo.

Heimasíða umboðsmansins eitur www.lum.fo.



# *II. Gongdin í 2009*

Í 2009 er hend ein broyting í uppgerðini av klagum. Hvørt einstakt mál kann innihalda fleiri ymiskar klagur. Higartil hava hesar klagur verið uppgjørdar serstakt. Men av tí hetta kann geva eitt skeivt bílæt av, hvussu nógvar klagur eru um eina avgerð hjá sama myndugleika, havi eg í ár valt bert at taka talið av upprættaðum málum við í hagtølini og bólka málini eftir, hvat málið í høvuðsheitum viðvíkti.

Í 2009 vórðu upprættaði 76 mál, sum er eitt lítið fall samanborið við undanfarnu ár. Av teimum 76 málunum, sum komu inn í 2009 vóru 64 endaliga avgreidd innan 31. des. 2009. Harumframt vóru 16 mál avgreidd, sum vóru innkomin (men ikki avgreidd) í 2008.

Føroyski umboðsmaðurin gjørdist í 2009 sjálvstøðugur limur í Altjóða Felagsskapinum fyri Umboðsmenn I.O.I, ein felagsskapur sum í dag telur á leið 135 limir. Í sambandi við, at 200 ár vóru liðin síðani svenski umboðsmannastovnurin, sum var fyrsti av sínum slag í heiminum, varð settur á stovn, helt Altjóða Felagsskapurin fyri Umboðsmonnum stórslidna ráðstevnu í Stockholm 9-12 juni 2009. Saman við umboðsmonnum úr øllum heiminum, luttók eg eisini í hesi ráðstevnu.

Á tjóðardegi Grønlands tann 21. juni luttók eg í einum hátíðarhaldi í Nuuk í sambandi við, at 30 ár eru liðin síðani at Grønland fekk heimastýrið, og at Grønland sama dag fekk sjálvsstýrið.

Umboðsmenninir í Noregi, Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum koma regluliga saman til fundar eina ella tvær ferðir um árið, har evni av felags áhuga koma til viðgerðar. Í 2009 var ein fundur, og hann varð hildin í Keypmannahavn í døgunum 12. og 13. mars.

# III. Hagtøl

**Klagur innkomnar í 2009 býttar á myndugleikar**
Í 2009 blivu upprættaði 76 mál. Hesi málini vóru býtt soleiðis millum ymsu myndugleikarnar:

(Talva 1)

| *Myndugleiki:* | *Klagur:* |
|---|---|
| Mentamálaráðið | 14 |
| Innlendismálaráðið | 4 |
| Vinnumálaráðið | 1 |
| Almannamálaráðið | 2 |
| Heilsumálaráðið | 1 |
| Fiskimálaráðið | 4 |
| Uttanríkisráðið | 3 |
| Kommunur | 13 |
| Almannastovan | 6 |
| Nærverkið | 1 |
| Høvuðsbarnanevndin | 1 |
| Landssjúkrahúsið | 1 |
| Føroya Landfúti | 1 |
| Taks | 6 |
| Kringvarpið | 4 |
| Kærunevndin í alm. og heilsumálum | 2 |
| Kærunevndin fyri stuðulsstovnin | 1 |
| Búnaðarstovan | 1 |
| Kærunevndin í lendismálum | 1 |
| Umhvørvisstovan | 1 |
| Friðingarnevndin | 1 |
| Televarpið | 1 |
| Loyvisnevndin | 1 |
| Føroya Musikskúli | 1 |
| Vinnuháskúlin | 2 |
| Vinnuframagrunnurin | 1 |
| Landsverk | 1 |
| **Tilsamans** | **76** |

**Innkomnar klagur í 2009 býttar á málsøki og klaguinnihald**
Klagurnar, sum komu inn í 2009 kunnu býtast upp eftir málsøki og innihaldi, sum gjørt er niðanfyri:

(Talva 2)

| *Málsøki* | *Tal av klagum* | *Klagur um avgerðir* | *Klagur um málsviðgerð* |
|---|---|---|---|
| Starvsfólkamál | 14 | 12 | 2 |
| Fiskivinnumál | 4 | 3 | 1 |
| Almannamál | 12 | 4 | 8 |
| Skattur v.m. | 6 | 3 | 3 |
| Undirvísing v.m. | 4 | 0 | 4 |
| Byggimál v.m. | 10 | 7 | 3 |
| Innlit | 16 | 9 | 7 |
| Vinnumál | 2 | 1 | 1 |
| Ymiskt | 8 | 4 | 4 |
| **Tilsamans** | **76** | **33** | **33** |

**Klagur endaliga avgreiddar í 2009**

Av teimum 76 klagunum, sum komu inn í 2009 vóru 64 endaliga avgreiddar innan 31. des. 2009. Harumframt vóru avgreiddar 16 klagur, sum vóru innkomnar (men ikki avgreiddar) í 2008. Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

(Talva 3)

| *Myndugleiki* | *Klagur* | *Avvístar* | *Viðgjørdar* | *Viðgjørdar uttan átalu/ tilmæli* | *Viðgjørdar átala/tilmæli givið* |
|---|---|---|---|---|---|
| Mentamálaráðið | 18 | 12 | 6 | 2 | 4 |
| Innlendismálaráðið | 4 | 1 | 3 | 1 | 2 |
| Vinnumálaráðið | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Almannamálaráðið | 3 | 3 | 0 | 0 | 0 |
| Heilsumálaráðið | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 |
| Fiskimálaráðið | 5 | 3 | 2 | 1 | 1 |
| Uttanríkisráðið | 2 | 0 | 2 | 0 | 2 |
| Kommunur | 13 | 13 | 0 | 0 | 0 |
| Almannastovan | 6 | 3 | 3 | 0 | 3 |
| Nærverkið | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Høvuðsbarnanevndin | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Landssjúkrahúsið | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 |
| Føroya Landfúti | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Taks | 4 | 3 | 1 | 0 | 1 |
| Kringvarpið | 4 | 3 | 1 | 0 | 1 |
| Kærunevndin í alm. og heilsumálum | 2 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| Kærunevndin fyri stuðuls. | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Búnaðarstovan | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Skuldarumskipanarnevndin | 1 | 0 | 1 | 0 | 1 |
| Umhvørvisstovan | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Friðingarnevndin | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Televarpið | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Loyvisnevndin | 2 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| Føroya Musikskúli | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Vinnuháskúlin | 2 | 2 | 0 | 0 | 0 |
| Vinnuframagrunnurin | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Landsverk | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **80** | **58** | **22** | **4** | **18** |



**Klagur avvístar í 2009**

Í 2009 vórðu 54 klagur avvístar av ymiskum orsøkum. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

(Talva 4)

| *Avvísingarorsøk* | *Klagur* |
|---|---|
| Innkomin ov seint; § 6, stk. 2 | 0 |
| Kærumøguleiki ikki troyttur; § 6, stk. 3 | 11 |
| Ikki grundarlag fyri víðari kanningum; § 6, stk. 4 | 28 |
| Uttanfyri heimildarøki; § 4 | 10 |
| Afturkallað | 5 |
| **Tilsamans** | **54** |

**Viðgjørdar klagur í 2009 býttar á málsøki**

Tey málini, sum blivu endaliga viðgjørd í 2009, kunnu býtast upp eftir málsøki á hendan hátt:

(Talva 5)

| *Málsøki* | *Klagur* |
|---|---|
| Starvsfólkamál | 4 |
| Skattur v.m. | 2 |
| Almannamál | 3 |
| Innlit | 8 |
| Byggimál v.m. | 1 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 1 |
| Vinnumál | 2 |
| Val | 1 |
| **Tilsamans** | **22** |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av viðgjørdum klagum**

Í teimum 22 endaliga viðgjørdu klagunum hevur miðal viðgerðartíðin verið hendan:

(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 6)

***Viðgerðartíð í miðal:***

| | |
|---|---|
| Aftaná partshoyring: | 2 mdr. 17 dg. |
| Samlað: | 5 mdr. 7 dg. |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av avvístum klagum:**

Í teimum 58 avvístu klagunum hevur miðal viðgerðartíðin verið hendan:

(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 7)

***Viðgerðartíð í miðal:***

| | |
|---|---|
| Aftaná partshoyring: | 6 dg. |
| Samlað: | 26 dg. |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av bæði viðgjørdum og avvístum klagum:**

Fyri allar klagurnar, tvs. bæði avvístar og endaliga viðgjørdar klagur, hevur málsviðgerðartíðin í miðal verið hendan:

(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 8)

| | **Viðgerðartíð** | **Viðgerðartíð aftaná partshoyring** |
|---|---|---|
| **Klagur** | **80** | **tilsamans** |
| Viðgerðartíð í miðal: | 2 mdr. 4 dg. | 27 dg. |



**Klagur innkomnar í 2009 býttar á myndugleikar**



**Klagur innkomnar í 2009 býttar á málsøki**




**Klagur innkomnar í 2009 býttar eftir klaguinnihaldi**






**Klagur endaliga avgreiddar í 2009**




**Klagur avvístar í 2009 býttar eftir avvísingarorsøk**



**Klagur viðgjørdar í 2009 býttar á málsøki**




**Innkomnar klagur**






# *IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2009*

## *10 Málsviðgerðartíð*

### 10.1 Drúgv málsviðgerðartíð á Almannastovuni av umsókn um fyritíðarpensjón

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um málsviðgerðartíð á Almannastovuni av umsókn um fyritíðarpensjón. Klagarin hevði síðani 2002 verið illa fyri heilsuliga, og nú eisini sosialt. Væl meira enn 2 ár vóru fráliðin, síðani klagarin søkti um fyritíðarpensjón, og hóast allar læknaváttanir staðfestu, at arbeiðsførleikin hjá klagaranum var skerdur, helt Almannastovan áfram við at biðja um læknakanningar av klagaranum, seinastu ferð í mai 2009. Grundað á allar læknaváttanirnar, ið vóru í málinum, hevði umboðsmaðurin trupult við at síggja endamálið við at senda klagaran til fleiri læknakanningar. Umboðsmaðurin gav Almannastovuni eina átalu fyri handfaringina av hesum málinum, og heitti samstundis á Almannastovuna um at taka avgerð í málinum. Umboðsmaðurin bað Almannastovuna lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum. (**J. nr. 200800077**)*

### Klagan

Við skrivi, dagfest 26. september 2008, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> **„Viðvíkjandi: Fyritíðarpensión j. nr. …**
>
> Í februar 2007 søkti eg um fyritíðarpensjón í samráð við kommunulæknan. Hettar hevur bara drigið út, og var klárt til støðutakan miðan november 2007, tá eg so prøvaði eitt vart starv eftir áheitan frá almannastovuni, men hettar riggaði ikki, og mátti eg gevast í apríl 2008 vegna sjúku.

Her skuldi so pensjónsmáli takast uppaftur, og skuldi nú leggjast fyri pensjónsráði. Hettar hevði eg fingið at vita umvegis telefon, men soleiðis skuldi tað ikki ganga.

Nú skuldu læknaváttanir og aftur læknaváttanir og eg veit ikki alt, sum í mínari verð var til at útseta og leingja hettar mál so leingi sum møguligt.

Tað sum nú fekk begari at flóta yvir er. Pensjónsfundur var tann 11. september og 16. september sendi eg ein teldupost, nær eg fekk nakað at vita um nevnda fund, men einki svar. Eg sendi tí aftur ein teldupost tann 18. september, men her kom heldur einki svar. Eg sendi tí aftur ein tann 19. september, og her síggi eg, at B deildarleiðari, hevur lisið teldupostin tann 22. september. Men stadivekk einki tekn, hvørki umvegis post, teldupost ella nakað annað.

Eg prøvaði fleiri ferðir at ringja og fáa fatur á C, sum er saksviðgerði hjá mær, men her var heldur einki at gera, annahvørt var hon á fundi ella tók hon ikki telefonina. Eg legði eisini boð um at fáa tey at ringja aftur, men tað sama segði tað.

Hetta er í stuttum, hvat málið snýr seg um, men tað er øll sakin sum eg ynskja, verður viðgjørd av umboðsmanninum.

Eg vil tí heita á Løgtingsins Umboðsmann, um at fara inn í hettar mál. Eftir mínari metan er alt ov long tíð gingin til at fáa hettar mál avgreitt."

## Málsgongd

Av skjølunum, ið umboðsmaðurin hevur fingið til láns frá Almannastovuni sæst, at gongdin í málinum hevur verið hendan:

Tann 27. februar 2007 hevur Almannastovan móttikið umsókn um fyritíðarpensjón frá A. Heimildarváttan til at innheinta og víðarilata upplýsingar er latin Almannastovuni saman við umsóknini.



Við skrivi, dagfest 9. mars 2007, heitir Almannastovan á kommunulækna um læknaváttan, og heitir samstundis á umsøkjaran um at seta seg í samband við læknan og avtala tíð.

Tann 18. apríl 2007 móttekur Almannastovan læknaváttan, dagfest 3. apríl 2007, frá kommunulæknanum. Kommunulæknin metir heilsustøðuna hjá sjúklinginum viðvíkjandi kroniskari pínu í … vera varandi. Hann metir ikki, at endurbúgving er ein møguleiki í núverandi støðu. Um heilsustøðan broytist, kann revalidering gerast aktuel. Kommunulæknin væntar ikki betringar í støðuni, og kann ikki siga, um støðan fer at versnað.

Í sambandi við eitt mál hjá umsøkjaranum frá 2005, hevur Almannastovan innheinta fleiri læknaváttanir. M.a. liggur eitt váttan frá E, serlækna í ortopedi á Landssjúkrahúsinum, dagfest tann 26. juli 2005. Í váttanini stendur m.a. soleiðis:

> „Eg dugi ikki at síggja nakra sum helst meining í at gera eina MR-skanning av hesum manni. Hon var jú gjørd í 2003, og sum ikki vísti nakran … .
>
> Pínan er óbroytt og uppá sama máta sum hon hevur verið frammanundan.
>
> Eg havi havt henda mannin kontrolleraðan av reumatologinum H, sum heldur ikki fann nakað fokal á honum, sum hann meinti kom frá so niðarlagað í … . Hann meinti, at tað kom eitt sindur longri uppifrá og hevur roynt at givið blokadur, men tað hevur ikki givið nakað úrslit.
>
> … so eg meti ikki, at tað førir nakað víðari. Haruafturímóti havi eg skrivað eitt bræv til … center og vita um teir kunnu hjálpa honum við nøkrum."

Í málinum liggur eisini ein váttan frá D, yvirlækna á … Sygehus, … centret, dagfest 6. oktober 2005. Í niðurstøðu síni skrivar yvirlæknin m.a. soleiðis:

> „Han vil varigt være betydeligt funtionshæmmet, også efter

mdr's eller års regelret træning. Må hjælpes videre med socialmedicinske foranstaltninger, hvor der varigt tages hensyn til hans kroniske …merter og hans …mæssige funktionshæmning. Bør aldrig have et ensidigt …belastende arbejde, herunder stillesiddende arbejde."

Í skrivi til Almannastovuna, dagfest 14. november 2005, vísir E, serlækni í ortopedi á Landssjúkrahúsinum, á váttanina frá yvirlækna á … Sygehus, og sigur m.a. soleiðis:

„Hetta er sjúklingur, sum hevur verið sjúkur síðani hann kom til skaða í 2002. Hann hevur eisini verið niðri á … center, sum er ein specialdeild fyri sovorðnar skaðar, og har er man komin til ta niðurstøðu, sí útskrivingarbræv, at støðan nú er stationær, altso við øðrum orðum lívslang, og ongir behandlingsmøguleikar eru eftir, at rokna við, at hann kemur útaftur í erhvervslívið er nú nokk so optimistiskt. So í mínari verð hevði tað verið rímuligt at bjóða hesum manni invalidupensión …"

Tann 6. juni 2007 hevur læknaráðgevin á Almannastovuni skrivað eina tilráðing, har tað m.a. stendur soleiðis:

„á hvønn hátt eru vinnuevnini skerd ? kan hverken arbejde fysisk krævende eller stillesiddende arbejde.
…
Eru størv umsøkjarin framvegis kann røkja ? Um ja, hvat slag av størvum:
Ikke aktuelt – situationen forekommer fastlåst. Man kunne forestille sig let arbejde, hvor han kunne gå til og fra."

Læknaráðgevin metir vinnuevnininі hjá umsøkjaranum vera niðursett við 2/3 ella meira.

Við skrivi, dagfest tann 6. september 2007, biður Almannastovan umsøkjaran koma til eina samrøðu á Arbeiðsmarknaðardeildini tann 13. september 2007. Hetta fyri at umrøða, nær fyritíðarpensjón kann tillutast, heilsustøðuna hjá umsøkjaranum, arbeiðsmarknaðarliga tilknýti, endurbúgving, inntøku og annað.

Tann 27. september 2007 hevur Almannastovan skrivað upprit viðvíkjandi lýsing av málinum og tilmæli um loysn. Heildarmetingin hjá málsviðgerðanum er soljóðandi:

„…
Eg meti, at endurbúgving eigur at verða roynd. A fekk í 2006 játtað endurbúgving og sjálvur ynskti hann at lesa …, men AMD metti at útbúgvingarleiðin var ov long. Hann kærdi avgerðina, men Almannastovan fekk viðhald. Tískil er grundarlag fyri endurbúgving við eini styttri lestrarleið.

Umsøkjarin er einans … ára gamal, hóast hann hevur ampar av skaðanum, meti eg tað er møguligt at endurbúgva hann til skrivstovuarbeiði. Evt. via sjálvlestur og síðan læru helst í heimbygdini (ella grannabygdunum) fyri at minimera ferðing. A upplýsur, at hann hevur trupulleikar við ferðing. Hann fær pínu av at koyra ov leingi, tí meti eg, at sjálvlestur helst hevði verið besta loysnin, tó so um hann brúkti bussin hevði hann havt møguleika fyri at reisa seg, tá pínan av at sita gerst ov ring.

Umsøkjarin upplýsur eisini, at hann gjarna vildi arbeitt, og hevur sjálvur roynt at finna sær arbeiði.

Samanumtikið meti eg, at umsøkjarin ikki kann arbeiða innanfyri …fakið, men at grundarlag er fyri at endurbúgva hann til skrivstovuarbeiði evt. víðari útbúgving innan fyri sítt núverandi fak *(mín viðm.: … og …)*, har atlit verða tikin til sjúkueyðkenni hansara á einum møguligum arbeiðsplássi. Mælt verður til endurbúgving."

Tann 1. oktober 2007 sendir Almannastovan umsøkjaranum læknaváttanir frá F, kommunulækna, og E, serlækna, umframt upprit viðvíkjandi lýsing av málinum frá Arbeiðsmarknaðardeildini til ummælis. Hetta áðrenn Almannastovan tekur endaliga avgerð í málinum.

Við telduposti, dagfestur tann 6. oktober 2007, biður umsøkjarin um

skjalainnlit í alt sum hevur við fyritíðarpensjónsmál hansara at gera. Almannastovan svarar umsøkjaranum, at Almannastovan skjótast gjørligt fer at avgreiða umbønina um skjalainnlit. Hoyringsfreistin verður samstundis longd við 14 døgum. Almannastovan sendir umsøkjaranum skriv við øllum skjølunum í málinum tann 11. oktober 2007.

Av tí at umsøkjarin biður um longda hoyringsfreist, boðar Almannastovan við skrivi, dagfest tann 24. oktober 2007, frá, at hoyringsfreistin er longd við 14 døgum til 8. november 2007.

Tann 8. november 2007 móttekur Almannastovan soljóðandi viðmerkingar frá A:

> **„Viðmerkingar til partshoyring j.nr. … Pensjónsmál hjá A**
>
> „Mælt verður til endurbúgving" Soleiðis endar C sína frágreiðing um heilsustøðuna hjá mær.
> Sjálvt um tað sera klárt og tíðiligt er sagt bæði av kommunulækna, F, serlækna, E, G læknaráðgeva og serlækna á … center at:
>
> Eg citeri: G læknaráðgevi metir, at A hvørki kann røkja eitt fysiskt krevjandi arbeiði ELLA SKRIVSTOVUARBEIÐI. Punkt 13. 4
>
> Eg citeri: …..samb. kommunulæknanum metir eisini at endurútbúgving IKKI er ein møguleiki tí konsentaratiónsevnini eru ov vánalig. PUNKT 13.4.
>
> Eg citeri: Hevur roynt at tikið skeið á …, men var samb. kommmunulækna IKKI FØRUR FYRI AT FULLFØRA VEGNA PÍNU. Hann kláraði ikki at sita ella standa í longri tíð, og hevði vegna PÍNU, RINGT VIÐ AT KONSENTRERA SEG UM SKÚLAARBEIÐI! Kommunulæknin metir IKKI, AT ENDURÚTBÚGVING er ein møguleiki í núverandi støðu, SOMU NIÐURSTØÐU HEVUR E SERLÆKNI, ið metir at heilsustøðan IKKI FER AT BROYTAST, tí allir viðgerðarmøguleikar nú eru troyttir.Punkt 13.5.



E sigur eisini í skrivi 14. nov. 2005. Eg citeri: ....at støðan nú er stationer, altso við øðrum oðrum lívslang, og ongir behandlingsmøguleikar eru eftir, AT ROKNA VIÐ AT HANN KEMUR ÚTAFTUR í ERHVERVSLÍVIÐ ER NU NOKK SO OPTIMISTISKT. SO í MÍNARI VERÐ HEVÐI TAÐ VERiÐ RÍMULIGT AT BJÓÐA HESUM MANNI INVALIDUPENSJÓN!

D yvirlækni á … Sygehus skrivar 06.10 05. Eg citeri: Bør aldrig have et ensidigt …belastende arbejde, HERUNDER STILLESIDDENDE ARBEJDE.

Tað undrar meg almikið, at Almannastovan soleiðis uttan víðari kann til einkis gera úttalilsir frá teim ymisku læknunum, vælvitandi um at Almannastovan skal troyta allar aðrar møguleikar smb. lóggávuni, men eg meti at man skal eisini verða realistiskur og taka læknalig úttalilsir til eftirtektar. Sum tað eisini sæst í skrivinum søkti eg arbeiði á ymiskum teknistovum og øðrum kontórum. Tað hevur verið eftir at eg kom aftur av sjúkrahúsinum í ….

Sum ein ansvarsfullur familjumaður og pápi at … børnum noyddist eg sum desperatur at finna eitthvørt arbeiði fyri at forsyrgja familjuni, sum tá livdi av pengum og mati frá familju og vinum. Men støðan er nógv versnað síðan tá. Frá at „bara" hava likamliga skaða, hevur henda drúgva og ótolandi langa tíð við konstantari lemjandi pínu gjørt, at ikki bara eg, men vit sum familja eru sera sera illa fyri sálarliga, sí punkt 14. 2.

Ein og hvør maður við virðing fyri sær sjálvum vil forsyrgja sær sjálvum og sínari familju, men tá heilsan stríðir ímóti verði eg og Almannastovan noydd at síggja í eyguni at hetta ikki ber til. Eg meti ikki at tað er ein møguleiki at fara undir eina útbúgving nú ella annað starv, tað er spill av tíð bæði hjá Almannastovuni og mær. Eg haldi eisini at tað ógvuliga týðiliga kemur til sjóndar í lýsingarskrivinum, at eg ongantíð havi havt trupuleikar at fara í holt við nýggjar avbjóðingar, so eg útiloki ikki, at eg vil í gongd við onkra endurútbúgving seinri, um heilsan eins væl og

„sykan“ loyvir tí. Men sum støðan er, havi eg og familjan brúk fyri at kunna fóta okkum aftur bæði heilsuliga, fíggjarliga og sálarliga.

Vísandi til løgtingslóg um almannapensjónir verður víst til, at inntøkan er ein sentralur partur, fyri at gera eina meting av arbeiðsevnunum hjá umsøkjaranum. Í mínum føri sæst, at eg bert havi havt forsorgarveiting sum inntøkugrundarlag trý tey seinastu árini, og hettar er ikki uttan grund, eg kann IKKI gjøgnumføra/fullføra nakað arbeiði, ei heldur smávegis, ella hevði eg langt síðan verið farin í gongd.

Sum nevnt omanfyri havi eg roynt eitt styttri lestrarskeið, fyri at vita um eg kundi klára eina útbúgving, men her mátti eg bukka undir bæði av pínu og sálarliga. Hettar var gott nokk ikki ein liður í endurútbúgvingarætlanini hjá Almannastovuni, men tað er undirorna, hvør tekur intiativið til at fara á skeið/útbúgving, so leingi tað er málrættað.

Tað er eisini nevnt, at taka eitt vart starv, møguliga í Havn, við at taka bussin suður. Eg citeri….A hevur trupuleikar við ferðing, hann fær pínu av at koyra ov leingi, tí meti eg at sjálvlestur helst hevði verði besta loysnin, tó so um hann brúkti bussin hevði hann havt møguleika fyri at reisa seg, tá pinan av at sita gerst ov ring.

Nú fari eg at ivast í, hvat meiningin er. At reisa seg í einum bussi, hvar galdandi lóggáva sigur, at ein SKAL sita í trygdarsela, og tað er tað í teimum nýggjastu bussunum, ….hví ikki bara ganga til Havnar ??????

Samanumtikið haldi eg, at bara eitt lítið sindur av viti og skili skal ráða. Tað kann ikki bera til at ein arbeiðsmarknaðarrágevi skal kunna gera beint í móti tí hon sjálv hevur skrivað og seta, ikki bara eitt men upptil fleiri skrásikrar læknaligar metingar út av kraft ….Hvat er meiningin at biða um læknaliga meting, tá tær ikki verða tiknar í álvara ?



Samanumtikið, fari eg sterkt at tilráða Almannastovuni at geva tilsøgn um pensjón, og soleiðis fáa eina skilagóða loysn uppá hettar seiga og drúgva mál.

Vónandi fær hetta eina sakliga og góða viðgerð.

Við vón um skjóta avgerð.“

Tann 13. november 2007 verður upprit viðvíkjandi tilráðing skrivað á Almannastovuni. Í tilráðingini stendur m.a. soleiðis:

„…
**Samandráttur, meting og tilráðing- sosialráðgevi:**
… ára gamal giftur maður við … børnum undir 18 ár. Er útbúgvin … og … . Avmarkingarnar í mun til arbeiðsmarknaðin stava frá skaða í … .

Umsøkjarin fekk í 2002 skaða í … meðan hann arbeiddi. Hevur fingið viðgerð í Føroyum og Danmark, tó uttan úrslit. Samb. upplýsingum frá serlækna eru eingir viðgerðar møguleikar. Kommunulækni og serlækni upplýsa tó, at fysioterapi hevur hjálpt um pínuna.

Umsøkjarin var í 2005 á …skúla í Danmark. Yvirlæknin á … skúlanum upplýsir, at umsøkjarin er tilvitaður um, at venjing er einasti háttur at handfara pínuna. Hóast skaðin er varandi, er endamálið við venjingunum at økja um orkuna hjá honum og metir læknin at umsøkjarin við framhaldandi trening kann venjast upp til betur stabilitet, áhaldni og konditión. Harumframt leggur yvirlæknin dent á, at tað er umráðandi at sosialmedisinsk tiltøk verða sett í verk, tá umsøkjarin vendur aftur til Føroyar. Samb. fysioterapeuti á …skúla hevur umsøkjarin ringt við at halda seg til venjingar. Hann er kunnaður um, at einasti møguleiki fyri at bata um pínustøðuna er gjøgnum venjing.

Í læknaligu upplýsingunum er konsensus um, at umsøkjarin

hevur nógv skerdan arbeiðsførleika. Hóast hetta meti eg, at endurbúgving ella vart starv eigur at verða roynd. Umsøkjarin fekk í 2006 játtað endurbúgving, og meti eg ikki, at munandi broytingar eru í heilsustøðuni síðan tá.

Umsøkjarin upplýsti í samband við pensjónssamrøðu, at hann gjarna vil arbeiða og hevur sjálvur roynt at finna sær arbeiði. Eg meti, at umsøkjarin ikki kann arbeiða sum … men at grundarlag er fyri at endurbúgva hann til skrivstovuarbeiði ella finna honum eitt vart starv sum …tøkningur. Tó skulu serlig atlit takast til hansara heilsutrupulleikar á arbeiðsplássinum – samb. ergoterapeuti á …skúlanum er tað best at skifta ímillum sitandi, standandi og gangandi støður. Læknaráðgevin á Almannastovuni metir møguleika vera fyri at umsøkjarin klárar lætt kontórarbeiði.

Umsøkjarin er einans … ára gamal og hevur stóra forsyrgjaraskyldu, tí skal hann hjálpast til at gerast sjálvforsyrgjandi. Mælt verður til at umsøkjarin fer undir endurbúgving ella í vart starv.
…
**Viðmerkingar og tilráðing – deildarleiðari**
Umøkjarin verður læknaliga mettur at hava nógv skerdan arbeiðsførleika. Spurningurin er tó um allir arbeiðsmøguleikar og endurútbúgvingarmøguleikar eru troyttir. Umsøkjarin er …, og er tað ein nógv efturspurd útbúgving. Tí er tað mín meting, at vit eiga at kanna um møguleikar eru tilstaðar at fáa umsøkjarin út á arbeiðsmarknaðin undir einari vardari fyriskipan. Mælt verður til at afturvísa málið til AMD fyri at kanna nærri møguleikarnar fyri um arbeiðsmarknaðartiltøk kunnu setast í verk.“

Sambært frágreiðing frá Almannastovuni verður tilráðingin skrásett í málið, men tilráðingin verður ikki løgd til pensjónsfundin til avgerðar, tí ein endurbúgvingarroynd verður framd eftirfylgjandi. Sosialráðgevin ringir eisini til umsøkjaran tann 13. november 2007 fyri at spyrja, um hann er áhugaður í endurbúgving ella vardum starvi, og eftir eitt sindur av umhugsan, ringdi umsøkjarin aftur og játtaði.



Skipað verður síðani fyri, at hóskandi endurbúgvingartilboð kann bjóðast umsøkjaranum, og tann 1. januar 2008 byrjar umsøkjarin í einari arbeiðsroynd á einum … í nærumhvørvinum. Umsøkjarin boðar tann 9. apríl 2008 frá, at hann ikki ynskir at halda fram við arbeiðsroyndini, av tí at hann ikki megnar arbeiðið.

Tann 29. mars 2008 sendi F, kommunulækni, nýggja kommunulæknaváttan til Almannastovuna. Í læknaváttanini stendur m.a. at kommunulæknin hevur verið í sambandi við umsøkjaran og konuna. Støðan er heilsuliga ikki góð, hann hevur nógva pínu nærum hvønn einasta dag, hóast hann tekur nógvan heilivág ímóti pínu. Hann hevur at kalla onga inntøku havt í fleiri ár, og støðan fíggjarliga er tí út av lagi vánalig. Sum støðan er nú, metir kommunulæknin, at umsøkjarin, konan og børnini eru sosialt avskorin orsaka av manglandi arbeiðsførleika og inntøku hjá umsøkjaranum.

Nýtt upprit er skrivað í málinum á Almannastovuni tann 24. apríl 2008. í uppritinum stendur m.a., at fyritíðarpensjónsmálið hjá umsøkjaranum hevur verið í bíðistøðu síðan miðan november 2007, tá umsøkjarin gekk við til at fara undir eitt arbeiðsmarknaðartiltak. Fyritíðarpensjónsmálið var tá klárt at leggja fyri á pensjónsfundin. Nú var arbeiðsroyndin, eftir ynski umsøkjarans, steðgað og fyritíðarpensjónsmálið tikið uppaftur.

Tann 13. mai 2008 er notat skrivað, har tað framgongur, at umsøkjarin … greiðir frá, at hann fer til …. at fáa skurðviðgerð fyri ….

Tann 22. mai 2008 verður málið lagt fyri læknaráðgevan á Almannastovuni. Læknaráðgevin verður spurdur, um tað er neyðugt at biðja um eina nýggja kommunulæknaváttan við atliti til, at umsøkjarin hevur upplýst sína heilsuligu støðu sum verandi nógv versnaða. Eisini verður víst til, at umsøkjarin fer til … fyri at skurðviðgerast. Í tilráðingini frá læknaráðgevanum, dagfest 22. mai 2008, stendur m.a. soleiðis:

> „á hvønn hátt eru vinnuevnini skerd:
> Har …smerter. Klarer ikke fysisk belastende arbejde.

> …
> Eru størv umsøkjarin framvegis kann røkja ?: Må kunne klare et ikke …belastende arbejde – kald pt. ind og tal med ham efter behandlingen i …
> …
> Skal sjúkrahúsjournal/-upplýsingar innheintast ?
> Indhente vurdering af pt. når behandlingen er afsluttet
> …“

Tann 28. mai 2008 boðar Almannastovan umsøkjaranum frá, at Almannastovan, áðrenn málið verður lagt fyri pensjónsráðið til støðutakan, fer at biðja um nýggja læknaváttan frá kommunulæknanum. Hetta av tí at umsøkjarin í partshoyringsskrivi hevur upplýst, at heilsustøða hansara er vorðin verri, enn tá arbeiðsroyndin byrjaði primo januar 2008.

Tann 9. juni 2008 móttekur Almannastovan kommunulæknaváttan frá F, kommunulækna. Í læknaváttanini stendur m.a., at umsøkjarin hevur verið skurðviðgjørdur á … . Kommunulæknin metir tó ikki, at hann er arbeiðsførur enn. Hann metir tað vera rímiligt, at umsøkjarin fær játtað fyritíðarpensjón orsaka av vánaligum … . Um støðan fer at batna nógv/munandi, kann heilsustøðan metast aftur seinni.

Hjálagt læknaváttanini eru tvær frágreiðingar: Surgery Report og Medical Report viðv. umsøkjaranum frá J frá … .

Við telduposti, dagfestur 7. juli 2008, spyr umsøkjarin nær hann kann vænta at fáa svar.

Tann 11. juli 2008 hevur læknaráðgevin á Almannastovuni gjørt nýggja tilráðing. Í tilráðingini stendur m.a. soleiðis:

> „Eru størv umsøkjarin framvegis kann røkja ? Um ja, hvat slag av størvum:
> Måske let arbejde der ikke er …belastende.
> Skal serlæknaváttan innheintast ?
> Finder at sagen skal sendes til afgørelse m. indkomne resultat fra …i ….
> …“

Tann 31. juli 2008 sendi Almannastovan Surgery Report og Medical Report frá J frá … til ummælis hjá umsøkjaranum. Hetta áðrenn Almannastovan tók endaliga avgerð í málinum. Svarfreistin var ásett til 14 dagar.

Við telduposti, dagfestur tann 10. august 2008, biður umsøkjarin um skjalainnlit í pensjónsmál sítt, herundir tilráðingar frá læknaráðgevanum og øðrum læknaligum metingum.

Við skrivi, dagfest tann 15. august 2008, letur Almannastovan umsøkjaranum avrit av øllum skjølum í pensjónsmáli hansara. Svarfreistin verður samstundis útsett við 14 døgum.

Við telduposti, dagfestur tann 26. august 2008, boðar umsøkjarin frá, at hann ikki hevur stórvegis viðmerkingar til málið. Hann biður Almannastovuna um at leggja málið fyri á pensjónsfundi tann 28. august 2008, soleiðis at greiða kann fáast á málinum.

Tann 1. september 2008 verður upprit viðv. tilráðing skrivað á Almannastovuni. Mett verður ikki, at allir møguleikar fyri at seta í verk fyriskipanir sum betra arbeiðsevnini, ella møguleikar fyri at útvega eitt arbeiði, eru troyttir. Útfrá fyriliggjandi læknaligu upplýsingum og samtalu við sosialráðgeva, verður mett, at møguleiki er fyri einum vardum starvi. Mælt verður til at sýta umsókn um fyritíðarpensjón vísandi til § 5 í almannapensjónslógini.

Málið verður viðgjørt á pensjónsfundi tann 11. september 2008. Sambært upplýsingum í málinum skal umsøkjarin til støðumeting 3 mánaðar eftir skurðviðgerðina, og er tað um sama mundið, ið pensjónsfundurin verður hildin. Pensjónsfundurin avgerð tí at senda málið aftur til Arbeiðsmarknaðardeildina til at innheinta støðumeting frá … í …, áðrenn avgerð verður tikin í málinum.

Umsøkjarin spyr til málið við telduposti, tann 16. september, tann 18. september og tann 19. september 2008.

Við skrivi, dagfest tann 24. september 2008, biður Almannastovan … um avrit av skjølum og journal viðvíkjandi umsøkjaranum.

Sama dag boðar Almannastovan umsøkjaranum frá, at fyritíðarpensjónsmál hansara hevur verið viðgjørt á pensjónsfundi tann 11. september 2008, har avgjørt var at innheinta úrslitið av støðukanning frá … í …. Skrivið til … verður hjálagt.

Við telduposti, dagfestur 28. oktober 2008, spyr umsøkjarin hvat hendir í málinum. Sama dag upplýsir Almannastovan umsøkjaran um, at einki svar er komið frá …, men at Almannastovan fer at senda áminning 6 hvørja viku, til svar kemur. Tann 7. november 2007 sendir Almannastovan áminning til …

Tann 8. desember 2008 sendir F, kommunulækni, nýggja læknaváttan til Almannastovuna. Niðurstøðan hjá kommunulæknanum er, at umsøkjarin er heilt avlamin og eigur rætt til hægstu fyritíðarpensjón.

Við tilráðing, dagfest tann 22. desember 2008, verður málið lagt aftur fyri pensjónsfund til støðutakan um, hvørt fasthaldast skal um at fáa støðumeting frá … úr …, ella um onnur støðumeting skal fáast til vega.

Tann 30. desember 2008 hevur … sent umsøkjaranum skjøl í málinum. Umsøkjarin sendir skjølini víðari til Almannastovuna. Hetta er ein „Surgery Report“, ein „Medical Report“, umframt tvey skriv frá J, dagfest 2. september 2008, og 14. oktober 2008. Í skrivinum, dagfest 14. oktober 2008, stendur m.a. soleiðis:

> „… had had two job-accidents in the years 1998 and 2002 with falling down. A surgery had to be performed in May 2008 to free the patient from his complaints.
>
> For the next 16 months A is not able to work.
> The nerve to his left leg is seriously damaged.“



Á pensjónsfundi, tann 14. januar 2009, var avgjørt at umbiðja eina føroyska ortoped kirurgiska meting.

Við skrivi, dagfest 20. januar 2009 verður áheitan um serlæknaváttan send I, ortopedkirurgi. Samstundis verður umsøkjarin kunnaður um hetta.

Tann 2. februar 2009 senda F, kommunulækni, og G, kommunulækni, inn læknaváttan til Almannastovuna. Í læknaváttanini stendur m.a.:

> „Sum kommunulæknar hjá omanfyrinevnda, vilja vit við hesum enn einaferð heita á almannastovuna um at veita A fyritíðarpensjón.
>
> Heilsuliga orsøkin er lýst í fyrrverandi læknaváttanum frá serlækna/um innan ymisk specialir, bæði føroyskum og útlendskum. Seinast frá lækna á sjúkrahúsi í …, har MR scanning greitt vísir, at broytingar eru, ið ávirka nervalagið í lendunum hjá sjúklinginum. Seinasta skriv úr … er sent Almannastovuni. Vit meta at neyvan nøkur fyritíðarpensjón man hava fleiri serlæknaváttanir enn hetta mál, og tykist kravið um fleiri læknaváttanir okkum meira at vera ein umbering fyri ikki at taka avgerð í málinum.
>
> Støðan hjá sjúklinginum er – sum áður nevnt – at hann ikki fær arbeitt orsaka av pínu í … – hóast hann tekur nógvan pínuheilivág.
>
> Sí útskrift av pínuheiluvági, ið er útskrivað til sjúklingin seinastu árini. Tað er møguligt, at meira heilivágur er útskrivaður við „hond“ av tí at telduskipanin ikki hevur verið stabil seinastu árini.
>
> Orsaka av, at nevnda pensjónsmál hevur drigið út í ólukkumát, vilja vit gera vart við, at eftir okkara meting er nú eisini indikatión at geva sjúklinginum pensjón av sosialum orsøkum.
>
> Við vón um at málið verður avgreitt og sjúklinginum játtað fyritíðarpensjón.“

Við skrivi, dagfest 17. februar 2009, hevur I, serlækni í ortopedi, sent Almannastovuni eina serlæknaváttan. Í niðurstøðu síni sigur serlæknin m.a., at skurðviðgerðin í … hevur bøtt eitt sindur um støðuna, men at umsøkjarin framvegis er nógv darvaður av pínu og nógv aftursettur funktiónsmessiga í gerandisdegnum. Serlæknin metir tó, at tað er ov tíðliga at úttala seg um støðuna, og biður Almannastovuna lata seg frætta aftur, um ynskiligt er við MR-skanning. Roknast má við at hetta má gerast í útlandinum.

Tann 23. mars 2009 hevur læknaráðgevin á Almannastovuni gjørt nýggja tilráðing í málinum. Í tilráðingini stendur m.a.:

> „Líkindi fyri betran ella versnan av avlaminum … ? Kan ikke besvares
> Avlami varandi: Ja
> Á hvønn hátt eru vinnuevnini skerd ? På gr. af vedholdende … smerter når han ikke nogen større pres.evne
> …
> Skal serlæknaváttan innheintast ? Sendes til afgørelse m. udt. fra I.“

Tann 26. mars 2009 sendir Almannastovan umsøkjaranum serlæknaváttan frá I til ummælis.

Tann 2. apríl 2009 játtar Almannastovan klagaranum skjalainnlit. Almannastovan sendir umsøkjaranum øll tey nýggjastu skjølini í málinum, aftur til seinastu ferð hann fekk játtað skjalainnlit í pensjónsmálinum tann 15. august 2008. Í hesum sambandi verður hoyringsfreistin longd í 14 dagar.

Tann 21. apríl 2009 móttekur Almannastovan teldupost frá sosialráðgevanum á Landssjúkrahúsinum. Sosialráðgevin mælir til, at umsóknin um fyritíðarpensjón verður tikin til viðgerðar á pensjónsfundi sum skjótast og avgjørd. Sosialráðgevin metir støðuna verða óverduga fyri umsøkjaran.

Tann 6. mai 2009 verður nýggj tilráðing skrivað á Almannastovuni.



Serlæknaváttan frá I er komin, og mælt verður til, at málið verður lagt fyri pensjónsfund til avgerðar.

Tann 25. mai 2009 var málið aftur lagt fyri á pensjónsfundi. Avgerð verður tikin um at heita á F, kommunulækna, um at ávísa viðkomandi til Landssjúkrahúsið, so nýggj MR-skanning kann verða framd. Í umbønini skal vísast til niðurstøðuna frá serlæknanum I, dagfest 17. februar 2009.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 1. oktober 2008, varð klagan send Almannastovuni til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Almannastovan biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 21. oktober 2008 sendi Almannastovan umboðsmanninum frágreiðing sína. Í frágreiðingini stóð m.a. soleiðis:

> **„Viðvíkjandi klagu frá A um viðgerðina av máli hansara um fyritíðarpensjon – tykkara j. nr. …**
>
> Í skrivi tann 1. oktober 2008 verður Almannastovan biðin um greiða umboðsmanninum nærri frá hesum máli. Eisini verður Almannastovan biðin um at lata umboðsmanninum til láns øll skjøl viðvíkjandi málinum.
>
> **Lýsing av málsgongdini**
> …
> **Viðmerkingar til klaguna**
> Í klaguni verður sagt, at fyritíðarpensjónsmálið tekur ov langa tíð at avgreiða, tí tað skulu „læknaváttanir og aftur læknaváttanir“ til. Her er at siga, at um Almannastovan skal vera før fyri at taka avgerð um umsókn um fyritíðarpensjón á einum haldgóðum grundarlagi, er tað av alstórum týdningi, at allar týðandi læknaligar upplýsingar um støðu, útlit og viðgerðarmøguleikar eru til taks, áðrenn endalig avgerð verður tikin; her verður bæði hugsað um almennu heilsuligu støðuna

hjá umsøkjaranum, men eisini um møguligar broytingar, sum koma í, meðan umsóknin um fyritíðarpensjón er til viðgerðar á Almannastovuni. Sostatt kann koma fyri, at ein læknaváttan, ið kom inn í byrjanini av viðgerðini av umsóknini, ikki gevur røttu myndina av heilsustøðuni hjá umsøkjaranum d.d. Tískil er ofta neyðugt, at Almannastovan innheintar nýggja læknaliga meting fyri at tryggja, at Almannastovan tekur eina so rætta avgerð sum møguligt.

Í klaguni verður sagt, at umsøkjarin hevur roynt at ringt og sent teldupostar til Almannastovuna aftaná pensjónsfundin tann 11. september 2008 fyri at frætta um avgerðina, tó uttan úrslit. Almannastovan hevur í skrivi dagfest 24. september 2008 boðað honum frá avgerðini frá pensjónsfundinum 11. september 2008. Almannastovan skal her viðmerkja, at ta arbeiðið, ið kemur eftir ein pensjonsfund ofta er rættuliga drúgt, og tí verður mett, at teir 12 dagarnir (frá 11. – 24. september), sum tað tók at kunna umsøkjaran um avgerðina er á góðari leið. Almannastovan skilur tó væl, at tað kann vera ørkymlandi fyri A at bíða.

**Niðurstøða**
Samanumtikið metir Almannastovan, at viðgerðin er farin fram á haldgóðum fyrisitingarligum grundarlagi.

Umsóknin um fyritíðarpensión hevur gingið ta vanligu gongdina. Mett verður, at gongdin frá tí at umsóknin kom inn, og til hon varð løgd fyri á pensjónsfundi tann 11. september 2008, hevur verið nøktandi. Talan var um 1 ár og 7 mánaðir. Harav er ein endurbúgvingarroynd framd á áleið 5 mánaðir, og partshoyringarnar hava eisini tikið yvir 2 mánaðir.

At viðurskiftini hava verið soleiðis, at avgreiðslan av málinum í tíðarskeiðnum fyri innkallan av umsøkjaranum til samrøðu og haldan av samrøðuni sum part av lýsingini, hevur verið drúgv – 3 mðr. – harmar Almannastovuna. Her er tó at siga, at umsøkjarin er kunnaður um hetta frammanundan, og hevur umsøkjarin sostatt ikki bíðað eftir at sleppa til samrøðu hjá sosialráðgevaranum uttan at vita orsøkina til hetta.



Umsóknin um fyritíðarpensjón hjá A er innkomin í februar 2007, og síðan tá hevur Almannastovan viðgjørt málið eftir tí mannagongd, sum slík mál verða viðgjørd. Biðið hevur verið um neyðug skjøl, og endurbúgvingartiltak varð sett í verk, sum ikki eydnaðist. Síðani varð málið lagt fyri á pensjónsfundi tann 11. september 2008. Har varð mett, at tað er neyðugt at innheinta úrslitið av støðumetingini frá … í … fyri at kunna taka støðu til umsóknina um fyritíðarpensjón.

Almannastovan metir seg hava viðgjørt hetta mál sambært ásetingunum í almannapensjónslógini og góðum fyrisitingarligum siði og gjørt tað, sum neyðugt er fyri at fáa málið lýst, so avgerðin kann byggja á haldgott grundarlag.

Soleiðis sum støðan er í løtuni, bíðar Almannastovan eftir úrsliti av støðumetingini frá … í ….

Hjálagt avrit av øllum skjølum, sum eru í málinum í sambandi við umsókn um fyritíðarpensión. Um ivamál eru, eru tygum vælkomin at venda tygum til Almannastovuna.“

Við skrivi, dagfest 29. oktober 2008, vórðu viðmerkingarnar hjá Almannastovuni sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 18. november 2008 sendi klagarin umboðsmanninum viðmerkingar sínar. Partur av viðmerkingunum verða endurgivnar niðanfyri:

„…
Tann 8. november 2007 blivu sendar viðmerkingar til partshoyring. Og her bleiv gjørt vart við somu viðurskiftir sum eg so mangan havi gjørt, men eg dugi ikki at síggja hví eg skal brúka tíð uppá at gera viðmerkingar, tí hesar verða ikki tiknar til eftirtektar allíkavæl. Eisini her síggi eg meg verða totalt hildnan til grin. Tað framgongur ongastaðni, at eg havi havt viðmerkingar til partshoyring.

Tann 13. november 2007 verður ein tilráðing skrivað, og heldur ikki her kann eg síggja, hvar mínar viðmerkingar koma inn ella verða umrøddar. Allareiða her verður nevnt at socialmedisinsk tiltøk eiga at verða sett í verk, og tey havi eg einki sæð til enn.

Enn einaferð fastheldur sosialráðgevin at tað sum hon hevur sett sær fyri, skal fremjast hóast samtalur við meg og skriv frá læknum siga nakað annað. Tað einasta sum kemur fram er tað sum er sagt við pensjónssamrøðuna.

Tá sagt verður, at eg skal prøva at arbeiða innan …, havi eg spurt tey umvegis telefon, um tey hava kannað ella sett seg inn í hvat hettar arbeiði inniber, men tað høvdu tey ikki, og segði eg við tey at tað kundu tey gloyma alt um, tí her vóru sera nógvar freistir sum skuldu haldast eins og nógv ferðing kundi koma uppá tal, eitt nú út á …pláss til eftirlit, og tað megnaði eg ikki, men hettar bleiv heldur ikki lurta eftir.

Tann 17.12.2007 var sáttmáli um arbeiðsroynd undirskrivaður (sí hjálagda)

Áðrenn eg valdi at undirskriva nevnda sáttmála, spurdi eg, hvat fyri fylgir hettar fekk fyri meg og pensjónsmálið sum heild. Her fekk eg at vita, at eg bleiv betur stillaður økonomiskt, og um eg ikki kláraði starvið, so kom eg undir pensjón beinanvegin.

Eg kundi staðfesta við fyrsta útgjald, at eg fekk bert forsorgarhjálp frá Almannastovuni og ikki tað sum var lovað, nemliga tað sama sum eitt kontórfólk fær fyri líknandi arbeiði, og hettar skuldi útgjaldast frá arbeiðsgevarunum, og síðan skuldi Almannastovan kompensera arbeiðsgevarunum. Hettar er eisini tað sum spurt verður um í telduposti tann 13.04.2008.

Vísandi til telduskriv 13.04.2008. Almannastovan sigur, at eg valdi at steðga við tí varda starvinum, men hettar er ikki rætt, eg var noyddur at steðga/gevast vegna sjúku, tað er nú ikki tað besta orði eg havi valt at brúka í teldupost „tí eg valdi at gevast“



og hettar havi eg eisini sagt yvir telefon við sosialráðgevan, at hettar skuldi uppfatast, at eg mátti ella føldi meg tvungnan vegna sjúku.

Somuleiðis verður víst á, at eg føli meg verða straffaðan við at verða farnan undir vart starv, tí her vóru ongar frammanundan sagdar avtalur hildnar.

Eisini verður spurt, um tað er rætt at avgreiðslutíðin skal verða meira enn eitt ár, men her kemur einki svar uppá tað.
…
At útseta málið við 14 døgum, fyri tí um eg biði um skjalainnlit, er fyri mær óhugsandi, tá eingin viðmerking er.

Sosialráðgevin vísir til, at ikki er samsvar millum arbeiðstímar og læknaváttan. Læknin sigur at eg ikki megnaði, og eg havi upplýst at eg arbeiði 4-6 tímar um vikuna, hettar svarar til ca. 1 tíma um dagin, um hettar ikki kemur undir at „ikki megna“ so veit eg ikki.

Eg viðleggi tímaseðil fyri arbeiðsroyndina, henda vísir at eg havi arb. millum 1,5 og 20 tímar um vikuna, í eitt tíðarskeið á 12 vikur og svarar tað til ca 6 tímar um vikuna.

Tá sosialráðgevarin mælir til at sýta umsøknini, tí allir endurbúgvinarmøguleikar ikki eru troyttir vísandi til § 5 í lógini.

Men § 9 sigur nakað heilt annað, og hesi atlit eru ikki tikin, hvørki eftir míni ella teirri læknaligu meting sum fyriliggur.
…
Tann 16.09.2008 sendi eg ein teldupost til deildarleiðaran, um at fáa svar frá pensjónsfundinum, men her kemur einki, og viðmerkingarnar siga, at hann er staddur uttanlanda. Hettar skilji eg ikki, at einki svar kann koma av tí orsøk, vanligt er aðrastani, er nakar burturstaddur verður sendur ein auto-teldupostur sum sigur, at viðkomandi er burturstaddur og nær hann kemur aftur, ella hvønn man skal kontakta, men

soleiðis er ikki á Almannastovuni, her skal man taka alt fyri givið.

**Viðmerkingar til viðmerkingarnar frá Almannastovuna:**
Almannastovan upplýsur at tað ikki kann verða tikin ein avgerð á haldgóðum grundarlagi um ikki allir læknaligir upplýsningarnir eru til taks.

Allir læknaligir upplýsningar/læknaváttanir sum eru lætnar frá fyrsta degi, siga allar tað sama „hann er óarbeiðsførur og eigur at fáa fyritíðarpensjón". Læknaráðgevin sigur eisini í síni fyrstu tilráðing, at man er 2/3 ella meira avlamin.

Tí meti eg ikki, at Almannastovan livir upp til tað sum sagt verður. Her eru allar upplýsningar og meira enn tað. Allareiða í november 2007 var málið klárt til støðutakan, men soleiðis skuldi tað ikki verða, hettar var ov skjótt at taka eina avgerð.

Um Almannastovan hevði fingið fleiri og týttari læknaváttanir, hevði hettar einki broytt uppá mína sjúkrastøðu, ístaðin fyri at brúkt møguleikan í § 25, stk. 1 í almannapensjónslógini. Sambært hesi grein hevur Almannastovan møguleika fyri at veita umsøkjara fyritíðarpensjón, tá ið læknaváttan fyriliggur, og síðani taka málið uppaftur til nýggja viðgerð um týðandi broytingar henda í eitt nú arbeiðsførinum.

Um so er at arbeiðið er so drúgt eftir at avgerðin er follin á pensjónsfundinum, hví so ikki upplýsa hettar so man veit hvar man flýtur?? Tað undrar meg eisini at nevnda arbeiði skal verða so drúgt tá fundur hevur verði, her skuldi alt arbeiði fyriligið áðrenn fundin, eftir míni metan, men tað skal bara verða trekt út.

Eftir fundin verður sagt, at innheintast skulu upplýsningar úr … um kanningarnar eg var til, tað er mær totalt óforstáðiligt.

Læknaráðgevin, sum hevur evstu læknaligu ábyrgd, hevur ikki



biðið um hettar, men avgerð skuldi treffast á tí læknaliga grundarlagi sum fyrilá. Fyri tað næsta, so gekk nevnda kanning ikki uppá at kanna míni heilsuligu viðurskifti og mín meintrupuleika, men bert um operatiónin hevði gingið sum hon skuldi og einki annað. Út frá hesum vildi eg mett at Almannastovan er farin útum teirra kompetansu, við ikki at gera eftir tí læknaliga.

Tann 14.04.2008 svarar Almannastovan teldupost, m.a. umsókn tygara um fyritíðarpensjón, kann avgreiðast innan rímuliga tíð. Sí hjálagda.

Tann 28.10.2008 svarar Almannastovan teldupost, m.a. um einki svar kemur úr …, fer Almannastovan at senda áminning til … 6. hvørja viku, til svar kemur. Almannastovan hevur ikki tikið støðu til, um einki svar kemur.

**Niðurstøða:**
Almannastovan hevur frá fyrstan tíð havt sera haldgott grundarlag at bygt sína meting á, bæði læknalig, serlæknalig og eisini okkara samrøður.

Men tað er gjøgnumgangandi at sosialráðgevarin skal hava síni serpreg sum hon hevur nú einaferð sett sær fyri, førd út í verk, uttan at hugsa um mína støðu bæði sálarliga og likamliga, alla hesa tíð eg havi ligið í hesi óvissu.

Hettar mál kundi verði yvirstaðið allareiða í november 2007, men her føldi eg meg kroystan til at eftirlíka Almannastovuni, sjálvt um kommunulæknin segði tað mótsatta. Annars kundi hettar aftur verði avklárað í apríl – mai mánað 2008.

Skal eg bíða óendaligt til Almannastovan nú einaferð fær eitt svar úr …, sum biðið er um, ella einki kemur. Síggi fyri mær, at her verður eingin avgerð tikin, um Almannastovan ikki fær tað tey biða um.

Framgangsmátin hjá Almannastovuni er ikki við til at fáa meg

út á arbeiðsmarknaðin aftur, tvørturímóti, mín sálarliga støða er sera nógv versnað alla hesa ósømiligu bíðitíð, sum forsyrgjari við famllju og … børnum.

Eg viðleggi skriv frá sálarfrøðingi, sum bleiv gjørt fyri einum ári síðan, og støðan er munandi verri í dag.

Hettar er undir allan kritikk.“

Við skrivi, dagfest 21. november 2008, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Almannastovuni til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 24. november 2008 boðaði Almannastovan umboðsmanninum frá, at Almannastovan ongar viðmerkingar hevði til skrivið frá klagaranum.

Tann 1. desember 2008 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki vóru fleiri viðmerkingar til málið, varð farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

Tann 2. apríl 2009 bað umboðsmaðurin Almannastovuna um nýggjastu upplýsingarnar í málinum. Samstundis boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at nógv mál høvdu verið at avgreiða, roknaði umboðsmaðurin ikki við at verða liðugur við viðgerð sína fyrr enn í apríl/mai 2009.

Almannastovan sendi, tann 6. apríl 2009 og tann 26. mai 2009, umboðsmanninum seinastu skjølini í málinum.

Umboðsmaðurin helt síðani áfram við viðgerð sínari av hesum málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um drúgva málsviðgerðartíð hjá Almannastovuni í sambandi við eina umsókn um fyritíðarpensjón.*



*Sambært skjølunum hjá Almannastovuni, ið umboðsmaðurin hevur fingið til láns, fekk klagarin í 2002 skaða í … undir arbeiði, og hevur stórt sæð ikki arbeitt síðan vegna pínu. Sambært fleiri læknaváttanum í málinum er arbeiðsførleiki hansara varandi skerdur. Í 2006 játtaði Almannastovan klagaranum endurbúgving, men av tí at semja ikki var um endurbúgvingarleiðina, kom hetta ikki í lag.*

*Í februar 2007 sendi klagarin umsókn um fyritíðarpensjón til Almannastovuna. Í november 2007 skrivar málsviðgerðin m.a. í einum uppriti, at tað í læknaligu upplýsingunum í málinum er semja um, at arbeiðsførleikin hjá klagaranum er nógv skerdur. Hóast hetta mælir málsviðgerðin til, at endurbúgving ella vart starv framhaldandi eiga at verða roynd. Almannastovan setir síðani eina arbeiðsroynd í verk, men eftir at hava arbeitt í nakrar tímar um vikuna í góðar tríggjar mánaðir, gevst klagarin vegna pínu í ...*

*Eg dugi ikki at síggja endamálið við hesari arbeiðsroynd, tá ið bæði kommunulækni, serlæknar og læknaráðgevin á Almannastovuni ikki meta, at klagarin er førur fyri at arbeiða, hvørki likamliga krevjandi ella skriviborðsarbeiði.*

*Fyritíðarpensjónsmálið verður síðani uppafturtikið, og Almannastovan fer undir at innheinta fleiri læknaváttanir. Hetta av tí, at klagarin hevur verið skurðviðgjørdur uttanlands.*

*Almannastovan móttekur kommunulæknaváttan tann 9. juni 2008. Hjálagt váttanini eru læknafrágreiðingar frá útlendska sjúkrahúsinum. Hetta metti Almannastovan ikki verða nóg mikið til at taka støðu í málinum, og biðið varð tí um meting av støðuni hjá klagaranum frá útlendska sjúkrahúsinum. Hesa støðumeting fær Almannastovan í desember 2008, har serlæknin boðar frá, at klagarin ikki kann arbeiða næstu 16 mánaðirnar. Hóast hetta biður Almannastovan um serlæknaváttan frá ortopedkirurgi á Lands-sjúkrahúsinum. Tann 2. februar 2009 senda tveir kommunulæknar læknaváttan til Almannastovuna, har teir staðiliga heita á Almannastovuna um at veita klagaranum fyritíðarpensjón. Umframt heilsuliga grundarlagi,*

*vísa teir á, at tað nú eisini er grundarlag fyri at veita fyritíðarpensjón av sosialum orsøkum.*

*Talan er í hesum førinum um ein mann, sum í fleiri ár hevur verið illa fyri heilsuliga, og nú eisini sosialt. Væl meira enn 2 ár eru fráliðin, síðani klagarin søkti um fyritíðarpensjón, og hóast allar læknaváttanirnar staðfesta, at arbeiðsførleikin hjá klagaranum er skerdur, heldur Almannastovan áfram at biðja um læknakanningar av klagaranum, seinastu ferð í mai 2009. Grundað á allar læknaváttanirnar, ið fyriliggja í málinum, havi eg trupult við at síggja endamálið við at senda klagaran til fleiri læknakanningar.*

*Eg fari samanumtikið at átala handfaringina av hesum málinum, og fari samstundis at heita á Almannastovuna um at taka eina avgerð í málinum. Í hesum sambandi fari eg at vísa á, at Almannastovan hevur møguleika til at taka málið uppaftur, um týðandi broytingar henda í eitt nú arbeiðsførinum, jb. § 25, stk. 1 í almannapensjónslógini.*

*Eg fari at biðja Almannastovuna lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum. Burtursæð frá omanfyristandandi átalu og viðmerkingum, geri eg ikki meira við málið í løtuni.*

Við skrivi, tann 11, juni 2009, boðaði Almannastovan umboðsmanninum frá, at Almannastovan tann 4. juni 2009 hevði avgjørt at játta klagaranum hægstu fyritíðarpensjón sambært § 6 í almannapensjónslógini. Samstundis var gjørt av, at málið skuldi takast uppaftur til kanningar sambært § 25, stk. 3 í lógini um 2 ár. Avgjørt var, at sýta umsóknini um avlamisveiting/hjálpiviðbót.

Tann 1. juli 2009 boðaði umboðsmaðurin Almannastovuni frá, at av tí at Almannastovan nú hevði tikið avgerð í málinum, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.



## 10.2 Viðgerðartíðin í Innlendismálaráðnum, av uppsagnarmáli

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um málsviðgerðartíð hjá Innlendismálaráðnum í einum kærumáli um uppsøgn av havnameistara.*

*Umboðsmaðurin helt tað vera sera átaluvert, at Innlendismálaráðið hevði latið kæruna liggja í nærum eitt ár, áðrenn nakað hendi. Hetta hóast advokaturin hjá klagaranum hevði sent fleiri áminningarskriv til ráðið. Fyri umboðsmanninum at síggja, var tað ein avgreiðsluspurningur hjá Innlendismálaráðnum at senda málið til hoyringar hjá kommununi.*

*Eftir at advokaturin hjá kommununi hevði sent hoyringsskriv og skjøl til Innlendismálaráðið, gingu aftur 10 mánaðar til avgerð varð tikin. Umboðsmaðurin helt hesa viðgerðatíð vera alt ov langa. Harumframt fanst umboðsmaðurin at, at Innlendismálaráðið ikki hevði svarað advokatinum hjá klagaranum uppá áminningarskriv hansara.*

*Samanumtikið gav umboðsmaðurin Innlendismálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri óneyðuga longu málsviðgerðartíðina í hesum málinum. (**J. nr. 200800078**)*

## Klagan

Við skrivi, dagfest 26. september 2008, hevur A, adv., vegna B sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> „**Klaga yvir málsviðgerð**
>
> Við brævi, dagfest 23. mars 2007, kærdi eg til Innlendismálaráðið (Løgmálaráðið) um uppsøgn av havnameistara.
>
> Hóast tað eru gingin umleið 1 ½ ár síðan kæran varð latin Innlendismálaráðnum, fyriliggur eingin avgerð í málinum. Tí verður málsviðgerðin klagað til Løgtingsins Umboðsmann.
>
> Eg viðleggi í hesum sambandi avrit av kæruni við tilhoyrandi skjølum, dagfest 23. mars 2007.
>
> Eisini viðleggi eg avrit av teimum skrivligu rykkjarunum, sum eg

havi sent til Innlendismálaráðið, umframt at tað eisini munnliga hevur verið rykt óteljandi ferðir eftirhondini.

Sum grundarlag fyri klaguni skal eg vísa á, at viðgerðartíðin hevur verið alt ov long, eins og Innlendismálaráðið í flestu førum ikki hevur svarað rykkjarunum.

Í hesum sambandi skal verða víst á, at talan er um persónsmál, har ein havnameistari er sagdur úr starvi og tað er tann uppsøgnin sum er kærd.

Viðkomandi hevur sostatt nú í 1 ½ ár liva í eini óvissu um, um hann var sagdur úr starvi av órøttum, soleiðis sum eg havi gjørt galdandi hansara vegna.

Eg meti tí, at eitt slíkt mál átti at verið avgreitt skjótast tilber og innan rímiliga tíð, tá slík mál eru tyngjandi fyri kæraran og avvarðandi hjá kæraranum.

Um spurningar ella ivamál annars eru, frætti eg fegin aftur."

Í tíðarskeiðnum frá februar til september 2008 varð aðalráðið nevnt Løgmálaráðið. Undan og eftir hetta tíðarskeið hevur ráðið verið nevnt Innlendismálaráðið. Umboðsmaðurin brúkar heitið Innlendismálaráðið í hesum áliti.

## Málsgongd

Tann 23. mars 2007 sendi A, adv., vegna B, kæru til Innlendismálaráðið um uppsøgn av honum sum havnameistara.

Við skrivum, dagfest tann 7. mai, 8. juni, 21. august, og 12. oktober 2007 minnir A, adv., Innlendismálaráðið á málið, og spyr, hvør gongdin er í málinum.

Tann 6. desember 2007 sendir A, adv., teldupost til C, deildarstjóra, har spurt verður, nær avgerð væntandi fyriliggur í málinum.



Við skrivi, dagfest tann 13. februar 2008, sendir Innlendismálaráðið málið til hoyringar hjá D, adv., ið umboðar Fuglafjarðar kommunu í málinum. Biðið verður um frágreiðing og skjølini í málinum. Svarfreistin er 11. mars 2008. Avrit av skrivinum verður sent A, adv., til kunningar.

Við skrivi, dagfest tann 11. mars 2008, biður D, adv., um longda ummælisfreist á 2 vikur. Hetta av tí at hann hevur fingið rættiliga rúgvusmikið tilfar frá kommununi at gjøgnumganga.

Við skrivi, dagfest tann 31. mars 2008, sendir D, adv., hoyringsskrivið við skjølum til Innlendismálaráðið.

Tann 4. juni 2008 sendir A, adv., teldupost til C, deildarstjóra, har spurt verður, um Innlendismálaráðið hevur fingið svar frá D, adv., og nær kærarin kann vænta svar frá ráðnum í málinum.

Við teldupostum, dagfestum tann 11. juni og 19. juni 2008 minnir A, adv., Innlendismálaráðið á málið.

Við telduposti, tann 20. juni 2008, boðar Innlendismálaráðið A, adv., frá, at av tí at D, adv., hevði sent rættiliga rúgvusmikið tilfar til Innlendismálaráðið viðvíkjandi kæruni, var tað torført at siga neyvt nær málið varð avgreitt.

Við teldupostum, dagfestir tann 29. august og 12. september 2008 spyr A, adv., Innlendismálaráðið, nær málið kann væntast at verða avgreitt.

Við telduposti, dagfestur tann 19. september 2008, minnir A, adv., Innlendismálaráðið á málið, og heitir á ráðið um at taka støðu í málinum. A, adv., boðar frá, at um svar ikki kemur innan rímiliga tíð, verður málið klagað til Løgtingsins Umboðsmann.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi,

dagfest 30. september 2008, varð klagan send Innlendismálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Innlendismálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 20. oktober 2008 sendi Innlendismálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> „**Viðvíkjandi klagu frá A um málsviðgerð í Innlendismálaráðnum**
>
> Víst verður til skriv tygara, dagfest 30. september 2008, viðv. klagu frá A um málsviðgerð í Innlendismálaráðnum.
>
> Sum grundarlag fyri klaguni verður víst á, at viðgerðartíðin hevur verið alt ov long, eins og Innlendismálaráðið í flestu førum ikki hevur svarað rykkjarunum.
>
> Í hesum sambandi verður víst á, at talan er um persónsmál, og at slík mál eiga at verða avgreidd skjótast tilber og innan rímiliga tíð.
>
> Innlendismálaráðið viðgongur, at alt ov long tíð er gingin frá tí, at klagan er móttikin og til gongd kemur á málið. Tilfarið í málinum hevur síðan víst seg at vera sera rúgvusmikið, og er hetta høvuðsorsøkin til, at málið ikki er avgreitt enn.
>
> Innlendismálaráðið miðar ímóti at fáa málið avgreitt skjótast gjørligt.
> Ráðið er samt við klagaranum í, at persónsmál eiga at verða avgreidd skjótast tilber og innan rímiliga tíð grundað á tann týdning, ið slík mál hava fyri viðkomandi persón.
>
> Hjáløgd eru avrit av øllum skjølum í málinum.“

Við skrivi, dagfest 24. oktober 2008, vórðu viðmerkingarnar hjá



Innlendismálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 27. oktober 2008 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> „**J.nr. 200800078/6: Uppsøgn av havnameistara**
>
> Eg skal vísa til bræv tykkara, dagfest 24. oktober 2008.
> Málið er fyri so vítt umfatandi, men tað er fyri so vítt eingin umbering fyri at viðgerðin skal vera so long, serliga tá talan er um persónsmál.“

Tann 5. november 2008 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

Tann 19. januar 2009 boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at av tí at nógv mál vóru at avgreiða í løtuni, og av tí at ársfrágreiðing umboðsmansins eisini skuldi fáast frá hondini, roknaði umboðsmaðurin tíverri ikki við, at viðgerðin av hesum máli varð liðug fyrr enn í mars 2009.

Við skrivi, dagfest 2. februar 2009, sendi Innlendismálaráðið umboðsmanninum avrit av skrivi og avgerð í málinum, ið var send advokatinum hjá klagaranum.

Tann 17. februar 2009 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at umboðsmaðurin fór at taka hetta málið upp til viðgerðar í næstum. Umboðsmaðurin gjørdi vart við, at tað bert var málsviðgerðartíðin í hesum málinum, ið umboðsmaðurin tók til viðgerðar.

Við skrivi, dagfest tann 3. mars 2009, boðaði Innlendismálaráðið umboðsmanninum frá, at ráðið hevði avgjørt at taka málið uppaftur til viðgerðar. Hetta av tí at viðmerkingarnar hjá D, adv., ikki vóru

fyrilagdar advokatinum hjá klagaranum, áðrenn ráðið tók avgerð í málinum.

Umboðsmaðurin helt síðani áfram við viðgerð síni av hesum máli.

### *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um málsviðgerðartíðina hjá Innlendismálaráðnum í einum kærumáli um uppsøgn av havnameistara.*

*Eg havi í hesari niðurstøðu míni lagt stóran dent á, at talan er um kæru av einari uppsøgn, og at tað er serliga tyngjandi fyri kæraran at bíða eftir avgerð. Endamálið við at ein borgari kann kæra eitt mál til hægri myndugleika er, at borgarin skal fáa eftirmett avgerðina. Av hesi orsøk er tað serliga umráðandi, at ein kærumyndugleiki avgreiðir málið innan rímiliga tíð.*

*Tann 23. mars 2007 sendi advokaturin hjá klagaranum kæru til Innlendismálaráðið. Ikki fyrr enn nærum eitt ár seinni, tann 13. februar 2008, varð kæran send advokatinum hjá kommununi til hoyringar.*

*Tað er óskiljandi, at kæran liggur í Innlendismálaráðnum í nærum eitt ár, áðrenn nakað hendir í málinum. Hetta hóast advokaturin hjá klagaranum sendir fleiri áminnigarskriv til ráðið. Ein myndugleiki, ið móttekur eina kæru, eigur skjótast gjørligt at taka støðu til, um hetta er eitt mál, sum myndugleikin kann viðgera, og síðani beinanvegin senda kæruna til ummælis hjá rætta myndugleika. Fyri mær at síggja, var tað ein avgreiðsluspurningur hjá Innlendismálaráðnum at senda málið til hoyringar hjá mótpartinum. Eg haldi tað tí vera sera átaluvert, at hetta ikki var gjørt beinanvegin.*

*Eftir at advokaturin hjá kommununi hevur sent umbidna hoyringsskrivið og skjølini til Innlendismálaráðið tann 31. mars 2008, ganga aftur meira enn 10 mánaðir, áðrenn Innlendismálaráðið tekur avgerð í málinum tann 2. februar 2009. Hetta hóast advokaturin hjá klagaranum sendir fleiri áminningarskriv, og at ráðið tann 20. oktober 2008 boðar mær frá, at ráðið miðjar ímóti at fáa málið avgreitt skjótast gjørligt. Innlendismálaráðið vísir á, at høvuðsorsøkin til, at málið ikki er avgreitt, er, at tilfarið í málinum hevur víst seg at vera sera rúgvusmikið. Eg havi fingið skjalatilfarið til láns frá Innlendismálaráðnum, og dugi ikki at síggja, at hetta tilfar er so umfatandi, at tað skal taka ráðnum 10 mánaðar at avgreiða málið. Eftir mínari meting hevur hendan viðgerðartíðin verið alt ov long.*

*Harumframt er tað alt annað enn nøktandi, at Innlendismálaráðið ikki svarar advokatinum hjá klagaranum uppá áminningarskriv hansara. Áminningarskriv, ið verða send einum myndugleika, og sum eru rímiliga grundað í málsviðgerðartíðini, eiga at verða svarað beinanvegin.*

*Samanumtikið fari eg at geva Innlendismálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri óneyðuga longu málsviðgerðartíðina í hesum málinum.*

*Av tí at eg haldi talan vera um álvarsom brek við viðgerðini av málinum, havi eg samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini boðað formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum í innlendismálum frá niðurstøðu mínari.*

*Innlendismálaráðið hevur tann 3. mars 2009 boðað mær frá, at ráðið hevur tikið málið upp til nýggja viðgerð. Eg fari at heita á ráðið um at avgreiða málið sum skjótast, og lata meg frætta, tá ið hetta er gjørt.*

*Burtursæð frá hesum, geri eg ikki meira við málið í løtuni.*

Við skrivi, tann 9. september 2009, boðaði Innlendismálaráðið umboðsmanninum frá, at ráðið hevði tikið avgerð í málinum. Ráðið metti, at avgerðin hjá kommununi var innan karmarnar á lóggávuni, og var tí ikki grandarlag fyri at koma kæraranum á møti í hesum máli.

Av tí at avgerð er tikin í málinum ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

# 11. Innlit

## 11.1 Partvíst noktandi innlit frá Mentamálaráðnum í mál um eftirskúla

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um partvíst noktandi innlit frá Mentamálaráðnum í málinum um eftirskúlan í Hvalba. Umboðsmaðurin metti, at talan var um eitt lóggávumál, sum ikki eru fevnd av innlitslógini, jbr. § 2, stk. 2. Umboðsmaðurin metti tó, at ávís skjøl í málinum ikki vóru fevnd av sjálvum lóggávumálinum. Hesi skjøl vóru innanhýsis skjøl, og undantikin innliti. Umboðsmaðurin var samdur við Mentamálaráðnum, at upprit til landsstýrisfund og samskifti í hesum sambandi var undantikið innliti sambært § 10, nr. 1 og 2. Klagarin ynskti eisini innlit í frágreiðingar hjá landsstýriskvinnuni fyri Mentanarnevnd Løgtingsins. Einki skjal var skrásett í málinum hesum viðvíkjandi. Ein myndugleiki hevur ikki skyldu til at framleiða nýggj skjøl til eitt innlitsmál. Samanumtikið metti umboðsmaðurin, at klagarin hevði fingið innlit í tey skjøl, ið hann hevði rætt til sambært innlitslógini.* ***(J. nr. 200800057)***

## Klagan

Við skrivi, dagfest 30. juni 2008, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> „Fari við hesum at klaga Mentamálaráðið fyri ikki at geva nóg gott innlit í mál um eftirskúlan í Hvalba.
> Undirritaði søkti um meirinnlit í skjøl, sum landsstýrismaðurin, B, varaði av.
> Undirritaði kann av góðum grundum ikki vita hvussu nógv, og hvørji skjøl eru journaliseraði undir eftirskúlan í Hvalba.
> Undirritaði veit tó, at landsstýrismaðurin var í Mentanarnevndini hjá løgtinginum, tá viðhefta uppskot um broytingar av løgtingslógini var í nevnd.
> Uppskotið vann ikki frama, m.a. tí at landsstýrismaðurin segði seg ikki kunna fylgja lógini, og B grundgav fyri hesum í nevndini.
> A vil m.a. hava innlit í hesar grundgevingar, sum ikki kunnu vera undantiknar lógini um alment innlit.
> Av somu orsøk verður hendan klaga send umboðsmanninum.“

## Málsgongd

Umboðsmaðurin hevur fingið øll skjølini í málinum til láns frá Mentamálaráðnum. Tað sæst av skjølunum, at landsstýrismaðurin í árunum 2006-2007 hevur arbeitt við málinum um ein eftirskúla í Hvalba. Í hesum sambandi hevur hann arbeitt við at tilevna eitt uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar. Lógaruppskotið við fylgiskjølum varð borið løgtinginum tann 6. desember 2007, men varð ikki lagt fram vegna nýval.

Tann 21. februar 2008 legði andstøðan fram uppskot um broyting í løgtingslóg um eftirskúlar. Eftir 1. viðgerð varð málið beint í Mentanarnevnd Løgtingsins. Undir viðgerðini hevði nevndin m.a. fund við táverandi landsstýriskvinnu í mentamálum. Hetta lógaruppskotið fall við 2. viðgerð.

Tann 27. mai 2008 bað A Mentamálaráðið um innlit í m.a. málið um eftirskúlan í Hvalba.

Tann 5. juni 2008 gav Mentamálaráðið A innlit í tey skjøl í málinum, sum ráðið metti, at A hevði rætt til sambært § 7, nr. 1 og § 10, nr. 1 í innlitslógini.

Tann 17. juni 2008 bað A aftur um innlit fyri at fáa restina av tilfarinum um eftirskúlan. A ynskti innlit í tær viðgerðir sum landsstýriskvinnan hevði framt ella hevði verið við til at fremja. A ynskti alt tilfar, eisini frásagnir frá nevndarviðgerð í Løgtinginum.

Tann 25. juni 2008 boðaði Mentamálaráðið A frá, at A hevði fingið innlit í tey skjøl, ið blaðið hevði rætt til sambært innlitslógini. Í málinum vóru tó onnur skjøl, ið vóru undantikin innliti sambært § 7, nr. 1, og § 10, nr. 1 í innlitslógini. Mentamálaráðið hevði viðgjørt,

um meirinnlit átti at verða givið í málið sambært § 4, stk. 1, 2. pkt. í innlitslógini, og var niðurstøðan hjá ráðnum, at meirinnlit ikki varð latið í málinum.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 8. juli 2008, varð klagan send Mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur. Samstundis varð Mentamálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 12. august 2008 sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum frágreiðing í málinum. Frágreiðingin samsvarar við omanfyristandandi málsgongd. Til seinast í frágreiðing síni upplýsti Mentamálaráðið, at nevndarviðgerðir í Løgtinginum ikki verða skrásettar í Mentamálaráðnum.

Við skrivi, dagfest 19. august 2008, vórðu viðmerkingarnar hjá Mentamálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Av tí at umboðsmaðurin einki frætti aftur frá A, boðaði hann pørtunum frá við skrivi, dagfest 15. september 2008, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

Tann 15. desember 2008 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at nógv mál høvdu verið til viðgerðar seinastu tíðina, hevði tað tíverri ikki eydnast umboðsmanninum at avgreiða hetta málið enn. Umboðsmaðurin roknaði við, at viðgerðin fór at verða liðug í januar 2009.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um, hvørt klagarin hevur fingið innlit í tey skjøl, sum hann sambært innlitslógini hevur rætt til at fáa innlit í.*

*Lóggávumál*
*Málið, ið klagarin ynskir innlit í, snýr seg um fyrireiking og tilevnan av uppskoti til broyting í løgtingslóg um eftirskúlar. Í málinum eru lógaruppskot, upprit til landsstýrisfund í hesum sambandi, innan- og uttanhýsis brævaskifti um lógaruppskotið, hoyringssvar osfr. Eftir mínari meting er talan um eitt lóggávumál, jb. § 2, stk. 2 í innlitslógini. Hendan grein er soljóðandi:*

> *„Stk. 2. Lóggávumál, herundir játtanarlógir, koma bert undir lógina, tá lógaruppskot er framlagt í løgtinginum.“*

*Serligar viðmerkingar eru ikki til føroysku innlitslógina, men í viðmerkingunum til donsku innlitslógina, ið er fyrimyndin fyri føroysku lógina, stendur m.a. soleiðis á sp. 207-208, tillæg A í Folketingstidende 1985/86:*

> *„Bestemmelsen hjemler nogle generelle undtagelser fra eller begrænsninger i lovens anvendelsesområde for så vidt angår visse sagstyper.*
> *…*
> *Bestemmelsen i stk. 2, … hjemler en tidsbegrænset undtagelse fra adgangen til aktindsigt, … I bestemmelsen er det præciseret, at dokumenter i sager om lovgivning kun undergives aktindsigt, såfremt lovforslag faktisk fremsættes for folketinget.*
> *…“*

*Lógaruppskotið í hesum máli varð sent Løgtinginum tann 6. desember 2007, men varð ikki framlagt. Eftir orðaljóðinum í § 2, stk. 2 og viðmerkingunum til hesa grein, er lóggávumálið sostatt ikki fevnt av innlitslógini. Mentamálaráðið hevði tí ikki skyldu til at geva innlit í skjølini í lóggávumálinum.*

*Eg fari tó ikki at gera viðmerkingar til, at Mentamálaráðið kortini hevur latið innlit í fleiri skjøl í málinum, av tí at Mentamálaráðið kann geva meirinnlit sambært § 4, stk. 1, 2. pkt. í innlitslógini.*

*Hóast talan er um eitt lóggávumál, eru tað ikki øll skjøl í málinum, ið eru undantikin innliti sambært § 2, stk. 2 í innlitslógini. Danski umboðsmaðurin sigur soleiðis um hetta í FOB 1991.470:*

*„… sagsbegrebet i § 2, stk. 2, må afgrænses snævert, og således at det kun omfatter handlinger og dokumenter med nær tilknytning til den lovgivningspolitiske proces.*
*…*
*Hvis begæringen om aktindsigt utvivlsomt omfatter en sag om lovgivning i ovennævnte forstand, foreligger der spørgsmål om, hvilke dokumenter der indgår i lovgivningssagen. …*
*Efter min opfattelse vil udtrykket sager om lovgivning i offentlighedslovens § 2, stk. 2, i overensstemmelse med det ovenfor omtalte fortolkningsprincip normalt kun omfatte dokumenter, der er tilvejebragt med henblik på det aktuelle lovgivningsprojekt.*
*Jeg henviser i den forbindelse også til motiverne til offentlighedslovens § 2, stk. 2, hvor der som eksempler på, hvilke dokumenter der omfattes af bestemmelsen – altså indgår i en sag om lovgivning – er nævnt „udtalelser fra organisationer og fra underordnede myndigheder og institutioner“ samt „betænkninger eller redegørelser fra sagkyndige udvalg, arbejdsgrupper mv., der har fået til opgave at tage stilling til lovgivningsspørgsmål.“*
*…*
*Der er tale om dokumenter, som forudsætter eksistensen af et bestemt, nærmere angivet lovgivningsprojekt, og som er udarbejdet som led i den pågældende myndigheds eller institutions deltagelse i lovgivningsprocessen.“*

*Av teimum skjølum í málinum, sum Mentamálaráðið ikki hevur latið innlit í eru fleiri teldupostar ímillum ymiskar deildir/starvsfólk í Mentamálaráðnum. Í teldupostunum verður umrøtt, hvussu lógarbroytingin skal orðast, hvørjar avleiðingarnar kunnu verða av lógarbroytingini v.m. Eftir mínari meting eru hesi skjøl partur av lóggávumálinum, og sostatt undantikin innliti sambært § 2, stk. 2 í innlitslógini. Mentamálaráðið hevði sostatt ikki skyldu til at veita A innlit í hesi skjøl.*

*Øðrvísi er tó við skjølum nr. 2 og 52. Hetta eru fundarfrásagnir frá fundum ímillum Mentamálaráðið, umboð fyri eftirskúlabólkin, Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag. Eftir mínari meting eru hesi skjøl ikki beinleiðis gjørd við atliti at ítøkiligu lógarbroytingini í eftirskúlalógini. Eg meti tí ikki, at hesi skjøl eru fevnd av lóggávumálinum, og skjølini koma tískil undir innlitslógina.*

*Eg eri samd við Mentamálaráðnum í, at hesi skjøl eru innanhýsis skjøl, ið eru fevnd av § 7, nr. 1 í innlitslógini. Eg dugi ikki at síggja at hesi skjøl ella upplýsingar kortini eru fevnd av rættinum til innlit sambært § 8 ella § 11, stk. 1 í innlitslógini.*

*Upprit til landsstýrisfund og samskifti í hesum sambandi*
*Fleiri skjøl í málinum, ið Mentamálaráðið ikki hevur givið innlit í, eru upprit til landsstýrisfund og teldupostar ímillum Mentamálaráðið og Løgmansskrivstovuna í sambandi við, at upprit og lógaruppskot hava verið løgd fyri á landsstýrisfundi. Eg eri samd við Mentamálaráðnum í, at hesi skjøl eru fevnd av § 10, nr. 1 og 2 í innlitslógini.*

*Í uppritunum til landsstýrisfund eru ávísar upplýsingar um veruligar umstøður, ið hava stóran týdning fyri málið. Men av tí at hesar upplýsingar framganga av øðrum skjølum í málinum, ið A hevur fingið innlit í, hevði Mentamálaráðið ikki skyldu til at ekstrahera hesar upplýsingar úr omanfyrinevndu uppritum, jbr. § 11, stk. 1 í innlitslógini.*

*Nevndarviðgerð í Løgtinginum*
*Í sambandi við, at andstøðan í Løgtinginum legði fram eitt broytingaruppskot til løgtingslóg um eftirskúlar í februar 2008, var landsstýriskvinnan í mentamálum á fundi í Mentanarnevnd Løgtingsins. Í klagu síni vísir A á, at blaðið ikki hevur fingið innlit í frágreiðingina hjá landsstýriskvinnuni frá hesum fundi.*

*Í málinum, ið eg havi fingið til láns frá Mentamálaráðnum, er einki skjal skrásett viðvíkjandi fundi í Mentanarnevnd Løgtingsins. Mentamálaráðið hevur í partshoyringini upplýst, at nevndarviðgerðir í Løgtinginum ikki verða skrásettar í ráðnum.*

*Til hetta er at siga, at rætturin til innlit fevnir um tey skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans, jbr. § 4, stk. 1 í*

*innlitislógini. Ein myndugleiki hevur sostatt ikki skyldu til at framleiða nýggj skjøl í sambandi við eina innlitsumbøn.*

*Samanumtikið*
*Samanumtikið meti eg, at klagarin hevur fingið innlit í tey skjøl í málinum, ið hann hevði rætt til sambært innlitslógini.*

*Burtursæð frá omanfyrinevndu viðmerkingum, geri eg ikki meira við málið.*



## 11.2 Noktan av innliti frá Mentamálaráðnum í starvsfólkamál

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um sýtan av innliti í eitt starvsfólkamál. Mentamálaráðið sýtti klagaranum innlit vísandi til § 2, stk. 1 í innlitslógini. Av skjølunum í málinum og frágreiðingini frá Mentamálaráðnum sást, at málið snúði seg hvørki um eina starvssetan ella framflytan í hægri starv. Tað var tí skeivt at sýta innlit vísandi til § 2, stk. 1. Umboðsmaðurin vísti á, at umbønir um innlit í starvsfólkamál skulu viðgerast eftir vanligu reglunum í innlitslógini, og at Mentamálaráðið í hesum sambandi hevur skyldu til at meta um, um skjøl ella upplýsingar kunnu undantakast eftir §§ 7 – 14. Umboðsmaðurin minti ráðið á 10 daga freistina í lógini.*

*Umboðsmaðurin mælti Mentamálaráðnum til at taka málið uppaftur til viðgerðar og lata seg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kom til.* ***(J. nr. 200800100)***

### Klagan

Við teldubrævi, dagfest 18. november 2008, hevur A klagað til umboðsmannin um, at Mentamálaráðið hevur sýtt honum innlit í eitt starvsfólkamál.

### Málsgongd

Av tí at frágreiðingin hjá Mentamálaráðnum niðanfyri lýsir málsviðgerðina í málinum á nøktandi hátt, havi eg valt ikki at gera eina nærri lýsing av málsgongdini í hesum málinum.

### Partshoyring

Við skrivi, dagfest 18. november 2008, varð klagan send Mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur. Samstundis varð Mentamálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 11. desember 2008 sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> **„Viðvíkjandi kæru frá A**
> Í brævi, dagfest 18. november 2008, heitir Løgtingsins umboðs-

maður á Mentamálaráðið um frágreiðing í sambandi við kæru frá A um alment innlit.

Gongdin í málinum hevur verið henda:

Í telduposti til Mentamálaráðið, dagfestur 5. november 2008, biður A um innlit í øll skjøl í sambandi við at B, fyrrverandi skúlastjóri á fyrrverandi Maskinmeistaraskúlanum fór úr starvi.

Í umbønini metir A seg hava rætt til innlit í hetta mál sambært fyrisitingarlógini, innlitslógini og sum starvsfólk á fyrrverandi Maskinmeistara-skúlanum.

Í telduposti, dagfestur 17. november 2008, frá Mentamálráðnum til A boðar Mentamálráðið frá, at umbønin ikki verður gingin á møti, tí talan er um persónsmál.

Tað er ikki rætt sum A sigur at B bleiv sagdur úr starvi.

B bað í brævi frá 23. februar 2004 um farloyvi frá 1. august 2004. Umbønin var gingin á møti, og var hetta fráboðað B í brævi, dagfest 23. februar 2004.

Í brævi, skrásett 30. juni 2004, sigur B seg úr starvi frá 1. september 2004 at rokna. Uppsøgnin var treytað av eini seravtalu við Mentamálaráðið fyri restina av árinum.

Mentamálaráðið gjørdi eina avtalu við B galdandi frá 1. august 2004 og árið út sum ráðgevi hjá Mentamálaráðnum og nýggju leiðsluni á Maskinmeistaraskúlanum og Føroya Sjómansskúla, sum skuldu leggja saman í ein stovn.

Hjálagt eru øll skjøl og yvirlit yvir øll skjøl í persónsmálinum hjá B."

Í frágreiðingini vísir Mentamálaráðið til teldupost, dagfestur 17.



november 2008, sum er svar Mentamálaráðsins uppá innlitsumbønina. Telduposturin er soljóðandi:

„Tygum hava í telduposti, dagfestur 5. november 2008, biðið um innlit í persónsmálið hjá B, fyrrverandi skúlastjóra á Maskinmeistara-skúlanum. Mentamálaráðið hevur avgjørt ikki at ganga umbøn tygara á møti.

Sambært løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001, hava tygum rætt til at gera tygum kunnugan við skjøl sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari málsviðgerð í sambandi við virksemi myndugleikans.

Hesin rættur er tó avmarkaður, tá tað snýr seg um persónsmál. Lógin er t.d. ikki galdandi fyri mál um setan í starv ella flytan í hægri starv. Harumframt skal myndugleikin taka atlit til reglurnar um tagnarskyldu.

Vísandi til § 4, stk. 2, kann tann, hvørs persónligu viðurskifti eru umtalað í einum skjali, við teimum undantøkum, ið nevnd eru í §§ 7-11, fáa høvi til at gera seg kunnugan við upplýsingarnar í nevnda skjali. Mentamálaráðið hevur hugt persónsmálið hjá B ígjøgnum og hevur staðfest, at einki skjal í málinum inniheldur upplýsingar um tygum ella tygara persónligu viðurskifti. Tí verður umbønin ikki gingin á møti."

Tann 15. desember 2008 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

## *Niðurstøða*

*Hetta mál snýr seg um, at Mentamálaráðið hevur noktað klagaranum innlit í málið um, tá fyrrverandi skúlastjórin á Maskinmeistaraskúlanum fór úr starvi.*

*Høvuðsreglan í innlitslógini er, at rætturin til innlit fevnir um øll skjøl, og tað krevst ein lógarheimild fyri at sýta innliti.*

*Mentamálaráðið sýtir innlitsumbønini vísandi til, at rætturin til alment innlit fevnir ikki um starvssetanarmál og mál um flytan í hægri starv, jbr. § 2, stk. 1 í innlitslógini.*

*Tað framgongur tó bæði av skjølunum, sum Mentamálaráðið hevur latið mær, og frágreiðingini frá Mentamálaráðnum til mín, at málið, sum klagarin biður um innlit í, snýr seg hvørki um starvssetan ella framflytan í hægri starv. Málið snýr seg í høvuðsheitum um, at fyrrverandi stjórin í fyrstu atløgu fer í farloyvi og síðani sigur seg úr starvi. Tað er tí skeivt at sýta klagaranum innlit vísandi til § 2, stk. 1 í innlitslógini.*

*Ein umbøn um innlit í eitt starvsfólkamál skal viðgerast eftir vanligu reglunum í innlitslógini. Eg fari í hesum sambandi at vísa á § 4, stk. 1, sum er soljóðandi:*

> *„**§ 4.** Ein og hvør kann við teimum undantøkum, sum eru nevnd í §§ 7-14, krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans. …“*

*Sum nevnt í ásetingini, so kunnu upplýsingar ella skjøl í starvsfólkamálum undantakast, men bert um §§ 7 – 14 í lógini heimila hesum. Mentamálaráðið hevur sostatt skyldu til at meta um, um tað eru upplýsingar ella skjøl í málinum, sum kunnu undantakast almennum innliti.*

*Mentamálaráðið svaraði innlitsumbønini 12 dagar eftir at hava móttikið hana. Eg fari í hesum sambandi at minna Mentamálaráðið á § 16, stk. 2 í innlitslógini, sum er soljóðandi:*

> *„Stk. 2. Er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur móttikið hana, skal myndugleikin boða viðkomandi frá, um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals.“*



*Vísandi til viðmerkingar mínar omanfyri fari eg at mæla Mentamálaráðnum til at taka málið uppaftur til viðgerðar og lata meg frætta, hvørja niðurstøðu ráðið kemur til hesum viðvíkjandi.*

Við skrivi, dagfest 26. februar 2009, boðaði Mentamálaráðið umboðsmanninum frá, at ráðið hevði tikið málið uppaftur til viðgerðar og hevði givið klagaranum innlit í umbidnu skjølini.
Umboðsmaðurin ger ikki meira við málið.

## 11.3 Noktan av innliti frá Mentamálaráðnum í uppsagnarmál

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um vantandi innlit í eitt uppsagnarmál í Mentamálaráðnum. Ráðið sýtti klagaranum innlit í málið vísandi til § 12, stk. 1, nr. 1 í innlitslógini, ið snýr seg um verju av privatlívinum hjá einstaklingum. Umboðsmaðurin vísti á, at ásetingin snýr seg um undantøku av upplýsingum og ikki skjølum ella málum í síni heild, og at klagarin sambært § 12, stk. 2 hevur rætt til at gera seg kunnigan við restina av einum skjali, um tað ikki kann undantakast eftir øðrum ásetingum í lógini. Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at nokta innlit í uppsagnarskrivið við heimild í § 12, tí ein upplýsing um, at ein persónur er sagdur úr starvi, viðvíkur ikki privatum viðurskiftum. Hinvegin kunnu grundgevingarnar fyri eini uppsøgn undantakast innliti í tann mun tær avdúka nakað, sum hoyrir privatlívinum til. Vísandi til tíðina, sum var gingin síðani innlitsumbønina, mælti umboðsmaðurin Mentamálaráðnum til at venda sær til klagaran fyri at vita, um hesin framhaldandi ynskti innlit í málið, og um so var, at taka innlitsumbønina uppaftur til viðgerðar.* ***(J. nr. 200900005)***

### Klagan

Við telduposti 13. januar 2009 hevur A, blaðkvinna á Dimmalætting sent umboðsmanninum klagu um, at Mentamálaráðið hevur sýtt innlit í málið um skúlastjóran í Fuglafjarðar skúla.

### Málsgongd

Við teldubrævi 6. januar 2009 sendi blaðkvinnan soljóðandi áheitan um innlit til Mentamálaráðið:

> „Dimmalætting søkir hervið um alment innlit í gongdina í málinum um skúlastjóran í Fuglafjarðar skúla, sum fyri nøkrum mánaðum síðani fór í farloyvi. Um uppsøgn er farin fram í málinum, verður eisini søkt um innlit í hana. Við vón um skjótt svar.“

Við teldubrævi 13. januar 2009 hevur Mentamálaráðið sent blaðkvinnuni soljóðandi svar:

> „Tygum hava 6. januar 2009 søkt um alment innlit í gongdina í málinum í Fuglafjarðar skúla. Sagt verður frá, at umsóknin verður ikki gingin á møti. Víst verður í hesum sambandi á § 12 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, har ásett er, at rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um upplýsingar um privatu, herundir fíggjarligu viðurskiftini hjá einstaklingum.“

### Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 15. januar 2009, varð klagan send Mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Mentamálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 21. januar 2009 sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> **„Frágreiðing um málið viðvíkjandi B**
> Við hesum sendir Mentamálaráðið Løgtingsins Umboðsmanni frágreiðing um orsøkina til sýtan av almennum innliti, og um málið um uppsøgn av skúlastjóranum í Fuglafjarðar skúla, B. Skjølini í málinum eru hjáløgd.
>
> **Um innlitsumbønina**
> Orsøkin til, at Mentamálaráðið ikki hevur latið alment innlit í málið um skúlastjóran í Fuglafjarðar skúla er, at Mentamálaráðið metir, at upplýsingarnar í persónsmálinum hjá B og í málinum um serligu viðurskiftini í Fuglafjarðar skúla eru av slíkum slagi, at tær ikki eiga at vera latnar út í almennum innliti.
>
> Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingar í Karnov, sum greitt tilskila, at myndugleikin eigur at leggja dent á privatu viðurskiftini hjá persóninum og meta um hvørt upplýsingarnar eru egnaðar til almennan kunnleika. Í hesum føri metir Mentamálaráðið, at tað eigur at verða víst serligt fyrilit fyri B og letur tí ikki alment innlit.

**Um málið**

…“

Tann 5. februar 2009 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at tað varð ikki mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, og at farið varð undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um, at Mentamálaráðið hevur noktað klagaranum innlit í málið um skúlastjóran í Fuglafjarðar skúla, sum varð sagdur úr starvi.*

*Starvsfólkamál, herundir mál um uppsøgn, eru fevnd av rættinum til innlit, jbr. § 4, stk. 1 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina), og upplýsingar og skjøl í hesum málum kunnu bert undantakast, um §§ 7 – 14 heimila hesum.*

*Mentamálaráðið sýtti innlit í málið vísandi til § 12 í innlitslógini, sum er soljóðandi:*

> *„**§ 12.** Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um <u>upplýsingar</u> um 1) privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum, 2) …*
> *Stk. 2. Um bert ein partur av skjalinum kemur undir ásetingina í stk. 1, skal hann verða kunnaður við <u>hin partin av innihaldinum í skjalinum</u>.“ (Mínar undirstrikingar)*

*Tað er greitt tilskilað í § 12, stk. 1, nr. 1, at ásetingin snýr seg um undantøku av upplýsingum og ikki skjølum ella málum í síni heild, og sambært stk. 2 skal innlit latast í restina av einum skjali, um skjalið ikki kann undantakast innliti eftir øðrum ásetingum í lógini. Tað er bert í heilt serligum førum, at § 12 kann nýtast til at forða almennum innliti í heil mál. Eftir mínari fatan er ítøkiliga málið, sum snýr seg um eina uppsøgn, ikki av slíkum slag, at tað kann grunda, at tað í síni heild verður undantikið innliti.*



*Mentamálaráðið sæst ikki at hava gjøgnumgingið einstøku skjølini fyri at meta, um tey innihalda upplýsingar um privat viðurskfti. Innihalda skjølini upplýsingar um privat viðurskifti, eru hesar sum nevnt undantiknar innliti. Innihalda skjølini aðrar upplýsingar, sum ikki kunnu undantakast eftir § 12, stk. 1 skal viðkomandi í útgangsstøðinum hava høvi at gera seg kunnigan við restina av skjalinum, sbr. stk. 2, um hesar ikki kunnu undantakast eftir øðrum ásetingum í lógini.*

*Eg havi í viðgerð míni av hesum málinum ikki kannað, um upplýsingar ella skjøl í málinum kunnu undantakast við heimild í øðrum ásetingum í lógini, men skal tó vísa á, at ein upplýsing um, at ein persónur er sagdur úr starvi viðvíkur ikki privatum viðurskiftum. Eg dugi tí ikki at síggja, at innihaldið í uppsagnarskrivinum kann undantakast við heimild í § 12, stk. 1. Hinvegin kunnu grundgevingarnar fyri einari uppsøgn vera undantiknar innliti, í tann mun tær avdúka nakað, sum hoyrir privatlívinum til.*

*Vísandi til tíðina, sum er gingin síðani avgerðin um at nokta innlit er tikin, fari eg at mæla Mentamálaráðnum til at venda sær til blaðkvinnuna fyri at spyrja, um hon framvegis er áhugað í at fáa innlit í málið. Um so er, fari eg at mæla ráðnum til at taka innlitsumbønina uppaftur til viðgerðar. Eg fari samstundis at biðja Mentamálaráðið lata meg frætta, hvat víðari hendir í hesum máli.*

Við skrivi, dagfest 10. juli 2009, kunnaði Mentamálaráðið umboðsmannin um, at ráðið hevði tikið málið uppaftur til viðgerðar og givið klagarum innlit í málið.

Umboðsmaðurin ger ikki meira við málið.

## 11.4 Noktan av innliti frá Mentamálaráðnum í mál, sum ikki var liðugt avgreitt

*Klagan snýr seg um, at Mentamálaráðið hevur noktað Dimmalætting innlit í eitt mál viðvíkjandi einum fyrrverandi leiðara á einum stovni undir Mentamálaráðnum. Umboðsmaðurin hevur gjørt av ikki at almannakunngera alt álitið, men bert niðurstøðuna, ið er soljóðandi.* ***(J. nr. 200900036)***

### *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um, at Mentamálaráðið hevur noktað Dimmalætting innlit í eitt mál viðvíkjandi einum fyrrverandi leiðara á einum stovni undir Mentamálaráðnum.*

*Mentamálaráðið hevur í frágreiðing til mín greitt frá, at málið er meldað til løgregluna, og at ráðið hevur latið løgregluni skjølini í málinum. Talan er sostatt um eitt fyrisitingarligt mál, sum er byrjað í Mentamálaráðnum, men sum endar við eini avgerð hjá Føroya Landfúta, um grundarlag er fyri at reisa ákæru ella ikki. Tað er tí eisini fútin, sum tekur endaligu fyrisitingarligu avgerðina í hesum málinum.*

*Tá biðið verður um innlit í eitt avgerðarmál, er tað sambært § 15, stk. 1 í innlitslógini tann myndugleikin, sum tekur avgerð í málinum, sum skal taka støðu til innlitsspurningin, hetta uttan mun til, um skjølini stava frá einum øðrum myndugleika. Hesin spurningur er umrøddur í Offentlighedsloven med kommentarer av John Vogter, 3. udg., bls. 263, har tað stendur:*

> *„**2. Hvilken myndighed træffer afgørelse om aktindsigt?***
> *Begæringen om aktindsigt vedrørende dokumenter, der indgår i en sag, hvori der er eller vil blive truffet afgørelse af en forvaltningsmyndighed, skal afgøres af den myndighed, som har afgørelsen af sagens realitet. Det er således uden betydning, at dokumentet i øvrigt hidrører fra en anden myndighed, jf. FOB 1982, side 66. Begæringer om aktindsigt i dokumenter, der ikke indgår i afgørelsessager, afgøres af den myndighed, der har dokumentet i sin besiddelse. …“*



*Hetta merkir, at tá Mentamálaráðið hevur latið løgregluni málið, er tað Føroya Landfúti, sum tekur avgerð um, hvørt innlit skal ella kann verða givið í skjølini frá Mentamálaráðnum. Innlitsumbønin átti tískil at verið send fútanum og ikki Mentamálaráðnum.*

*Sambært § 7, stk. 2 í fyrisitingarlógini hevur ein myndugleiki, sum fær eina skrivliga áheitan, sum ikki viðvíkur málsøki hansara, um hetta er gjørligt, skyldu til at senda áheitanina til rætta myndugleikan. Mentamálaráðið átti tí at sent Føroya Landfúta innlitsumbønina. Hetta fari eg at mæla ráðnum til at gera skjótast gjørligt.*

*Hóast tað er fútin, sum skal taka støðu til, um innlit skal ella kann verða latið, fari eg at gera viðmerkingar til ta einu grundgevingina, sum Mentamálaráðið gav fyri at sýta klagaranum innlit. Nevnliga grundgevingina um, at málið ikki var liðugt avgreitt. Eg skal í hesum sambandinum vísa á § 4, stk. 1, 1. pkt. í innlitslógini, sum er soljóðandi:*

*„**§ 4.** Ein og hvør kann við teimum undantøkum, sum eru nevnd í §§ 7-14, krevja at fáa høvi til at gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans. …“*

*Sambært orðaljóðinum er rætturin til innlit ikki avmarkaður til mál, har myndugleikin hevur tikið eina avgerð. Hesin spurningur er eisini umrøddur í Offentlighedsloven med kommentarer av John Vogter, 3. udg., bls. 118, har tað stendur:*

> *„**6. Retten til aktindsigt omfatter både løbende og afgjorte sager***
> *Ligesom efter offentlighedsloven af 1970 omfatter retten til aktindsigt efter § 4, stk. 1, både løbende og afgjorte sager. Adgang til aktindsigt er der principielt fra det øjeblik, sagen rejses. …“*

*Hetta merkir, at ein myndugleiki kann ikki sýta innlit við teirri grundgeving, at eitt mál ikki er liðugt viðgjørt og avgreitt, og um so*

*var, at Mentamálaráðið var rætti myndugleiki at viðgera innlitsumbønina, kundi Mentamálaráðið ikki sýta klagaranum innlit við hesi grundgeving.*

*Burtursæð frá tilmælinum til Mentamálaráðið um at senda Føroya Landfúta innlitsumbønina geri eg ikki meira við málið.*



## 11.5 Noktan av meirinnliti í innanhýsis arbeiðsskjøl

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um, at Mentamálaráðið noktaði at lata meirinnlit í innanhýsis arbeiðsskjøl. Mentamálaráðið grundgav við, at talan var um innanhýsis arbeiðsskjøl, sum ikki eru fevnd av rættinum til innlit, jbr. § 7 í innlitslógini. Umboðsmaðurin vísti á, at myndugleikar kunnu lata innlit í innanhýsis arbeiðsskjøl eftir meginregluni um meirinnlit, sum er ásett í § 4, stk. 1, 2. pkt. Umboðsmaðurin hevði tó ikki orsøk til at finnast at ráðnum fyri at sýta klagaranum innlit í skjølini, av tí at hesi í høvuðsheitum innihildu upplýsingar um privat viðurskifti, sum sambært § 12, stk. 1, nr. 1 ikki eru fevndar av rættinum til innlit. Umboðsmaðurin gav Mentamálaráðnum eina átalu fyri ikki at hava givið klagaranum eina nøktandi grundgeving fyri partvís at nokta innlit, tá biðið varð um hetta fyrstu ferð. (**J. nr. 200900078**)*

### Klagan

Við teldubrævi 28. august 2009 hevur A, blaðstjóri sent umboðsmanninum eina klagu um, at Mentamálaráðið hevur noktað honum meirinnlit í innanhýsis arbeiðsskjøl í einum máli um ein skúlastjóra, sum varð sagdur úr starvi.

### Málsgongd

Við skrivi, dagfest 24. august 2009, sendi Mentamálaráðið klagaranum soljóðandi svar uppá eina innlitsumbøn:

> „**Viðvíkjandi innlitsumbøn í málið um B, fyrrverandi skúlastjóri í D**
>
> Mentamálaráðið hevur í dag móttikið teldubræv, dagfest 23. august kl. 16.29, har tygum kæra Mentamálaráðið fyri ikki at hava ønt tygum aftur, tá søkt hevur verið um alment innlit í málið, sum førdi til, at táverandi skúlastjórin, B, varð koyrdur úr starvinum.
>
> Teldubræv tygara, sum tygum hava sent 4. august kl. 11.15 er komið í summarferiuni hjá Mentamálaráðnum, men Menta-

málaráðið sær tíverri ikki, at hetta teldubræv nakrantíð er komið til ráðið.

Mentamálaráðið skal tí við hesum lata innlit í avrit av viðløgdu skjølum.

Av tí at talan er um persónsmál, eru tað skjøl í málinum, sum ikki eru alment atkomulig.“

Við teldubrævi 28. august 2009 sendi klagarin Mentamálaráðnum soljóðandi umbøn um innlit:

„Við hesum verður biðið um víðkað alment innlit í málið um táverandi skúlastjóran, B.

Tað verður serliga biðið um víðkað innlit í frágreiðingarnar hjá lærarunum, sum vóru givnar til Mentamálaráðið í juni 2008.

Hesar frágreiðingar kunnu ikki allar vera av persónligum slagi, tá tær lýsa fakligu eginleikarnar hjá B, sum ikki kunnu koma inn undir persónsmál, ið ikki eru atkomulig.“

Mentamálaráðið hevur við skrivi, dagfest 4. september 2009, sent klagaranum soljóðandi svar uppá innlitsumbønina:

**„Viðvíkjandi umbøn um víðkað innlit í málið um B**

Við telduposti, dagfestur 28. august 2009, hava tygum heitt á Mentamálaráðið um at fáa víðkað innlit í málið um táverandi skúlastjóran í D, B. Biðið verður serliga um víðkað innlit í frágreiðingarnar hjá lærarunum, sum vóru givnar Mentamálaráðunum í juni 2008.

Sagt skal vera frá, at omanfyrinevndu frágreiðingar eru skjøl til egna nýtslu – innanhýsis arbeiðsskjøl – sum Mentamálaráðið hevur skrivað í sambandi við eftirlit Mentamálaráðsins við D skúla. Frágreiðingarnar eru fevndar av § 7 í løgtingslóg nr. 133 frá



10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001 og koma sostatt ikki undir innlit.

Vísandi til omanfyristandandi skal vera sagt frá, at Mentamálaráðið hevur avgjørt ikki at ganga umbøn tygara um víðkað innlit í sambandi við frágreiðingarnar á møti.

Tygum biðja annars um víðkað innlit í málið um B. Mentamálaráðið metir, at tygum hava fingið innlit í øll tey skjøl í nevnda máli, sum tygum sambært lógini um innlit í fyrisitingina hava rætt til.“

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 8. september 2009, varð klagan send Mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Mentamálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 18. september 2009 sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

**„Viðvíkjandi umbøn um víðkað innlit í málið hjá B.**

Í skrivi, dagfest 8. september 2009, heita tygum á Mentamálaráðið um at greiða nærri frá grundgevingunum fyri at sýta innlit í frágreiðingarnar hjá lærarunum í D skúla.

Í sambandi við eftirlitsarbeiði Mentamálaráðsins í D skúla 16. juni 2008 ynsktu fleiri lærarar at siga sína hugsan um viðurskiftini í skúlanum. Mentamálaráðið gjørdi av at lata lærararnar, ið ynsktu tað, koma til orðanna. Mentamálaráðið skrivaði frágreiðing frá munnligu samrøðuni við lærararnar, og váttaðu teir, eftir at hava lisið endurgivnu samrøðuna, at tað teir høvdu sagt, var teirra hugsan um viðurskiftini.

Mentamálaráðið metir, at hesar frágreiðingar frá lærarum í D skúla

eru at meta sum innanhýsis arbeiðsskjøl í Mentamálaráðnum og eru fevndar av § 7 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001, og koma tí ikki undir skjøl, har innlit verður givið.

Hetta er grundgeving Mentamálaráðsins fyri ikki at lata A víðkað alment innlit í frágreiðingarnar hjá lærarunum.

Samstundis verða eftir umbøn tygara latin tygum til láns øll skjøl í málinum.“

Tann 25. september 2009 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um, at Mentamálaráðið hevur noktað klagaranum meirinnlit í nakrar frágreiðingar, sum ráðið hevði skrivað frá samrøðum við lærarar um viðurskiftini á einum skúla.*

*Tá klagarin á fyrsta sinni bað um innlit í málið, fekk hann innlit í fleiri skjøl í málinum, men ikki umrøddu frágreiðingarnar. Sambært § 21 í fyrisitingarlógini skal ein avgerð um partvís at nokta innlit grundgevast. §§ 21 og 23, stk. 1 og 2 i fyrisitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg) eru soljóðandi:*

*„**§ 21.** Tá ein avgerð verður fráboðað skrivliga, skal hon hava grundgeving uttan so, at avgerðin til fulnar gongur partinum á møti.“*

*„**§ 23.** Ein grundgeving fyri eini avgerð, skal hava eina tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Í tann mun, avgerðin eftir hesum reglum hvílir á eini fyrisitingarligari meting, skal grundgevingin eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini.*



*Stk. 2. Grundgevingin skal eisini um neyðugt hava eina stutta frágreiðing viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, sum hava havt stóran týdning fyri avgerðina.“*

*Í svarinum uppá innlitsumbønina vísti Mentamálaráðið til, at talan var um eitt persónsmál, og at nøkur skjøl í málinum vóru undantikin rættinum til innlit. Hendan grundgevingin lýkur ikki krøvini í § 23, stk. 1, 1. pkt. og stk. 2. Mentamálaráðið átti at greitt klagaranum frá, hvørji hesi skjøl vóru, hvørjar heimildirnar vóru fyri at sýta honum innlit í tey, og hvørjar veruligar umstøður høvdu týdning fyri avgerðina um at sýta honum innlit. Eg fari tískil at geva ráðnum eina átalu fyri ikki at hava givið klagaranum eina nøktandi grundgeving.*

*Tá klagarin í øðrum umfari bað um meirinnlit í umrøddu frágreiðingarnar, sýtti ráðið fyri hesum við teirri grundgeving, at innanhýsis arbeiðsskjøl vóru undantikin innliti sambært § 7 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina).*

*Meginreglan um meirinnlit er ásett í § 4, stk. 1, 2. pkt., sum er soljóðandi:*

*„**§ 4.** ...Ein myndugleiki kann geva loyvi til skjalainnlit í størri mun, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu v.m.“*

*Eg eri samd við Mentamálaráðnum um, at umrøddu frágreiðingarnar eru at meta sum innanhýsis arbeiðsskjøl. Við omanfyri nevndu ásetingini er tó staðfest, at innlitslógin er ein minimumslóg, og tað vil siga, at myndugleikar kunnu lata innlit í t.d. innanhýsis arbeiðsskjøl eftir meginregluni um meirinnlit. Tað sæst tó ikki av svarinum til klagaran, at Mentamálaráðið yvirhøvur hevur viðgjørt spurningin um at veita innlit eftir hesi meginreglu.*

*Tá hetta er sagt, so havi eg havt høvið at lesa umrøddu frágreiðingarnar, og hesar innihalda í høvuðsheitum upplýsingar um privat viðurskifti, sum ikki eru fevndar av rættinum til innlit eftir § 12, stk. 1 í innlitslógini. Eftir eini ítøkiligari meting kunnu skjølini eftir míni fatan í síni heild*

*undantakast innliti eftir § 12, stk. 1. Grundað á hetta havi eg ikki orsøk til at finnast at Mentamálaráðnum fyri at sýta klagaranum innlit í frágreiðingarnar.*

*Burtursæð frá omanfyristandandi átaluni og viðmerkingum geri eg ikki meira við málið.*



## 11.6 Handfaring hjá Uttanríkisráðnum av innlitsumbøn

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Uttanríkisráðnum av eini innlitsumbøn frá einum fjølmiðli. Tá klagað var til umboðsmannin, vóru tríggir mánaðir frálidnir, og ráðið hevði tá bert avgreitt ein part av innlitsumbønini. Uttanríkisráðið avgreiddi umbønina undir umboðsmansviðgerðini, men umboðsmaðurin metti ikki, at ráðið gav klagaranum innlit í øll skjøl, sum hann bað um. Viðvíkjandi viðgerðartíðini hevði umboðsmaðurin trupult við at síggja, at tekniskir spurningar skuldu kunna hava við sær, at tað tók 4 mánaðir at avgreiða eina einfalda innlitsumbøn. Umboðsmaðurin vísti á, at ein fortreyt fyri at reglurnar um innlit virka til fulnar er, at skjøl verða skrásett, men at hetta munar lítið, um skjalaskipaninar ikki eru tøkar og atkomuligar. Umboðsmaðurin gav Uttanríkisráðnum eina átalu fyri ófullfíggjaðu viðgerðina av innlitsumbønini og átalaði drúgvu viðgerðartíðina. Umboðsmaðurin mælti Uttanríkisráðnum til at taka málið uppaftur til viðgerðar og lata seg frætta úrslitið av viðgerðini.* ***(J. nr. 200900046)***

## Klagan

Við skrivi, dagfest 25. mai 2009, hevur blaðmaður á Sosialinum sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> „**Kæra um vantandi alment innlit hjá Uttanríkisráðnum:**
> Við hesum vil undirritaði blaðmaður kæra umsitingina hjá Uttanríkisráðnum fyri vantandi viðgerð av umbøn um alment innlit.
>
> Lóggávan staðfestir, at umbøn um alment innlit - um hendan ikki er í stríð við reglurnar annars - skal gangast á møti skjótast gjørligt og í seinasta lagi 10 dagar eftir, at umbønin er send.
>
> Tann 4. mars bað undirritaði um innlit í tey viðurskifti, sum framganga av hjálagda mail-samskifti. Tann 17. mars var eg á fundi við skjaladeildina og A um sama mál.
>
> Hóast tað varð lovað mær á hesum fundi, at umbønin skuldi

avgreiðast skjótast gjørligt, hoyrdi eg einki aftur, fyrr enn eg í telduposti tann 28. apríl rykti eftir hesum.

Eisini tá fekk eg svar í telduposti, har skrivað er, at svar verður sent mær skjótast gjørligt.

Í dag skriva vit 25. mai, men einasti parturin av mínari umbøn, sum er gingin mær á møti, er tann um kostnaðin fyri Liberia-ferðina. Hinar spurningarnar havi eg ikki fingið svar uppá. Tó er mær upplýst í telefonsamrøðu, at arbeitt verður við málinum.

Eg vil við hesum kæra, at almenna fyrisitingin ikki arbeiðir sambært lógini um alment innlit, og at fyrisitingin á tann hátt er við til at forða upplýsingum í at koma út til almenningin.

Hava tit spurningar í hesum sambandi, eru tit sjálvandi vælkomin at seta tykkum í samband við undirritaða á telefon …/…

Hjálagt er avrit av mail-samskifti við A."

## Málsgongd

Tann 4. mars 2009 sendi blaðmaðurin Uttanríkisráðnum soljóðandi umbøn um innlit:

„Vísandi til lógina um alment innlit kundi eg hugsað mær at vita, hvat ymisku heitini: Aðalstjóri, Deildarstjóri, leiðandi serfrøðingur, serfrøðingur, fulltrúi, skrivari og starvslesandi innibera, hvørji krøv verða sett til at ein persónur skal blíva hesi ymisku heitini, og hvat hesi størv geva í løn.

Umframt hetta kundi eg hugsað mær at vita, um nakrar serligar treytir eru í sambandi við Uttanríkisráðið. Eisini ætlaði eg at fáa øll viðkomandi skriv í sambandi við starvssetanir í Uttanríkisráðnum.

Hvar er B í skipanini, tá eg ikki finni hann á heimasíðuni?"



Uttanríkisráðið svaraði umbønini við teldubrævi sama dag:

„Her er nógv tilfar hjá okkum at gjøgnumganga. Skilabest hevði verið um vit avtalaðu, at tú kom út til okkara, og vit saman við journalini gjøgnumgingu málini."

Blaðmaðurin spurdi síðani, um fundurin kundi verða seinnapartin 10. mars. Deildarstjórin svaraði, at hann var burturstaddur, og at tað lá betur fyri at halda fundin 17. mars 2009.

Við teldubrævi 28. apríl 2009 rykti blaðmaðurin eftir svari:

„Vísandi til niðanfyristandandi mail frá 4. mars 2009 vil eg biðja um svar uppá ávísar upplýsingar í sambandi við løn og útbúgving hjá ymisku fólkunum í Uttanríkisráðnum áðrenn klokkan 09.00 í morgin. Um ikki, verður farið víðari við málinum.

Konkret kundi eg hugsað mær at vita:

Hvussu nógv rindar uttanríkisráðið í lønum um mánaðin?
Hvørji eru, og hvørja útbúgving hava ymisku fólkini í uttanríkisráðnum?
Og eitt útgreinað yvirlit, hvat hvør fær í løn.

Harumframt vil eg biðja um innlit í, hvat túrurin hjá uttanríkisráðharranum til Liberia við fylgi kostaði. Men hetta havi eg ikki spurt um fyrr."

Við teldubrævi sama dag svaraði Uttanríkisráðið blaðmanninum soleiðis:

„Vísandi til samrøðuna fyri løtu síðani sendi eg tær hetta svar.

Á fundinum 17. mars við skjalaskrásetingina greiddi eg tær frá, at tað er lønardeildin, ið tú skal venda tær til viðvíkjandi spurninginum um ymisku heitini: Aðalstjóri, Deildarstjóri,

leiðandi serfrøðingur, serfrøðingur, fulltrúi, skrivari og starvslesandi innibera, hvørji krøv verða sett til at ein persónur skal fáa hesi ymisku heitini og hvat hesi størv geva í løn. Sí: Rundskriv um serfrøðingar og deildarleiðarar eftir BLF-sáttmálanum, sum lønardeildin umsitur.

Eisini greiddi eg frá, at tað ikki eru nakrar serligar treytir fyri Uttanríkisráðið.

Viðvíkjandi B greiddi eg tær frá, at hann ikki starvast í Uttanríkisráðnum, og at tú má seta teg í samband við Løgmansskrivstovuna.

Vit skiltust uppá tað, at skjalaskrásetingin skuldi senda tær setanarskrivini hjá starvsfólkunum í Uttanríkisráðnum. Spurningarnir niðanfyri eru móttiknir og verða viðgjørdir. Svar verður sent tær skjótast gjørligt.

*Hvussu nógv rindar Uttanríkisráðið í lønum um mánaðin?*
*Hvørji eru, og hvørja útbúgving hava ymisku fólkini í uttanríkisráðnum?*
*Og eitt útgreinað yvirlit, hvat hvør fær í løn.*

*Harumframt vil eg biðja um innlit í, hvat túrurin hjá uttanríkisráðharranum til Liberia við fylgi kostaði. Men hetta havi eg ikki spurt um fyrr.*"

Tann 23. juni 2009 sendi Uttanríkisráðið blaðmanninum soljóðandi svar uppá innlitsumbønina:

„**Viðvíkjandi umsókn um innlit í skjøl viðvíkjandi løn og útbúgving hjá starvsfólkunum í Uttanríkísráðnum**

Víst verður til umsókn tygara, dagfest 28 apríl 2009, um innlit í ávísar upplýsingar í sambandi við løn og útbúgving hja starvsfólkunum í Uttanríkisráðnum.



Uttanríkisráðið hevur viðgjørt málið samsvarandi Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina við seinni broytingum og verður við hesum latið innlit í setanarbrøv hjá starvsfólkunum og yvirlit yvir lønarútreiðslurnar hjá Uttanríkisraðnum fyri árið 2009."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 28. mai 2009, varð klagan send Uttanríkisráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Uttanríkisráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 19. juni 2009 sendi Uttanríkisráðið umboðsmanninum soljóðandi teldubræv:

„Eg fari at vísa til bræv frá Løgtingsins Umboðsmanni frá 28. mai 2009 viðvíkjandi omanfyrinevnda máli. Tað var okkara ætlan at svara nevnda brævi, áðrenn tríggjar viku freistin fór í vikuni, eisini tí at vit væntaðu at kunna avgreiða innlitsumbønina samstundis.

Síðan Sosialurin søkti um innlit í ávís skjøl hava starvsfólk hjá Uttanríkisráðnum og Løgmansskrivstovuni leita eftir skjølum í skjalasøvnunum hjá Uttanríkisráðnum, heruppií gamla Samvit (Menningarstovan og Ferðaráð Føroya), eins og Løgmansskrivstovuni og Landsskrivstovuni, ið var fram til 1. august 1996.

Sum eg skilji á mínum starvsfólkum hevur Sosialurin ferð aftan á ferð víst sína misnøgd, tí at hann ikki fekk øll skjølini beinanvegin innlitsumbønin var latin Uttanríkisráðnum. Vit hava boðað honum frá í hvørjum einstøkum føri, at hann fær innlit í øll skjøl, sum hann eigur innlit í eftir lógini so skjótt tey eru fingin til vegar. Vit hava annars eisini ráðgivið honum, at hann kann kæra okkum til Umboðsmannin, um hann ikki góðtekur okkara frágreiðing.

Eg væntaði sum áður sagt at náa at kunna avgreiða málið bæði

í mun til Sosialin og Umboðsmannin, áðrenn hendan vikan var lokin, men eydnaðist tað tíverri ikki.

Tískil fari eg við hesum at biðja Umboðsmannin um í fyrstu atløgu at halda okkum til góðar í hesum máli og í aðru atløgu at leingja freistina til fríggjadagin í næstu viku at svara omanfyrinevnda brævi. Eg havi í hesum sambandi boðað avvarðandi stavsfólkum frá, at tá skal málið verða avgreitt."

Umboðsmaðurin játtaði at leingja freistina til 26. juni 2009.

Tann 26. juni 2009 sendi Uttanríkisráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„**Viðvíkjandi klagu frá Sosialinum, dagfest 25. mai 2009**
Í brævi dagsettum 28. mai 2009 frá Løgtingsins Umboðsmanni, viðvíkjandi klagu frá Sosialinum, dagfest 25. mai 2009, verður heitt á Uttanríkisráðið um at greiða frá málinum eins og at lata Umboðsmanninum til láns øll skjøl í málinum. Og verður tað við hesum gjørt niðanfyri.

Innlitsmálið var sett á stovn í sambandi við innlitsumbøn fra Sosialinum hin 4. mars 2009. Umbønin verður síðan víðkað hin 28. april 2009. Í samskiftinum millum Uttanríkisráðið og Sosialin kemur til sjóndar, at Sosialurin fær innlit so hvørt upplýsingar í málinum verða funnir fram. Eisini fær Sosialurin høvi til at koma til fundar í Uttanríkisráðnum hin 17. mars 2009, har greitt var nærri frá ymiskum viðurskiftum, ið innlitsumbønin fevnir um, men, sum ikki eru til skjals í Uttanríkisráðnum, tí at onnur avís stjórnarráð varða av hesum viðurskiftum. Øll hesi viðurskifti eru nærri frágreidd í skjølum i innlitsmálinum, ið eru hjáløgd.

Í telduposti til Umboðsmannin hin 19. juni 2009 greiddi eg frá tilgongdini soljóðandi:

„Síðan Sosialurin søkti um innlit í ávís skjøl hava starvsfólk hjá Uttanríkisráðnum og Løgmansskrivstovuni leita eftir skjølum í skjalasøvnunum hjá Uttanríkisráðnum, heruppií gamla Samvit (Menningarstovan og Ferðaráð Føroya), eins og Løgmansskrivstovuni og Landsskrivstovuni, ið var fram til 1. august 1996.

Sum eg skilji á mínum starvsfólkum hevur Sosialurin ferð aftan á ferð víst sína misnøgd, tí at hann ikki fekk øll skjølini beinanvegin innlitsumbønin var latin Uttanríkisráðnum. Vit hava boðað honum frá í hvørjum einstøkum føri, at hann fær innlit í øll skjøl, sum hann eigur innlit í eftir lógini so skjótt tey eru fingin til vegar. Vit hava annars eisini ráðgivið honum, at hann kann kæra okkum til Umboðsmannin um hann ikki góðtekur okkara frágreiðing."

Mín niðurstøða er sostatt hon, at Uttanríkisráðið hevur sett rímiliga orku av til at avgreiða hetta mál skjótast gjørliga, men at ymisk viðurskifti, harímillum ein røð av ymiskum skjalaskrásetingarskipanum, ið ikki eru skipaðar eins tøkniliga og ikki vóru tøkar frá fyrsta degi í hesum máli hava sum heild havt við sær, at óvanliga torført hevur verið at avgreitt hetta mál til fulnar stundisliga.

Eg leggi við hesum hjá øll skjøl í innlitsmálinum. Somuleiðis eri eg til reiðar at lata Umboðsmannium til láns øll setanarmál í Uttanríkisráðnum, ið eru komin undan kavi í sambandi við nevndu innlitsumbøn, um tørvur er á tí."

Saman við skrivinum lá ein útskrift frá Leiðslukunningarskipanini hjá Føroya Gjaldsstovu yvir samlaðu lønarútreiðslurnar í 2009 til og við mai mánaða umframt avrit av setanarbrøvum hjá starvsfólkum í Uttanríkisráðnum.

Við skrivi, dagfest 30. juni 2009, vórðu viðmerkingarnar hjá Uttanríkisráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 6. juli 2009 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> **„Vísandi til skriv tykkara frá 30. juni, J.nr: 200900046/9, hava vit hesa viðmerking:**
>
> …
> Sum fjølmiðil kann tað ikki vera okkara trupulleiki, at skjalaskrasetingin og/ella telduskipanir ikki eru nøktandi. Lógin um alment sigur púrasta greitt, at innlit eigur at verða latið skjótast gjørligt og í seinasta lagi 10 dagar eftir, at umbønin er send. Tann freistin er ikki yvirhildin, og er tað hetta, sum kært verður um.“

Tann 7. juli 2009 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um handfaringina hjá Uttanríkisráðnum av eini innlitsumbøn.*

*Tá klagað varð til mín, vóru slakir 3 mánaðir frálidnir, síðani klagarin á fyrsta sinni søkti um innlit. Ráðið hevði tá avgreitt ein part av innlitsumbønini umframt svarað klagaranum uppá spurningar, sum vórðu settir saman við innlitsumbønini. Uttanríkisráðið hevði m.a. víst klagaranum á, sum góður fyrisitingarsiður tilskilar, at fyrispurningurin um starvsheitini v.m. skuldi stílast Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum.*

*Av tí at tað oftast er týdningarmikið fyri bæði borgarar og serliga fjølmiðlar at fáa skjalainnlit í eitt mál so skjótt sum gjørligt, er tað í § 16, stk. 1 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) ásett, at ein myndugleiki sum skjótast skal gera av, um ein umbøn um innlit kann verða gingin á møti. Myndugleikarnir hava sostatt eina lógarásetta skyldu at svara innlitsumbønum skjótast gjørligt. Tað er tó ikki, sum sagt verður í klaguni, ásett eitt evsta mark fyri, nær ein umbøn um innlit skal vera avgreidd, men í § 16, stk. 2 er ásett, at um ein innlitsumbøn ikki er gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at myndugleikin hevur móttikið hana, so skal myndugleikin boða frá orsøkini til hetta, og nær ein avgerð kann væntast.*

*Eftir at hava móttikið innlitsumbønina 4. mars, bað ráðið klagaran koma á fund, tí talan var um at gjøgnumganga nógv ymisk skjøl. Á fundinum, sum var hildin 17. mars, fekk klagarin svar uppá spurningarnar, sum vórðu settir saman við innlitsumbønini, men ikki innlit í tey skjøl, sum hann hevði biðið um. Eg havi sum so onga viðmerking til, at ráðið bjóðar klagaranum á fund, men vísandi til at vavið á skjølunum var avmarkað, og at Uttanríkisráðið kundi havt svarað klagaranum uppá settu spurningarnar beinanvegin, dugi eg ikki at síggja, hvat endamálið var við hesum fundi. Eg haldi tað heldur ikki vera nøktandi, at fundurin ikki kundi verða fyrr enn tvær vikur eftir, at innlitsumbønin var móttikin, av teirri orsøk at ein deildarstjóri var burturstaddur. Er eitt starvsfólk ikki tøkt, hevur myndugleikin skyldu at tryggja, at eitt annað starvsfólk kann avgreiða innlitsumbønina.*

*Klagarin endurtók í teldubrævi 28. apríl umbønina um innlit í setanarskrivini og víðkaði hana til at fevna um lønarútreiðslurnar hjá ráðnum, mánaðarligu og býttar á einstøku starvsfólkini. Upplýsingar, sum allar eru fevndar av rættinum til innlit. Uttanríkisráðið avgreiddi umbønina 23. juni. Eg havi fingið avrit av skjølunum, sum ráðið lat klagaranum, og sambært hesum hevur klagarin bert fingið innlit í setanarskrivini hjá áleið helminginum av starvsfólkunum, sum sambært heimasíðuni hjá Uttanríkisráðnum starvast har. Ráðið gav eisini klagaranum innlit í samlaðu mánaðarligu lønarútreiðslurnar, men tað er bert í einstøkum førum, at mánaðarliga lønin hjá einstaka starvsfólkinum framgongur av skjølunum.*

*Uttanríkisráðið hevur greitt soleiðis frá um viðgerðina av innlitsumbønini:*

*„Mín niðurstøða er sostatt hon, at Uttanríkisráðið hevur sett rímiliga orku av til at avgreiða hetta mál skjótast gjørliga, men at ymisk viðurskifti, harímillum ein røð av ymiskum skjalaskrásetingarskipanum, ið ikki eru skipaðar eins tøkniliga og ikki vóru tøkar frá fyrsta degi í hesum máli hava sum heild havt við sær, at óvanliga torført hevur verið at avgreitt hetta mál til fulnar stundisliga.“*

*Givið er, at tað kann draga út at avgreiða eina innlitsumbøn, um skjøl skulu útvegast frá fleiri ymiskum myndugleikum, men eg havi trupult við at síggja, hvussu ymiskar tøkniligar loysnir í skjalaskipanunum skulu kunnu hava við sær, at tað tekur 4 mánaðir at avgreiða eina einfalda innlitsumbøn. Ein fortreyt fyri at reglurnar um innlit virka til fulnar er, at skjøl verða skrásett, men hetta munar lítið um so er, at skjalaskipaninar ikki eru tøkar og atkomuligar. Eg fari at heita á Uttanríkisráðið um at tryggja hesi viðurskifti.*

*Samanumtikið fari eg at geva Uttanríkisráðnum eina átalu fyri ófullfíggjaðu viðgerðina av innlitsumbønini. Herumframt fari eg at átala drúgvu viðgerðartíðina. Vísandi til viðmerkingarnar um, at ráðið ikki gav klagaranum innlit í allar tær upplýsingar, sum hann bað um, fari eg at mæla Uttanríkisráðnum til at taka málið uppaftur til viðgerðar og lata meg frætta úrslitið av hesari viðgerð.*

Við skrivi, dagfest 26. oktober 2009, boðaði Uttanríkisráðið umboðsmanninum frá, at ráðið hevði kunnað blaðmannin um, at hann var vælkomin at venda aftur í seinasta lagi 1. janaur 2010 og fáa eitt yvirlit yvir, hvørjar útbúgvingar einstøku starvsfólkini høvdu, umframt at tað var óvist, nær øll starvsfólkini høvdu fingið eitt setanarskriv, sum blaðmaðurin kundi fáa innlit í. Umboðsmaðurin metti framvegis viðgerðina vera ófullfíggjaða og vísti á, at klagaranum vantaði at fáa innlit í navn, starvsheiti og løn hjá fleiri av starvsfólkunum, og hvørja útbúgving starvsfólkini í ráðnum høvdu, og at hetta vóru upplýsingar, sum Uttanríkisráðið sum almennur arbeiðsgevari hevði.



Við skrivi, dagfest 25. november 2009, boðaði Uttanríkisráðið umboðsmanninum frá, at klagarin sama dag hevði fingið innlit í, hvørji starvsfólkini í ráðnum vóru, hvat starvsheiti teirra var, og hvussu tey vóru lønt. Ráðið sá seg ikki ført fyri at avgreiða tann partin av innlitsumbønini, sum snúði seg um, hvørja útbúgving starvsfólkini høvdu. Umboðsmaðurin mælti ráðnum til at lata klagaranum hesar upplýsingar, tá tær vóru til taks. Umboðsmaðurin gjørdi ikki meira við málið.

# *21 Kommunu-, Umhvørvis-, Byggi-/leigumál og Friðing*

## 21.1 Avgerð hjá Innlendismáláraðnum at nokta sundurbýti í eigaraíbúðir

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um avgerð hjá Innlendismálaráðnum um at nokta sundurbýti í eigaraíbúðir. Sundurbýtið varð noktað, av tí at Innlendismálaráðið ikki metti, at treytin í § 10 í løgtingslóg um eigaraíbúðir var lokin. Umboðsmaðurin kom til ta niðurstøðu, at av tí at ráðið ikki hevði tikið støðu til ella mett um, hvørt ítøkiligu umstøðurnar í málinum kundu føra til sundurbýti, hevði ráðið ikki givið málinum eina veruliga viðgerð. Umboðsmaðurin heitti tí á ráðið um at taka málið upp til nýggja viðgerð, og lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum. (**J. nr. 200900008**)*

## Klagan

Við skrivi, dagfest 20. januar 2009, hevur B, adv., vegna A, sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> **„Viðv. matr. nr. …, Tórshavn – eigarar A: Umsókn um sundurbýti í eigaraíbúðir**
>
> Vegna A, …, Tórshavn, loyvi eg mær at senda kæru til Løgtingsins umboðsmann um málsviðgerðirnar og avgerðirnar hjá Tórshavnar kommuna og Innlendismálaráðnum í málinum um umsókn um sundurbýti av matr. nr. …, Tórshavn, í eigaraíbúðir.
>
> **Málsgongdin**
>
> Málsgongdin er í stuttum hendan: Í 1970 bygdu kærararnir sethús á ognini matr. nr. …, Tórshavn. Grundstykkið er 656 m2 til víddar, og húsini vórðu bygd á tílíkan hátt, at lættligt skuldi vera seinni at býta tey sundur í tvær sundurskildar búeindir.



Í sambandi við at ein dóttir við familju síni ynskti at búgva inni hjá foreldrunum, varð avgjørt at fremja tað sundurbýti, ið atlit vórðu tikin til, tá húsini upprunaliga vórðu bygd, og søkt varð um byggiloyvi til at innrætta eina sjálvstøðuga íbúð í niðaru hæddunum av húsunum.

Hetta loyvið varð givið av Tórshavnar kommunu við byggiloyvi, dagfest 15. januar 2001.

Tá kærararnir somuleiðis ynsktu at tryggja dóttrina við formalisering av eigaraviðurskiftunum, søkti eg teirra vegna tann 9. november 2007 um góðkenning av, at sethúsaognin matr. nr. …, Tórshavn, varð býtt sundur í tvær eigaraíbúðir sambært reglunum í løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir.

Umsóknin varð send Vinnumálaráðnum, sum upplýsti, at málið nú hoyrdi undir Innlendismálaráðið, hagar tað bleiv sent beinleiðis av Vinnumálaráðnum.

Eftir at Umhvørvisstovan við brævi, dagfestum 13. februar 2008, hevði sýtt at fremja sundurbýtið, varð kært til Løgmálaráðið við brævi, dagfest 6. mai 2008.

Løgmálaráðið sýtti í brævi, dagfest 21. august 2008, at ganga kæruni á møti. Í málsviðgerðini hevði Løgmálaráðið ikki sent málið til ummælis hjá Tórshavnar kommunu, hóast Løgmálaráðið tyktist at hava havt stór atlit til byggiteknisk, trafikal og onnur viðurskifti, ið nettupp vóru kommunal mál. Heitt varð tí á Løgmálaráðið um at taka avgerðina aftur og taka málið upp til nýggja viðgerð og senda tað til kommununa til ummælis. Hetta varð gjørt í brævi, dagfestum 10. september 2008, og samstundis varð skrivað til býararkitektin hjá Tórshavnar kommunu, har biðið varð um fund at greiða gjøllari frá málinum.

Løgmálaráðið fekk seinni, tann 23. september 2008, sendandi byggiloyvi frá kommununi, dagfest 15. januar 2001, í sambandi

við broyting av innrættingini av ognini, soleiðis at hon varð býtt sundur í tvær íbúðir.

Tann 26. september 2008 váttaði Løgmálaráðið, at málið fór at verða sent kommununi til ummælis, og at avgerðin fyribils varð tikin aftur í hesum viðfangi.

Tann 31. oktober 2008 varð av nýggjum skrivað til býararkitektin, C, har biðið varð um høvi til at hava fund við arkitektin ella onkran á byggideildini at greiða gjøllari frá málinum.

Tann 26. november 2008 fekk eg frá Innlendismálaráðnum sendandi viðmerkingarnar frá Tórshavnar kommunu, dagfestar 18. november 2008. Í hesum sambandi loyvi eg mær at gera vart við, at eg ongantíð frætti aftur frá kommununi um áheitanir mínar um fund. Umframt framman fyri nevndu skrivligu áheitanir hevur verið ringt og meylað fleiri ferðir til kommununa um tað sama.

Gjørt verður eisini vart við, at í viðmerkingum sínum verður ikki eitt orð sagt um konkreta málið, nevniliga matr. nr. …, Tórshavn, og viðurskiftini á hesi ognini. Tað einasta, ið kommunan skrivar um í viðmerkingum sínum, eru generellar tankar um parkering, vegir, kloakk, vatn v.m. Kommunan heitir staðiliga á Løgmálaráðið um ikki at loyva sundurbýti av „vanligum sethúsum," vísandi til omanfyristandandi.

Í brævi til Innlendismálaráðið, dagfest 1. desember 2008, varð gjørt vart við hesi viðurskifti, og í endanum av brævinum til Innlendismálaráðið varð, „heitt á ráðið um at viðgera hetta konkreta málið út frá teimum fortreytum, ið liggja í hesum málinum, og ikki einans vísa til generellar grundgevingar."

Endaliga avgerðin kom frá Innlendismálaráðnum tann 18. desember 2008, har kæran um avgerðina frá Matrikulstovuni um at nokta eigarunum loyvi til sundurbýti ikki verður gingin á møti. Umsóknin um sundurbýti er sostatt endaliga sýtt av umsitingini.



Grundgevingarnar hjá Innlendismálaráðnum eru hesar:

1. Ivasamt er, hvørt ætlanin hjá kærarunum var frá fyrstan tíð av at býta húsini sundur í eigaraíbúðir.
2. Byggiloyvi frá Tórshavnar kommunu frá 2003 *(mín viðm.: 2001)* hevur ongan týdning, tá kommunan ikki hevur heimild at veita loyvi til sundurbýti av eigaraíbúðini.
3. Týdningurin av at hava endamálið við einari byggisamtykt fyri eyga.
4. Aðrir borgarar skulu hava sama møguleika at sundurbýta.

Umframt tað, sum longu er framført í brævasamskiftinum við myndugleikarnar um nógv av hesum viðurskiftum, sum víst verður til, skulu í stuttum hesar viðmerkingar gerast til grundgevingarnar hjá Innlendismálaráðnum:

**Ad. 1 – ætlanin tá húsini vórðu bygd**
Í lógini um eigaraíbúðir (løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970) eru í grein 10 ásettar tvinnar treytir fyri, at eini hús kunnu koma undir lógina, nevniliga at húsini eru grundað, eftir at lógin er komin í gildi, og ætlað til tess at leggja sundur í eigaraíbúðir.

At fyrra treytin er lokin, er eingin ivi um, og tykist eisini at vera semja um tað í hesum málinum. Seinna treytin er reiðiliga óítøkilig. Fyri tað fyrsta kann verða spurt, hvør skal hava havt hesa ætlanina, tann, ið byggir húsini, ella viðkomandi mynguleikar? Tað sigur lógin einki um, og ei heldur er nakað at finna í viðmerkingunum til lógina, ið kann kasta ljós á hesi viðurskifti.

At umsøkjararnir í hesum málinum ikki høvdu nakra beinleiðis ítøkiliga ætlan um frá fyrsta degi av at leggja húsini sundur í eigaraíbúðir, er møguligt. Kortini er so mikið komið fram í hesum málinum um byggihátt og annað, at frá fyrsta degi hava húsini verið soleiðis bygd, at tað fór at bera væl til seinni at leggja tey sundur í eigaraíbúðir, um hetta skuldi komið uppá tal.

Um so er, at tað eru myndugleikarnir, ið skulu hava havt hesa ætlan, átti tað at verið gjøllari lýst annaðhvørt í lógini ella í tí praksis, ið seinni hevur verið um hesi viðurskifti, at myndugleikarnir høvdu havt hendan møguleika í huganum frá fyrsta degi av. Um so var, kundi lógin ikki verið brúkt um onnur hús enn tey, sum frá fyrsta degi av vóru góðkend sum eigaraíbúðarhús. Hetta er ikki talan um, sum sæst av teimum fáu málum, ið borið hevur til at fáa upplýsingar um í sambandi við viðgerð av hesum málinum. Um hetta nøkur orð seinni.

Samanumtikið er hetta kravið so lítið ítøkiligt og lítið útgreinað í lógini, at alt ov stórur dentur eigur ikki at verða lagdur á hesa treytina í viðgerð av einum konkretum máli, og at so hevur verið í øðrum málum um loyvi at býta hús sundur í eigaraíbúðir er eyðsæð, sí niðanfyri.

Tað sær út til, at Innlendismálaráðið nú hevur ta fatan, at ætlanin skal hava verið til staðar frá fyrstan tíð av, hóast stuðul til hetta sjónarmið ikki er at finna í lógini ella praksis, sum hevur verið fylgd higartil.

**Ad. 2 – byggiloyvið frá 2001 ísambandi við, at íbúðin varð gjørd**

Her tykist sum Innlendismálaráðið hevur misskilt tað, sum varð ført fram av kærarunum í sambandi við hetta byggiloyvið. Víst verður í hesum sambandi til bræv frá Løgmálaráðnum til undirritaða, dagfest 21. august 2008, har spurningurin um ætlanina við húsunum verður viðgjørdur. Her førir Løgmálaráðið fram, at tað umframt tað reint byggitekniska eisini er av alstórum týdningi at hava onnur fyrilit fyri eyga, tá talan er um sundurbýti. Í hesum sambandi vísir Løgmálaráðið á skipan av bygging í kommununi í byggiøki, ferðslu, parkeringsviðurskifti og kloakkering v.m. Hetta metir Løgmálaráðið alt vera viðurskifti, sum skulu havast í huga, tá støða verður tikin til sundurbýti eftir grein 10 í eigaraíbúðarlógini, og kemur til tað úrslit, at avleiðingarnar, sum standast av einum møguligum sundurbýti, virka til, at ásetingin „kann tulkast strangt.“ Tað var sum svar uppá hesi sjónarmið hjá Løgmálaráðnum at víst varð á í brævi mínum til ráðið, dagfest 10. september 2008, at hetta vóru alt viðurskifti, ið tað ikki tilkom Løgmálaráðnum at hugleiða um, men hetta vóru viðurskifti, ið lógu undir kommununi at taka støðu til, og ført varð tí fram, at kommunan júst mátti haldast at hava tikið støðu til allar hesar spurningar, tá hon gav byggiloyvi til tað fysiska sundurbýtið av húsunum í tvær íbúðir. Tað tilkom tí ikki Løgmálaráðnum seinni at leggja seg út í hesi viðurskifti.

Sjónarmið mítt var – og er – at tað eru tey konkretu viðurskiftini á viðkomandi ogn, ið talan er um, og at hesi viðurskifti vóru avgreidd við byggiloyvinum. At tað skal hava stórvegis negativ árin á ferðslu-, parkering- og kloakkviðurskifti, at íbúðin fær status av eigaraíbúð í staðin fyri leiguíbúð, kann ikki góðkennast.

Tað var eisini tí, at biðið varð um, at málið varð sent kommununi til ummælis, soleiðis at høvi var til hjá umsøkjarunum at fáa eina tílíka konkreta viðgerð í kommununi, og biðið varð eisini fleiri ferðir um fundir við kommunalu byggimyndugleikarnar í hesum sambandi, uttan at hetta eydnaðist.

Tað svarið, ið er komið frá kommunalu byggimyndugleikunum, dagfest 18. november 2008, vísir eisini, at kommunan als ikki hevur viðgjørt hetta konkreta málið, men kemur við generellum hugleiðingum um rottangar, hitaketlar, el-mátarar o.s.fr. Víðari vísir kommunan generelt á vegir, parkering, kloakk, vatn v.m. uttan yvirhøvur at koma inn uppá, um hesi viðurskifti kunnu haldast at versna orsakað av, at íbúðin verður broytt frá leigíbúð til eigaraíbúð. Hesi viðurskifti eru gjøllari umrødd í brævi mínum til Innlendismálaráðið, dagfest 1. desember 2008, sum víst verður til.

**Ad. 3 – endamálið við byggisamtykt**

Her endurtekur Innlendismálaráðið stórt sæð somu sjónarmið, sum vórðu førd fram undir 1 og 2 omanfyri, og endar við

hesum orðum: „Um eitt sethús, ið frá fyrstan tíð varð roknað til eitt húski, verður býtt sundur soleiðis, at tað eftirfylgjandi skal vera møguligt hjá tveimum húskjum at búgva á staðnum, so vil hetta sjálvandi viðføra árin bæði á ferðsluna, sum kommunan eisini vísir á í skrivi sínum, men eisini onnur ting, so sum parkeringsviðurskifti, kloakkering o.a.“

Hví hetta er sjálvandi, er ilt at skilja, og víst verður til tað, sum ført er fram um hesi viðurskifti omanfyri. Her verður eisini víst til viðmerkingarnar frá umsøkjarunum, ið eru dagfestar 16. september 2008, viðvíkjandi byggiloyvinum frá 2001, har m.a. er upplýst, at trý parkeringspláss eru á økinum, og at rottangi varð valdur til tvey húsarhald, eins og betongdekk eru millum niðastu hæddirnar og rundan um trappurnar millum hæddirnar.

Eisini eigur at verða víst til grein 5 í ásetingum fyri umráðispartarnar A 1 í triðja grundumráði í byggisamtykt fyri kommununa, har ásett er, at „loyvt er einans at byggja stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum og – eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, raðhús og ketuhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.“ Somuleiðis eigur at verða víst á, at við at minsta krav til grundstykki í byggisamtyktini er 500 m2 er grundstykkið á matr. nr. …, Tórshavn, 656 m2.

Samanumtikið geri eg galdandi, at við byggiloyvinum frá 2001 eru allir býarskipanarligir spurningar viðvíkjandi ferðslu, parkering, kloakk v.m. endaliga avgreiddir av kommununi, sum er kompetenti myndugleikin á økinum.

**Ad. 4 – rættindi hjá øðrum borgarum í somu ella líknandi støðu sum eigararnir av matr. nr. …, Tórshavn**
Her vísir Innlendismálaráðið á, at tað er av týdningi at hava í huga, at „aðrir borgarar, sum eru í somu ella líknandi støðu sum eigararnir av omanfyri standandi matr. nr., eisini skulu hava sama møguleika við sundurbýti.“

Ja sjálvandi. Hvussu kann nakað annað koma uppá tal?



Hetta tykist tíverri at vera eitt sjónarmið, ið nógvir myndugleikar leggja til grund í teirra málsviðgerð: Betri er at siga nei enn ja, tí sigur tú ja, kunnu onnur eisini koma og biðja um tað sama, men sigur tú nei, so hevur tú bundið um heilan fingur. Hetta er eitt sjónarmið, sum als ikki eigur at koma uppá tal í almennari umsiting, og sum heitt verður á umboðsmannin um at reka aftur við greiðum orðum.

Ikki minst orsakað av, at Innlendismálaráðið metir hetta sjónarmiðið at føra til, at ásetingin í grein 10 í lógini um eigaraíbúðir eigur at verða tulkað trongt. Tað kann ikki metast at vera í samsvari við góðan umsitingarsið at brúka eina reglu um heldur at siga nei enn ja til eina umsókn orsakað av vanda fyri, at aðrir borgarar fáa somu sømdir, sum grundarlag undir trongari tulking av einari so lítið ítøkiligari reglu í grein 10 í lógini um eigaraíbúðir sum „ætlað.“

**Myndugleikapraksis**
Í brævi mínum til Løgmálaráðið, dagfest 6. mai 2008, vísti eg á trý dømi um myndugleikapraksis viðvíkjandi sundurbýti av ognum í eigaraíbúðir, sum eg hevði kunnleika um, og í brævi mínum til Løgmálaráðið, dagfest 10. september 2008, bað eg um innlit í hesi málini.

Tey málini, eg fekk innlit í, eru tvey, nevniliga: Matr. nr. …, Hoyvík.

Her snýr tað seg um eini hús í randarbyggingini í Hoyvík, ið upprunaliga vórðu løgd sundur í tvær íbúðir, tá tey vórðu bygd (men ikki eigaraíbúðir). Húsini vórðu bygd í 1977, og í 2000 varð søkt um loyvi at leggja tey sundur í eigaraíbúðir. Hetta varð sýtt av Matrikulstovuni eftir tilmæli frá býarskipanarnevnd kommununar, men um hetta sigur Vinnumálastýrið í avgerð síni, dagfest 6. juni 2000, at „ummælið, sum býarskipanarnevndin hevur gjørt í hesum máli, var ikki samsvarandi lógini um eigaraíbúðir, tí býarskipanarnevndin grundgevur sína støðutakan við, at sundurbýtið av ognini í eigaraíbúðir ikki er í

samsvari við ætlanirnar hjá býráðnum við økinum, og at ognin tí ikki egnað at verða løgd sundur í eigaraíbúðir."

Um hesa grundgeving sigur Vinnumálastýrið, at eingin heimild er fyri hesum, og býarskipanarnevndin verður tí áløgd at taka málið til nýggja viðgerð. Hetta varð gjørt, men uttan aðra grundgeving helt býarskipanarnevndin fast um sína støðu. Hetta verður undirkent av Vinnumálastýrinum, sum sostatt gevur loyvi til sundurbýti. Hetta málið minnir ikki sørt um tað málið, sum her er til viðgerðar.

Hitt málið er: Matr. nr. …, Tórshavn.

Hetta er ein gomul íbúðarogn …. Hóast hendan ognin var nógv eldri enn lógin um eigaraíbúðir, og tað ongantíð hevði verið uppá tal at leggja hana sundur í eigaraíbúðir, góðkendi Matrikulstovan, at hetta varð gjørt vísandi til, at talan var um eina fullkomuliga endurbygging av bygninginum. Her er sostatt talan um eina reiðiliga fría tulking av treytunum í lógini um eigaraíbúðir, sum óivað hevur verið skilagóð.

Í sama máli (bræv, dagfest 15. september 2004, frá Matrikulstovuni) verður víst á eitt mál í Klaksvík, har matr. nr. … varð býtt sundur í 16 eigaraíbúðir í einum gomlum fabriksbygningi. Í hesum málinum hava tær formligu treytirnar í grein 10 óivað heldur ikki verið loknar.

Triðja málið er:
Eitt mál, ið eg meti meg hava reiðiliga álítandi vitan um, har loyvi varð givið til at býta allar handlarnar í SMS sundur í eigaraíbúðir.
Í hesum máli havi eg einki frætt aftur og einki tilfar fingið viðvíkjandi umsókn míni um innlit, og tá eg meti, at hetta mál eisini hevur áhuga fyri at gera eina fullfíggjaða meting av tí máli, sum her er til viðgerðar, heiti eg á umboðsmannin um at biðja um innlit í hetta málið og eisini onnur mál viðvíkjandi sundurlegging av ognum í eigaraíbúðir.



Gjørt verður galdandi, at:

- hetta málið í roynd og veru onga veruliga viðgerð hevur fingið, hvørki í Tórshavnar kommunu ella í Vinnumálaráðnum, Løgmálaráðnum og Innlendismálaráðnum, og at málið tí eigur at verða sent aftur til hesar myndugleikar til veruliga málsviðgerð, har støði verður tikið í veruligu umstøðunum á ognini matr, nr. …, Tórshavn, og at ein avgerð verður tikin við støði í hesum umstøðum,
- bæði kommunan og tey trý ráðini hava lagt avgerandi dent á viðurskifti, ið eru umsóknini óviðkomandi, so sum ferðslu-, parkerings- og kloakkviðurskifti v.m., tí hesi eru avgreidd við byggiloyvinum frá 2001,
- bæði kommunan og tey trý ráðini í staðin fyri konkreta objektiva viðgerð av málinum og eina konkreta meting av viðkomandi umstøðum hava sett reglur fyri metingini („sat skøn under regel"), og at hetta er í ósamsvari við góðan umsitingarsið.

…"

## Málsgongd

Við skrivi, dagfest tann 9. november 2007 sendi B, adv., umsókn til Vinnumálaráðið um sundurbýti av matr. nr. …, Tórshavn, í tvær eigaraíbúðir.

Vinnumálaráðið sendi umsóknina til rætta myndugleika í málinum, nevniliga Umhvørvisstovuna. Umhvørvisstovan tók avgerð tann 13. februar 2008. Avgerðin var soljóðandi:

> **„Viðv. sundurbýti av húsum á matr. nr. … í Tórshavn í eigaraíbúðir (J.nr. …).**
>
> Í umsókn dagf. 9. nov. 2007 biðja tygum, vegna A, um at fáa býtt sethús teirra á matr. nr. … sundur í tvær eigaraíbúðir.
>
> Upprunaliga varð umsóknin send Landsstýrinum, sum síðani sendi hana víðari til okkara at taka støðu til, soleiðis sum lógin ásetir.

Tygum vísa á, at húsini eru bygd í 1970 eftir tekningum frá D, arkitekti. Viðlagt umsóknini er ein váttan frá arkitektinum, dagf. 30. okt. 2007, sum sigur, at húsini vóru bygd soleiðis, at tað skuldi bera til einaferð at kunna býta tey sundur í eigaraíbúðir.

Tá talan er um sundurbýti í eigaraíbúðir, verður hugt at reglunum í løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970. Grein 10 í hesi lóg er soljóðandi: „*Undir lógina koma bert íbúðir í húsum, sum grundað eru eftir at lógin er komin ígildi og ætlað til tess at leggja sundur í eigaraíbúðir*".

Nú velst, um húsini eru grundaði, eftir at lógin er sett í gildi, t.v.s. aftaná 3. apríl. Harumframt er neyðugt, at tað sæst í byggiloyvinum, ella á annan hátt kann prógvast, at ætlanin av fyrstan tíð var at býta húsini sundur í eigaraíbúðir, áðrenn Umhvørvisstovan kann ganga umsóknini á møti.

Omanfyri nevnda váttan frá arkitektinum metir Umhvørvisstovan ikki vera nóg gott prógv fyri, at ætlanin upprunaliga hevur verið at býta sundur í eigaraíbúðir.

Henda avgerð okkara kann kærast til Løgmálaráðið."

Tann 6. mai 2008 sendi B, adv., kæru viðvíkjandi avgerðini hjá Umhvørvisstovuni til Løgmálaráðið.

Í tíðarskeiðnum frá februar til september 2008 varð aðalráðið nevnt Løgmálaráðið. Undan og eftir hetta tíðarskeið hevur ráðið verið nevnt Innlendismálaráðið.

Tann 21. august 2008 tók Løgmálaráðið soljóðandi avgerð í málinum:

**„Viðvíkjandi sundurbýti av matr.nr. …, Tórshavn.**

Í skrivið sum Løgmálaráðið hevur móttikið t. 8. mai 2008, kæra tygum, vegna A, avgerðina hjá Matrikulstovuna, har Matrikulstovan noktaði at ganga umsókn um sundurbýti av omanfyristandandi matr.nr. á møti. Sum grundgeving fyri avgerð síni vísti Matrikulstovan á, at treytin sum er ásett í § 10 í lóg um eigaraíbúðir, (11. Nr. 11 frá 3 apríl 1970) viðvíkjandi ætlanini við húsinum, t.e. at bert íbúðir í húsum sum eru ætlað til tess at leggja sundur í íbúðir kunnu fevnast av lógini, ikki var uppfylt.

Í skrivið tygara vísa tygum á, at fyrra treytin í lógini viðvíkjandi nær húsini eru bygd óivað er uppfylt. Løgmálaráðið metir eisini at hetta er so, men var tað eisini § 10, 2. pkt. sum lá sum grundgeving fyri noktandi svari frá Matrikulstovuni.

Viðvíkjandi ætlanini við húsinum, vísa tygum á, at tað ikki er lætt hjá klienti tygara at upplýsa í dag, meir enn 30 ár eftir at tey hava bygt, hvat ætlanin var við húsinum. Tó vísa tygum víðari á, at klientur tygara sum verkfrøðingur óivað hevur verið klárur yvir hesa lóg, og tískil hava tey valt at bygt húsini soleiðis, at tey lættliga kunnu verða sundurbýtt í 2 eigaraíbúðir. Víðari vísa tygum so á, at út frá frágreiðingini frá arkitektinum sæst, at tað lættliga ber til at býta húsið sundur í tvær íbúðir.

Viðvíkjandi treytini um at húsini skulu verða ætlaði til at býta sundur hava tygum ført fram, at grundin til hesa treyt óivað má standast av onkrum tekniskum fyrilitum, eitt nú byggisnið, innrætting og øðrum. Løgmálaráðið er partvíst samt við tær, og metir eisini at tað er av týdningi at hava hesi fyrilit fyri eyga tá umsókn um sundurbýti skal viðgerast. Í hesum sambandi vísa tygum á, at umrøddu hús eftir tygara meting eru sera væl egnaði til at verða sundurbýtt, og tískil meina tygum ikki at tað er nakað byggitekniskt sum kann tala ímóti einum sundurbýti.

Løgmálaráðið metir tó, at tað umframt tað reint byggitekniska, eisini er av alstórum týdningi at hava onnur fyrilit fyri eyga tá talan er um sundurbýti.

Viðvíkjandi skipan av bygging í kommununi, so hevur Tórshavnar kommuna valt at skipað tað soleiðis, (sjá galdandi

byggisamtykt fyri Tórshavnar kommunu), at umráðir verða býtt upp í ávikavist økir til stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum og – eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, raðhús og ketuhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski; víðari er latið upp fyri, at tað í førum har serloyvi verður givið kann byggjast annað, ið náttúrliga hoyrir býlinginum til, men skal hetta ikki vera til ampa ella spilla dámin á økinum sum sethúsabýlingur.

Løgmálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at ein tílík skipan av bústaðaøkjunum hjá kommununi má skiljast soleiðis, at ætlanin júst er at skilja millum øki ið ætla eru til sethús, og so onnur økir har annað kann byggjast, eitt nú raðhús, eigaraíbúðir og annað. Ikki kann sigast at ætlanin sum heild er at geva loyvi til formelt at sundurbýta øll sethús ið kunnu metast at lúka treytirnar- fyri at vera eigaraíbúðir reint tekniskt. Tá ein spurningur um sundurbýti skal viðgerast er av týdningi eisini at hyggja eftir teimum avleiðingum sum eitt sundurbýti kann føra við sær. Um so er at eitt sethús verður sundurbýtt er eyðsæð at t.d. ferðslan á staðnum kann vaksa, og eisini er sannlíkt at tað kemur at hava árin á parkeringsviðurskiftini. Eisini onnur fyrilit, t.d. kloakering, gera at tað kann vera óheppið at býta stakhús í sethúsaøkjum sundur í eigaríbúðir.

Tygum føra fram at tygum ikki meina at ásetingin í § 10 kann tulkast so strangligt, tá tað eftir tygara meting ikki er annað sum kann forða einum sundurbýti.
Løgmálaráðið metir tó at avleiðingarnar sum standast av einum møguligum sundurbýti virkar til at ásetingin kann tulkast strangt. Lógin leggur upp til við § 10 2. pkt., at tað frá byrjan av skal hava verið ætlanin at býta sundur, soleiðis at umstøður í heila tikið, og ikki bert tað byggitekniska, frá fyrstan tíð av kann verða lagt soleiðis til rættis, at eitt sundurbýti ikki fær óhepnar fylgjur, hvørki fyri eigaran sjálvan, men ei heldur fyri umráðið sum heild.

Til síðst í tygara brævi nevna tygum nøkur dømi, har Vinnumálaráðið, sum táverandi rætti myndugleiki, hevur játta sundurbýti. Viðvíkjandi hesum førum er at siga, at hesi mál ikki kunnu metast at vera lík tygara.

- Í avgerðini viðvíkjandi matr.nr. … Hoyvík framgongur, at vekt varð løgd á, at tað her var talan um eini hús sum, tá søkt var um byggiloyvi, vóru býtt í 2 eigaraíbúðir. Sostatt kundi staðfestast at tað var ætlanin at fáa tvær íbúðir.
- Viðvíkjandi matr.nr. … Tórshavn (…) var talan um eina endirbygging av bygninginum, har sundurbýti var treytað av, at serkunnleiki kundi vátta, at bygningurin so at siga var at kalla nýggjur; her var talan um endurbygging við tí fyri eyga at fáa tað býtt sundur í eigaraíbúðir.

Vísandi til omanfyristandandi skal Løgmálaráðið boða frá, at kæra tygara ikki verður gingin á møti.

Avrit av hesum skrivi er sent Matrikulstovuni.“

Tann 10. september 2008 sendi B, adv., skriv til Løgmálaráðið. Advokaturin førir fram, at ráðið í avgerð síni tykist leggja dent á generel byggiviðurskifti í Tórshavnar kommunu. Hann metir ikki, at tað tilkemur Løgmálaráðnum at meta um hesi viðurskifti, og heitir tí á ráðið um at taka málið upp til nýggja viðgerð, og senda málið til Tórshavnar kommunu til ummælis. Í framhaldi av hesum skrivi, sendi advokaturin, tann 23. september 2009, nýtt skriv til Løgmálaráðið. Saman við skrivinum sendi advokaturin avrit av byggiloyvi við tilhoyrandi tekningum, brævaskifti í sambandi við, at sethús klagaranna vóru umbygd, soleiðis at tey kundu rúma tveimum sjálvstøðugum, óheftum íbúðum. Advokaturin ger í hesum sambandi galdandi, at kommunan sum byggimyndugleiki hevur tikið støðu til øll tey atlit, ið Løgmálaráðið nevnir í brævi sínum, dagfest 21. august 2008, ið hava við byggiviðurskifti, kloakkviðurskifti, ferðslu, parkering v.m. at gera. Advokaturin førir fram, at tað nú bert er eftir at taka støðu til, um lógin um eigaraíbúðir forðar tílíkari sundurlegging av ognini, og har er bert orðið „ætlað“, ið kann hugsast at vera ein forðing. Advokaturin heitir tí aftur á Løgmálaráðið um at viðgera málið av nýggjum og játta umsóknini.

Løgmálaráðið tekur síðani málið upp av nýggjum, og sendir málið til ummælis hjá Tórshavnar kommunu. Tann 18. november 2008 sendir Tórshavnar kommuna Løgmálaráðnum soljóðandi skriv:

> **„Viðvíkjandi áheitan um viðmerkingar til umsókn um sundurbýti matr. …, Tórshavn**
>
> Vísandi til skriv tygara um viðmerkingar í sambandi við sundurbýti matr. …, Tórshavn.
>
> Lógin um eigaraíbúðir er bert ætlað til hús sum eru ætlað at leggja sundur í eigaraíbúðir, vísandi til § 10 í LØGTINGSLÓG NR. 11 FRÁ 3. APRÍL 1970 UM EIGARAÍBÚÐIR / OM EJERLEJLIGHEDER, SUM BROYTT VIÐ LØGTINGSLÓG NR. 33 FRÁ 26. MAI 1988
>
> **§ 10.** Undir lógina koma bert íbúðir í húsum, sum grundað eru, eftir at lógin er komin í gildi og ætlað til tess at leggja sundur í eigaraíbúðir.
>
> Hetta merkir, at hús í fleiri hæddum sum frá byrjan er ætlað til íbúðir, og sum ikki kann sundurmatrikulerast eftir matrikullógini, skal nýta eigaraíbúðarlógina frá 1970.
>
> Vanlig sethús sum eru ætlaði til eitt húski, eru ikki ætlaði til eigaraíbúðir. Eini vanlig sethús hava t.d ein rottanga, ein ketil, ein el-málara, og eru vanliga á onga hátt ætlaði til fleiri íbúðir.
>
> Harumframt er í býarplani og útstykkingarplani lagt upp til viðv. vegum, parkering, kloakk, vatn vm. at í flestu húsum skal búgva eitt húski, við møguliga einari kjallaraíbúð, har ein sonur ella dóttur kann búgva í eina tíð. Um vanlig sethús skulu býtast sundur í íbúðir, vil hetta viðføra, at fleiri húski koma at búgva í hvørjum húsi, og er hetta ikki í samsvari við býarplan, útstykkingarplan, og vil skapa stórar ferðslutrupulleikar í sethúsaøkjum, umframt at tær teknisku installatiónirnar ikki eru førar fyri at klára eitt størri trýst.



> Harumframt skal vísast á, at tá kommunan loyvir borgarum at byggja tvíhús, so er kravið at grundstykkjavíddin er í minsta lagi 600m2; við einum lodrættum brandmúri millum húsini, og ongum felagsleiðingum, og grundstykkini kunnu frámatrikulerast. Samstundis er ásett í byggisamtyktini, at tvíhús eru til eitt húski. Hetta fyri at tryggja borgarunum góð bústaðarviðurskiftir.
>
> Um vanlig sethús verða frábýtt í íbúðir, so er hetta tað sama sum at undirgrava byggisamtyktina, við tað at loyvt verða at gera íbúðir í sethúsum við grundstykkjavídd, sum í flestu førum eru munandi undir 600m2.
>
> Tórshavnar kommuna vil staðiliga heita á Løgmálaráðið um ikki at loyva sundurbýti av vanligum sethúsum, vísandi til omanfyristandandi.“

Skrivið frá kommununi verður sent B, adv. til ummælis, og við skrivi, dagfest tann 1. desember 2008, sendir advokaturin Innlendismálaráðnum soljóðandi viðmerkingar:

> **„Viðv. sundurbýti av matr. nr. …, Tórshavn – tykkara mál nr. …**
>
> Eg vátti móttøku av brævi tykkara, dagfest 26. november 2008, har tit senda mær bræv frá kommununi til ráðið, dagfest 18. november 2008.
>
> … kommunan … nýtir grundgevingar, sum eftir mínum tykki ikki eru sakligar grundir fyri at nokta umsóknini um sundurbýti av matr. nr. …, Tórshavn. Í brævi sínum vísir kommunan til, at vanlig sethús er m.a. ikki ætlað til eigaraíbúðir. Hvaðani kommunan hevur hetta frá, er mær ókunnugt. Mál sum felags rottangi, ketil v.m. kunnu saktans loysast á ein praktiskan hátt og kunnu ikki sakliga brúkast sum generellar grundgevingar fyri at sýta sundurbýti av eigaraíbúðum. Víðari vísir kommunan til, at býarplanir ikki leggja upp til, at fleiri húski skulu búgva í einum

„vanligum“ sethúsum, og at tá ræður um tvíhús er kravið uppá grundstykkjavídd í minsta lagi 600 m2.

Allar hesar grundgevingar eru sum nevnt generellar og vísa als ikki til tað konkreta málið, har tað má metast at vera avgerandi, at kommunan longu hevur givið umsøkjarunum byggiloyvi til sundurbýti av húsunum í tvær íbúðir. Við hesum hevur kommunan eftir mínum tykki tikið endaliga støðu til allar teir byggitekniskulu spurningar, ið kunnu metast at hava týdning fyri, um eini hús kunnu býtast sundur í tvær íbúðareindir ella ikki. Tað er sum nevnt gjørt í hesum málinum, og kommunan hevur játtað hesum við at geva byggiloyvi. Eg havi fyrr sent tykkum byggiloyvið, men leggi fyri ein ordans skuld við avrit av loyvinum, sum er dagfest 15. januar 2008.

Viðvíkjandi tí, sum kommunan nevnir um býarplan, leggi eg við ljósrit av ásetingunum fyri umráðispartarnar Al í 3. grundumráði, har matr. nr. …, Tórshavn, er at finna. Sum tað sæst undir pkt. 1 er í hesum grundumráði loyvt m.a. at byggja „stakhús við í mesta lagi tveimum íbúðum...“ og „- eftir serloyvi frá byggivaldinum – tvíhús, raðhús...“.
Sum tað sæst av hjálagda tingblaði, er grundstykkjavíddin á matr. nr. … 656 m2.

Eg havi fleiri ferðir heitt á kommununa um at fáa høvi at tosa um málið og biðja umboð fyri kommununa koma á staðið at hyggja eftir viðurskiftunum, men havi ikki fingið svar á hesar áheitanir, og nú síggi eg, at málið er viðgjørt og avgjørt uttan eina einasta grundgeving, ið vísir til tað konkreta málið, men einans generellar grundgevingar, ið mugu metast at vera órelevantar, eftir at kommunan hevur givið byggiloyvi til sundurbýti í tvær íbúðareindir.

Vísandi til omanfyri standandi fari eg tí at heita á Innlendismálaráðið um at viðgera hetta konkreta málið út frá teimum fortreytum, ið liggja í hesum málinum, og ikki einans vísa til generellar grundgevingar.“



Tann 18. desember 2008 sendi Innlendismálaráðið B avgerð í málinum. Niðurstøðan hjá ráðnum var soljóðandi:

> **„Viðvíkjandi matr.nr. …, Tórshavn.**
> …
> **Innlendismálaráðið:**
> Innlendismálaráðið hevur nú viðgjørt málið av nýggjum, og skulu vit upplýsa at kæra tygara ikki verður gingin á møti.
>
> Innlendismálaráðið metir ikki at tað er staðfest, at treytin í § 10 í lógini um eigaraíbúðir viðvíkjandi kravinum um ætlanina við húsinum, er uppfylt. Í hesum sambandi skal Innlendismálaráðið vísa á, at mett verður ikki, at úttalilsi frá arkitekti, fleiri ár eftir at húsini eru bygd, umframt úttalilsi frá eigaranum, eisini fleiri ár eftir at tey eru bygd, kunnu metast sum nøktandi prógv fyri, at ætlanin við húsinum alla tíðina hevur verið at býta tey sundur í 2 eigaraíbúðir.
>
> Innlendismálaráðið er av teirri áskoðan, at um ætlanin við húsunum var at býta tey sundur, so er tað mest sannlíkt, at eigararnir vildu gjørt hetta, tvs. fingið framt sundurbýti stutt eftir at tey vóru bygd. Í umrødda málið snýr tað seg um eitt hús sum er bygt í 1970, og kemur umsóknin um sundurbýti ikki fyrr enn í 2007, tvs. 30 ár eftir at húsini eru bygd. Hetta í sær sjálvum metir Innlendismálaráðið ikki talar fyri, at ætlanin frá fyrstan tíð av hevur verið at býta húsini sundur í 2 eigaraíbúðir frá fyrstan tíð av.
>
> Tygum vísa á, at kommunan við byggiloyvi sínum í 2001 hevur givið loyvi til sundurbýti. Innlendismálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at heimildin til at loyva sundurbýti ikki liggur hjá kommununi, men hjá Matrikulstovuni, nú Umhvørvisstovuni, sjá matrikuleringslógina, ll. nr. 64 frá 11. desember 1962. Kommununan verður, sambært § 20 í hesi somu lóg, hoyrd í møguligum sundurbýtismálum, har kommunan fær loyvi at upplýsa um eitt møguligt sundurbýti sum Umhvørvisstovan ætlar at loyva, hevur avleiðingar við atlit at galdandi byggisamtykt (sjá § 17 í somu lóg).

Tá so er, so kann eitt byggiloyvi frá kommununi undir ongum umstøðum verða at rokna tað sama sum eitt sundurbýtisloyvi. Kommunan umsitur bert byggiheimildina (sjá § 1 í kap. 1 í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu), men hevur ikki heimild til at loyva sundurbýti; hetta kann bert fremjast av Umhvørvisstovuni.

Innlendismálaráðið vil hereftir eisini vísa á, at tað er av alstórum týdningi júst at hava endamálið við einari byggisamtykt fyri eyga. Ein byggisamtykt er eitt amboð hjá kommununi til at skipa útstykkingar og bygging á ein so skilagóðan hátt sum yvirhøvur møguligt. Um loyvið verður givið til sundurbýti av sethúsum ið liggja í sethúsaumráðið, sum annars eru rokna til eitt húskið, so vil hetta viðføra stór árin á umráðið, og hevur Innlendismálaráðið eisini víst á hetta í avgerðini sum varð send tygum t. 21. august 2008. Um eini sethús, ið frá fyrstan tíð varð rokna til eitt húskið, verður býtt sundur soleiðis at tað eftirfylgjandi skal verða møguligt hjá 2 húskjum at búgva á staðnum, so vil hetta sjálvandi viðføra árin bæði á ferðsluna sum kommunan eisini vísir á í skrivi sínum, men eisini á onnur ting, so sum parkeringsviðurskifti, kloakkering o.a.

Innlendismálaráðið skal til síðst vísa á, at tað er av týdningi at hava í huga, at aðrir borgarar sum eru í somu ella líknandi støðu sum eigararnir av omanfyristandandi matr.nr. eisini skulu hava sama møguleika til sundurbýti. Sostatt kann tað her opnast ein møguleiki til í stóran mun at fáa sundurbýtt hús sum annars standa í økjum sum eru roknaði til sethús til eitt húski, og er hetta avgjørt ikki í tráð við galdandi byggisamtyktir, ella við ætlanini við eini tílíkari. Hetta skal eisini síggjast sum ein orsøk til at Innlendismálaráðið metir, at ásetingin í § 10 í lógini um eigaraíbúðir eigur at verða tulka trongt.

Vísandi til omanfyristandandi skal Innlendismálaráðið upplýsa at kæran ikki verður gingin á møti, og er málið hervið endaliga avgreitt.



Avrit av hesum skrivi er sent Umhvørvisstovuni."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 29. januar 2009, varð klagan send Innlendismálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur. Samstundis varð Innlendismálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Við telduposti tann 23. februar 2009 bað Innlendismálaráðið um at leingja svarfreistina til 13. mars 2009. Hetta vegna stórt arbeiðstrýst. Við skrivi, dagfest 23. februar 2009 játtaði umboðsmaðurin umbønini.

Tann 11. mars 2009 sendi Innlendismálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> **„Viðvíkjandi klagu frá Advokatskrivstovuni vegna A, matr. nr. …, Tórshavn.**
>
> Innlendismálaráðið hevur móttikið skriv frá Løgtingsins Umboðsmanni t. 30 januar 2009, har biðið verður um viðmerkingar til málið viðvíkjandi sundurbýti av matr.nr. … í Tórshavn. Umboðsmaðurin biður í sama skrivi um at fáa avrit av øllum skjølum í umrødda máli.
>
> Hjáløgd eru avrit av skjølunum í málinum hjá Innlendismálaráðnum viðvíkjandi kæruni til sjálvt ráðið, sbr. IMR mál …, og er umframt hetta eisini viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni í sambandi við, at málið er reist av umboðsmanninum, IMR mál ….
>
> **Frágreiðing frá Innlendismálaráðnum:**
> B hevur vegna eigararnar kært yvir málsviðgerðina og vísir á fýra málsgrundgevingar í mun til grundgevingarnar hjá Innlendismálaráðnum fyri at nokta sundurbýti.

Innlendismálaráðið hevur hesar viðmerkingar til tað, ið verður ført fram av sakføraranum:

*Viðv. málsgrundgeving 1*
Her verður sipað til seinnu treyt í § 10 í lógini um eigaraíbúðir, sum er soljóðandi:

*„Undir lógina koma bert íbúðir í húsum sum eru grundað eftir at lógin er komin í gildi og ætlað til tess at leggja sundur í „eigaraíbúðir“*

Sakførarin hevur ført fram, at tað her er talan um eina sera ógreiða treyt, og sigur hann víðari, at tað væl er møguligt at umsøkjararnir ikki frá fyrstan tíð av høvdu nakra ætlan um at leggja húsini sundur í tvær eigaraíbúðir (sjá 3. reglubrot á síðu 3 í skrivinum frá sakføraranum til umboðsmannin.)

Innlendismálaráðið metir ikki at talan er um eina ógreiða áseting, men skal vísa á, at ásetingin ítøkiliga inniheldur tvær treytir, t.e. viðvíkjandi árstalinum, tá húsið varð grundað, t.e. bygt, og ætlanina við húsinum. Út frá orðingini av greinini má leggjast til grund, at báðar treytirnar skulu verða loknar fyri at fáa sundurbýtt í eigaraíbúðir, við tað, at tað stendur „og“ millum treytirnar.

Sakførarin hevur víst á, at talan eru um eini hús, sum eru væl egnað til at býta sundur. Innlendismálráðið skal í hesum sambandi vísa á, at lógin ikki ásetur nakað ítøkiligt krav um, at húsið skal verða egnað til at býta sundur, men sipar bert til árstalið og ætlanina. Ráðið er av teirri fatan, at metingin av, um eini sethús eru egnaði ella ikki til sundurbýtið, er sekundær í mun til lógásettu treytirnar. Treytirnar í § 10 fyri at loyva sundurbýtið skulu verða loknar, áðrenn tað kemur uppá tal at meta um, hvussu væl egnaði ella ikki eini hús eru til at býta sundur og verður hesin spurningur eitt mál ímillum eigara og kommunala byggivaldið.



Niðurstøðan hjá Innlendismáláráðnum er tí framvegis, at ein lógarbroyting er neyðug, um lógásettu treytirnar fyri sundurbýti skulu setast til viks til frama fyri aðrar treytir.

*Viðv. punkt 2 og 3*
Her vísir sakførarin á tað, sum hevur verið ført fram av ávikavist kommununi og Innlendismáláráðnum við atliti at árin á umráðið og installatiónir o.a. tílíkt.

Innlendismálaráðið skal í hesum sambandi vísa á tað, sum hevur verið ført fram av ráðnum í avgerðunum ávikavist t. 21. august 2009 og 18. desember 2009, og vil umframt hetta eisini vísa á viðmerkingarnar frá kommununi í skrivi dagfest 18. november 2009, sjá hjáløgdu avrit.

Eini vanlig sethús eru ætlaði til eitt húski, og letur byggisamtyktin upp fyri einari møguligari kjallaraíbúð, har tað kann verða møguligt hjá eitt nú soni ella dóttur at búgva. Kommunan vísir staðiliga á tey árin sum komast av at fleiri <u>húski</u> koma at búgva í einum húsið, sum liggur í einum umráði, sum eftir byggisamtyktini bert loyvir vanligum sethúsum við møguligari kjallaraíbúð. Um so er, at tað skuldi verið møguligt at býtt sundur í tílíkum umráðum sum her, so vildi hetta viðført tvey sjálvstøðug matr.nr. við tveimum sjálvstøðugum eigarum, og skal hvør av hesum eigarum hava somu rættindi til teir hentleikar, sum eitt nú kommunan eigur at veita, samstundis sum skyldur í byggisamtyktini, eitt nú við atlit at parkeringspláss o.a. eisini hervið vildu gjørt seg galdandi.

Innlendismálaráðið hevur í avgerð síni, útyvir orðingina í omanfyristandandi § 10, eisini víst á byggisamtyktina, tí henda samtykt fyriskipar allari planlegging og regulering, hvat lendi og bygging viðvíkur í kommununi. Innlendismálaráðið er av teirri áskoðan, at atlit at byggisamtyktini eru av týdningi, tá víst verður til § 10 í lógini um eigaraíbúðir. Orsøkin er, at um tað verður vikið frá treytunum í lógini um eigaraíbúðir, so vil hetta

ikki bert verða í stríð við galdandi lóg um eigaraíbúðir, men vil hetta eisini í týðandi mun máa støðið undan góðkendum byggisamtyktum, sum áseta karmar fyri lógligari bygging á teimum ymisku økjunum í kommununi.

*Viðv. punkt 4*
Her verður víst á avleiðingina av einum sundurbýti í umrødda máli við atliti at øðrum borgarum, sum eru í somu ella líknandi støðu. Innlendismálaráðið hevur í hesum sambandi víst á, at umráðandi er, at allir borgarar verða viðgjørdir eins og skulu hava somu rættindi.

Innlendismálaráðið er av teirri áskoðan, at tað er sera umráðandi at hava atlit at javnrættindum í málum, sum kunnu fáa avleiðingar fyri fleiri. Ráðið skal í hesum sambandi vísa á, at tað í kommununi eru sera nógv hús, sum eru bygd undir somu ásetingum, sum matr.nr. …, t.v.s. undir ásetingunum viðvíkjandi vanligum sethúsum, og tískil eru fortreytirnar hjá hesum borgarum tær somu sum hjá eigaranum av matr.nr. …, hvat sundurbýti viðvíkur. Tá so er, so er tað eisini eyðsæð at tað fyri nógvar aðrar eigarar møguliga kundi verið áhugavert at fingið húsini býtt sundur, m.a. tí hetta letur upp fyri sølu av frábýtta partinum. Lógin um eigaraíbúðir tryggjar tó, at hetta bert verður gjørt, um so er at øll nøktandi atlit eru tikin longu tá húsið varð bygt, bæði hvat viðvíkur tí byggitekniska, men eisini viðvíkjandi umstøðunum annars, eitt nú lendisplanlegging, sum kommunan varðar av.

Leggjast skal afturat, at kommunan hevur víst á, at um loyvt verður at sundurbýta vanlig sethús vil óhepna avleiðingin verða, at sethús, sum upprunaliga eru bygd í økjum, har grundstykkini í flestu førum liggja væl undir 600m2, ikki longur lúka ásetingarnar í byggisamtyktini og fortreytirnar, sum liggja til grund fyri byggisamtyktini. Ráðið vil sum dømi vísa á, at eitt nú spillivatnsleiðingar eru dimensjoneraðar til at kunna svølgja tann belastning, sum økið er lagt út til. Um sundurbýtið verður loyvt uttan fyrilit fyri ásetingunum í lógini, vil hetta í ringasta



føri elva til eina tvífaldan av húskjum í sethúsaøkjum, sum bara eru ætlaði einum húski.

*Viðvíkjandi málsviðgerðini*
Innlendismálaráðið, fyrrverandi Løgmálaráði, móttók kæruna t. 8. mai 2008.

Tann 21. august 2008 avgreiddi Innlendismálaráðið málið, men eftir áheitan frá kæraranum varð avgerðin tikin aftur, og málið sent kommununi til ummælis. Innlendismálaráðið hevði undir fyrru viðgerð ikki sent málið til ummælis hjá kommununi, tí Innlendismálaráðið, sum góðkennandi myndugleiki av byggisamtyktum smbr. § 1 í ll. nr. 1954 um býarskipan og byggisamtyktir, metti seg hava nøktandi innlit í byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og ætlanina við hesari.

Kærarin varð tó ónøgdur við, at kommunan ikki varð hoyrd, tí avgerðin í vissan mun var tengd at byggisamtyktini. Ásannandi at hetta møguliga var ein formligur feilur, sum kundi hava materiellan týdning fyri málið, við tað at avgerðin eisini varð tengd at atlitum at byggisamtyktini, valdi Innlendismálaráðið við skrivið dagfest 26. september 2008 at eftirlíka áheitanina um at taka avgerðina aftur og varð málið hereftir sent kommununi til ummælis, áðrenn endalig avgerð varð tikin. Svarið frá kommununi dagfest 18. november 2008 vísti tó júst á somu viðurskifti sum Innlendismálaráðið longu hevði víst á undir viðgerðini.

Innlendismálaráðið vil annars upplýsa, at heimildin til at býta ein matrikul sundur smbrt. § 16 í ll. nr. 64 frá 1962 um matrikulering og sundurbýti, liggur hjá matrikulmyndugleikanum, sum er á Umhvørvisstovuni, og ikki hjá kommununi. Sostatt er tað loyvið, sum kommunan í 2001 gav til íbúð í kjallaranum á matr.nr. …, ikki at rokna sum eitt loyvi til sundurbýti.

Innlendismálaráðið skal til síðst vísa á, at ráðið hevur tikið avgerð út frá § 10 í ll. nr. 11 frá 1970 um eigaraíbúðir, við støði

í teimum veruligu viðurskiftum, sum eru galdandi fyri umrødda matr.nr., og er ráðið av teirri fatan, at tey veruligu viðurskifti, sum greinin er tengd at, er árstalið og upprunaliga ætlanin við húsinum. Lógin letur hinvegin ikki upp fyri serstakari meting í tí einstaka førinum, sum tekur støði í, um húsið er egnað ella ikki til at býta sundur, í øllum førum ikki, um lógásettu treytirnar ikki fyrst eru tiknar.

**Viðvíkjandi siðvenju í myndugleikaviðgerðini**
Í skrivinum til umboðsmannin vísir kærarin eisini á nøkur dømi, har loyvið er givið til sundurbýti.

Innlendismálaráðið vil í hesum sambandi vísa á tað, sum varð ført fram mótvegis kæraranum í skrivi dagfest 21. august 2008, har tað klárt framgongur, at í nevndu málum vóru aðrar umstøður, sum talaðu fyri sundurbýti.

Viðvíkjandi bygninginum í Klaksvík verður víst á, at tað eisini her var talan um so at siga nýbygging (sjá avrit av teldupost frá Umhvørvisstovuni 25. februar 2009), og varð loyvið givið til sundurbýti.

Innlendismálaráðið hevur ikki kunnleika til nakað mál viðvíkjandi møguligum sundurbýti av SMS bygninginum.

Innlendismálaráðið hevur ikki fleiri viðmerkingar til málið. Um so er at umboðsmaðurin hevur brúk fyri fleiri upplýsingum ella øðrum, fættir ráðið fegin aftur."

Við skrivi, dagfest 17. mars 2009, vórðu viðmerkingarnar hjá Innlendismálaráðnum sendar advokatinum hjá klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 2. apríl 2009 sendi advokaturin hjá klagaranum umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:



„**Viðv. kærumálinum: A móti Innlendismálaráðnum – tykkara mál nr. …**

Eg skal gera hesar viðmerkingar til skrivið frá Innlendismálaráðnum, dagfest 11. mars 2009.

Fyrst í brævinum frá Innlendismálaráðnum verður víst til viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni. Eg dugi ikki at síggja, at eg havi fingið hesar viðmerkingar, og eg fari tí at biðja um eitt eintak.

Eg havi hug til fyrst at nevna tað, sum Innlendismálaráðið skrivar niðast á síðu 3 og ovast á síðu 4, nevniliga:

Innlendismálaráðið skal til síðst vísa á, at ráðið hevur tikið avgerð út frá § 10 í ll. nr. 11 frá 1970 um eigaraíbúðir, við støði í teimum veruligu viðurskiftum, sum eru galdandi fyri umrødda matr. nr., og er ráðið av teirri fatan, at tey veruligu viðurskifti, sum greinin er tengd at, er árstalið og upprunaliga ætlanin við húsunum. Lógin letur hinvegin ikki upp fyri serstakari meting í tí einstaka førinum, sum tekur støði í, um húsið er egnað ella ikki til at býta sundur, í øllum førum ikki, um lógásettu treytirnar ikki fyrst eru loknar.

Tað, sum Innlendismálaráðið her sigur, tykir mær reiðiliga fløkt. Øðrumegin verður dentur lagdur á, at tey hava viðgjørt málið við støði í teimum veruligu viðurskiftunum, sum eru galdandi fyri umrødda matr. nr., og hesi veruligu viðurskifti eru sambært Innlendismálaráðnum árstalið og upprunaliga ætlanin við húsunum. Hinvegin verður sagt, at lógin ikki letur upp fyri serstakari meting í tí einstaka førinum, sum tekur støði í, um húsini er egnað ella ikki til at býta sundur.

Semja er um, at árstalið í § 10 í lógini ikki er nøkur forðing, og byggir øll málsviðgerðin og allar grundgevingarnar hjá

Innlendismálaráðnum fyri at sýta umsóknini á tað eina orðið í lógini, nevniliga „ætlan.“ Tá Innlendismálaráðið harafturat ikki góðkennir, at ein serstøk meting verður gjørd av viðurskiftunum, sum tey eru í dag, tykir mær, at hetta eina orðið „ætlan“ er farið at viga ovmikið nógv í málsviðgerðini.

Verður fyrst hugt at sjálvum orðinum, kann neyvan stór ósemja vera um, at tað ikki er neyvasta orðið í málinum. Í øllum førum tykir tað at vera ovmikið trong tulking at leggju so stóran dent á eitt tílíkt orð í einari skjótt 40 ára gamlari lóg, at tað skal útiloka konkreta viðgerð av einum máli í dag.

Verður hugt at forarbeiðinum til løgtingslóg um eigaraíbúðir, er lítið at finna har. Sagt verður í viðmerking til lógaruppskotið (løgtingsmál nr. 24 frá 1988 *(mín viðm.: 1968)*, at endamálið við lógini er „at gera tað lættari hjá teimum, sum búgva til leigu, at vera eigarar.“ Víðari verður sagt, at lógaruppskotið ikki er gjørt eftir danskari fyrimynd, men víkir tó nakað frá hesi donsku lógini, tá ræður um § 10, har er loyvt at stovna eigaraíbúðir í eldri húsum (t.v.s. húsum eldri enn lógin). Í viðmerkingunum verður sagt, at „motivini eru m.a., at torført er at býta eldri prioritetar millum eigararnar, og vandin fyri ovurprís.“

Tað sær sostatt út til, at § 10 fyrst og fremst er sett í lógina fyri at forða spekulatión í at gera gomul óhóskandi hús um til eigaraíbúðir. Tað er sostatt ikki serlig vegleiðing at finna í forarbeiðinum til lógina um orðið „ætlan.“

Undir hesum umstøðum eigur tað ikki – sum Innlendismálaráðið tykir at halda – at vera neyðugt at viðgera umsóknir um býti av húsum í eigaraíbúðir so „mekaniskt,“ at tað nærmast verður talan um at seta meting undir reglu („skøn under regel“).

Ovast á síðu 2 í brævinum ger Innlendismálaráðið vart við, at lógin ikki ásetir nakað ítøkiligt krav um, at húsið skal vera egnað til at býta sundur. Hetta skuldi væl ikki verið neyðugt. At tað má tala ímóti at játta eina umsókn, um so er, at húsið er óegnað,



skuldi verið sjálvsagt, og eins sjálvsagt skuldi verið, at er húsið væl egnað at býta sundur, skuldi tað talt við í málsviðgerðini.

So koma vit til tað, sum ført verður fram av Innlendismálaráðnum um byggiloyvið og byggisamtyktina.

Her tykir Innlendismálaráðið enn eina ferð at hava misskilt meg. Eg má eftirhondini halda, at tað er við vilja, tí so ógreitt havi eg ikki orðað meg. Eg havi ongantíð gjørt galdandi, at byggiloyvi frá Tórshavnar kommunu í sambandi við innrætting av íbúðini hevði nakað við loyvi til sundurbýti í eigaraíbúðir at gera. Tað, sum eg havi ført fram – og framvegis haldi fast um – er, at Tórshavnar kommuna við at geva byggiloyvi hevur tikið endaliga støðu til tey viðurskifti, ið nú verða brúkt av kommununi og Innlendismálaráðnum sum grundgevingar fyri at nokta sundurbýti í eigaraíbúðir, nevniliga kloakk, parkering v.m.

Eg haldi fast um, at tað krevst hvørki størri kloakk ella størri parkeringspláss til fólk, sum búgva í eini íbúð, sum tey sjálvi eiga, enn til fólk, sum búgva til leigu í somu íbúð.

Innlendismálaráðið førir víðari fram, at „eini vanlig sethús eru ætlað til eitt húski, og letur byggisamtyktin upp fyri eini møguligari kjallaraíbúð, har tað kann vera møguligt hjá eitt nú soni ella dóttur at búgva.“

Eg dugi ikki at síggja nakrastaðni í byggiviðtøkunum, at ein møgulig kjallaraíbúð er avmarkað til ein son ella eina dóttur at búgva í. Hvat nú, um sonurin ella dótturin giftast og stovna eitt húski, skulu tey so blakast út?

Tað verður ført víðari fram, at um ein kjallaraíbúð verður broytt til sjálvstøðugt matr. nr., skal hvør av hesum eigarum hava somu rættindi til teir hentleikar, sum eitt nú kommunan eigur at veita. Um hetta er tað sama at siga: Tað er eingin broyting í viðurskiftunum viðvíkjandi kloakk, parkering v.m., um leiga verður broytt til ogn.

Innlendismálaráðið er av teirri áskoðan, at atlit at byggisamtyktini eru av týdningi, tá víst verður til § 10 í lógini um eigaraíbúðir. Hetta kann so enn einaferð bert vera talan um orðið „ætlan“ í lógini, sum nú eisini skal fevna um byggisamtyktina. Tað haldi eg, er ovmikið at gera burtur úr hesum orðinum. Í hesum sambandi eigur eisini at verða mint á, at tað stendur einki í lógini um, hvør skal hava havt hesa ætlanina, eigarin ella tann myndugleiki, sum skal geva loyvi til sundurbýti í eigaraíbúðir. Um hetta verður víst til kærurit mítt.

At enda koma vit til atlitið at øðrum borgarum, sum eru í líknandi støðu. Her førir Innlendismálaráðið fram – og eg eri púra samdur í tí, sum tey siga – at „umráðandi er, at allir borgarar verða viðgjørdir eins og skulu hava somu rættindi.“

Í hesum sambandi vísir Innlendismálaráðið á, at tað í Tórshavnar kommunu eru sera nógv hús, sum eru bygd undir somu ásetingum sum matr. nr. …. Víðari førir Innlendismálaráðið fram, at tað fyri nógvar aðrar eigarar enn umsøkjararnar kundi verið áhugavert at fingið húsini býtt sundur, men, leggur Innlendismálaráðið afturat, hetta letur seg ikki gera, tí lógin um eigaraíbúðir forðar tí, bæði hvat viðvíkur tí byggitekniska, men eisini viðvíkjandi umstøðunum annars, eitt nú lendisplanlegging, sum kommunan varaði av. Her tykist ráðið at fáa uppaftur meira burtur úr orðinum „ætlan“ í lógini, ið nú eisini skal hava atlit til lendisplanlegging. Harafturat verður ført fram, at flestu av teimum grundstykkjunum í hesum byggiumráði í kommununi liggja væl undir 600 m2. Tað er tó ikki talan um grundstykki í hesum máli, sum er til viðgerðar, ið er 656 m2 til støddar.

Innlendismálaráðið endar við at vísa til tað ræðuliga, sum kundi hent, um so er, at hendan umsóknin varð játtað, nevniliga at tað í ringasta føri kann elva til eina tvífaldan av húskjum í sethúsaøkjum, sum bert eru ætlað einum húski.

So illa man ikki fara at ganga, um umsóknin verður játtað.



*Siðvenja í myndugleikaviðgerðini*
Innlendismálaráðið førir fram, at í teimum nevndu málum, sum upplýst eru vóru aðrar umstøður, sum talaðu fyri sundurbýti.

Eg eri ikki kunnugur við ein bygning í Klaksvík, har talan var um „so at siga nýbygging,“ og eg kundi hugsað mær at fingið hesi skjølini at hugt ígjøgnum.

Viðvíkjandi matr. nr. … í Hoyvík er ikki, sum eg haldi meg hava sæð onkustaðni er ført fram, talan um, at hesi húsini upprunaliga vóru ætlað at leggja sundur í eigaraíbúðir. Talan var um eitt av randarhúsunum, ið upprunaliga varð bygt við tveimum íbúðum, men uttan at søkt var um loyvi at leggja sundur í eigaraíbúðir. Her varð eftirfylgjandi givið loyvi frá landsstýrinum, eftir at kommunan hevði sýtt umsóknini um sundurbýti.
Um hetta málið er annars at siga, at tað snýr seg um eitt av randarhúsunum uppi í Hoyvík. Tað munnu vera eini 50 randarhús tilsamans, so um allir eigararnir har fingu loyvi at býta síni hús sundur í eigaraíbúðir, hevði tað ført til tann reina hurlivasa haruppi, um sjónarmiðini hjá Innlendismálaráðnum vórðu løgd til grund, nevniliga at krøvini til parkeringspláss, kloakkir o.a. tvífaldaðust einans orsakað av, at leigumál vórðu broytt til eigaraviðurskifti.

*Matr. nr. … í Tórshavn*
Her snýr tað seg um eina útleigingarogn … í húsum, sum bygd vórðu upprunaliga í 1964, men sum vórðu gjøgnumgangandi umvæld og partvís nýbygd í 2000. Formliga var sostatt einki til hindurs fyri at sýta umsókni um sundurbýti í eigaraíbúðir, men Vinnumálaráðið metti tað vera skilagott og metti ikki, at so stórur dentur kundi leggjast á tey formligu viðurskifini í lógini, at ein skilagóð avgerð ikki kundi verða tikin. Umsóknin varð sostatt játtað.

Innlendismálaráðið sigur, at tey hava ikki kunnleika til nakað mál viðvíkjandi møguligum sundurbýti av SMS-bygninginum.

Eg havi síðani leitað ymsastaðni og verið á tinglýsingarskriv-

stovuni og Matrikulstovuni og eri komin fram á skjøl hesum máli viðvíkjandi.

Tann 27. apríl 1988 skrivar sakførarin hjá SMS til Tórshavnar býráð og søkir um, nú sølumiðstøðin er liðugt útbygd, at loyvi verður givið til at býta ognina sundur í eigaraíbúðir.

Her skal viðmerkjast, at SMS mundi lata upp uml. 1977, og tá var ikki talan um eigaraíbúðir.

Seinni, tann 6. juni 1988, skrivar hann til Matrikulstovuna við somu ørindum. Í brævinum til Matrikulstovuna vísir hann til eitt bræv frá kommununi, dagfest 25. mai 1988. Hetta brævið havi eg ikki kunnað funnið.

Matrikulstovan skrivar tann 16. august 1988 til Tórshavnar býráð við áheitan um býráðsins ummæli av hvørvítt ásetingarnar í § 10 í løgtingslóg um eigaraíbúðir forða fyri eini slíkari sundurlegging, og verður tað her serliga hugsað um tað, sum seinasta pettið í greinini fyrisetir. Her hugsar Matrikulstovan óivað um orðið „ætla."

Kommunan svarar aftur tann 9. september 1988, at býráðið metir, at treytirnar í 10. grein eru uppfyltur og vísir til, at byggingin frá byrjan av hevur verið ætlað at býta sundur.

At tað av fyrstan tíð skal hava verið ætlanin at leggja byggingina av bygninginum hjá SMS sundur í eigaraíbúðir man vera meira enn ivingarsamt, men sama ger. Úrslitið er so tað, at Matrikulstovan fer undir sundurbýti, og sum tað sæst av yvirliti frá Matrikulstovuni, dagfest 22. november 1989, eru ikki minni enn 26 eigaraíbúðir úrslitið.

Vísandi til tað, sum ført er fram av Innlendismálaráðnum í umsóknini um sundurbýti av matr. nr. …, Tórshavn, hevði talan verið um ein ómetaligan hurlivasa á økinum við Trapputrøðna, um so var, at hetta sundurbýtið nakrantíð hevði verið framt í verki, og sjónarmiðini hjá ráðnum um fylgjurnar av, at leiga varð broytt til ogn, vóru røtt.

Eg hugsi, at niðurstøðan man vera tann, at tað framvegis verður væl búgvandi í Havnini, um so er, at umsóknin vegna A verður eftirlíkað.

Í aðra máta vísi eg til tað, sum ført er fram í kæruritinum.

Eg leggi við ljósrit av skjølunum viðvíkjandi SMS-málinum. Innlendismálaráðið hevur fingið avrit av hesum brævinum við tilhoyrandi skjølum."

Við skrivi, dagfest 14. apríl 2009, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Innlendismálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 24. apríl 2009 sendi Innlendismálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

**„Viðvíkjandi klagu frá Advokatskrivstovuni, dagfest 20. januar 2009.**

Innlendismálaráðið hevur t. 15. apríl móttikið skriv frá umboðsmanninum, har viðmerkingarnar frá sakføraranum eru latnar okkum til ummælis.

Innlendismálaráðið hevur gjøgnumgingið skrivið frá sakføraranum, og hevur niðanfyri standandi viðmerkingar til tað sum verður ført fram:

*Viðvíkjandi serstøku metingini:*
Sakførarin hevur ført fram, at tað kann virka eitt sindur fløkjasligt tá Innlendismálaráðið sigur, at tað ikki kann gerast serstøk meting av ítøkiliga málinum.

Innlendismálaráðið skal í hesum sambandi vísa á tað, sum

Innlendismálaráðið fyrr hevur ført fram um, at tað ikki ber til byggja eina avgerð í fyriliggjandi máli út frá einari serstakari meting, sum tekur støði í, um húsið er egnað ella ikki til sundurbýti; hetta tí lógin ikki setur nøkur krøv hesum viðvíkjandi. Hinvegin hevur Innlendismálaráðið tikið støði í teimum ítøkiligu viðurskiftunum, sum eru av týdningi við atliti at treytunum í § 10 í lógini um eigaraíbúðir, nevniliga árstalið og ætlanin við húsinum, og hevur ráðið viðgjørt málið út frá upplýsingunum hesum viðvíkjandi. Sostatt hevur Innlendismálaráðið gjørt eina serstaka meting, men er henda meting gjørd út frá, um húsið viðvíkjandi árstali og ætlan lýkur tær treytir, sum eru ásettar í lógini.

*Orðingin í § 10:*
Sakførarin metir tað vera óheppið at tað í ítøkiliga málinum verður lagdur so stórur dentur á orðingina í § 10.

Innlendismálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at ráðið til eina og hvørja tíð metir tað vera av stórum týdningi at tryggja, at lóggarásettu karmarnir verða hildnir. Umrødda grein hevur 2 treytir, og er ráðið av teirri áskoðan, at avgerðir eftir hesi grein skulu takast út frá teimum treytum, sum í henni eru settar.

*Atlit at byggisamtykt:*
Innlendismálaráðið metir tað framvegis vera av týdningi at hava hetta atlit við undir viðgerðini. Sakførarin hevur víst á, at tað, at tað er møguligt at lata son/dóttir búgva í einum kjallara, eisini eigur at tala fyri at loyva sundurbýti. Innlendismálaráðið metir ikki hetta vera so, og vil í hesum sambandi vísa á, at tað at ein sonur/dóttir býr í kjallaranum í eina tíð, ikki kann sigast at skula kunna sammetast við, at eitt og hvørt hús í sethúsaøki skal kunna býtast sundur í tvær sjálvstøðugar eindir. Innlendismálaráðið vil eisini her vísa á teir viðmerkingar, sum kommunan hevur ført fram í skrivi sínum.

*Atlit at øðrum borgarum:*
Sakførarin metir ikki, at eitt sundurbýti í fyriliggjandi málið fer at hava við sær, at allir borgarar, sum eru í somu ella líknandi støðu, fara at krevja tað sama sum umsøkjarin í umrødda máli.

Innlendismálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at tað sum er av týdningi at hava fyri eyga er, at hesir borgarar fara at hava somu rættindi, t.v.s. at eisini teir, eins og hesin umsøkjarin, kunnu krevja sundurbýti sjálvt um húsini ikki eru ætlað til tess, og sjálvt um kommunan talar ímóti hesum. Hetta vil vera í stríð bæði vit § 10 í lógini um eigaraíbúðir, og eisini við § 20 í ll.nr. 64 frá 11. desember 1962, t.e. matrikuleringslógin.

*Viðvíkjandi siðvenju:*
Innlendismálaráðið vil her vísa á tað, sum áður er ført fram viðvíkjandi teimum dømunum, sum sakførarin hevur víst á.

Viðvíkjandi SMS er at siga, at Innlendismálaráðið ikki hevur haft nakað mál hesum viðvíkjandi til viðgerðar inni í málinum.

Ráðið hevur spurt seg fyri hjá Umhvørvisstovuni, sum hevur víst á hjáløgdu skjøl úr teirra skipan frá 1989 (sjá hjáløgdu avrit). Út frá hesum skjølum framgongur, at kommunan her viðmælti einum sundurbýti vísandi til, at tað var ætlanin at býta bygningin sundur (sjá skriv frá kommununi dagfest 9. september 1988). Sostatt var tað talan um eitt mál, sum lýkur tær ásettu treytirnar í lógini um eigaraíbúðir um árstal og ætlan.

Ráðið hevur eisini eftirfylgjandi spurt seg fyri á tinglýsingini. Her verður upplýst, at skrivið frá matrikulstovuni frá 1989 við einum yvirliti yvir tær ymisku eindirnar í bygninginum liggur í málinum. Tinglýsingin upplýsir tó, at tey ikki hava móttikið nakað skeyti frá møguligum eigarum av nakrari eigaraíbúð í bygninginum, og at tað ikki er hent meir við hesum máli.

Innlendismálaráðið hevur ikki fleiri viðmerkingar til málið, men um umboðsmaðurin hevur brúk fyri fleiri upplýsingum ella øðrum, frættir ráðið fegin aftur.“

Tann 6. mai 2009 vórðu viðmerkingarnar hjá Innlendismálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest tann 13. mai 2009, boðaði advokaturin hjá klagaranum umboðsmanninum frá, at hann ikki hevði fleiri viðmerkingar.

Av tí at fleiri viðmerkingar ikki vóru til málið, boðaði umboðsmaðurin, við skrivi, dagfest tann 19. mai 2009, pørtunum frá, at hann fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um avgerð hjá Innlendismálaráðnum at nokta sundurbýti í eigaraíbúðir av matr.nr. … í Tórshavn.*

*Heimildin at sundurbýta í eigaraíbúðir er í § 10 í løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir, við seinni broytingum. Greinin er soljóðandi:*

> *„**§ 10.** Undir lógina koma bert íbúðir í húsum, sum grundað eru, eftir at lógin er komin í gildi og ætlað til tess at leggja sundur í eigaraíbúðir.“*

*Tvær treytir skulu sostatt verða loknar, um sundurbýti skal vera møguligt. Fyri tað fyrsta skulu húsini verða grundað eftir at lógin kom í gildi, og fyri tað næsta skulu húsini vera ætlað at leggja sundur í eigaraíbúðir. Fyrsta treytin er greið, meðan næsta treytin er heldur ógreið. Hetta av tí, at ilt er at siga, hvat nágreiniliga liggur í orðingini „ætlað“. Viðmerkingarnar til lógina, løgtingsmál 24/1968, geva lítla vegleiðing um, hvussu orðið „ætlað“ skal tulkast, men geva tó eina mynd av, hvat liggur aftanfyri lógarásetingina. Í viðmerkingunum stendur m.a. soleiðis:*

> *„Tað sum aftan fyri liggur er at gera tað lættari hjá teimum, sum búgva til leigu at verða eigarar ella medeigarar av íbúð ella rúmum, sum tey búgva í ella nýta.*
> …
> *Sum sagt frá, er uppskotið gjørt eftir danskari fyrimynd, lóg nr. 199 frá 8. juni 1966 „om ejerlejligheder“. Uppskotið víkir tó frá tí donsku lógini í § 10, síðani talan er um, at bert íbúðir í húsum, sum eru grundað eftir at lógin er komin í gildi, og ætlað til tess at leggja sundur í eigaraíbúðir, koma undir lógina, og ikki íbúðir í eldri húsum. Uppskotið er tó í hesum samsvarandi danska lógaruppskotið. Motivini eru m.a., at torført er at býta eldri prioritetar millum eigarar og vandin fyri ovurprísi.“*

*Av tí at tað ikki av lógini ella viðmerkingunum til lógina greitt framgongur, hvat skal til, fyri at treytin um ætlanina við húsunum er lokin, má myndugleikin í hvørjum einstøkum føri meta um allar tær ítøkiligu umstøðurnar í málinum, áðrenn avgerð verður tikin.*

*Í hesum ítøkiliga málinum vísa klagararnir á, at húsini eru grundað, eftir at lógin kom í gildi. Klagararnir hava ikki beinleiðis prógv fyri, at húsini upprunaliga vóru ætlaði til eigaraíbúðir, men vísa á, at ítøkiligu umstøðurnar í málinum tala fyri hesum. Arkitekturin, ið teknaði húsini, upplýsir, at húsini vóru bygd soleiðis, at tað var sera einfalt at býta húsini sundur í tvær hóskandi eigaraíbúðir, tá ið hetta gjørdist neyðugt. Klagararnir upplýsa m.a., at tá ið húsini vóru bygd, var valdur rottangi til tvey húsarhald, at betongdekk er millum niðastu hæddirnar og betong er rundan um trappuna millum hæddirnar. Loftið millum 2. og 3. hædd er klætt við gipsonit, sum er góðkend brandverja. Upplýst verður, at klagararnir í 2001 fingu byggiloyvi frá kommununi til at innrætta húsini í tvær sjálvstøðugar íbúðir. Hetta er síðani gjørt.*

*Í kæruviðgerð sínari av málinum, kemur Innlendismálaráðið til ta niðurstøðu, at fyrra treytin í § 10 er lokin, meðan ráðið ikki metir, at seinna treytin, viðvíkjandi kravinum um ætlanina við húsunum, er lokin. Ráðið kemur til hesa niðurstøðu uttan at taka støðu til tær omanfyrinevndu ítøkiligu umstøðurnar, ið klagararnir vísa á í málinum. Ráðið metir ikki um, hvørt hesar umstøður tala fyri ella ímóti, at húsini eru „ætlað“ at leggja sundur í eigaraíbúðir sambært § 10 í løgtingslóg um eigaraíbúðir. Av tí at Innlendismálaráðið ikki hevur gjørt hetta, meti eg ikki, at ráðið hevur givið málinum eina veruliga viðgerð.*

*Umframt hetta leggur Innlendismálaráðið dent á generel viðurskifti viðvíkjandi byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, herundir skipan av bygging í kommununi í byggiøki, ferðslu, parkeringsviðurskifti og kloakkering v.m. Í hesum ítøkiliga málinum er tað tó soleiðis, at klagararnir hava fingið byggiloyvi frá kommununi. Við hesum hevur kommunan, sum byggimyndugleiki, tikið støðu til øll tey atlit, ið Innlendismálaráðið her vísir á. Eftir mínari meting er tað ósakligt, at nokta sundurbýti partvíst vísandi til generel viðurskifti í byggisamtykt, tá ið hesi viðurskifti longu eru avgreidd við byggiloyvinum.*

*At enda førir Innlendismálaráðið fram, at tað er av týdningi at hava í huga, at aðrir borgarar sum eru í somu ella líknandi støðu sum eigararnir av omanfyristandandi matr.nr., eisini fáa sama møguleika til sundurbýti í eigaraíbúðir. Til hetta er at siga, at metir ráðið, at treytirnar í § 10 í lóg um eigaraíbúðir eru loknar, hevur borgarin rætt til sundurbýti. Tað er tí ósakligt av Innlendismálaráðnum at leggja dent á hetta.*

*Av tí at eg ikki meti, at hetta málið hevur fingið eina veruliga viðgerð, fari eg at heita á Innlendismálaráðið um at taka málið upp til nýggja viðgerð, og lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.*

*Burtursæð frá omanfyristandandi, geri eg ikki meira við málið í løtuni.*

Við skrivi, dagfest 19. januar 2010, boðaði Innlendismálaráðið umboðsmanninum frá, at ráðið var samt við umboðsmanninum um at tað í hesum málinum eigur at verða gjørd ein ítøkilig meting áðrenn avgerð verður tikin. Innlendismálaráðið hevur tí tikið málið uppaftur til nýggja viðgerð. Í nýggju viðgerðini av málinum kom Innlendismálaráðið til somu niðurstøðu, nevnuliga at kæran ikki verður gingin á møti.



## 21.2 Avgerð hjá Innlendismálaráðnum viðv. kommunuvalinum 2008 í Kvívíkar kommunu

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um avgerð hjá Innlendismálaráðnum viðvíkjandi kommunuvalinum í Kvívíkar kommunu í 2008. Umboðsmaðurin helt tað als ikki vera nøktandi, at valnevndin fyri Kvívíkar kommunu hevði góðkent valevnislistarnar, hóast hesir vóru ófullfíggjaðir. Spurningurin var tó, um formliga brekið við valevnislistunum átti at ført við sær ógildan av valinum. Eftir at hava kannað lógargrundarlagið v.m., kom umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at av tí at Innlendismálaráðið hevði ta fakligu ábyrgdina av valinum og hevði serkunnleikan á økinum, helt umboðsmaðurin ikki, at grundarlag var fyri at finnast at avgerðini hjá Innlendismálaráðnum um ikki at ógilda kommunuvalið í Kvívík 2008.* ***(J. nr. 200900009)***

## Klagan

Við skrivi, dagfest 26. januar 2009, hava A og B sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> **„Kæra / umbøn**
> Í samband við kæru um kommunuvalið 2008 í Kvívíkar kommunu, sum varð send til Innlendismálaráðið 01.12.2008, verður við hesum sent kæra/umbøn, um at endurskoða avgerðina, sum Innlendismálaráðið hevur tikið hesum viðvíkjandi.
>
> Til tykkara kunnleika kann sigast at avgerð var tikin í Innlendismálaráðunum 16. januar 2009. Kravið um umval var ikki gingið á møti, hóast Innlendismálaráðið hevur staðfest fleiri mistøk og feilir har lógarinnar krøv ikki vóru fylgd/lokin.
>
> Tað eru fleiri ting í avgerðini hjá Innlendismálaráðnum, sum vísur at Innlendismálaráðið hevur gingið lættliga um kæruna og ikki grundugt kannað málið. Millum annað pástendur C, at hann sjálvur hevur gjørt lista A. – Tað sær út til at Innlendismálaráðið góðtekur henda pástand. – Hetta er als ikki satt og kann millum annað prógvast við at hyggja at „Lista A“, „Lista B“ og „Felagslistanum” („Felagslistin“ er upprunalistin, gjørdur av A), ið allir eru gjørdir á telduni heima hjá A. Um

hugt verður at øllum hesum listum sæst tíðiliga, at hetta er satt. Fylgjandi prógvar millum annað, at C ikki hevur skrivað „Lista A“, men at allir listarnir eru skrivaðir á telduni hjá A:

- Raðfylgjan á nøvnum er akkurát tann sama á „Listi A“ og „Felagslistanum“, sum bleiv stolin, kliptur og límaður saman. (Sí kæruna til Innlendismálaráðið og sí Appendix 3).
- Uppsetingin er akkurát tann sama á øllum listunum (t.e. „Listi A“, „Listi B“ og „Felagslistanum“) – sí Appendix 1,2 og 3.
- Akkurát sami fontir, skriftstødd v.m. eru á øllum listunum (t.e. „Listi A“, „Listi B“ og „Felagslistanum“.
- Sami skrivifeilur er í „Lista A“ og „Felagslistanum“, har eftirnavnið „Olsen“ manglaði í navninum hjá D, og hetta er seinri skrivað við hond á „Lista A“. – Sí Appendix 1 og 2.
- Sami skrivifeilur er í „Lista A“, „Lista B“ og „Felagslistanum“ har A av misgáum skrivaði „bústaði“ og ikki „bústaður“. – Sí Appendix 1, 2 og 3.

*NB: „Felagslistin“ er upprunalistin, ið bleiv stolin, kliptur og límaður saman, sum greitt er frá í kæruni til Innlendismálaráðið. Hetta er listin, sum C pástendur, at hann sjálvur hevur gjørt og ikki er stolin frá A.*

Omanfyri eru greið prógv fyri, at C ikki sjálvur hevur gjørt „Lista A“, men at hetta er upprunalistin („felagslistin“), sum bleiv tikin (stolin) úr heiminum hjá A. Fýra nøvn blivu síðani klipt av listanum og valevnið D bleiv klistrað uppá „Lista A“. Tey fýra nøvnini sum blivu klipt av „felagslistanum“, bleiv síðani til „Lista B“. – Ein miðvís foðring varð gjørd fyri at stoppa teimum fýra valevnunum at stilla upp (sí kæruna til Innlendismálaráðið). – Hesi fýra náddu tó í evstu løtu at gera ein nýggjan lista, sum kom at eita „Lista B“.

Innlendismálaráðið vísur í avgerðini til kæruna, á § 6 stk. 6 í kommunuvallógini viðv. 24 tímars reglinum. Í hesum sambandi skal nevnast at A fleiri ferðir ringdi til valformannin (J), sama dag sum listin skuldi latast inn. Seinasta uppringing var 21.10.2008 ca. kl. 17:35, og greiddi A valformaninum frá trupulleikanum við, at listin (t.e. „Felagslistin“) var tikin/stolin, og at arbeitt var tí við at gera ein nýggjan lista (sum bleiv „Listi B“). Vegna tíðarneyð var ikki møguligt at fáa fleiri enn fýra valevnir á „Lista B“, (t.e. tey fýra valevnini, sum vóru tikin av „felagslistanum“). Valformaðurin visti sostatt til trupulleikan, men einki varð nevnt um 24 tímars regulin, sum evt. kundi verið nýttur í hesari støðu. Um vit høvdu verið upplýst um henda 24 tímars regul og fingið møguleika til at nýtt hann, høvdu vit á „Lista B“ um ikki annað fingið fleiri uppá listan.

Vit halda ikki at Innlendismálaráðið hevur viðgjørt kjarnina í kæruni í heila tikið, men ummælir onnur lógarbrot í sambandi við teir ófullfíggjaðu valevnislistarnar.

Viðmerkjast skal eisini, at A bleiv kunnað um at Innlendismálaráðið hevði tikið avgerð um ikki at ganga kæruni á møti av einum blaðmanni, ið ringdi frá Sosialinum, mánadagin 19.01.2009. A fekk ongantíð nakað bræv um avgerðina til kæruna frá Innlendismáláráðnum, men bert ein teldupost við avgerðini, eftir, at hon hevði ringt til Innlendismálaráðið og greitt frá, hvat blaðmaðurin hevði kunnað hana um. E advokatur hjá A fekk tó eitt skriv frá Innlendismálaráðnum við postinum týsdagin 20.01.2009. – Tað er ein løgin mannagongd og ein sera óheppin støða at koma í, at blaðfólk verða kunnaði um avgerðina, áðrenn eg fekk nakað at vita frá Innlendismálaráðnum um avgerðina. Hetta kann ikki verða rætt !

Tað undrar okkum stórliga, at Innlendismálaráðið ikki grundiga hevur kannað kjarnuna í kæruni. Vit halda at avgerðin frá Innlendismálaráðunum er skeiv og at okkara rættindi ikki eru vird, men sett til viks.

Vit halda eisini at tað er spell, at Innlendismálaráðið staðfestur brot á galdandi reglur, uttan at tað fær nakrar avleiðingar og at valið ikki verður ógildað. Vandi er fyri at hettar fer at mynda

fordømi (præcedens) fyri galdandi mannagongdir í framtíðini og at úrslitið eftir hetta verður, at gingið verður lætt um lógina, vegna vantandi fylgjur – fólkaræði verður ikki virt, tí hægsti fyrisitingarmynduleiki í Føroyum vælsignar órætt.

Vónandi kann Løgtingsins Umboðsmaður rudda upp í hesari sak.“

## Málsgongd

Av tí, at kæran til og kæruavgerðin frá Innlendismálaráðnum saman við partshoyringini niðanfyri lýsa gongdina í málinum á nøktandi hátt, havi eg valt bert at taka kæruna og kæruavgerðina við í málsgongdina.

Tann 1. desember 2008 sendi E, adv., vegna A, soljóðandi kæru til Innlendismálaráðið:

> „**Kæru um kommunuvalið í Kvívíkar Kommunu tann 11. november 2008**
> Undirritaði skal hervið vegna A, …, kæra um framferðarháttin í samband við uppstillingina til kommunuvalið í Kvívíkar Kommunu tann 11. november 2008.
>
> A gjørdi ein valevnislista og arbeiddi við at fáa undirskriftir frá valevnum og stillarum, so sum kravt í lógini innan seinastu freist, sum var ásett at vera tann 21. okt. 2008, kl. 1800.
>
> Tað, sum kært verður um, er at tað reint faktiskt var at forðað fyri, at nevndi listi bleiv lagdur fram innan seinastu freist, við tú úrslitið, at listin við valevnunum ikki kundi verða við til kommunuvalið í Kvivíkar Kommunu.
>
> Málsgongdin er í stuttum henda:
>
> A hevði undan valinum arbeitt við at gera ein valevnislista, sum var liðugur tann 21.10.2008.



Í samband við innsavningina av undirskriftum til valevnislistan, var farið í holt við at fáa undirskrift frá einum valevni á listanum, sum var staddur í Tórshavn um hetta mundi. Hetta valvevnið var D, ….

I skuldi hjálpa til við at fáa nevndu undirskrift til vega og koyrdi í hesum sambandi til Havnar frá bústaðnum hjá A ca. kl. 16.40 tann 21.10.2008.

Undirskriftin var fingin til vega og hann koyrdi síðan aftur til Leynar fyri at avlevera listan til A.

Í sjálvari innkoyringini til Leynar bleiv I steðgaður av ávikavist C og F úr Kvívík, sum kravdu at fáa útflýggja listan, sum D hevði undirskrivað.

Hetta var teimum eftirlíkað og tey fingu sostatt listan umleið kl. 17.20-17.30 tann 21. okt. 2008.

C hevði onki við sjálvan listan at gera, meðan F, stóð á sjálvum listanum, jfr. hjálagda avrit av listanum, skjal 1.

Avtalað var við F, at hon skuldi koma aftur til Leynar við seinastu undirskriftunum frá stillarunum, meðan valevnini, sum vóru ávikavist A, …, B, …, G, …, og H, …, síðan skuldu seta sínar undirskriftir á listan.

Men F kom ikki aftur við listanum, sum avtalað, og sjálvt um roynt var at fáa fatur á henni, so var hetta alt til fánýtis.

C, ringdi síðan til A kl. 17.25 tann 21. okt. 2008, t.v.s. 35 min. áðrenn evstamark og boðaði frá, at hann nú átti listan og at hann ikki vildi, at B, … kom á listan.

A, …, B, …, G, …, og H, …, sum upprunaliga vóru á listanum, ið A hevði gjørt, vóru nú tikin av listanum uttan teirra vitan ella góðkenning.

D, var settur á henda sama listan, sum var latin Kvívíkar Kommunu sum listi A.

Soleiðis sum málið fyriliggur lýst, so varð navnið á D, klistrað á henda sokallaða nýggja lista A. t.v.s. at nevndu broytingar vóru gjørdar á listanum uttan vitan og samtykki frá hinum, sum stóðu á listanum. Hetta var m.a. upplýst av F um kvøldið tann 21 okt. 2008.

D hevur upplýst, at hann fekk at vita frá I, at listin, sum hann skrivaði undir uppá var felagslistin, og at A, …, B, …, G, …, og H, …, skuldu setast á listan aftaná, at hann hevði undirskrivað henda sama lista.

Veruleikin er tann, at I ikki hevur handað D felagslistan, sum hann fekk frá A, áðrenn hann fór til Havnar, men hevur givið honum ein annan lista at undirskriva (sum bleiv listi A).

Av tí, at A í seinastu løtu av tilvild fekk at vita, tað sum hent var við listanum, sum hald var lagt á, gjørdi hon ca. ½ tíma áðrenn evstamark ein nýggjan valevnis/stillaralista.

Hesin listi bleiv mannaður av A, …, B, …, G, …, og H, ….

Tey náddu akkurát at lata listan inn áðrenn evstu freist kl. 18.00 og kom hesin listi at bera heiti listi B til valið, jfr. skjal B.

Valúrslitið háttaði sær soleiðis, at Listi A, sum A upprunaliga hevði gjørt, og har tey fýra áður umrøddu valevnini vóru strikað, fekk flest atkvøður.

Tað sum er bæði átaluvert og óhaldbart í samband við nevnda kommunuval er tann framferðarháttur, sum her er nýttur av ávísum valevnum at ávirka úrslitið av kommunuvalinum á ein bæði ódámligan og ólógligan hátt.



Hini valevnini á lista A fingu nevniliga at vita, at tey trý sum strikað vóru av listanum, sjálvboðin høvdu tikið seg av listanum.

Tey trúðu sostatt, at alt var farið rætt og lógliga fram og tóku tískil ikki nakrar avleiðingar av teimum broytingum, sum nevndu persónar einvíst og uttan samtykki frá viðkomandi valevnum høvdu gjørt viðvíkjandi valevnislistanum, – listi A.

Tað er heilt eyðsæð, at uttan nevndu ólógligu konfiskatión av valevnislistanum, so var valúrslitið vorðið annað.

Fyri tað fyrsta, so var bert ein valevnislisti komin inn, tá tað upprunaliga ikki var meiningin at gera fleiri listar.

Fyri tað næsta, so vóru hendar broytingar bæði við valevnum og stillarum á listanum, um valevni/og stillarar í góðari tíð frammanundan høvdu fingið at vita og kendu veruligu bakgrundina fyri, hví áður nevndu persónar ikki kundu vera við á listanum.

Ivaleyst høvdu fleiri tikið seg av listanum og stillað upp á øðrum lista ella kravt heilt aðra samanseting av sama lista.

Fyri tað næsta, so hevði góður møguleiki verið fyri, at A við flest atkvøðum (53 atkvøður) hevði blivið borgarstjóri í Kvívíkar Kommunu.

Tað var eisini í evstu løtu, at A og tey valevni, sum vóru strikað av listanum, fingu kunnleika til hetta lokabragdið.

Høvdu hesar upplýsingar bara verið teimum í hendi ca. 10 min seinni, so hevði ongin av teimum nátt at stilla upp til kommunuvalið.

Málið er kært til Kvívíkar Kommunu, so sum ásett í vallógini, men hevur kommunan samb. fundarfrásøgn dagfest 24.11. 2008, víst hesi kæru aftur, jfr. skjal C.

Undirritaði skal vísandi til omanfyristandandi biðja um, at málið verður kannað nærri, og at kommunuvalið til Kvívíkar Kommunu verður ógildað við tí úrslitið, at umval verður skjótast til ber, jfr. § 24 stk. 4 og § 25 í LL nr. 44 frá 19 juni 1972 við seinni broytingum."

Tann 16. januar 2009 sendi Innlendismálaráðið soljóðandi avgerð til E, adv.:

„**Viðvíkjandi klagu um kommunuvalið 2008 í Kvívíkar kommunu**

Víst verður til skriv tygara, dagfest 9. desember 2008 *(mín viðm.: 1.12.2008)*, har tygum vegna A klaga um framferðarháttin í sambandi við uppstillingina til kommunuvalið í Kvívíkar kommunu tann 11. november 2008.

**Avgerð**
Innlendismálaráðið hevur tikið avgerð um ikki at ganga klaguni á møti.

**Málsgongd**
Innlendismálaráðið móttók omanfyrinevndu klagu tygara, dagfest 9. desember 2008 *(mín viðm.: 1.12.2008)*, har klagað verður um framferðarháttin í sambandi við uppstillingina til kommunuvalið 2008 í Kvívíkar kommunu.
…
Í skrivum, dagfest 8. desember 2008, bað Innlendismálaráðið I, D, F og C um viðmerkingar til klaguna.

Í viðmerkingum sínum vísir C á, at hann ikki hevur forðað A í hennara arbeiði við egnum lista til valið. C boðaði bert A frá, at hann ikki kundi gera lista saman við henni, um B var á listanum, og tá A ikki kundi góðtaka hetta, gjørdi C egnan lista – Lista A – og lat henda inn.

Í skrivum, dagfest 9. desember 2008 *(mín viðm.: 8.12.2008)*, bað Innlendismálaráðið Kvívíkar kommunu og kommunuvalnevndina í Kvívíkar kommunu um viðmerkingar til klaguna. Kommunan vísti klaguna frá sær orsakað av, at kommunan ikki metti seg hava rætt at avhoyra vitnir og ei heldur at døma nakran, skuldi hetta gjørst neyðugt. Annars vísti kommunan til, at valnevndin hevði góðkent valevnislistarnar.

Valnevndin vísti í sínum viðmerkingum á, at nevndin kom saman 22. oktober 2008 at góðkenna innkomnu valevnislistarnar, og at sambært nevndini var einki sum bendi á, at nakað óreglulig var farið fram viðvíkjandi innlatnu valevnislistunum. Sambært valprotokollini frá 22. oktober 2008 hevur valnevndin sambært vallógini gjøgnumgingið báðar listarnar og funnið báðar listarnar lógligar at vera.

Í skrivum, dagfest 17. desember 2008, bað Innlendismálaráðið stillararnar á lista A til kommunuvalið um at vátta, um hjálagdi valevnislisti var ein og sami listi, ið viðkomandi sum stillari skrivaði undir til kommunuvalið 2008 í Kvívíkar kommunu. Allir stillararnir játtaðu, at valevnini og talið á valevnum á lista A varð tað sama, sum viðkomandi høvdu skrivað undir.

Í skrivum, dagfest 22. desember 2008, bað Innlendismálaráðið stillararnar á lista B til kommunuvalið um at vátta, um hjálagdi valevnislisti var ein og sami listi, ið viðkomandi sum stillari skrivaði undir til kommunuvalið 2008 í Kvívíkar kommunu. Allir stillararnir játtaðu, at valevnini og talið á valevnum á lista B varð tað sama, sum viðkomandi høvdu skrivað undir.

**Viðmerkingar og grundgevingar Innlendismálaráðsins**
*Mannagongd í sambandi við uppstillingina til valið*
Sambært § 6, stk. 1, í kommunuvallógini fer atkvøðugreiðslan fram sambært valevnislistum, har ávísir persónar eru í uppskoti sum valevni. Sambært § 6, stk. 3, í somu lóg skal listin vera undirskrivaður av – í ítøkiliga førinum – í minsta lagi 10 veljarum sum stillarum, og hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, starvi,

bústaði og føðingardegi. Tað eru sostatt stillararnir, ið avgera, hvørjir borgarar, ið stilla upp til kommunuvalið. At stilla upp til kommunuval er borgaraskylda, og kunnu valevnini einans í einstøkum føri bera seg undan at taka við vali, sbr. § 22, stk. 4 í kommunuvallógini. Harafturímóti hava borgarar ikki krav uppá at verða stillaðir upp til kommunuval; tað eru stillararnir og bara stillararnir, ið hava avgerandi leiklutin í hesum sambandi. Í ítøkiliga førinum hava allir stillarar á lista A og B váttað, at innkomni og góðkendi valevnislisti er ein og sami listi, ið tey sum stillarar skrivaðu undir. Sostatt eru stillararnir samdir um og hava váttað, at viðkomandi uppstillaðu valevni vóru endaligu valevnini til kommunuvalið í Kvívík 2008.

Á hvønn hátt stillararnir velja at skipa uppstillingina av valevnum eru ongar greiðar ásetingar ella reglur um fyriuttan tær ásetingar, ið eru nevndar í § 6 í kommunuvallógini. Spurningurin um, á hvønn hátt hetta arbeiði er farið fram áðrenn valevnislistarnir eru innlatnir og góðkendir, harundir hvørt hetta er óhaldbart ella ódámligt, er tískil óviðkomandi fyri viðgerð Innlendismálaráðsins av málinum.

Við støði í omanfyristandandi metir Innlendismálaráðið sostatt ikki at grundarlag er fyri at lýsa kommunuvalið 2008 í Kvívíkar kommunu ógildugt við tí úrslitið, at umval skal verða skjótast til ber.

*Mannagongd í sambandi við góðkenning av valevnislistunum*
Sambært áður nevndu § 6, stk. 3, í kommunuvallógini skal listin (valevnislistin) sum nevnt vera undirskrivaður av — í hesum føri — í minsta lagi 10 veljarum sum stillarum, og hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, starvi, bústaði og føðingardegi. Valevnislistin skal sostatt sambært kommunuvallógini verða undirskivaður av stillarunum.

Í ítøkiliga førinum er talan um, at valevnislistin einans er undirskrivaður av valevnunum, meðan stillararnir hava skrivað undir skjal, ið er hjálagt valevnislistanum, tvs. at stillararnir hava ikki skrivað undir sjálvan valevnislistan, ið er kravt sambært lógini.

Valevnislistarnir eru góðkendir av valnevndini í Kvívíkar kommunu. Innlendismálaráðið metir í hesum føri, at valevnislistarnir grundað á omanfyristandandi eru so mikið ófullfíggjaðir, at valnevndin átti beinanvegin, sum listarnir vóru innlatnir, at boða viðkomandi stillara frá hesum og geva honum høvi til innan 24 tímar at bøta um brekið, sbr. § 6, stk. 6, í kommunuvallógini.

Innlendismálaráðið metir tó ikki, at brekið er so mikið avgerandi og stendur mát við avleiðingina av umvali, at kommnunuvalið eigur at verða ógildað við tí úrsliti, at umval skal verða skjótast til ber. Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at stillararnir hava váttað fyri Innlendismálaráðnum, at valevnislistarnir eru ein og sami listi, sum tey sum stillarar hava skrivað undir.

**Niðurstøða**
Grundað á omanfyristandandi er Innlendismálaráðið komið til ta niðurstøðu, at kommunuvalið 2008 í Kvívíkar kommunu ikki verður ógildað, og at umval tískil ikki verður.

Avrit av hesum skrivi er sent Kvívíkar kommunu og valnevndini fyri Kvívíkar kommunu."

## Partshoyring
Fyri at umboðsmaðurin kundi taka støðu til, um hetta var eitt mál, sum umboðsmaðurin antin kundi ella átti at taka upp til viðgerðar, var klagan send Innlendismálaráðnum tann 30. januar 2009. Innlendismálaráðið var í hesum sambandi biðið um innan 4 vikur at lata umboðsmanninum eina frágreiðing um viðgerðina av málinum. Samstundis varð Innlendismálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 24. februar 2009 sendi Innlendismálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„**Viðvíkjandi klagu frá A og B**

Víst verður til skriv tygara, dagfest 30. januar 2009, viðvíkjandi klagu frá A og B um kommunuvalið 2008 í Kvívíkar kommunu. Í skrivinum biður Umboðsmaðurin Innlendismálaráðið um frágreiðing um viðgerðina av hesum máli.

**Málsgongd**

…

Kæran til Innlendismálaráðið snýr seg í stuttum um, at A gjørdi ein valevnislista til kommunuvalið og arbeiddi við at fáa undirskriftir frá valevnum og stillarum. Sambært klagaranum bleiv hesin listi tó – meðan arbeiðið at fáa undirskriftir til vega var í gongd – tikin frá A og síðan umgjørdur og latin inn til kommunuvalnevndina fyri Kvívíkar kommunu. Hesin listi varð góðkendur av valnevndini og fekk heitið „Listi A". Listin varð latin inn av C, stillara.

…

**Viðmerkingar Innlendismálaráðsins**

*Framferðarhátturin í sambandi við uppstillingina av valevnum*

Klagararnir føra í klagu síni til Umboðsmannin fram, at Innlendismálaráðið ikki hevur viðgjørt kjarnuna í kæruni í heila tikið. Soleiðis sum Innlendismálaráðið lesur kæruna frá A, so er kjarnin í kæruni, at forðað varð fyri, at upprunalistin („Felagslistin") bleiv latin inn innan seinastu freist við tí úrsliti, at listin við valevnunum ikki kundi verða við til kommunuvalið í Kvívíkar kommunu. Ráðið fatar tað átaluverda og óhaldbara sambært kæraranum í hesum sambandi at vera tann framferðarháttur, sum varð nýttur av ávísum valevnum óbeinleiðis at ávirka úrslitið av kommunuvalinum.

Sambært § 6, stk. 1, í kommunuvallógini fer atkvøðugreiðslan fram sambært valevnislistum, har ávísir persónar eru í uppskoti sum valevni. Sambært § 6, stk. 3, í somu lóg skal listin vera undirskrivaðir av – í ítøkiliga førinum – í minsta lagi 10



veljarum sum stillarum, og hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, starvi, bústaði og føðingardegi.

Afturat hesum ásetir § 6, stk. 4, tal av valevnum, og stk. 5 ásetir, hvørjir upplýsingar um valevnini ið eru kravdir. Hetta eru krøvini, ið valevnislistarnir sambært kommunuvallógini skulu lúka fyri at verða góðkendir. Á hvønn hátt valevnislistarnir verða til, eru tískil ongar ásetingar ella reglur um í lógini, og er tað tí upp til stillararnar at gera av, hvussu uppstillingin fer fram.

Innlendismálaráðið førdi í avgerð síni í málinum fram, at tað eru stillarnir til kommunuval, ið avgera, hvørjir borgarar, ið stilla upp til kommunuval, t.e. gerast valevnir. At stilla upp til kommunuval er borgaraskylda; kortini hava borgarar ikki krav uppá at verða stillaðir upp. Tað eru stillararnir og bara stillararnir, ið taka avgerð hesum viðvíkjandi. Tey hava sostatt einki krav uppá at verða standandi á hesum lista, um so er, at stillararnir vilja tað øðrvísi. Soleiðis sum Innlendismálaráðið fatar málið, er hetta tað, ið er hent í sambandi við valið í Kvívíkar kommunu. Grundað á, at stillararnir hava avgerandi leiklutin, metti ráðið ikki, at framferðarhátturin í sambandi við uppstillingina átti at hava við sær, at valið skuldi lýsast ógildugt við tí avleiðing, at umval skuldi verða.

Í hesum sambandi skal Innlendismálaráðið gera vart við, at ráðið ikki hevur góðtikið uppáhaldið um, at C hevur gjørt lista A, soleiðis sum ført verður fram í klaguni til Umboðsmannin. Ráðið hevur í viðgerð síni av málinum ikki tikið støðu til, á hvønn hátt arbeiðið at skipa valevnislistarnar fór fram, harundir hvør hevur gjørt hvønn lista. Hetta er orsakað av, at ráðið metti hetta vera óviðkomandi grundað á, at stillararnir eftirfylgjandi váttaðu sínar undirskriftir á innlatnu og góðkendu valevnislistarnar. Sum áður ført fram eru ongar reglur ella ásetingar í kommunuvallógini um, á hvønn hátt arbeiðið at skipa valevnislistar eigur at fara fram, og eru tað tí stillararnir, ið sjálvir skipa hetta arbeiði.

Innlendismálaráðið metir sostatt ikki, at tað, ið fór fram tann 21. oktober 2008 áðrenn kl. 18, tá seinasta freist var at lata inn valevnislistar, viðvíkjandi arbeiðinum at gera valevnislistar, kann metast sum brot á nakra fyriskrift í kommunuvallógini, ella óskrivaða reglu galdandi í praksis, sum skal tryggja, at uppstillingin fer rætt fram.

*24-tímars reglan í § 6, stk. 6*
Klagararnir føra í klaguni til Umboðsmannin fram at tey áttu at verið kunnað um 24-tímars regluna í § 6, stk. 6, í kommunuvallógini av valnevndarformanninum í sambandi við, at tey lótu valevnislista, lista B, inn, soleiðis at fleiri valevnir kundu komið á listan. Innlendismálaráðið skal í hesum sambandi gera vart við, at ásetingin í § 6, stk. 6, bert kann verða nýtt hjá stillaða til at bøta um brekið í einum ófullfíggjaðum valevnislista og ikki til at fáa meira tíð til at fáa fleiri valevnir á listan. Tí metir ráðið ikki, at parturin av klaguni um 24-tímars regluna er viðkomandi.

*Góðkenningin av valevnislistunum*
Klagararnir halda í klaguni til Umboðsmannin, at tað er spell, at Innlendismálaráðið staðfestir brot á galdandi reglur, uttan at tað fær nakrar avleiðingar, og at valið ikki verður ógildað. Undir viðgerð síni av málinum kom Innlendismálaráðið fram á, at innlatnu valevnislistarnir ikki vóru undirskrivaðir av stillarunum, eins og krav er um sambært § 6, stk. 3, í kommunuvallógini. Innlendismálaráðið metti grundað á brekið, at valevnislistarnir vóru so mikið ófullfíggjaðir, at valnevndin átti beinanvegin, sum listarnir vóru innlatnir, at havt boðað viðkomandi stillara frá hesum og givið honum høvi til innan 24 tímar at bøta um brekið, sbr. § 6, stk. 6, í kommunuvallógini.

Innlendismálaráðið er tilvitað um, at reglurnar í (kommunu) vallógum vanliga eiga at tulkast strangt. Kortini má avleiðingin av einum formligum breki í hesum sum øllum øðrum fyrisitingarmálum haldast upp móti, um brekið fekk innihaldsligan týdning, og um brekið er so álvarsamt, at ein ógildan



av valinum er ein rímilig avleiðing. Innlendismálaráðið metti ikki, at brekið var so mikið týðandi, at ein ógildan av valinum og umval vildu staðið mát við brekið. Talan var um eitt brek, ið var av formligum slag, ið ikki hevði týdning fyri sjálva uppstillingina og harvið onga ávirkan hevði á úrslitið av valinum. Av avgerandi týdningi fyri metingina, sum í hesum sambandi leiddi til avgerð Innlendismálaráðsins, var eisini, at stillararnir á báðum listum váttaðu fyri Innlendismálaráðnum, at listarnir vóru ein og sami listi, ið tey sum stillarar høvdu skrivað undir, sí áðurnevndu skriv frá 17. og 22. desember 2008.

Niðurstøða Innlendismálaráðsins byggir á eina ítøkiliga meting og avvigan millum áhugamál, eins og krav er um í hvørjum einstøkum føri. Innlendismálaráðið metir tí ikki, at henda avgerð fer at mynda fordømi (præcedens) fyri galdandi mannagongdir í framtíðini, eins og ført verður fram í klaguni til Umboðsmannin.

Samanumtikið metir Innlendismálaráðið seg sostatt ikki kunna lýsa valið ógildugt grundað á viðurskiftini, ið klagararnir til Umboðsmannin føra fram. Kortini metir Innlendismálaráðið, at hetta málið lýsir, at tørvur er á greiðum reglum um mannagongdir í sambandi við uppstilling til kommunuval, og eiga tílíkar mannagongdir tí at verða gjørdar til næsta kommunuval, soleiðis at sleppast kann undan slíkum ógreiðum viðurskiftum, eins og talan er um í hesum føri.

*Fráboðanin um avgerðina*
Í klaguni til Umboðsmannin verður ført fram, at A bleiv kunnað um avgerð Innlendismálaráðsins í málinum av blaðmanni mánadagin tann 19. januar 2009. Innlendismálaráðið sendi avgerðina við vanligum posti fríggjadagin 16. januar 2009 til E, adv., ið umboðaði A. Ráðið metti, at avgerðin átti at verið komin fram til E og harvið A mánadagin 19. januar, og varð innlit tí givið blaðmanninum sama dag. Seinni vísti tað so tó, at A ikki varð kunnað um avgerðina, áðrenn blaðmaðurin ringdi til hana. Innlendismálaráðið metir sjálvsagt ikki, at hetta

er nøktandi mannagongd. Ráðið átti at havt tryggjað sær, at A varð kunnað um avgerðina, áðrenn innlit varð latið, og tekur ráðið hetta til eftirtektar.

Hjálagt er avrit av øllum skjølum í málinum."

Tann 5. mars 2009 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um eina avgerð hjá Innlendismálaráðnum viðvíkjandi kommunuvalinum í Kvívík í 2008.*

*Klagararnir finnast at, at Innlendismálaráðið ikki hevur viðgjørt kjarnuna í málinum. Við hesum skilji eg tey viðurskifti, ið funnu stað, áðrenn valevnislistarnir vóru latnir inn.*

*Valevnislistin er grundarlagi undir valinum, og eru reglur um krøv til valevnislistar ásettar í kap. IV, §§ 6 og 7 í løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, við seinni broytingum, (kommunuvallógin). Einki er ásett um, hvussu valevnislistarnir verða tilevnaður ella hvør framferðarháttur skal verður nýttur í hesum sambandi. Ásetingarnar viðvíkja bert formligu krøvunum til valevni og serliga til stillarar á einum valevnislista. Av tí, at kommunuvallógin ikki regulerar viðurskifti, ið fara fram áðrenn valevnislistar verða innlatnir og góðkendir, havi eg ikki viðmerkingar til, at Innlendismálaráðið ikki viðgjørdi hesi viðurskifti í kæruavgerð sínari.*

*Til hetta kommunuvalið vóru valevnislistarnir A og B undirskrivaðir av valevnunum. Stillararnir høvdu ikki undirskrivað valevnislistarnar, men høvdu skrivað undir eitt skjal, ið var hjálagt listunum. Viðvíkjandi formkrøvum til valevnislistar stendur soleiðis í § 6, stk. 3 og 6 í kommunuvallógini:*

> *„Stk. 3. Listin skal vera undirskrivaður av í minsta lagi 15 og í mesta lagi 25 veljarum sum stillarum, og hjálagdur skal vera serligur listi yvir stillararnar, har teir eru skilliga lýstir við navni, starvi, bústaði og føðingardegi. Er íbúgvartalið í kommununi minni enn 1000, eru 10 stillarar nóg nógv. …*
>
> *...*
>
> *Stk. 6. Heldur valnevndin, at ein rættstundis innlatin valevnislisti er so ófullfíggjaður, at neyðugt er at gera hann ógildugan, skal nevndin beinanvegin boða viðkomandi stillara frá hesum og geva honum høvi til innan 24 tímar at bøta um brekið."*

*Hóast valevnislistarnir sambært § 6, stk. 3 vóru ófullfíggjaðir, tí stillararnir ikki høvdu undirskrivað teir, góðkendi valnevndin fyri Kvívíkar kommunu listarnar. Hetta meti eg als ikki vera nøktandi. Valnevndin átti í staðin at havt boðað viðkomandi stillarum frá, at listarnir vóru ófullfíggjaðir, og givið teimum høvi til innan 24 tímar at bøta um brekið, jb. § 6, stk. 6. Formkrøvini í lógini eru ein trygd fyri, at valið er rætt framfarið, og tað er tí, eftir mínari meting, eitt munandi brek, at stillararnir ikki hava undirskrivað valevnislistarnar. Tá ið eitt slíkt munandi brek við einum valevnislista kemur fyri, má ítøkilig meting gerast av, hvørt formliga brekið hevði innihaldsligan týdning fyri valið. Fyri at kanna hetta, hevur Innlendismálaráðið spurt stillararnar, um teir hava skrivað undir fyri teimum valevnum, ið stóðu á lista A og B. Stillararnir hava skrivliga váttað hesum. Av tí at Innlendismálaráðið átalar breki við ófullfíggjaðu valevnislistunum, og hevur fingið umrøddu váttan frá stillarunum, geri eg ikki meira við hetta.*

*Spurningurin er tó, um formliga brekið við valevnislistunum átti at ført við sær ógildan av valinum. Ongar ásetingar eru í kommunuvallógini um, hvat skal til fyri at eitt val skal ógildast. Ongar serligar viðmerkingar eru til lógina, ið geva svar uppá hetta, jb. løgtingsmál 6/1971, og skjal til Løgtingstíðindi B frá 1971, bls. 36. Føroyska kommunuvallógin hevur sína fyrimynd í donsku „lov nr. 101 af 29. marts 1924 om kommunale valg", við seinni broytingum. Heldur ikki í hesari lóg, í uppskotið til hesa lóg, sp. 3701 í Rigsdagstidende frá 1923, í øðrum fyrireikingararbeiði til lógina, skrivaðum tilfari ella siðvenju er nøkur vegleiðing um, hvørjir tilburðir kunnu ella skulu viðføra, at valið skal verða ógildað. Av tí at Innlendismálaráðið hevur ta fakligu ábyrgdina av valinum og hevur serkunnleikan á økinum, haldi eg*

*ikki, at grundalag er fyri at finnast at avgerðini hjá Innlendismálaráðnum um ikki at ógilda kommunuvalið í Kvívík 2008.*
*Klagararnir føra harumframt fram, at um teir høvdu verið upplýstir um 24-tímars regulin í § 6, stk. 6 í kommunuvallógini, høvdu teir kunna fingið fleiri valevnir uppá valevnislista B. Eg eri samd við Innlendismálaráðnum í, at § 6, stk. 6 í kommunuvallógini bert kann nýtast til at geva viðkomandi stillara møguleika at bøta um brek við einum ófullfíggjaðum vallista, og at hetta skotbrá ikki kann nýtast til at seta fleiri valvevni á listan. Eg havi tí ikki viðmerkingar til hetta.*

*Klagararnir klaga um, at avgerðin hjá Innlendismálaráðnum ikki var fráboðað teimum, men bert advokatinum hjá klagarunum. Harumframt verður klagað um, at blaðmaður fekk innlit í málið, áðrenn klagararnir vóru kunnaðir um avgerðina. Til hetta er at siga, at klagararnir hava latið seg umboðað av advokati, jb. § 8 í fyrisitingarlógini, og advokaturin var sostatt rætti viðkomandi at senda kæruavgerðina til.*

*Kæruavgerðin verður send advokatinum fríggjadagin tann 16. januar 2009, og Innlendismálaráðið gav blaðmanni innlit í málið tann 19. januar 2009. § 5, stk. 1, nr. 1 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) er soljóðandi:*

> *„**§ 5.** Rætturin til skjalainnlit fevnir um*
> *1) øll skjøl, ið viðvíkja málinum, herundir makaskjøl av teimum skjølum, sum eru send frá myndugleikanum, tá skrivini mugu haldast at vera komin fram til móttakaran, ...“*

*Innlendismálaráðið metti avgerðina vera komna fram til móttakaran tann 19. januar 2009, og var innlit tí givið í málið. Hesa meting eri eg samd í, og havi eg tí onga viðmerking til, at Innlendismálaráðið gav alment innlit í avgerðina tann 19. januar 2009.*

*Innlendismálaráðið sigur í partshoyringsskrivi sínum til mín, at hetta málið lýsir, at tørvur er á greiðum reglum um mannagongdir í sambandi við kommunuval. Eg kann bert taka undir við hesum, og fari at mæla*



*til, at arbeiðið hesum viðvíkjandi verður sett í verk sum skjótast, og lata meg frætta, hvat víðari hendur í málinum.*

*Samanumtikið havi eg einki at finnast at viðgerðini hjá Innlendismálaráðnum í hesum málinum, og geri ikki meira við málið.*

# *22 Skattur og Avgjøld v.m.*

## 22.1 Viðgerð av umsókn um eftirgeving av MVG-skuld

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um eina avgerð hjá Skuldarumskipanarnevndini um eftirgeving av skuld. Nevndin metti klagaran lúka treytirnar í § 3 í skuldarumskipanarlógini fyri at fáa skuldina umskipaða, men treytaði avgerðina av, at klagarin rindaði kr. 80.000 í einum ella at veð varð fingið í ogn hjá børnum klagarans. Sambært § 4 í lógini skal gerast avdráttarskipan fyri restskuldina, har atlit skulu takast til, hvussu nógv skuldarin er førur fyri at gjalda. Umboðsmaðurin metti tí ikki heimild vera fyri at krevja restskuldina goldna í einum. Nevndin upplýsti fyri umboðsmanninum, at ein gáva, sum klagarin gav børnunum í 1992, hevði ávirkað metingina av, hvussu nógv nevndin metti klagarin vera føran fyri at rinda aftur. Hetta metti umboðsmaðurin vera ósakligt og vísti á, at metingin sbrt. § 4 skal taka støði í verandi og væntaðu fíggjarligu umstøðunum. Tað var heldur ikki nøktandi, at nevndin ikki tók útreiðslur til bústað við í metingina av fíggjarligu umstøðunum hjá klagaranum. Umboðsmaðurin helt tað somuleiðis vera ósakligt at treyta avgerðina av, at veð varð fingið í ogn, sum klagarin ikki átti. Umboðsmaðurin mælti Skuldarumskipanarnevndini til at taka málið uppaftur og viðgera, um skuldin skuldi eftirgevast heilt ella lutvíst. (**J. nr. 200800035**)*

### Klagan

Við skrivi, dagfest 22. apríl 2008, hevur A, adv., vegna B sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> „**Kæra um málsviðgerð hjá Skuldarumskipanarnevndini í sambandi við eftirgeving av landskassaskuld hjá fólki**
> Sum advokatur hjá B og C í … skal eg við hesum kæra málsviðgerðina hjá Skuldarumskipanarnevndini í einum máli hjá teimum, har tey hava søkt Skuldarumskipanarnevndina um eftirgeving av mvg-skuld, sum stavar frá 1993.



Umstøðurnar í málinum eru hesar:
B rak eitt …virki í …, sum kallaðist … . Virksemið helt uppat í …, og virkið varð frámeldað mvg-skránni 31. desember 1994.

B hevur mótmælt at skylda mvg, men hevur ikki havt orku til at mótmæla hesari skuld. Úrslitið av hesum varð, at Toll- og Skattstova Føroya, nú TAKS, í nógv ár hevur framt úrslitaleysa útpanting mótvegis teimum.

…

B er gift við C, og hjúnini eru í dag ávikavist … og … (…) ára gomul. Tey hava einki arbeiði og eiga ongar ognir. Inntøka teirra er fólkapensjón.

…
…
…

Tá …virksemið hjá manni B, …, byrjaði at ganga illa í 90'unum, stúrdi hon fyri, at hon eisini fór at missa ognina, um … fór av knóranum.

… Ognin varð hereftir avhendað við einum gávubrævi, sum er tinglýst 19. november 1994.

…

Mett varð í 1994, at ognin samanlagt hevði eitt virði á uml. kr. 300.000, og í gávubrævi, sum fyriliggur í málinum, er virðið á ognini sett til kr. 50.000.

Um hetta mundið var veðskuld í ognini á kr. 300.000, og avtalað varð, at børnini hjá B skuldu rinda veðskuldina í ognini ímóti at fáa ognina í gávu.

Tað er serstakliga at viðmerkja, at TAKS í øll hesi ár hevur verið

vitandi um hesa avhending. TAKS hevur ikki tikið nøkur konkret stig til tess at umstoyta nevndu dispositión.

Eftir ráðum frá TAKS søkti B Skuldarumskipanarnevndina í apríl 2006 um eftirgeving av mvg-skuldini. …

…

Málið varð lagt fyri Skuldarumskipanarnevndina tann 6. november 2006, men nevndin avgjørdi ikki at taka avgerð í málinum, tí málið var ikki nóg væl lýst.

Nevndin vildi m.a. hava at vita, hvussu stór samlaða veðskuldin var í matr.nr. …, og hvussu stórt virðið ognin hevur í dag.

Skriv hesum viðvíkjandi frá 29. november 2006 verður lagt við.

…

Eftir hetta tók Skuldarumskipanarnevndin tann 16. apríl 2007 avgerð um at eftirgeva skuldina, treytað av, at goldnar vórðu kr. 80.000 ella at pant verður givið í matr. nr. … í partunum hjá børnunum, sum ikki varð frámatrikuleraður.

Skipanin verður rentu- og avdráttarfrí, og skuldin fellir til gjaldingar, tá B og C eru deyð, ella tá ognin verður seld ella á onkran hátt skiftir eigara.

Nevndin gav B eina freist til 1. mars 2008 til antin at rinda kr. 80.000 ella at lata pant í nevndu ogn.

Eg mótmælti sjálvsagt hesi avgerð, m.a. við teirri grundgeving, at B ongan møguleika hevði at rinda kr. 80.000, og at hon ikki var harri yvir, hvørt børnini vildu lata tí almenna pant í ogn teirra ella ikki.



Eisini vísti eg á, at tá Løgtingið hevur samtykt eina serliga lóg um eftirgeving av landskassaskuld, so er eingin meining í, at Skuldarumskipanarnevndin setir strangari treytir fyri at eftirgeva skuld, enn tær sum Føroya Skiftirættur vanliga setir.

Eisini metti eg tað vera heilt skeivt, at Skuldarumskipanarnevndin setir treytir, sum skuldarin ikki er førur fyri at lúka.

Skuldarumskipanarnevndin tók málið upp til nýggja viðgerð tann 29. november 2007, men fasthelt sína avgerð frá 16. apríl 2007.

Eftir míni metan vísir hetta mál, at praksis hjá Skuldarumskipanarnevndini ikki livir upp til fyritreytirnar í skuldarumskipanarlógini og endamálið við lógini.

Tað er eisini javnan at hoyra, at tær treytir, sum Skuldarumskipanarnevndin setir, eru so strangar, at tað í veruleikanum næstan er ógjørligt at fáa almenna skuld eftirgivna umvegis nevndina.

Hetta mál er eitt dømi um, at so er.

Eg meti tí, at Løgtingsins Umboðsmaður eigur at gjøgnumganga ta praksis, sum Skuldarumskipanarnevndin hevur, tí dømið viðvíkjandi B vísir, at Skuldarumskipanarnevndin fer langt út um tað, sum vanliga verður kravt í sambandi við mál um skuldarumskipan.

…

Eg kann upplýsa, at málið er sera tyngjandi fyri B og C, og at tey, eftir at Skuldarumskipanarnevndin hevur tikið avgerð, aftur hava verið innkallað til útpantingar hjá TAKS. Eisini hesaferð varð útpantingin úrslitaleys.

Børnini hjá B og C hava greitt boðað frá, at tey ikki ynskja at geva skattavaldinum veðrætt í nevndu ogn, og tí hava hjúnini ongan møguleika at lúka tær treytir, sum Skuldarumskipanarnevndin hevur sett.

Eg fari tí at biðja um, at Løgtingsins umboðsmaður gjøgnumgongur hetta mál, herundir tekur upp ta praksis, sum Skuldarumskipanarnevndin hevur havt seinastu árini, alt til tess at tryggja, at Skuldarumskipanarnevndin livir upp til tey krøv, sum galdandi lóggava setir."

Saman við klaguni vórðu viðløgd skjøl, sum eru endurgivin undir málsgongdini í tann mun, tey eru mett at vera viðkomandi.

## Málsgongd

A, adv., sendi 21. apríl 2006 Skuldarumskipanarnevndini umsókn um eftirgeving av mvg-skuld hjá B.

Toll- og Skattstova Føroya sendi 7. juni 2006 eftir umbøn nevndini soljóðandi frágreiðing frá …øki, … um eftirstøðuna hjá B:

„**Ummælið viðv. umsókn frá B um eftirgeving av mvg og rentum**
Vísandi til skriv tykkara frá 3. mai 2006 viðv. umsókn frá B, …, um eftirgeving av mvg og rentum, verður við hesum sent frágreiðing og skjøl í málinum:

Hjáløgd skjøl:
…

**Gongdin í málinum**
Mvg-eftirstøðan er í dag kr. 296.949.13.

B varð tann 01.01.1993 mvg-skrásett fyri … . Virksemið helt uppat aftur og er frámeldað úr vinnuskránni tann 31.12.1994.



Gongdin í eftirstøðuni hevur verið hendan:

(*Mín viðmerking:* Sambært yvirlitinum, sum ikki er tikið við í álitið, hevur B goldið mvg í 1993 og 1994. Við árslok 1994 var eftirstøðan kr. 66.761,18. Síðani er skuldin niðurgoldin við afturhildnum restskatti. Pr. uppgerðardagin var skuldin kr. 296.949,13.)

Sum omanfyri nevnda yvirlit vísir, hevur B leypandi verið í mvg-eftirstøðu, og er hetta eisini smb. viðmerkingunum í umsóknini ein av orsøkunum til, at virkið helt uppat eftir stutta tíð, tí tað ikki megnaði at halda sínar skyldur.

B og maðurin eiga onga fasta ogn. Sonurin, F, keypti hús og innbúgv í … .
B og C búgva í húsunum móti at gjalda tær vanligu útreiðslurnar, so sum el, hita v.m.

B hevur eisini átt eini sethús … – hesi húsini hava børnini eisini yvirtikið. B stendur framvegis fyri láninum uppá hesi húsini, men ognin er tinglisin í navninum hjá børnunum, sum gjalda lánið.

Innheintingin hevur leypandi roynt at kravt eftirstøðuna inn, m.a. er ein gjaldførleikaútrokning (GFÚ) gjørd fyri árið 2002. Hendan vísir eitt avlop fyri bæði á íalt kr. 7.184 til mat, klæðir, v.m. Inntøkur og útreiðslur hava síðani verið á leið tær somu. Smb. umsóknini hava hjúnini kr. 6.052 fyri árið 2005 til mat og klæðir v.m. Innheintingin hevur tí ikki mett tað vera gjørligt at heinta nakað inn av tí peningi, sum hjúnini hava eftir til mat og klæðir.

Út frá fíggjarligu umstøðunum og aldri hjá hjúnunum í dag verður ikki mett, at nakar møguleiki er at innheinta eftirstøðuna. Tá ongar ognir eru, og ongin tøkur peningur, hevur Innheintingin

> ikki havt nakað virði at framt úttøku í, og eru úrslitaleysar útpantingar tí gjørdar leypandi – seinast 01.07.2003 – fyri at tryggja kravið.
>
> …økið, Innheintingin hevur ikki fleiri viðmerkingar til umsóknina frá B.“

Skuldarumskipanarnevndin hevur 9. november 2006 sent advokatinum hjá skuldaranum fyrispurning um, hvussu stór samlaða veðskuldin er í matr. nr. …, og hvussu stórt virði ognin verður mett at hava d.d.

Advokaturin hevur 22. januar 2007 svarað nevndini, at hann frá klientum sínum hevur fingið upplýst, at eingin veðskuld er í ognini matr.nr. …, at ognin verður mett at hava eitt virði á uml. 3 mió. kr., og at ognin er seld smápartafelagnum Sp/f G.

… Sparikassi hevur 30. januar 2007 uppá fyrispurning frá nevndini upplýst, at bæði lánini hjá skuldaranum eru niðurgoldin av Sp/f G tann 14.12.2006, at B hevur staðið sum skuldari av omanfyri nevndu lánum, og at hon hevur yvirhildið sínar gjaldsavtalur. Upplýst varð somuleiðis, at ongin upphædd var goldin inn á innlánskonto hjá B viðvíkjandi matr.nr. …, …

Húsalánsgrunnurin hevur 31. januar 2007 uppá fyrispurning frá nevndini um lán skuldarans í grunninum upplýst, at B síðani 1998 hevði goldið mánaðarligu lánsgjøldini á kr. 865,00, at lánið varð niðurgoldið við kr. 28.781,94 tann 27.07.2006 smb. umbøn frá B, og at peningurin er goldin av konto hjá B í … Sparikassa.

Advokaturin sendi 21. mars 2007 nevndini soljóðandi viðmerkingar:

> **„Viðv.: Umsókn um eftirgeving av mvg og rentum hjá B**
>
> …



Tað var ein greið avtala, at børnini eisini skuldu yvirtaka skuldina hjá B í … Sparikassa og í Húsalánsgrunninum.

Av eini og hvørji orsøk eru lánini ikki flutt yvir í navnið á børnunum, men tað eru børnini, sum øll árini hava afturgoldið uppá lánið.

Lánini í … Sparikassa og í Húsalánsgrunninum verða innfríðaði í sambandi við, at Sp/f G keypti ognina frá børnunum í sambandi við nevndu …ætlan.

Sp/f G upptók lán, sum síðani verður brúkt m.a. til at innfría pantiskuldina í ognini.

Tað er sera týdningarmikið at undirstrika, at B ikki hevur innfríað skuldina og at hon heldur ikki hevur goldið niður uppá lánini síðani 1995.

Tað er at viðmerkja, at børnini hava hækkað lánini í ognini í sambandi við, at fastognin hevur verið umvæld leypandi, men hettar hevur B onki havt við at gera.

B metir, at talan er um eitt mistak frá Sparikassans síðu, tá hon gjøgnum øll árini hevur staðið fyri lánunum, tí veruligu debitorarnir hava verið børn hennara, inntil Sp/fG við F keypti ognina frá børnunum.

Eg meti, at dispositiónin í 1994 ongan týdning eigur at hava fyri hettar mál. Fyri tað fyrsta hevur Toll- & Skattstova Føroya verið vitandi um hesa avhending í meiri enn 10 ár, uttan at skattamyndugleikin hevur tikið nakað stig til at krevja hesa dispositión umstoytta. Havast má eisini í huga, at ognin í veruleikanum ikki hevði nakað serligt virði, tá hon var avhendað, útyvir pantiskuldina í ognini. Øll vita, at prísirnir á fastari ogn miðskeiðis í nítiárunum vóru í botni, og hetta má eisini hava verið orsøkin til, at Toll- & Skattstova Føroya ikki hevur tikið nøkur rættarlig stig í sambandi við avhendanina.

Eisini má havast í huga, at børnini hjá B hava avhendað ognina til eitt partafelag og at hvørki børnini ella partafelagið undir nøkrum umstøðum vilja ganga við til, at Toll- & Skattstova Føroya nú skal hava veð í nevndu ogn.

Annars er at viðmerkja, at var talan um eitt mál, sum bleiv viðgjørt ígjøgnum Føroya Skiftirætt sum eitt skuldarumskipanarmál, vildi Føroya Skiftirættur ikki farið so langt aftur í tíðina og spurt um viðurskiftir, sum eru farin fram fyri meira enn 10 árum síðani.

Eitt av endamálunum við Skuldarumskipanarnevndini var at gera tað lættari hjá fólki at fáa síni viðurskiftir við tað almenna avkláraði. Undir hesum umstøðum dugi eg illa at skilja, hví Skuldarumskipanarnevndin í veruleikanum leggir ein praksis, sum er strangari enn tann, sum Føroya Skiftirættur hevur lagt.

Eisini meti eg tað hava stóran týdning í málinum, at kreditorurin í málinum, Toll- & Skattstova Føroya, í einum ummæli til Skuldarumskipanarnevndina beinleiðis hevur mælt til at eftirgeva skuldina.

Undir hesum umstøðum dugi eg illa at skilja, hví Skuldarumskipanarnevndin ger so nógv hóvasták burturúr tí avhending, sum er farin fram fyri mongum harrans árum síðani.

Tað, sum hevur týdning í dag, er veruliga støðan hjá C og B, nevniliga at tey ongan møguleika hava at afturrinda skuldina.

Eg skal annars gera vart við, at um skuldin ikki verður eftirgivin, ætli eg mær, vegna C og B at gera galdandi, at tað í veruleikanum ikki fyriliggur nøkur skuld og at tær umposteringar, ið eru gjørdar í 1995, ikki hava verið rættar.

Eg vænti at frætta aftur.“



Skuldarumskipanarnevndin fráboðaði 20. apríl 2007 advokatinum soljóðandi avgerð:

> **„Viðvíkjandi umsókn tygara vegna B, um eftirgeving av mvg og rentuni.**
>
> Málið varð lagt fyri aftur Skuldarumskipanarnevndina tann 16. apríl 2007.
>
> **Nevndin samtykti at eftirgeva kr. 216.949,13 av skuldini, treytað av at goldnar verða kr. 80.000,00, ella at pant verður givið í matr. nr. …, í partinum hjá børnunum, sum ikki verður frámatrikulerað. Skipanin verður rentu- og avdráttarfrí. Skuldin fellur til gjaldingar tá B og C eru deyð, ella tá ognin verður seld, ella á onkran hátt skiftir eigara.**
>
> Tá mett verður, um persónur kann fáa skuldarumskipan verður ein fíggjarlig meting gjørd. Skuldin, ið er fevnd av § 2 í lógini um skuldarumskipan, kann eftir umsókn umskipast, um skuldarin prógvar, at hann ikki er førur fyri og innan fyri næstu árini eingi útlit hevur fyri at kunna lúka sínar gjaldskyldur til landskassan, og viðurskiftini hjá skuldaranum og umstøðurnar annars tala fyri hesum, smb. § 3, stk. 1, nr. 1 og 2.
>
> Av viðmerkingunum til lógina sæst, at munandi misjavni skal vera staðfestur millum gjaldsevnini hjá skuldaranum og skuldina, ið hann hevur til tað almenna.
>
> Mett varð, at B lýkur treytirnar í § 3, stk. 1, nr. 1 og nr. 2, fyri at fáa ein part av skuldini eftirgivnað, treytað av at ein partur verður goldin, ella at pant verður givið fyri hesa upphædd í matr. nr. … Við í metingunum var, at lánini í ávikavist … Sparikassa og Húsalánsgrunninum eru niðurgoldin í sambandi við søluna av jørðini sum hoyrir til matr. nr. … . Sostatt er B munandi betri før fyri at gjalda almennu skuldina.

> Avrit av hesum skrivi er sent til Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið."

Advokaturin hevur í skrivi til Skuldarumskipanarnevndina, dagfest 24. oktober 2007, vegna B mótmælt avgerðini og biðið nevndina um at taka málið upp til nýggja viðgerð.

Skuldarumskipanarnevndin tók málið uppaftur, og á fundi 29. november 2007 staðfesti nevndin avgerðina frá 20. apríl við teirri grundgeving, at einki nýtt var í málinum, tó við hesum uppískoyti:

> „Nevndin samtykti, at B fær eina freist til 1. mars 2008 antin at rinda kr. 80.000, ella at pant verður givið í omanfyri nevndu ogn."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 23. apríl 2008, varð klagan send Føroya Kærustovni/Skuldarumskipanar-nevndini til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur. Samstundis varð Kærustovnurin biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 21. mai 2008 sendi Skuldarumskipanarnevndin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> **„Viðvíkjandi klagu frá A, advokati, vegna B, …:**
> Umboðsmaðurin hevur við skrivi dagf. 23. apríl 2008 biðið um nærri frágreiðing og skjølini í málinum um skuldarumskipan hjá B, …
>
> Hjálagdur er postlisti og skjøl í málinum.
>
> Talan er um vanliga málsgongd, har Kærustovnurin útvegar nærri upplýsingar um fíggjarviðurskiftini hjá umsøkjaranum, áðrenn málið verður lagt fyri Skuldarumskipanarnevndina til støðutakan.



Í sambandi við sjálva avgerðina, so er hendan avgerð tikin út frá eini metan av, at munandi misjavni skal vera staðfestur millum gjaldsevnini hjá skuldaranum og skuldina, ið hann hevur til tað almenna. Mett varð, at hon leyk treytirnar í § 3, stk. 1, nr. 1 og nr. 2, fyri at fáa ein part av skuldini eftirgivna, treytað av at ein partur verður goldin, ella at pant verður givið fyri hesa upphædd í matr. nr. … . Við í metingunum var, at lánini í ávikavist … Sparikassa og Húsalánsgrunninum eru niðurgoldin í samband við søluna av parti av jørðini, sum hoyrdi til partar av matr. nr. … . Hetta ger, at umsøkjarin nú er betri før fyri at gjalda almennu skuldina.

Í hesum sambandi verður viðmerkt, at tað framgongur av upplýsingunum í málinum, at B, vælvitandi um skuldina til tað almenna, gav børnunum ognina, matr. nr. … . Hetta fyri at, um …virksemið, sum skuldin til tað almenna stavar frá, fór av knóranum, so skuldi hon ikki missa ognina. Í hesum sambandi kundi nevndin sostatt staðfesta, at umsøkjarin hevði gjørt dispositiónir fyri at fáa ognir burtur frá kreditorunum, og at tað almenna er einasti ógoldni kreditorur. Her áseta viðmerkingarnar til lógina, at hetta talar ímóti at veita skuldarumskipan yvirhøvur.

Nevndin hevur eisini staðfest, at B gav ognina, men varðveitti skyldurnar sum skuldari á lánunum í ognini.

Nevndin er greið yvir, at nevnda gáva varð givin fyri uml. 12 árum undan umsóknini um skuldarumskipan av skuldini. Viðmerkt verður, at nevndin sær sera álvarsamt uppá, at ein skuldari við ráddum huga ger eina tílíka dispositión og hevur ikki nakra ávísa tíðarfreist fyri, nær møguliga kann síggjast burtur frá tílíkum dispositiónum.

Øll skuld er goldin í matr. nr. …, í sambandi við, at Sp/f G keypti partar av jørðini uml. … fermetrar fyri kr. 2,5 mió, sum nú er frámatrikulerað matr.nr. … . Sostatt kann nevndin staðfesta, at um so er, at umsøkjarin framhaldandi hevði átt ognina, so

hevði hon kunna goldið almennu skuldina, ið er einasta ógoldna skuldin, sum eftir er. Nevndin ásetti út frá eini heildarmetan eina upphædd uppá kr. 80.000, við støði í tí B kundi verða før fyri at gjalda í einum tíðarskeiði uppá í mesta lagi 5 ár. Útrokning av gjaldsevnunum varð grundað á hennara egnu upplýsingar um inntøkur og útreiðslur. Hennara gáva hevði eisini týdning fyri upphæddina á kr. 80.000.

Nevndin valdi tó at geva B høvi til at gjalda upphæddina kontant, ella at pant varð fingið uppá skuldina í ognini, matr. nr. … hjá børnunum.

Elva skjølini ella frágreiðingin til spurningar, so lat okkum frætta aftur frá tykkum."

Við skrivi, dagfest 22. mai 2008, vórðu viðmerkingarnar hjá Skuldarumskipanarnevndini sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 30. mai 2008 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„**Eftirgeving av skuld hjá B**
Eg havi móttikið avrit av viðmerkingum frá Skuldarumskipanarnevndini og eri framvegis eins ovfarin av hesum viðmerkingum, sum av málsviðgerðini annars.

Frágreiðingin hjá Skuldarumskipanarnevndini frá 21. mai 2008 er ikki í tráð við veruleikan.

Annars skilji eg ikki viðmerkingarnar, tá Skuldarumskipanarnevndin sigur, at hon hevur tikið við í metingunum, at lánini í ávikavist … Sparikassa og Húsalánsgrunninum eru niðurgoldin í sambandi við søluna av parti av jørðini, sum hoyrdi til partar av matr.nr. …, og at hetta ger, at umsøkjarin nú er betri før fyri at rinda almennu skuldina.



Hetta er ikki samsvarandi veruleikanum. Sølan av matr. nr. … hevur ikki á nakran hátt ávirkað fíggjarstøðuna hjá B, og hetta veit Skuldarumskipanarnevndin.

Tá nevndin viðmerkir, at tað framgongur av upplýsingum í málinum, at B, væl vitandi um skuldina til tað almenna, gav børnunum matr. nr. …, er hetta heldur ikki rætt.

Ognin var heft við skuld áljóðandi kr. 300.000, og børnini yvirtóku skyldina at afturrinda hesa skuld. Í slíkum føri var talan ikki um eina gávu. Tá gávan varð givin, varð ikki mett, at ognin hevði eitt hægri virði, enn veðskuldin tá var í ognini.

Tað er ikki rætt, tá Skuldarumskipanarnevndin staðfestir, at umsøkjarin skal hava gjørt dispositiónir fyri at fáa ognir burtur frá kreditorunum, og at tað almenna er einasti ógoldni kreditorurin.

Tað almenna hevur øll árini verið vitandi um gávubrævið til børnini, herundir eisini TAKS í …, men tað almenna hevur einki gjørt fyri at umstoyta nevndu disposition, væl saktans orsakað av, at ognin í kreppuárunum ikki varð mett til at hava eitt størri virði enn tað, sum svaraði til skuldina í ognini.

Tað er heldur ikki rætt, tá Skuldarumskipanarnevndin sigur seg hava staðfest, at B gav ognina til børnini, men varðveitti skyldurnar sum skuldari av láninum í ognini. Her tosar nevndin ímóti betri vitan, tí eg havi skrivliga greitt nevndini frá, at B ikki hevur afturgoldið lánið í ognini, men at børnini hava afturgoldið lánið samsvarandi teirri avtalu, sum varð gjørd, tá ognin varð avhendað.

B var fyri meira enn 12 árum síðani leys av ognini og leys av skuldini, sum hefti ognina.

Nevndin viðmerkir, at hon sær tað sum sera álvarsamt, at ein

skuldari við ráddum huga ger eina tílíka dispositión. Henda viðmerking má skiljast soleiðis, at nevndin í sínum praksis onga ávísa tíðarfreist hevur fyri, nær tað møguliga kann síggjast burtur frá tílíkum dispositiónum.

Hetta sjónarmið gevir eina heilt greiða ábending um, at Skuldarumskipanar-nevndin metir seg hava skyldu til at røkja áhugamálini hjá tí almenna sum kreditori.

Hetta er ikki samsvarandi endamálinum við Skuldarumskipanarnevndini. Tað eru 12 ár liðin síðani nevnda dispositiónin er farin fram, og sambært øllum galdandi reglum og sambært praksis eru allar tíðarfreistir farnar til tess at umstoyta eina slíka dispositión.

Skuldarumskipanarnevndin sigur seg eisini hava gjørt útrokningar av gjaldsevnunum hjá skuldaranum, og at avgerðin um at B skuldi rinda kr. 80.000 varð grundað á hesar útrokningar.

Her skal viðmerkjast, at hvørki undirritaði ella klientur mín hava sæð hesar útrokningar.

Tað er undrunarvert, at Skuldarumskipanarnevndin sigur seg meta, at umsøkjarin kann rinda upphæddina kontant, tí nevndin er vitandi um, at B ongar ognir eigur yvirhøvur. Nevndin leggur afturat, at hon fyri at vísa vælvild hevur givið skuldarunum møguleika at fáa pant í ognini matr. nr. …, hóast nevndin er vitandi um, at skuldarin ikki er eigari av hesi ogn. Við hesum setir nevndin treytir, sum hon er vitandi um, at skuldarin ikki kann uppfylla.

Skuldarumskipanarnevndin hevur ikki ført nøkur prógv fyri ella víst á ítøkilig viðurskifti sum benda á, at ognin, tá hon varð avhendað, hevði eitt størri virði enn lániskuldin í ognini. Tað er beinleiðis ósakligt at vísa á, at eitt smápartagfelag nú hevur keypt part av jørðini, umleið … m2 fyri 2,5 mió.kr., sum eru



frámatrikuleraðar matr. nr. … Henda dispositión hevur einki við viðurskiftini hjá umsøkjaranum at gera. Umsøkjarin hevur á ongan hátt notið gott av nevndu dispositión, og sølan hevur á ongan hátt ávirkað gjaldsevnini hjá umsøkjaranum.

Avrit av hesum skrivi er sent til Skuldarumskipanarnevndina."

Við skrivi, dagfest 4. juni 2008, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Skuldarumskipanarnevndini til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 13. juni 2008 sendi Skuldarumskipanarnevndin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„**Viðvíkjandi klagu frá A, advokati vegna B, …**
Skuldarumskipanarnevndin og Kærustovnurin hava móttikið avrit av skrivinum frá A, advokati dagfest 30. mai 2008.

Skrivið undrar okkum stórliga og vísir, at advokaturin og Skuldarumskipanar-nevndin møguliga ikki hava sama fakta í málinum. Tað fakta, vit hava, er frá skjølunum í málinum og frá upplýsingum frá umsøkjaranum sjálvum.

Annars so hevur nevndin fyribils hetta at leggja afturat tí, ið longu er skrivað:

Skuldarumskipanarnevndin móttók 24. apríl 2006 umsókn frá B. Umsóknarblaðið var dagfest 22. september 2005.

B skrivaði á umsóknarblaðið, at hon hevði 3 lán:

| | | |
|---|---|---|
| … skuld kr. | 107.256 | … Sparikassi |
| … – - | 136.862 | … Sparikassi |
| … – - | 40.612 | Húsalánsgrunnurin |

Hon upplýsti eisini á umsóknarblaðnum, at hon og maðurin gjalda kr. 1.983 + kr. 1.983 í lánsgjøldum/leigu.

Lánini … og … í … Sparikassa vórðu niðurgoldin tann 14. desember 2006 av Sp/f G.

… Sparikassi greiddi frá, at B hevur staðið sum skuldari av omanfyrinevndu lánum.

Húsalánsgrunnurin upplýsti, at B hevur goldið kr. 865,00 um mánaðin síðani 1998 umvegis … Sparikassa.

Lánið er sambært kontoavriti innfría tann 27. juli 2006. B hevur sjálv flutt peningin inn á lánið.

Sambært ognaruppgerðir hjá TAKS 2004, 2005 og 2006 sæst, at B hevur staðið sum skuldari av omanfyri nevndu lánum ultimo 2004 og 2005, og at lánini eru burtur ultimo 2006, t.v.s. eftir at søkt er um skuldarumskipan.

B upplýsti m.a. á umsóknarblaðnum, at hon rindaði hesar upphæddir í lánsgjøldum/húsaleigu kr. 1.983 + kr. 1.983, t.v.s. íalt kr. 3.965. Út frá upplýsingunum í málinum legði nevndin til grund, at talan var um lánsgjøld.

Innfríanin av lánunum viðførdi, at umsøkjarin fekk kr. 3.965 meira at liva fyri hvønn mánað. Skuldarumskipanarnevndin hevur lagt til grund, at tá B varð loyst frá hesum lánsskyldum, forbetraðust hennara gjaldsevni samsvarandi. Hetta er grundin til, at B í gjaldsevnis-útrokningini (sí niðanfyri) hjá Skuldarumskipanarnevndini hevur tøkan pening til partvísa rindan av almennu skuldini.

Gávubrævið viðv. matr. nr. … er dagfest 11. november 1994. Ognin verður avhendað til børnini sum teirra serogn.

Um hugt verður eftir tingbókini tann 24. januar 2007, so sæst, at tann:

9. januar 2007 er skeytið lýst í (byrderubrikken) uppá kr. 2.500.000 við freist til 1. juli 2007.

15. januar 2007 er ognarveðbræv uppá kr. 20.000.000 lýst í (byrderubrikken) við freist til 1. juli 2007.



Um hugt verður eftir tingbókini tann 9. juni 2008, so sæst, at ongin skuld er lýst á ognini longur.

Hjálagt eru øll viðkomandi skjøl fyri hetta, sum skrivað er omanfyri.

Tá hugt varð eftir upplýsingunum frá B um inntøkur, útreiðslur, ogn og skuld og teim upplýsingum, sum vóru tøkar frá Toll- og Skattstovuni, tá málið fór fyri nevnd av fyrstan tíð í nov. 2006, sá støðan hjá B soleiðis út:

| ***OGN OG SKULD:*** | ***Umsøkjari:*** | ***Hjúnafelagi*** |
|---|---|---|
| ***Ogn:*** | | |
| *Samb. ognaruppgerð 2005* | | |
| *Inniogn* | *kr. 14.319,98* | *kr. 14.028,00* |
| ***Skuld:*** | | |
| *Samb. umsóknarblað* | | |
| *… Sparikassi* | *kr. 107.256,00* | *kr. 32.374,00* |
| *… Sparikassi* | *kr. 136.862,00* | |
| *Húsalánsgrunnurin* | *kr. 40.612,00* | |

*Saldo á mvg-skuldini var pr. 24. mai 2006 kr. 296.949,13. Av hesum er umleið kr. 217.491,32 tilskrivað renta. Mvg-skuldin er uppá kr. 79.949,81.*

*Umsøkjarin hevur sostatt eina skuld uppá í alt kr. 581.679,13. Privata skuldin er uppá kr. 284.730,00 (er nú innfría), skuldin til tað almenna er uppá kr. 296.949,13.*

**INNTØKUR OG ÚTREIÐSLUR:**

**Inntøkur:**

| | |
|---|---|
| Kona: | 10.951 |
| Maður | 14.502 |
| Skattur | 8.224 |
| ***Inntøkur í alt*** | 17.229 |

***Útreiðslur:***

| | |
|---|---|
| Lánsgjøld/húsaleiga | 3.965 |
| Húsatrygging | 350 |
| Trygging av innbúgvi | 155 |
| Olja | 1250 |
| Ljós | 292 |
| Lánsgjald | 875 |
| Vegskattur | 165 |
| Biltrygging | 271 |
| Útvarp/sjónvarp | 302 |
| Sjúkrakassi | 450 |
| Telefon/internet | 600 |
| Gjald til yrkisfelag | 908 |
| Læknafyriskrivaður heilivágur | 239 |
| ***Útreiðslur íalt um mánaðin:*** | 9.822 |
| ***Upphædd til uppihald hvønn mánað:*** | 7.407 |

*Út frá tølunum hjá skiftirættinum, so skulu tey hava kr. 6.200 eftir hvønn mánað, tá allar fastar útreiðslur eru goldnar. Tey hava kr. 7.407 eftir. Tey hava sostatt kr. 1.200 meiri enn skiftirætturin fyriskrivar. Maðurin er fólkapen-sjónistur, og konan verður fólkapensjónistur um 2 ár, so inntøkan fer at minka munandi hjá teimum.(nov. 2006)*

*Tá málið eftir nærri kanning varð lagt fyri nevnd aftur í apríl 2007, varð, sum greitt er frá omanfyri, øll privata skuldin innfría. Hetta gav eina øking í tøkum peningi pr. mánað uppá. 3.956 kr., og skuldu hjúnini sostatt havt 5.156 kr. tøkar pr. mánaða út um nevndu vegleiðandi upphædd hjá Skiftirættinum. (apríl 2007)*



Út frá hesum upplýsingum avgjørdi nevndin eina umskipan av almennu skuldini soleiðis, at um 80.000 kr. vórðu inngoldnar, varð restskuldin av teim 216.949,13 kr. eftirgivin. At nevndin sum alternativ til kontantgjaldið biður um viljabestemt pant, er bert eitt tilboð til B at loysa málið á ein smidligari hátt. At víst verður á matr. nr. … hongur saman við teim dispositiónum, sum B hevur gjørt í mun til hesa ogn, samstundis sum hon stóð í skuld til ta almenna.“

Við skrivi, dagfest 17. juni 2008 vórðu viðmerkingarnar hjá Skuldarumskipanarnevndini sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 23. juni 2008 bað klagarin um at ummælisfreistin varð longd til hálvan august vegna ivamál um faktiska grundarlagið undir kæruavgerðini. Hesum játtaði umboðsmaðurin við skrivi, dagfest 3. juli 2008, og longdi ummælisfreistina til 18. august 2008.

Tann 6. august 2008 bað advokaturin um at fáa freistina longda til hálvan september 2008. Umboðsmaðurin játtaði við skrivi, dagfest 12. august 2008, at leingja freistina til 15. september 2008 og gjørdi vart við, at freistin var endalig og ikki fór at verða longd aftur.

Tann 15. september 2008 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„**Klaga vegna B**
Í framhaldi av skrivi mínum dagfest 6. august 2008 kann eg upplýsa, at eg aftur havi tosað við klientar mínar og við Bókhaldsvirkið E, sum hevur hjálpt B at seta saman umsókn sína til Skuldarumskipanar-nevndina um eftirgeving.

Viðvíkjandi ognini matr. nr. …, sum í 1994 varð avhendað til børnini hjá B, fevndi ognin um eini gomul sethús, sum stóðu á eini trøð, sum var … m2 til víddar. Sethúsini, sum stóðu á trøðni, vóru í 1994 í sera ringum standi. Í 1994 búði ongin í sethúsunum.

Tá ognin varð avhendað til børnini, var skuldin í ognini umleið kr. 300.000, og eg vísi í hesum sambandi til skriv frá E dagfest 22. mars 2007, sent Skuldarumskipanarnevndini tann 27. mars 2007 (*Mín viðmerking:* Skrivið frá advokatinum til nevndina er dagfest 21. mars 2007, og viðlagt skrivinum er gávubrævið frá 1994, har virðið á ognini er ásett til kr. 50.000).

Av málinum framgongur, at lánini í … Sparikassa og lánið í Húsalánsgrunninum eru innfríað av Sp/f G. Víst verður til skriv mítt dagf. 6. august 2008 við skjølum.

Lánið í … Sparikassa nr. … er innfríað við kr. 120.161,36. Lán nr. … er innfríað við kr. 134.555.12. Áðrenn hetta lán varð innfríað, varð lánið hækkað í juli 2007 við kr. 29.705,39, og varð henda upphædd nýtt til at innfría lánið í Húsalánsgrunnin.

Tað er sostatt ikki rætt, tá sagt verður av Skuldarumskipanarnevndini, at B hevur innfríað nevndu lán. Lánini eru øll innfríað av Sp/f G, …
…

…

B og maður hennara búðu í hesum húsunum í … fram til …, tá tey fluttu inn í húsini hjá børnunum, sum standa á matr. nr. …. Húsini vóru tá so frægt umvæld, at búgvandi var í teimum.

Sum nevnt hava børnini goldið fyri umvælingina og ístandsetingina av sethúsunum.

Tað er rætt, at B og maður hennara í staðin fyri at rinda leigu í ávísan mun hava goldið niður uppá lánini í … Sparikassa og Húsalánsgrunninum, men støðan hevur rættiliga oftani verið tann, at børnini hava inngoldið pening til teirra, sum síðani er goldin víðari til lánistovnarnar.



Síðani … hava B og maður hennara sostatt ikki goldið formliga leigu til børnini, men hava kunnað búð í húsunum móti at rinda nevndu lánsútreiðslur til … Sparikassa, Húsalánsgrunnin og útreiðslur til el og hita.

Nú lánini til … Sparikassa og Húsalánsgrunnin eru innfríað skulu B og maður hennara rinda eina leigu, sum svarar til tað, sum er upplýst í umsóknini um skuldarumskipan, nevniliga slakar kr. 4.000 um mánaðin.

Støðan er sostatt ikki tann, at fíggjarstøðan hjá B og manni hennara er batnað í sambandi við, at nevndu lán eru innfríað.

Tað er heldur ikki realistiskt ella rætt av Skuldarumskipanarnevndini at uppseta eitt budget fyri hjúnini uttan at taka við húsaútreiðslur.

Tað fyriliggja ongar upplýsingar í málinum um, at B og maðurin kunna búgva ókeypis restina av teirra lívi. Tvørturímóti fyriliggja upplýsingar um, at hesar útreiðslur skulu takast við og eru útvið kr. 4.000 um mánaðin.

Í hesum sambandi kann eg upplýsa, at tað eisini er heilt vanligt av skiftirættinum at taka við húsaútreiðslur, sjálvt um børn ella onnur nærstandandi standa sum eigarar av húsunum, sum skuldarin býr í.

Um fíggjarstøðuna annars kann eg upplýsa, at maður B, C, er fólkapensjónistur. Hann fær fólkapensjón og gjøld frá Arbeiðsmarknareftirlønargrunninum. Aftaná skatt fær hann umleið kr. 7.300 útgoldnar um mánaðin.

B hevur fingið fyritíðarpensjón og upphædd frá ALS, men … í ár verður hon 67 ár og fær eftir hetta einans fólkapensjón og gjøld frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

Eftir míni metan er tað heilt skeivt av skuldarumskipanarnevndini ikki at taka við í metingina av hesum máli, hvørjar framtíðar inntøkumøguleikar hjúnini hava.

Samlaðu inntøkurnar hjá B og manni hennara verða frá 1. november 2008 sostatt samanlagt eftir skatt umleið kr. 14.000 um mánaðin.

Metingin hjá Skuldarumskipanarnevndini um at tey framhaldandi skulu hava eina inntøku uppá kr. 17.229 um mánaðin eftir skatt er sostatt heldur ikki røtt.

Veruleikin er tann, at hjúnini frameftir í mesta lagi koma at hava kr. 4.178 um mánaðin at liva fyri, tá allar útreiðslur eru drignar frá. Inntøka teirra eftir skatt verður umleið kr. 14.000, og føstu útreiðslurnar um mánaðin eru kr. 9.822, soleiðis sum upplýst í umsókn teirra. Upphæddin at liva fyri um mánaðin er sostatt munandi lægri enn tann vegleiðandi upphædd, sum Skiftirætturin ásetir.

Tað er mín meting, at Skuldarumskipanarnevndin, í staðin fyri at tvíhalda um eina skeiva avgerð, eigur at taka fyrilit fyri aktuellu støðuni hjá B, og eisini eigur at taka við í metingini framtíðarmøguleikar teirra at vinna pening. Havandi aldur teirra í huga og veruliga tiltøkupeningin er eingin ivi um, at hjúnini ikki kunna fáa til vega kr. 80.000.

Samanumtikið er støðan sostatt:

- at B og maður hennara onga ognir eiga
- at tey komandi mánað bæði fáa vanliga fólkapensjón og gjald úr Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, tilsamans umleið 14.000 kr. um mánaðin eftir skatt
- at tiltøkupeningur teirra um mánaðin at liva fyri frameftir kemur at liggja um kr. 4.178
- at tey sostatt hoyra til kjarnubólkin av fólki, sum sambært viðmerkingunum til skuldarumskipanarlógina eiga at fáa skuldarumskipan
- at tey ongan møguleika hava at uppfylla tær treytir, sum Skuldarumskipanarnevndin hevur sett, hvørki við at fáa til vega kr. 80.000 ella at veita veð í eini ogn, sum tey ikki hava ognarrættin til, svarandi til somu upphædd
- at tey ikki hava avhendað nakra ogn fyri at sleppa undan skuld. Samlaða skuldin í hesum máli er ongantíð góðtikin av klienti mínum og er áðrenn rentutilskrivingar góðar kr. 44.000 sambært uppgerð frá skattavaldinum frá 30. oktober 2007
- at skattavaldið í hesum máli beinleiðis hevur mælt til skuldarumskipan, tí „... ikki verður mett gjørligt at heinta nakað inn av tí peningi, sum hjúnini hava eftir til mat og klæðir..." skriv frá Toll- og Skattstovu Føroya, dagf. 25. mai 2006
- at børnini hjá B og manni hennara gjøgnum mong harrans ár hava útvegað teimum tak yvir høvdið
- at tað ikki er rætt av Skuldarumskipanarnevndini at nokta skuldarumskipan vísandi til, at eitt gávubræv er skrivað fyri umleið 15 árum síðni undir teimum umstøðum sum fyriliggja."

Við skrivi, dagfest 23. september 2008, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Skuldarumskipanarnevndini til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Av tí at umboðsmaðurin einki frætti aftur frá Skuldarumskipanarnevndini, boðaði hann pørtunum frá við skrivi, dagfest 21. oktober 2008, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

Við skrivi, dagfest 10. mars 2009, bað umboðsmaðurin Skuldarumskipanarnevndina vísandi til m.a. § 4 í lógini um at greiða frá heimildargrundarlagnum og siðvenjuni hjá nevndini, fyri at treyta eina avgerð um *lutvísa eftirgeving* av, at ein partur av skuldini verður

goldin í einum, ella at veð verður fingið í ogn hjá persóni, ið ikki kann roknast til húski skuldarans, og sum skuldarin ikki hevur ræði á.

Skuldarumskipanarnevndin hevur við skrivi, dagfest 24. mars 2009, sent umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> „**Viðvíkjandi klaguni frá A, adv., dagfest 22. apríl 2008 – tykkara j. nr. ...**
> Vísandi til skriv tygara dagf. 10. mars 2009, verður givin frágreiðing um heimildargrundarlag og „siðvenju" hjá Skuldarumskipanarnevndini fyri at treyta eina avgerð um lutvísa eftirgeving av, at ein partur av skuldini verður goldin í einum, ella at veð verður fingið í ogn hjá persóni, ið ikki kann roknast til húski skuldarans, og skuldarin ikki hevur ræði á.
>
> Tað er eingin „siðvenja" hjá nevndini, at veð verður fingið í ogn hjá persóni, ið ikki kann roknast til húski skuldarans, og skuldarin ikki hevur ræði á. Tað er bert í hesum eina málinum, at skuldarin hevur fingið hetta tilboð.
>
> Sambært § 4 í lógini kann skuld samb. § 2 verða heilt ella lutvíst eftirgivin ella umskipað. Í § 3 eru treytirnar fyri eftirgeving nevndar.
>
> Mett verður, at hesar heimildir, ávikavist treytirnar fyri eftirgeving í § 3 og hátturin, t.v.s. heil og lutvís eftirgeving, ella umskipan í § 4, hanga saman. Nevndin hevur mett, at í teimum málum, har umsøkjarin hevur havt frívirði í fastari ogn, kann nevndin ikki síggja burtur frá hesum.
>
> Nevndin hevur skilt orðið „skuldarumskipan" í tí týdningi at broyta/umskipa skuldina, t.d. at flyta skuldina yvir í fasta ogn, ella at úttøkur í fastari ogn verða avloystar av einum pantibrævi frá skuldara, har skuldin verður niðurskrivað í mun til eftirgevingina. Tá umsøkjari søkir um skuldarumskipan, so hevur nevndin eisini havt í huga, at skilagóðar loysnir verða funnar í hvørjum einstøkum føri.
>
> Skuldarumskipanarnevndin er greið yvir, at í § 4, 2. pkt. er ásett, at verður skuldin lutvíst eftirgivin ella umskipað, skal avtala gerast um gjaldskáa og/ella avdráttarskipan fyri tann partin av skuldini, sum ikki er eftirgivin. Hetta hevur eisini verið gjørt í fleiri førum.
>
> Nevndin hevur mett, at viðmerkingarnar til § 3 eisini skulu havast við, tá nevndin viðger mál um skuldarumskipan. Og av hesum viðmerkingum til § 3, stk. 1, nr. 1, sæst m.a., at **hyggjast skal eftir, um skuldarin og/ella húski hansara eigur ognir, sum kunnu seljast ella latast sum trygd fyri skuldini og lánum.**
>
> Tað er hendan serliga viðmerkingin, sum nevndin hevur havt í huga, tá hon hevur treytað partvísa eftirgeving av, at veð fæst í fastari ogn. Talan er í tí førinum um eina umskipan, har landskassin fær ein part av skuldini inn, hóast long tíð gongur.
>
> Í hesum sambandi verður viðmerkt, at tá skuldarin gevur veð í fastari ogn, fellur skuldin til gjaldingar, tá ognin á onkran hátt skiftir eigara. Hetta er at rokna sum ein gjaldsskái, sum skuldarin fær. Hesin gjaldsskáin er rentufríur. Skuldarin fær sostatt møguleika fyri at behalda sethúsini, so leingi sum hann livir, ella til ognin á annan hátt skiftir eigara. Við hesari loysnini kann skuldarin fáa eina tilveru, har almenna skuldin ikki tyngir dagliga raksturin.
>
> Tá umsøkjarar hava fingið tilboð um at gjalda skuldina í avdráttum yvir 5 ár, hava tey ofta eisini fingið ein møguleika fyri at gjalda skuldina í einum. Nevndin hevur tá givið skuldaranum ein avsláttur uppá uml. 20%. Til dømis kr. 100.000,00 í avdráttum uppá kr. 1.666,66 um mánaðin í 5 ár, ella kr. 80.000,00 í einum innan eina ávísa freist.
>
> Í nøkrum førum hevur skuldarin ynskt at fingið ein møguleika fyri at gjalda skuldina í einum. Hendan loysnin hevur verið játtað, tí mett hevur verið, at skuldarin við hesi loysnini verður

fríur frá almennu skuldini beinanvegin. Summir umsøkjarar hava ynskt hesa loysnina. Møguleikin fyri at fáa lán hevur eisini verið framúr góður í seinastuni, og tí hevur hesin møguleikin verið ein góð loysn fyri nakrar umsøkjarar.

Nevndin metir, at hon í bestan mun eigur at tryggja, at landskassin fær ein part av skuldini inn, um møguleiki er fyri hesum. At hetta er í tráð við andan í lógini.

**Viðvíkjandi B:**
Skuldarumskipanarnevndin hevur ikki í øðrum førum kravt, at veð verður fingið í ogn hjá persóni, ið ikki kann roknast til húski skuldarans, og sum skuldarin ikki hevur ræði á. Talan er her um eina ítøkiliga avgerð, sum er tikin við atliti til tær serligu umstøðurnar í hesum málinum.

Í hesum ítøkiliga málinum varð mett, at B leyk treytirnar fyri at fáa ein part av skuldini eftirgivna, treytað av, at hon rindaði kr. 80.000,00 kontant, ella at veð varð givið í matr.nr. ...

Viðvíkjandi veðsetingini so var hetta eitt tilboð, sum nevndin gav orsakað av, at tey mettu, at hetta kundi vera betri fyri B enn bara at krevja gjald. Nevndin helt, at tað var rímiligt, at hon hevði tann eyka møguleikan at fara til børnini, sum hon hevði givið gávuna til fyri at vita, um tey vildu veðseta partar av gávuni. Hetta tí at gávan, ið jú var hennara dispositión, var viðvirkandi til, at hon mátti rinda kr. 80.000 kontant.

Nevndin metti, at tey høvdu heimild, soleiðis sum hetta mál er farið fram. Gávan til børnini er ein partur av málinum, tí børnini hava fingið ágóðan av gávuni, meðan tað almanna má líða undir henni. Nevndin metti, at hesin møguleikin annars bara var til fyrimuns fyri umsøkjaran. Nevndin var greið yvir, at børnini hava ikki skyldu til at veðseta ognina, men nevndin metti, at umsøkjarin kundi gera eina roynd at spyrja tey. Alternativið var at gjalda kr. 80.000 kontant.



Eitt av kriteriunum hjá nevndini er eisini, hvussu skuldarin hevur háttað sær, meðan hann hevur havt skuldina. Her hevur umsøkjarin eftir nevndarinnar meting ikki háttað sær rætt, tí hon hevur givið gávu fyri at sleppa undan, at tað almenna kann fara eftir gávuni fyri skuld, sum umsøkjarin hevur, tá gávan verður givin. Hetta kann ikki góðtakast. Tað var hetta momentið í málinum, sum hevði við sær, at nevndin avgjørdi, at skuldarin kundi fáa møguleikan fyri at gjalda kr. 80.000 kontant og ikki yvir 5 ár, sum annars hevði verið eftir teimum vanligu treytunum, tá hennara fíggjarstøða er tikin sum grundarlag. Nevndin metti, at í hesum ítøkiliga málinum var heimild at brúka hesa metingina, soleiðis sum tey hava gjørt.

Nevndin helt eisini, at tað átti at verið gjørligt hjá B at fáa fígging til at gjalda kr. 80.000,00 kontant. Hetta varð grundað á, at B sjálv tann 27. juni 2006 var før fyri at innfría lánið í Húsalánsgrunninum við kr. 28.781,94 við veð í matr.nr. …, og hini bæði lánini, uppá í alt kr. 254.716,48, við veð í matr.nr. …, vórðu innfríað av Sp/f G tann 14. desember 2006. B var við hesum dispositiónum loyst frá øllum sínum lániskyldum (uppá í alt kr. 283.498,42) í matr.nr. … .

Nevndin metti samanumtikið, at talan var um eina sera rímiliga avgerð, tá atlit verður tikið til tær serligu umstøðurnar í hesum málinum."

Umboðsmaðurin helt síðani áfram við viðgerð sínari av hesum máli.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um, at Skuldarumskipanarnevndin treytaði eina avgerð um eftirgeving av mvg-skuld av, at klagarin rindaði ein part av skuldini í einum, ella at veð varð veitt í eini ávísari ogn, sum klagarin ikki átti.*

*§ 3 í løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005 um umskipan av landsskatta-, mvg- og tollskuld v.m. hjá fólki (skuldarumskipanarlógin) er soljóðandi:*

> *„**§ 3.** Skuld, ið er fevnd av § 2, kann eftir umsókn umskipast, um:*
> *1) skuldarin prógvar, at hann ikki er førur fyri og innan fyri næstu árini eingi útlit hevur fyri at kunna lúka sínar gjaldskyldur til landskassan, og*
> *2) viðurskiftini hjá skuldaranum og umstøðurnar annars tala fyri hesum.*
> *Stk. 2. Tá mett verður um, hvørt treytin í stk. 1, nr. 1) er lokin, skal dentur eisini leggjast á ognar- og inntøkuviðurskiftini hjá øllum húskinum.*
> *Stk. 3. Tá mett verður um, hvørt treytin í stk. 1, nr. 2) er lokin, skal dentur serliga leggjast á, um skuldarin einans ella fyri ein stóran part hevur skuld til tað almenna, áhugan hjá skuldaranum í at fáa skuldina eftirgivna, hvussu gomul skuldin er, hvussu skuldin er íkomin og higartil afturgoldin, umframt skuldarans viðurskifti undir viðgerðini av eftirgevingarmálinum.“*

*Tá mett verður, um skuldarin hevur møguleika at lúka sínar gjaldsskyldur sbrt. stk. 1, nr. 1 skulu atlit takast til rímiligar útreiðslur til bústað, neyðugan bil, aðrar rímiligar útreiðslur, livikostnað og uppihaldsskyldur, sbr. viðmerkingarnar til § 3, stk. 1, nr. 1 í løgtingsmáli 19/2004.*

*Sambært viðmerkingunum til § 3, stk. 1, nr. 2 skal ein heildarmeting gerast í hvørjum einstøkum føri. Í metingini skulu atlit m.a. takast til, at eldri skuldin er, tess størri er møguleikin fyri at játta skuldarumskipan, og dentur skal leggjast á, um skuldarin hevur roynt eftir bestu evnum at goldið skuldina niður. Hevur skuldarin goldið øðrum kravánarum fram um ta almennu skuldina, talar tað ímóti at veita skuldarumskipan yvirhøvur. Er skuldarin vorðin eftirløntur, eftir at skuldin er stovnað, talar hetta fyri at veita skuldarumskipan.*

*Í avgerð síni, dagfest 20. apríl 2007, metti Skuldarumskipanarnevndin klagaran at lúka krøvini í § 3, stk. 1, nr. 1 og 2 fyri at fáa skuldina umskipaða og samtykti at eftirgeva meginpartin av skuldini (lutvís*



*eftirgeving). Nevndin treytaði tó avgerðina av, at klagarin rindaði kr. 80.000 í einum, ella at veð varð fingið í ávísari ogn, sum børn hennara áttu.*

*Eg havi í míni viðgerð av klaguni lagt til grund, at skuldarin lýkur krøvini fyri at fáa skuldina umskipaða. Av hesi orsøk havi eg ikki viðgjørt spurningin um ognina, sum klagarin í 1994 gav børnum sínum, og sum er sama ogn, sum nevndin ynskti at fáa veð í. Eg havi einans viðgjørt, um heimild var fyri treytunum, sum nevndin setti.*

*Sambært § 4 í lógini kann skuld til landskassan verða eftirgivin ella umskipað heilt ella lutvíst. § 4, 1. og 2. pkt. í lógini eru soljóðandi:*

> *„**§ 4.** Skuld sambært § 2 kann vera heilt ella lutvíst eftirgivin ella umskipað. Verður skuldin lutvíst eftirgivin ella umskipað, skal avtala gerast um gjaldskáa og/ella avdráttarskipan fyri tann partin av skuldini, sum ikki er eftirgivin. …“*

*Í viðmerkingunum til bæði § 3 og § 4 er útgreinað, hvørji atlit skulu takast í metingini av, um skuldin skal eftirgevast heilt ella lutvíst.*

> *„(§ 3) ... Verður skuldin lutvíst eftirgivin, er neyðugt at syrgja fyri, at skuldarin hevur ein <u>veruligan møguleika</u> fyri at <u>afturgjalda</u> restskuldina. ...“*

> *„(§ 4)... Hvørt eftirgevingin skal vera lutvís, veldst um eina <u>meting av fíggjarligu umstøðunum</u> hjá skuldaranum. Verður veitt lutvís eftirgeving, verður <u>skuldin niðurskrivað til eina upphædd, sum skuldarin hevur verulig útlit fyri at gjalda aftur</u>. Skuldin verður niðurskrivað til eina upphædd, sum <u>skuldarin verður mettur at vera førur fyri at gjalda aftur eftir einum rímiligum áramáli</u>, tá havd verða í huga aldur, familju-, útbúgvingar- og yrkisviðurskifti. Lækkingarposentið verður ásett eftir einari <u>forsøgn um tær væntaðu inntøkurnar</u> hjá skuldaranum í hesum tíðarskeiði og við atliti at tí, at skuldarin og húski hansara koma at hava ein sámuligan livifót. ...“ (Viðm.: Mínar undirstrikingar)*

*Nevndin treytaði sum nevnt avgerðina av, at klagarin rindaði part av skuldini í einum. Um hesa treyt er at siga, at tað er beinleiðis ásett í § 4, stk. 1, 2. pkt., at avtala skal gerast um avdráttarskipan fyri tann partin av skuldini, sum ikki verður eftirgivin, og í viðmerkingunum verður sagt, at skuldin skal niðurskrivast til eina upphædd, sum skuldarin er førur fyri at gjalda aftur eftir einum rímiligum áramáli. Lógin heimilar tískil ikki nevndini at treyta avgerðina av, at ein partur av skuldini verður rindaður í einum.*

*Nevndin hevur greitt frá, at gávan, sum klagarin gav børnunum í 1994, hevði týdning fyri treytina um at klagarin skuldi rinda eina upphædd uppá júst kr. 80.000. Sum nevnt frammafyri metti nevndin klagaran lúka krøvini í § 3, og tá eftirgevingarhátturin sbrt. § 4 (heilt ella lutvíst) valdast eina meting av verandi og væntaðu fíggjarligu viðurskiftunum hjá klagaranum, er tað eftir mínari fatan ósakligt at lata hesa gávu ávirka metingina eftir § 4.*

*Nevndin metti klagaran vera føran fyri at rinda ein part av skuldini av teirri orsøk, at trý lán vóru niðurgoldin undir viðgerðini av málinum. Nevndin og klagarin eru ósamd um, í hvønn mun tað var klagarin ella børn hennara, sum høvdu røkt lánsskyldurnar. Út frá teimum upplýsingum, sum fyriliggja í málinum, havi eg ikki møguleika at taka støðu til ymisku uppáhaldini. Tað er tó greitt, at klagarin í umsóknini upplýsti nevndini at vera skuldari av lánunum, og eg havi tí ongar viðmerkingar til, at nevndin tók við í metingina, at klagarin ikki longur hevur hesa skuld.*

*Tað er ikki beinleiðis nevnt í viðmerkingunum til § 4, hvørjar útreiðslur skulu takast við, tá mett verður um fíggjarligu umstøður skuldarans, men torført er at gera eina slíka meting uttan at taka við rímiligar útreiðslur til bústað, eins og gerast skal eftir § 3, stk. 1, nr. 1. Eg dugi ikki at síggja, at nevndin hevur tikið hetta við, og hetta er eftir míni meting ikki nøktandi.*

*Hvat viðvíkur treytini um veð í ogn hjá børnum klagarans, hevur Skuldarumskipanarnevndin greitt mær frá, at nevndin ikki áður hevur treytað avgerðir av veð í ognum, sum skuldari ella húski hansara ikki eiga, men at nevndin metti seg hava neyðugu heimildina í umstøðunum í málinum. Óansæð hvussu umstøðurnar eru í málinum, eigur klagarin ikki umrøddu ognina og kann ikki taka avgerð um at veðseta hana. Tað er eftir mínari fatan ósakligt at treyta avgerðina av viðurskiftum, sum klagarin onga ávirkan hevur á.*

*Vísandi til at nevndin metti klagaran lúka krøvini í § 3, stk. 1, nr. 1 og 2 í lógini fyri at fáa skuldina umskipaða og viðmerkingar mínar um treytirnar, sum nevndin setti, fari eg at mæla nevndini til at taka málið uppaftur og viðgera um skuldin skal eftirgevast heilt ella lutvíst.*

*Eg fari samstundis at biðja nevndina lata meg frætta, hvat víðari hendir í hesum málinum.*

Við skrivi, dagfest 9. juli 2009, boðaði Skuldarumskipanarnevndin umboðsmanninum frá, at nevndin fór at taka málið uppaftur til viðgerðar.

# 28 Starvsfólkamál v.m. og arbeiðsmarknaðarmál

## 28.1 Setan av stjóra á Búnaðarstovuni

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um setan av stjóra á Búnaðarstovuni. Klagarin, sum ikki varð boðin til setanarsamrøðu, ivaðist í, um umsókn hansara hevði fingið eina saklig viðgerð. Umboðsmaðurin staðfesti, at útveljingin av umsøkjarunum til setanarsamrøður bygdi á saklig og viðkomandi atlit, og at grundarlag var ikki fyri at finnast at Fiskimálaráðnum fyri ikki at bjóða klagaranum til setanarsamrøðu. Tað var tó ikki nøktandi, at eingin frágreiðing var skrivað frá fundi í setanarbólkinum við upplýsingum um, hvat varð lagt til grund, tá umsøkjararnir vórðu valdir út til setanarsamrøður. Umboðsmaðurin helt ikki grundgevingina mótvegis klagaranum lúka krøvini í § 23, stk. 1 í fyrisitingarlógini. Sambært ásetingini skal ein avgerð, sum hvílir á eini fyrisitingarligari meting, tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri metingina. Sambært hesum átti Fiskimálaráðið at havt boðað klagaranum frá, at starvsroyndir og aðrar royndir innan landbúnaðarøkið vóru avgerandi fyri starvssetanina. Umboðsmaðurin hevði onga orsøk at halda, at Fiskimálaráðið ikki hevði givið málinum eina veruliga og sakliga viðgerð. **(J. nr. 200800105)***

## Klagan

Við skrivi, dagfest 3. desember 2008, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> „**Kæra viðvíkjandi setan av stjóra fyri Búnaðarstovuna undir Fiskimálaráðnum (mál Fiskimálaráðsins nr. …**)
>
> Undirritaði heitir við hesum á Løgtingsins Umboðsmann um at kanna tilgondina í sambandi við setan av nýggjum stjóra fyri Búnaðarstovuna undir Fiskimálaráðnum.
>
> Orsøkin til áheitan mína er, at eg ikki kenni meg sannførdan um, at avgerðin, um hvør skuldi setast í starvið, er sakliga grundað.



Gongdin í málinum:

- Vísandi til lýsing í Vikublaðnum 04.11.2008 søkti eg við skrivi dagfest 07.11.2008, starvið sum stjóri fyri Búnaðarstovuna.
- Fiskimálaráðið sendi mær váttan fyri móttøku av umsókn míni í skrivi dagfest 10.11.2008. Í hesum skrivinum stendur m.a.: „*Tygum frætta aftur, tá umsóknirnar verða viðgjørdar.*“
- Í útvarpstíðindunum hjá Kringvarpi Føroya á middegi 03.12.2008 frættist, at Fiskimálaráðið hevði sett stjóra fyri Búnaðarstovuna.
- Við postinum seinnapartin sama dag fekk eg skriv frá Fiskimálaráðnum, dagfest 02.12.2008, har sagt verður frá, at Fiskimálaráðið hevur sett annan umsøkjara í starvið. Sagt verður í skrivinum, at grundarlagið fyri avgerðini er, at tann setti hevur: „*…góð leiðsluevni, viðkomandi starvsroyndir og góð evni at samskifta skrivliga og munnliga við myndugleikar, starvsfólk og viðskiftafólk.*“ Víðari verður sagt, at dentur er lagdur á evnini hjá umsøkjaranum „*…at gera meginsetningar og greina raðfestingar fyri stovnin og virkisøkið.*“
- Í telefonsamrøðu við fíggjar- og starvsfólkaleiðaran í Fiskimálaráðnum 03.12.2008 royndi eg at fáa eina nærri greining av grundgevingini fyri starvsetanini. Talan var um eina góða og høviska samrøðu, men fíggjar- og starvsfólkaleiðarin fekk ikki lagt nakað munagott afturat teirri grundgeving, sum stendur í skrivinum. Fíggjar- og starvsfólkaleiðarin skeyt upp, at eg tosaði við aðalstjóran í Fiskimálaráðnum, um eg hevði fleiri spurningar.
- Eg royndi at fáa orð á aðalstjóran í Fiskimálaráðnum beint sum eg hevði tosað við fíggjar- og starvsfólkaleiðaran, men fekk at vita, at aðalstjórin ikki verður aftur at hitta fyrrenn 04.12.2008.
- Við tað, at eg illa dugi at síggja, hvat aðalstjórin kann hava at leggja afturat tí, sum fíggjar- og starvsfólkaleiðarin longu hevði sagt mær, avgjørdi eg beinanvegin at kæra málið til tygara.

Endamálið við kæruni

Orsøkin til kæru mína er, sum sagt, at eg ikki kenni meg sannførdan um, at tey atlit, sum hava havt við sær, at eg ikki var innkallaður til samrøðu um starvið, hava verið saklig. Verður støðið tikið í skrivligu grundgevingini fyri avgerðini um at seta annan umsøkjara í starv, má komast til hesa niðurstøðu:

- setti umsøkjarin hevur betri leiðsluevni enn eg,
- setti umsøkjarin hevur meira viðkomandi starvsroyndir enn eg,
- setti umsøkjarin hevur betri evni at samskifta skrivliga og munnliga við myndugleikar, starvsfólk og viðskiftafólk enn eg,
- setti umsøkjarin hevur betri evni at gera meginsetningar og at greina raðfestingar fyri stovnin og virkisøkið enn eg.

Tað kann væl hugsast, at setti umsøkjarin hevur allar hesar dygdir framum meg. Men tað øvugta kann eisini hugsast. Eg dugi ikki at síggja, hvussu Fiskimálaráðið yvirhøvur kann samanbera nevndu dygdir hjá mær og setta umsøkjaranum, tá Fiskimálaráðið ikki so frægt sum hevur innkallað meg til eina samrøðu. Hetta merkir í roynd og veru, at Fiskimálaráðið hevur mett:

- at leiðsluroyndir frá almennum stovni við ábyrgd fyri umleið 250 starvsfólkum og eini játtan uppá góðar 100 mió kr. ikki eru nóg viðkomandi til at umsøkjarin skal innkallast til samrøðu,
- at hægsta fyrisitingarliga útbúgving frá lærdum háskúla ikki er nóg viðkomandi til at umsøkjarin skal innkallast til samrøðu,
- at drúgvar royndir í at undirvísa øðrum leiðarum í leiðslu ikki eru nóg viðkomandi til at umsøkjarin skal innkallast til samrøðu.

Samanumtikið havi eg eina kenslu av, at umsókn mín av einihvørjari ósakligari grund er sáldað frá í setanarviðgerðini, og at umsóknin tískil ikki hevur fingið ta sakligu og óheftu viðgerð sum fyrisitingarligu meginreglurnar fyriskrivað. Eg havi onga orsøk til at halda, at setti umsøkjarin ikki hevur neyðugar førleikar til at røkja starvið, men eg havi hinvegin heldur onga orsøk til at halda, at eg ikki eri fult so væl skikkaður til starvið. Um so er, átti eg at havt fingið starvið.

Eg veit fullvæl, at tá ein starvsetan er framd vendist illa aftur. Tí eru ørindi míni heldur ikki at fáa setta umsøkjaran frá aftur, um tað skuldi víst seg, at annar umsøkjari átti at verið settur í starvið. Men tað hevur alstóran týdning fyri meg at vita, um eg, sum umsøkjari til eitt alment starv, í hesum føri stjórastarvið á Búnaðarstovuni, fái ta rættvísu og sakligu viðferð, sum eg eigi rætt til, sum borgari í einum rættarsamfelag.

Við vón um, at umboðsmaðurin tekur hetta málið upp."

## Málsgongd

Lýsingin eftir stjóra til Búnaðarstovuna var soljóðandi:

> **„Stjóri til Búnaðarstovuna**
> Fiskimálaráðið hevur gjørt av at leggja virkisøkini hjá Búnaðarstovuni og Royndarstøðini saman í ein stovn. Við hesum verður søkt eftir stjóra til nýggja stovnin, sum fevnir um báðar eindirnar. Navnið á samanløgdu stovnunum verður Búnaðarstovan.
>
> Stjórin fer at hava leiðsluna og ábyrgdina av Búnaðarstovuni. Í breiðari høpi fær stjórin týðandi leiklut á málsøkinum landbúnaður, ið er skipað undir Fiskimálaráðnum, og skal hann virka fyri, at økið verður ment og væl fyrisitið.
>
> **Høvuðsuppgávur**
> Høvuðsuppgávur stjórans eru at leiða og samskipa arbeiðið á Búnaðarstovuni, herímillum:
> - At umsita játtanir mótvegis yvirskipaða myndugleikanum á tryggan hátt
> - At gera meginsetningar og greina raðfestingar fyri stovnin og virkisøkið

- At veita Fiskimálaráðnum ráðgeving í øllum málum á landbúnaðarøkinum
- Í samráði við Fiskimálaráðið at evna til uppskot um lógir og kunngerðir á landbúnaðarøkinum
- At skipa mannagongdir á stovninum til at tryggja eina góða borgara-tænastu innan fyrisiting, ráðgeving, royndir, kunning o.a.

**Almenn førleikakrøv**
- Góð leiðsluevni
- Viðkomandi starvsroyndir
- Útbúgving frá lærdum háskúla ella útbúgving og royndir, ið kunna javnmetast við hetta
- Góð evni at samskifta skrivliga og munnliga við myndugleikar, starvsfólk og viðskiftafólk.
- Góð evni at samstarva við yvirskipaða myndugleikan, eitt nú í lógarsmíði og fyrireiking av tilfari, sum myndugleikanum tørvar

**Setanarviðurskifti**
Starvið er lønt ájavnt 37. lønarflokk sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv.

Starvsheitið er stjóri, við beinleiðis tilvísing til aðalstjóran í Fiskimálaráðnum. Starvsøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin verður á Búnaðarstovuni í Kollafirði.

**Umsóknir**
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og við møguligum viðmælum skulu sendast til:

Fiskimálaráðið
Rógvi Reinert, aðalstjóri
Postboks 347
FO-100 Tórshavn



Umsóknarfreistin er hósdagin 20. november 2008. Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til F, aðalstjóra í Fiskimálaráðnum, telefon 35 30 30.

*Í framtíðini verða Búnaðarstovan og Royndarstøðin skipaðar í ein stovn. Stovnurin fer at húsast Frammi í Dal í Kollafirði. Í dag starvast um 10 fólk á báðum stovnum. Samlaða fíggingin til rakstur er um 7 mió. kr. um árið. Uppgávur stovnsins eru millum annað eftirlit við festum, avgreiðslumál, fyrisiting av stuðulsjáttanum og at standa fyri gransking, royndum og kanningum, sum skulu menna landbúnaðarøkið. Sí heimasíðurnar www.bst.fo og www.rst.fo.*“

Klagarin søkti starvið við umsókn, dagfest 7. november 2008. 7 umsøkjarar vóru til starvið, og 3 teirra vóru bodnir til setanarsamrøðu. Millum skjølini er eitt yvirlit yvir umsøkjararnar við upplýsingum um útbúgvingar, størv og royndir. Niðanfyri eru endurgivnar upplýsingar úr yvirlitinum um klagaran og teir 3 umsøkjararnar, sum vóru til setanarsamrøðu.

…
„*Yvirlitið verður ikki endurgivið her.*“

Setanarsamrøður vórðu hildnar 27. november 2009 við B, D og E. Limirnir í setanarbólkinum hava í hesum sambandi skrivliga mett um umsøkjararnar og givið teimum stig í mun til førleikakrøv og uppgávur stovnsins, sum eru nevnd í starvslýsingini, eins og mett er um persónligar eginleikar.

Dagin eftir, 28. november 2009, lat setanarbólkurin landsstýrismanninum soljóðandi innstilling:

„**Innstilling av stjóra til Búnaðarstovuna**
Lýst var eftir stjóra til Búnaðarstovuna í bløðum, á heimasíðu Fiskimálaráðsins og á portal.fo. Tá freistin at søkja var úti 20. november 2008 vóru 7 umsóknir komnar til starvið.

Aðalstjórin í Fiskimálaráðnum setti eina setanarnevnd at viðgera umsóknirnar. Í setanarnevndini eru:

- F, aðalstjóri
- G, Búnaðarstovan (hon var í samband við H, Royndarstøðin, í setanartilgongdini)
- I, Fiskimálaráðið

Setanarnevndin var kunnað um umsóknirnar 21. november 2008. Hevði fyrireikandi fund tann 25. november 2008, har nevndin samdist um at taka tríggjar umsøkjarar til setanarsamrøðu tann 27. november 2008. Hesir vóru:

- D
- B
- E

Grundað á umsóknir og setanarsamrøður kom setanarnevndin fram til niðanfyri standandi niðurstøður.

D:
Viðkomandi hevur góð leiðsluevni og vísti góð evni at samskifta og samstarva. Hann hevði starvsroyndir, sum í ávísan mun kundu setast í samband við starvið, eitt nú innan lógarsmíð og fyrireiking av tilfari til myndugleikan.

B:
Viðkomandi hevði útbúgving frá lærdum háskúla innan landbúnað eins og royndir, ið eru viðkomandi fyri starvið. Mett var, at viðkomandi hevði góð evni at samskifta við myndugleikar eins og evni at samstarva við myndugleikar um at evna til fyrireikandi tilfar til lógarsmíð v.m. Umsøkjarin vísti á fleiri meginsetningar og raðfestingar fyri virkisøki.

E:
Viðkomandi hevur sera viðkomandi og drúgvar starvsroyndir innan fleiri tættir á landbúnaðarøkinum. Starvsroyndirnar staðfesta, at umsøkjarin evnar at arbeiða sjálvstøðugt, men sýndi eisini evnir at samstarva og evna til tilfar, sum myndugleikin hevur tørv á. Hann hevur góð evni at samskifta við starvsfólk, viðskiftafólk og myndugleika. Umsøkjarin vísti góð evnir at greina meginsetningar og raðfestingar fyri stovnin og virkisøki.

Út frá omanfyristandandi ger setanarnevndin innstilling til starvið sum stjóri fyri Búnaðarstovuna í hesi røð:

1. E
2. B
3. D“

Gjørt varð av at seta E í starvið, og Fiskimálaráðið hevur 2. desember 2008 við telduposti og vanligum brævi sent klagaranum soljóðandi svar uppá umsóknina:

> „Víst verður til umsókn tygara til starvið sum stjóri á Búnaðarstovuni dagfest 16. november 2008.
>
> Fiskimálaráðið skal við hesum boða frá, at vit hava sett annan umsøkjara í starvið sum stjóri fyri *Búnaðarstovuna.*
>
> Sum grundarlag fyri avgerðini, um hvør setast skuldi, hava vit serliga lagt dent á góð leiðsluevni, viðkomandi starvsroyndir og góð evni at samskifta skrivliga og munnliga við myndugleikar, starvsfólk og viðskiftafólk. Harumframt var dentur lagdur á evnini at gera meginsetningar og greina raðfestingar fyri stovnin og virkisøkið.
>
> Vit takka fyri tygara áhuga í starvinum.“

## Partshoyring

Áðrenn umboðsmaðurin tók støðu til at taka málið upp til viðgerðar, varð klagan við skrivi, dagfest 8. desember 2008, send Fiskimálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur.

Samstundis varð Fiskimálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 18. desember 2008 sendi Fiskimálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> „**Viðvíkjandi klagu frá A**
> Víst verður til skriv tykkara, dagfest 8. desember 2008, viðvíkjandi kæru frá A um setan av stjóra til Búnaðarstovuna, har tit biðja um okkara frágreiðing um viðgerðina av hesum máli, umframt øll skjøl viðvíkjandi málinum.
>
> Niðanfyri er frágreiðing Fiskimálaráðsins um tilgongdina í málinum í sambandi við setan av stjóra fyri Búnaðarstovuna.
>
> - Seint í oktober 2008 verður lýst eftir stjóra til Búnaðarstovuna.
> - 20. november 2008 var umsóknarfreistin úti.
> - 20. november 2008 setir aðalstjórin í Fiskimálaráðnum ein setanarbólk við fýra umboðum. Aðalstjórin og fíggjar-/starvsfólkaleiðarin umboða yvirskipaða myndugleikan. Starvsfólk og leiðsla á Búnaðarstovuni/ Royndarstøðini samdust um tvey umboð (eitt teirra luttók ikki beinleiðis á fundi, men hevði telefonsamband við umboð í bólkinum í setanartilgongdini).
> - 21. november 2008 kunnar aðalstjórin setanarbólkin um umsøkjararnar.
> - 25. november 2008 hevur setanarbólkurin fund, og semja er um, hvør skal kallast inn til samrøðu.
> - 27. november 2008 eru setanarsamrøður við tríggjar av sjey umsøkjarum.
> - 28. november 2008 ger setanarbólkurin eina innstilling, sum full semja er um, sum verður handað landsstýrismanninum.
> - desember 2008 tekur landsstýrismaðurin støðu at fylgja innstillingini frá setanarbólkinum.
> - desember 2008 verða umsøkjarar kunnaðir.



> **Hvør skal kallast inn til samrøðu**
> Sum yvirlitið vísir, so er avgerðin um innkalling tikin eftir, at setanarbólkurin er kunnaður – havt umhugsunartíð – eins og skipaður fundur hevur verið um nevndu innkalling.
>
> Fyrireikingin til avgerðina var grundað á eina samanbering av umsóknum og hjáløgdum upplýsingum øðrumegin og tekstin í lýsingini hinumegin. Avgerðin um innkalling til samrøðu var tikin við støði í, hvussu gott samsvar var millum upplýsingarnar í umsóknini og tekstin í lýsingini.
>
> Við tí fyri eyga at lýsa málið viðvíkjandi nevndu klagu, verður partur av tekstinum í lýsingini útgreinaður. Hann verður settur í samband við tað grundarlag, sum avgerðin, um ikki at kalla kæraran inn til samrøðu, byggir á.
>
> Teksturin í lýsingini kann býtast upp í tvey:
> 1. Kjarnuøki, sum Fiskimálaráðið metir viðkomandi fyri stovnin og starvið.
> 2. Formlig førleikakrøv, ið kunnu setast í samband við kjarnuøkini.
>
> Nøkur kjarnuøki
> Í innleiðsluni til lýsingina stendur, at stjórin í breiðari høpi fær týðandi leiklut á málsøkjabýtinum *landbúnaður*, og hann skal virka fyri, at økið verður ment og væl fyrisitið.
>
> Um uppgávur stovnsins verður sagt, at tær millum annað eru eftirlit við festum, avgreiðslumál, fyrisiting av stuðulsjáttanum og at standa fyri gransking, royndum og kanningum, sum skulu menna landbúnaðarøkið.
>
> Eftir innleiðsluna „høvuðsuppgávur stjórans“ stendur millum annað, at stjórin skal gera meginsetningar fyri stovnin og virkisøkið (landbúnaðarøkið er virkisøkið, egin viðmerking).
>
> Eisini verður nevnt, at uppgávur stjórans eru millum annað at

veita Fiskimálaráðnum ráðgeving í øllum landbúnaðarmálum, eins og at hann skal evna til lógir og kunngerðir á landbúnaðarøkinum.

Formligu førleikakrøvini
Fyrri spurningur kærarans er, at hann ikki kennir seg sannførdan um, at avgerðin, um hvør skuldi setast í starvið, er sakliga grundað.

Upplýsast kann, at setanarbólkurin var samdur um innstillingina, og at umsóknin hjá tí, sum fekk starvið, staðfesti, at:

- *Umsøkjarin hevur sera viðkomandi og drúgvar starvsroyndir innan fleiri tættir á landbúnaðarøkinum. Starvsroyndirnar staðfesta, at umsøkjarin evnar at arbeiða sjálvstøðugt, men hevur eisini evnir at samstarva, eins og hann hevur royndir at leiða arbeiði, ið eru partar av landbúnaðarøkinum. Umsøkjarin hevði eisini royndir at evna til tilfar, sum myndugleikin hevur tørv á, eins og tilfar, ið kann setast í samband við virkisøkini hjá Búnaðarstovuni. Viðkomandi starvsroyndir hjá umsøkjaranum, bæði á leiðslustigi og í sjálvstøðugum arbeiði, eru sera drúgvar, tilsamans væl yvir 20 ár. Drúgvu royndirnar, samantvinnað við útbúgving umsøkjarans, kunnu javnmetast við hægri útbúgving.*

Sum áður upplýst vórðu tríggir umsøkjarar kallaðir inn til samrøðu. Teir, sum vóru kallaðir inn, men ikki fingu starvið, høvdu starvsroyndir og/ella útbúgving, ið kundu setast í samband við lýsingina. Tó var samsvarið – lýsing mótvegis upplýsingum í umsókn – ikki so fullfíggjað hjá hesum, sum hjá honum, ið fekk starvið.

Seinni spurningur kærarans tekur støði úr egnari umsókn. Kærarin kennir seg ikki sannførdan um, at avgerðin um ikki at taka hann inn til samrøðu var saklig.



Í hesum sambandi er viðmerking Fiskimálaráðsins, at setanarbólkurin ikki metti upplýsingarnar um formligu krøvini í umsóknini vera í samsvari við nevndu kjarnuøki, landbúnaðarøki, (sí omanfyri).

Grundað á orðingarnar *viðkomandi starvsroyndir* og setningin *royndir, ið kunnu javnmetast við hægri útbúgving*, metti bólkurin ikki, at talan var um nóg greitt samsvar.

Í umsóknini vísir kærarin ikki á viðkomandi starvsroyndir og royndir annars, ið beinleiðis kunnu setast í samband við nevndu kjarnuøki. Hvørki frá útbúgving, skeiðs- og verkætlanum, yrkisleið ella lívsleið annars.

Setanarbólkurin metti harvið, at royndirnar ikki eru nóg viðkomandi, *samanborið* við royndirnar hjá teimum, sum bólkurin valdi at kalla inn til samrøðu.

Sagt skal vera frá, at kærarin í síni umsókn hevði upplýst sína teldupostadressu, og fekk hann tískil, um teldupost, tann 2. des. 2008 kl. 12.06, sendandi svar til umsókn sína við fráboðan um, at svarið eisini varð sent sum vanligt bræv. Brævið fór út sama dag.

Dagin eftir, tann 3. desember 2008 kl. 11, almannakunngjørdi Fiskimálaráðið á heimasíðuni, hvør ið settur var í stjórastarvið.

Hjálagt verður mál nr. 200800653 latið Løgtingsins Umboðsmanni til láns."

Við skrivi, dagfest 13. januar 2009, vórðu viðmerkingarnar hjá Fiskimálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við telduposti 14. januar 2009 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„Vísandi til skriv tykkara, dagfest 13. januar 2009, skal eg við hesum siga frá, at eg, eftir at hava lisið hoyringssvarið frá Fiskimálaráðnum, enn ikki kenni meg sannførdan um, at avgerðin um at sálda umsókn mína frá longu í fyrsta umfari av setanartilgongdini, var saklig og óvildug.

Ella sagt á ein annan hátt: Eg havi ein sterkan varhuga av, ikki minst við almennu úttalilsunum frá setta umsøkjaranum í huga (E lat skilja í samrøðu við útvarpið, beint sum hann var settur, at hann var biðin um at søkja starvið) at avgerðin um at seta E í starvið sum stjóri fyri Búnaðarstovnuni var tikin longu áðrenn setanartilgongdin byrjaði. Tað er henda varhuga sum eg vil hava royndan.

Vónandi kann ein kanning av málinum vísa, at varhugi mín er ógrundaður. Sum nevnt síggi eg tó tíverri einki í hoyringssvarinum frá Fiskimálaráðnum, sum bendir á at so er.

Eg havi ikki aðrar viðmerkingar til hoyringssvarið."

Við skrivi, dagfest 15. januar 2009, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Fiskimálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 28. januar 2009 sendi Fiskimálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„**Viðvíkjandi klaguni frá A**
Víst verður til skriv tykkara, dagfest 15. januar 2009, har tit biðja um okkara ummæli til viðmerkingarnar hjá klagaranum.

Fiskimálaráðið hevur hesa viðmerking, ið kann býtast í tvey:

<u>Í fyrsta lagi:</u> Kærarin ger niðurstøðu um, at hann ikki kennir seg tryggan um, at setanartilgongdin var saklig og óvildug. Tó vísir hann ikki til eina einastu orðing í frágreiðing Fiskimálaráðsins, ið kann byggja undir, at hann hevur rætt. Tað merkir, at hann kann ikki vísa á nakað dømi í nevndu frágreiðing, ið staðfestir, at teir, ið vórðu kallaðir inn til samrøðu, ikki vóru teir, sum umboðaðu tær umsóknirnar, ið vóru í størsta samsvari við tekst og krøv í lýsingini.

Fiskimálaráðið sigur í niðurstøðu síni:
„Grundað á orðingarnar <u>viðkomandi starvsrroyndir</u> og setningin <u>royndir v.m.</u> metti setanarbólkurin ikki, at talan var um nóg greitt samsvar millum lýsing og umsókn hjá kærara, samanborið við teir, ið vóru kallaðir inn til samrøðu."

Tað var ikki mett, at kærarin kundi vísa á viðkomandi starvsroyndir og royndir annars, í eins stóran mun, sum teir, ið vóru kallaðir inn til samrøðu kundu. (sí annars frágreiðing okkara frá 17. desember 2009).

<u>Í øðrum lagi:</u> Sum sagt, so grundgevur kærarin ikki fyri niðurstøðuni í telduposti sínum frá 14. januar 2009. Tó leggur hann nú eitt nýtt sjónarmið í málið, ið ikki var partur av upprunakæruni. Kærarin sigur í seinna umfari, at hann hevur varhuga av, at avgerðin um at seta nýggja stjóran í starv á Búnaðarstovuni var tikin, áðrenn setanartilgongdin byrjaði, og at setti stjóri var biðin um at søkja starvið.

Viðmerking okkara er, at vit als ikki skilja hesa kæru, og vit vísa henni avgjørt staðiliga aftur. Ongin, ið hevur luttikið í setanartilgongdini (setanarbólkur ella fólk í Fiskmálaráðnum) hevur vent sær til setta stjóran við umbøn um, at hann skuldi søkja, og ei heldur við boðum um, at nøkur avgerð er tikin, áðrenn setanartilgongdin byrjaði.

<u>Niðurstøða okkara er greið:</u> Setanarbólkurin metti, at teir, ið vórðu kallaðir inn til samrøðu, umboðaðu tær umsóknir, ið best vóru í samsvari við tekst og krøv í lýsingini. Ongi onnur viðurskifti hava ávirkað avgerðina um at kalla inn til setanarsamrøðu."

Tann 30. januar 2009 vórðu viðmerkingarnar hjá Fiskimálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 2. februar 2009, sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> **„Vísandi til tykkara skriv j.nr. 200800105/13**
> Eg havi hesar viðmerkingar til skrivið frá Fiskimálaráðnum dagfest 28.01.2009:
>
> Í fyrsta lagi:
> Fiskimálaráðið skrivar m.a.:
> *„Kærarin [...] vísir... ikki til eina tað einastu orðing í frágreiðing Fiskimálaráðsins, ið kann byggja undir, at hann hevur rætt. Tað merkir, at hann kann ikki vísa á nakað dømi í nevndu frágreiðing, ið staðfestir, at teir, ið vórðu kallaðir inn til samrøðu, ikki vóru teir, sum umboðaðu tær umsóknirnar, ið vóru í størsta samsvari við tekst og krøv í lýsingini."*
>
> Hetta brotið sýnir heilt týðuliga, at Fiskimálaráðið vil hava øvugta próvbyrðu at galda í hesum máli.
>
> Kjarnin í málinum er, at eg ikki havi møguleika til at samanbera umsóknirnar og tískil heldur ikki havi møguleika til sjálvur at kanna, hvørt málið er rætt handfarið ella ikki. Tí havi eg kært tað til Løgtingsins umboðsmann, sum hevur møguleika til at síggja øll viðkomandi skjøl.
>
> Annars setti eg fram eina røð av ítøkiligum spurningum í upprunaligu kæru míni. Hóast Fiskimálaráðið nú í tveimum umførum hevur gjørt viðmerkingar til kæru mína hevur ráðið ikki svara einum einasta av nevndu spurningum.
>
> Í øðrum lagi:
> Stutt eftir at hann var settur í stjórastarvið á Búnaðarsstovuni segði E í samrøðu við Útvarp Føroya, at hann var biðin um at søkja starvið. Hann segði tó ikki hvør tað var, sum hevði biðið hann søkja. Eg haldi tó at úttalilsi er áhugavert í sambandi við hetta málið, og at tað er týðandi at fáa staðfest, at tað ikki vóru umboð fyri setanarmyndugleikan, sum høvdu biðið hann um at søkja.
>
> Orsøkin til at hetta ikki var við í upprunaligu kæruni er, at kæran varð send umboðsmanninum áðrenn orðini fullu í útvarpinum."

Við skrivi, dagfest 3. februar 2009, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Fiskimálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 16. februar 2009 sendi Fiskimálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> **„Viðvíkjandi klagu frá A og viðmerkingar hansara, dagfestar 02.02.2009**
> Sum kunnugt vóru 7 umsøkjarar til starvið. Av hesum mettu vit 3 at vera mest áhugaverdar, tí teir uppfyltu best krøvini í lýsingini, her uppií kravið um yrkisroyndir á landbúnaðarfakliga økinum. At ein velur at taka nakrar burtur úr rúgvuni av umsøkjarum til eina samrøðu er púra vanligt, og tey fyrilit Fiskimálaráðið legði dent á, tá avgjørt var hvør skuldi til samrøðu eru saklig. Minnast skal á, at talan er um ein sera lítlan stovn, har stjórin í stóran mun persónliga kemur at avgreiða mál, og tí er tað avgjørt ein fyrimunur, at stjórin frá fyrsta degi hevur eitt ávíst búnaðarfakligt innlit bæði innan umsiting og royndir.
>
> Fiskimálaráðið má tó ásanna, at í tí noktandi svarinum, ið varð sent kæraranum 2. desember 2008, kann ein fáa ta fatan, at Fiskimálaráðið hevur samanborið hansara persónligu eginleikar við eginleikarnar hjá tí, ið settur varð. Hetta er ikki so, og átti noktandi svarið at greitt betur frá setanartilgongdini, her uppií hvussu valt var út til samrøðu.

Ein setanartilgongd er nú einaferð soleiðis, at bara tey, ið verða kallað inn til samrøðu, verða mett nærri innan persónligar eginleikar/evnir. Sostatt ber ikki til hjá Fiskimálaráðnum at siga nakað sum helst um leiðsluevnir, samskiftisevnir og aðrar persónligar eginleikar hjá kæraranum, tí kærarin varð ikki valdur út til samrøðu, vegna at aðrir umsøkjarar vóru mettir betri at uppfylla krøvini í lýsingini, tí teir høvdu starvsroyndir/útbúgving á landbúnaðarfakliga økinum.

Viðvíkjandi samrøðu við setta stjóran í Útvarpinum vilja vit endurtaka, at onki umboð fyri setanarmyndugleikan hevur heitt á setta stjóran um at søkja starvið. Um onkur annar kann hava biðið hann søkt, er fyri Fiskimálaráðið ein óviðkomandi spurningur.

Fiskimálaráðið metir seg hava latið Umboðsmanninum øll skjøl sum vísa, at alt er farið fram sakligt og sum greitt frá omanfyri. Men um tað framvegis er eitthvørt ivamál, rokna vit við at frætta aftur.“

Tann 17. februar 2009 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um viðgerðina hjá Fiskimálaráðnum av málinum um setan av stjóra á Búnaðarstovuni. Klagarin, sum var ein av umsøkjarunum til starvið, men sum ikki varð boðin til setanarsamrøðu, ivast í, um umsókn hansara fekk eina sakliga viðgerð.*

*Tá ið ein almennur myndugleiki setir fólk í starv, hevur myndugleikin skyldu til at seta tann, sum úr einum heildarsjónarmiði er best egnaður til tað umrødda starvið. Sambært starvslýsingini vóru almennu førleikakrøvini m.a. góð leiðsluevni, viðkomandi starvsroyndir og útbúgving frá lærdum háskúla ella útbúgving og royndir, ið kundu javnmetast við hetta.*



*Tríggir umsøkjarar vórðu bodnir til setanarsamrøður. Sambært upplýsingunum um útbúgving og royndir hjá hesum umsøkjarunum og klagaranum hevur setanarbólkurin lagt dent á útbúgving, starvsroyndir ella aðrar royndir, ið kundu setast í samband við landbúnaðarøkið. Hetta framgongur eisini av tilmælinum frá setanarbólkinum til landsstýrismannin, dagfest 28. november 2008. Tað sær sostatt út til, at klagarin, sum hevur útbúgving frá lærdum háskúla og leiðsluroyndir, ikki varð boðin til setanarsamrøðu vísandi til vantandi royndir, ið kundu setast í samband við landbúnaðarøkið.*

*Eg havi ikki fortreytir fyri at meta um fakliga førleikan hjá umsøkjarunum og harvið, hvørt tann, sum settur er í starvið, er betri egnaður til uppgávuna enn nakar annar av umsøkjarunum. Men eg má tó staðfesta, at tá talan er um at seta stjóra á Búnaðarstovuni, eru royndir, ið kunnu setast í samband við landbúnaðarøkið, eitt sakligt og viðkomandi atlit. Eg havi tískil ikki grundarlag fyri at finnast at Fiskimálaráðnum fyri ikki at bjóða klagaranum til setanarsamrøðu.*

*Fiskimálaráðið hevur greitt frá, at setanarbólkurin á fundi 25. november 2008 viðgjørdi umsóknirnar, og at semja var um, hvørjir umsøkjarar skuldu til setanarsamrøður. Einki upprit er skrivað frá hesum fundinum. Eg skal í hesum sambandi vísa á víðkaðu notatskylduna, sum byggir á eina ikki-lógarfestu fyrisitingarliga meginreglu. Henda skylda fevnir um at skriva upp innihaldið á øllum upplýsingum, sum hava týdning fyri málsviðgerðina og málsgongdina. Eg haldi tað ikki vera nøktandi, at eingin frágreiðing er skrivað frá fundinum um, hvat varð lagt til grund, tá umsøkjararnir vórðu valdir út til setanarsamrøður.*

*Sambært § 21 í fyrisitingarlógini hevði Fiskimálaráðið skyldu til at geva klagaranum eina grundgeving fyri avgerðini um ikki at seta hann í starv. Hetta er gjørt í skrivinum til klagaran, dagfest 2. desember 2008, og sum grundgeving verður víst til 4 av 5 førleikakrøvum, sum vórðu nevnd í starvslýsingini, herundir viðkomandi starvsroyndir. Eg haldi ikki, at grundgevingin mótvegis klagaranum lýkur krøvini í § 23, stk. 1 í fyrisitingarlógini, sum er soljóðandi:*

*„**§ 23.** Ein grundgeving fyri eini avgerð, skal hava eina tilvísing*

*til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Í tann mun, avgerðin eftir hesum reglum hvílir á eini fyrisitingarligari meting, skal grundgevingin eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini.“*

*Sambært hesum skal grundgevingin geva eina frágreiðing um, hví avgerðin fekk ta innihald, hon fekk. Um týdningin av grundgevingini verður m.a. sagt soleiðis í Forvaltningsret, 2. udg, v. Hans Gammeltoft-Hansen v.fl., bls. 551f, har tað m.a. stendur soleiðis:*

*„…*
*Begrundelser kan (ligesom inden for retsplejen) på forskellig måde bidrage til en forøgelse af retssikkerheden.*
*Først og fremmest er begrundelserne udtryk for at den borger der berøres af myndighedernes afgørelse, også bør have fuld information om grundlaget og baggrunden for afgørelsen. Det er ikke nok at vide hvad afgørelsen går ud på; man vil ofte (især hvis afgørelsen er bebyrdende) have behov for også at vide hvorfor. Kendskab hertil kan i bedste fald lette accepten af den afgørelse som går én imod, og styrke tilliden til forvaltningen og dens virksomhed.*
*…*
*I relation til klage over afgørelser udgør begrundelsen et væsentligt grundlag for borgeren i overvejelserne om hvorvidt der skal klages, og med hvilken argumentation; på denne måde kan begrundelserne tillige bidrage til at udsigtsløse klager undgås, og til at indgivne klager bygger på et relevant grundlag. …“*

*Fiskimálaráðið hevur greitt mær frá, at viðkomandi starvsroyndir og aðrar royndir innan landbúnaðarøkið vóru avgerandi fyri starvssetanina. Hesum átti Fiskimálaráðið tískil at havt greitt klagaranum frá. Ráðið ásannar hetta í skrivi til mín, dagfest 16. februar 2009, og eg geri tí ikki meira við hetta.*

*Klagarin sigur seg í skrivi til mín, dagfest 14. januar 2009, hava ein varhuga av, at setanin var avgreidd, áðrenn setanartilgongdin byrjaði. Hesum vísir Fiskimálaráðið aftur. Mín viðgerð byggir á skrivliga grundarlagið í málinum, og eftir at hava kannað alt tilfarið havi eg*



*onga orsøk at halda, at Fiskimálaráðið ikki hevur givið málinum eina veruliga og sakliga viðgerð.*

*Klagarin vísir á, at Fiskimálaráðið almannakunngjørdi setanina av stjóra á Búnaðarstovuni, áðrenn hann fekk boðini um hetta. Sambært skjølunum, ið eg havi fingið til láns frá Fiskimálaráðnum, sendi ráðið klagaranum boðini við telduposti á middegi dagin fyri. Eg geri tískil ikki meira við hetta.*

*Burtursæð frá omanfyri standandi viðmerkingum um notatskylduna og grundgevingina, geri eg ikki meira við málið.*

## 28.2 Handfaring hjá Uttanríkisráðnum av setan av deildarstjóra á Løgmansskrivstovuni

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Uttanríkisráðnum av eini deildarstjórasetan á Løgmansskrivstovuni. Klagað varð m.a. um, at aðalstjórin í Uttanríkisráðnum var ógegnigur sambært § 3, stk. 1, nr. 5 í fyrisitingarlógini og um málsviðgerðina annars.*

*Umboðsmaðurin metti ikki talan vera um ein álvarsligan persónligan tvídrátt millum klagaran og aðalstjóran, sum hevði við sær, at aðalstjórin var ógegnigur, ella at tað vóru onnur viðurskifti, sum kundu hava við sær, at aðalstjórin eftir eini objektivari meting mátti haldast at vera ógegnigur.*

*Umboðsmaðurin helt tað vera ein álvarsaman feil í viðgerðini hjá setanarnevndini, at hon ikki útvegaði sær upplýsingar um starvið frá Løgmansskrivstovuni, sum hevði neyðuga kunnleikan og innliti í, hvørjar uppgávur liggja í starvinum, og hvørjar treytir tann, sum verður settur í starvið, skal lúka. Tað var ivasamt at byggja setanarprofilin á upplýsingar frá einum fyrrverandi leiðara í starvinum. Umboðsmaðurin gav Uttanríkisráðnum eina átalu fyri ikki at hava hildið notatskylduna í § 6, stk. 1 í innlitslógini og skrivað niður innihaldið av samrøðuni við fyrrverandi leiðaran um setanarprofilin. Tað var somuleiðis ein álvarssamur feilur, at setanarnevndin ikki útvegaði sær eitt ummæli av klagaranum frá løgmansstjóranum, sum var tann einasti, sum hevði neyðugu vitanina um og kundi úttala seg um, hvussu klagarin hevði roynst í starvinum. Umboðsmaðurin metti grundarlagið undir tilmælinum hjá setanarnevndini vera ófullfíggjað, at setanarmyndugleikin átti at havt varnast og gjørt vart við hetta. Tað var eisini átaluvert, at setanarnevndin ikki grundgav nærri fyri setanini.*

*Umboðsmaðurin metti ikki grundgevingina til klagaranum lúka krøvini í § 23 í fyrisitingarlógini, og helt klagaran hava krav uppá eina neyvari grundgeving grundað á, at klagarin hevði røkt starvið í meira enn eitt ár, at hon hevði verið til setanarsamrøðu, og at hon varð innstillað sum ávikavist nr. 1 og nr. 2 til starvið. Tað var somuleiðis sera átaluvert, at Uttanríkisráðið ikki lat við seg koma, tá klagarin vendi sær til ráðið við umbøn um eina neyvari grundgeving.*

*Umboðsmaðurin helt tað vera sera átaluvert, at Uttanríkisráðið ikki gav umboðsmanninum allar upplýsingarnar í málinum beinanvegin. Samanumtikið metti umboðsmaðurin talan vera um so grundleggjandi feilir í málsviðgerðini, at hann gav Uttanríkisráðnum eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av málinum. Av tí at talan var um álvarsom brek við viðgerðini av hesum máli, boðaði umboðsmaðurin samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum í uttanríkismálum frá niðurstøðu sínari. (**J. nr. 200900001**)*

## Klagan

Við skrivi, dagfest 2. januar 2009, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> **„Kæra um framferð Uttanríkisráðsins í sambandi við setan av leiðslustarvi á Løgmansskrivstovuni**
>
> Í seinnu helvt av oktober lýsti Løgmansskrivstovan eitt leiðslustarv leyst á Løgmansskrivstovuni við umsóknarfreist hin 3. november 2008.
>
> Sjálv søkti eg leiðslustarvið, sum eg havi virkað í síðan september 2007.
>
> Løgmaður gjørdi vart við, at umstøður gjørdu, at hann var ógegnigur í málinum og var øll Løgmansskrivstovan tí ógegnug at viðgera setanarmálið. Sbr. málsbýtisfráboðanini varð varaløgmaður biðin um at taka støðu til, hvat annað aðalráð í staðin skuldi taka sær av setanini. Varaløgmaður gjørdi av, at Uttanríkisráðið sjálvt skuldi taka sær av setanarmálinum.
>
> 30. desember 2008 fekk eg teldubræv frá Uttanríkisráðnum, at annar umsøkjari hevði fingið nevnda starv.

Eg meti at hendan avgerð Uttanríkisráðsins er ólóglig og ógildug vegna ógegni. Sum løgtingsumboðsmanninum kanska kunnugt, hevur tvídráttur verið millum m.a. undirritaðu og setta aðalstjóran í Uttanríkisráðnum í sonevnda lásagølumálinum í august/september 2008. Tvídráttin meti eg vera so álvarsligan og persónligan, at setti aðalstjórin, og harvið alt Uttanríkisráðið, er ógegnugt at viðgera setanarmálið sbr. fyrisitingarlógini § 3, stk. 1, nr. 5. Alt tilfar um lásagøluna er til skjals á heimasíðu løgtingsins undir landsstýrismálanevndarinnar viðgerð av málinum.

Eisini fari eg at heita á løgtingsumboðsmannin um at eftirkanna allar aðrar fyrisingarligar liðir í Uttanríkisráðsins viðgerð av hesum máli, eitt nú um grundgevingarnar mótvegis mær í avslagnum (sum bert var við teldubrævi) uppfylla lógarásettar treytir.

Setanin verður ikki effektuerað fyrr enn 1. februar 2009 so gott hevði verið, um umboðsmaðurin fyri henda dag kundi gjørt eina niðurstøðu í málinum, um ikki annað eina fyribilsniðurstøðu."

## Málsgongd

Í seinnu helvt av oktober 2008 varð eitt leiðslustarv á Løgmansskrivstovuni lýst leyst til setan. Lýsingin var soljóðandi:

„**Leiðslustarv í Løgmansskrivstovuni**
Nú eitt av okkara starvsfólkum er farið í annað starv, er eitt fjøltáttað leiðslustarv í Løgmanskrivstovuni leyst at søkja at byrja 1. desember 2008 ella skjótast tilber.

**Uppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um:

- at skipa fyri landsstýrisfundum og øðrum politiskum samstarvsfora
- at skipa fyri stjóraráðsfundum og øðrum fyrisitingar- og samskipanar-uppgávum
- starvsfólkamenning, lønarmál o.l.



Harumframt skal tann, ið settur verður, hava ábyrgd at fremja og/ella samskipa aðrar uppgávur og tvørvegis verkætlanir, ið løgmaður hevur sett sær fyri.

Løgmansskrivstovan er skipað í virksemisøkir, og skal viðkomandi vera til reiðar at broyta virksemisøki og/ella taka á seg ábyrgd av nýggjum fakøkjum umframt at vera til reiðar at taka hond í øðrum virksemisøkjum.

**Fakligt og persónlig førleikakrav**
Sett verður sum krav, at umsøkjari hevur kandidatútbúgving frá hægri lærustovni. Umsøkjari skal hava góð samstarvsevni, vera tænastuhugaður, miðvísur og ágrýtin av lyndi. Harumframt er neyðugt, at viðkomandi dugur at arbeiða sjálvstøðugt eins væl og saman við øðrum og eigur at kunna virka til lítar í einum umhvørvi, har mál til tíðir hava stóran skund. Tað er fyrimunur, at umsøkjari hevur arbeiðsroyndir innan tær uppgávur og øki, sum liggja í starvinum, og hevur kunnleika til almennu fyrisitingina.

Umsøkjari eigur at vera stinnur í føroyskum og enskum máli, og eiga at skilja týdningin av at samskifta væl.

**Løn- og setanartreytir**
Starvið er flokkað samsvarandi 37. lønarflokki sambært Tænastumannafelag Landsins tó uttan at vera tænastumannastarv.

Løgmansskrivstovan er í støðugari menning, og tann, ið settur verður, skal tola broytingar í starvinum.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívrensli (CV) og møguligum viðmælum skulu sendast til:

Løgmansskrivstovan
Tinganes
100 Tórshavn"

Klagarin søkti starvið við umsókn, dagfest 2. november 2008, og við umsókn hennara lá eitt CV, har tað m.a. stóð soleiðis:

„Lívrensl (Curriculum Vitae)
…
ÚTBÚGViNG:
2007: Dit personlige lederskab (DIEU leiðsluútbúgving)
2006: Projektleiðaraútbúgving (PLÚ) á Handilsskúlanum.
2001-02: Sálarfrøði, hjágrein (Åben Uddannelse skipanin á Aalborg Universiteti)
1999-00: Pædagogikum – ástøðiligi parturin
1998-99: Cand.Mag. í Enskum við Evropa studium og Sálarfrøði frá AAU.
1994-97: Cand.Phil. í Enskum við Evropa studium frá Aalborg Universiteti.
1993: University of West Virginia, USA (fimta hálvár av kandidat lesnaðinum)
1991-94: BA í Enskum við Altjóða studium frá Aalborg Universiteti.
1985-89: Málsligur studentur, Studentaskúlin í Hoydølum,
1986-87: High School í Charleston, South Carolina, USA.

Herumframt eru fleiri smærri skeið, t.d. í lógarsmíð, almennari fyrisitingarlóg, lógini um alment innlit, teldukoyrikort, Doculive, TotalView, sálarfrøði, fyrisiting, leiðslu o.a.

STARVSROYNDIR (akademiskar):
2007- Deildarstjóri í Løgmansskrivstovuni
2000-07: Fulltrúi í Mentamáladeildini í Mentamálaráðnum
1999-00: Handilsskúlalærari í enskum og sálarfrøði (Kambsdalur)
1996-98: Studentaskúlalærari í enskum (Hoydalar)
1995: …

Nevndar- og norðurlandaarbeiði:
Stýrislimur í Norðurlandahúsinum í Føroyum
Stýrislimur í Nordens Institut pá Áland – NIPÁ
Limur í Nordisk-arktisk arbejdsgruppe inden klimaforandring
Limur í Kultur og mediegruppen
Limur í bólkinum fyri norðurlendskt tænastumannaumbýti
Limur í Ráðnum fyri Brekað
…
Herumframt við sum formaður ella skrivari í fleiri álitum og nevndum, t.d,: nýggja universitetslóg, álit um nýggja lærara- og pedagogútbúgving, nýggj sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingarlóg, nýggj heilsuhjálpara- og -røktaraútbúgvingarlóg, bygginevndin fyri miðnámsskúlan í Hovi, PISA, nýggjur karakterskala, kirkjulógirnar.

…“

B, sum varð settur í starvið, søkti starvið við umsókn, dagfest 26. oktober 2008, og við umsókn hansara lá eitt CV, sum m.a. var soljóðandi:

„Curriuculum Vitae
…
**Útbúgvingar:**
2006: Masterprógv (M.S.Sc.) í stjórnmálafrøði frá Fróðskaparsetri Føroya.
2005: Bachelorprógv (B.A.) í søgu og mentanarfrøði frá Fróðskaparsetri Føroya.
2003: Bachelorprógv (B.S.Sc.) í stjórnmálafrøði frá Fróðskaparsetri Føroya.
2001: Merkonomprógv í marknaðarføring frá Føroya Handilsskúla.
1999: Tók eitt hálvársskeið í gudfrøði á fróðskaparstøði í USA.
1998: HH-prógv frá Føroya Handilsskúla

**Undirvisíng:**
2003-2005: Undirvíst í samfelagsfrøði á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna.
2003-2006: Undirvíst í samfelagsfrøði á Føroya Handilsskúla í

Tórshavn. Eisini havi eg havt nakrar vikartímar í samtíðarsøgu og heimspeki á Føroya Handilsskúla.
Á heysti 2006 undirvísti eg í grundskeiði í stjórnmálafrøði á Fróðskaparsetri Føroya.

**Starvsroyndir:**

- Havi verið deildarleiðari á Almannastovuni síðan 1. februar í 2007.
- Eg havi í tíðarskeiðinum frá august í 2005 og til januar 2007 starvast sum skrivari/samskipari í Stjórnarskipanarnevndini (gomlu grundlógar-nevndini)
- Lærari í samfelagsfrøði (sí „undirvísing“).
- Starvaðist í hálvt ár á fíggjardeildini í Almanna- og Heilsumálaráðnum í 2000.
- Havi verið leiðari innan ungdómsarbeiði í tíðarskeiðinum 1999-2007.

**Annað:**
Eg havi síðani 2004 verið limur í Føroyskum Lógarriti. Eri limur í einum bólki, sum rektarin á Fróðskaparsetri Føroya hevur sett til at skriva eitt uppskot til broyting av útbúgvingum á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum.

Eg havi skrivað og lagt til rættis nakrar bøkur. Eisini havi eg skrivað fleiri greinar um politisk og søgulig viðurskiftii. Sí hjálagda útgávulista.
…“

Eftir at umsóknarfreistin var úti, hevði Løgmansskrivstovan 11. november 2008 samrøður við umsøkjarar. Út frá fakligu og persónligu førleikakrøvunum í lýsingini varð gjørd ein meting og samanbering av A og B, sum út frá einum heildarsjónarmiði høvdu staðið seg best. Tað sæst tó ikki at vera skrivað nakað setanartilmæli í málinum hjá Løgmansskrivstovuni.

Við skrivi, dagfest 13. november 2009, sendi løgmaður O, landsstýrismanni soljóðandi áheitan:



„Løgmansskrivstovan hevur lýst leyst eitt leiðslustarv í Løgmansskrivstovuni at seta 1. desember 2008 ella, so skjótt til ber. Umsóknarfreistin var úti 3. november 2008.

Ein av umsøkjarunum ger, at løgmaður er ógegnigur í hesum máli.

Løgmaður heitir tí, vísandi til fráboðan nr. 84 frá 30. september 2008 um býti av málsøkjum millum landsstýrismenninar § 55, stk. 1, á varaløgmann um at leggja hesa starvssetan í Løgmansskrivstovuni til annað aðalráð at gera av.“

Uttanríkisráðið kunnaði umsøkjararnar um áheitan løgmans í soljóðandi skrivi, dagfest 19. november 2009:

„**Viðvíkjandi umsókn tygara um leiðslustarv á Løgmansskrivstovuni**
Løgmansskrivstovan lýsti herfyri leyst eitt leiðslustarv, við freist at søkja 3. novembur 2008, sum tygum hava søkt.

Løgmansskrivstovan er komin til ta niðurstøðu undir viðgerðini av umsóknunum, at hon sum myndugleiki er ógegnig at avgreiða málið. Tískil hevur løgmaður heitt á varaløgmann um leggja hesa starvssetan í Løgmansskrivstovuni til annað stjórnarráð at gera av.

Sagt verður frá, at varaløgmaður hevur avgjørt, at nevnda starvssetan verður løgd til Uttanríkisráðið at gera av. Sostatt skipar Uttanríkisráðið nýggja setanarnevnd, ið fer til verka í næstum.“

Í setanarnevndini, sum Uttanríkisráðið setti, vóru C, deildarstjóri og D, skrivari í Uttanríkisráðnum, E, fulltrúi í Innlendismálaráðnum og F, deildarstjóri í Vinnumálaráðnum.

Millum skjølini, sum Uttanríkisráðið hevur latið umboðsmanninum, er eitt skjal við heitinum „*Profilspurningar*“ og áskriftini „*MASTER*“.

Uttanríkisráðið hevur uppá fyrispurning greitt frá, at setanarbólkurin gjørdi hetta skjal, áðrenn umsóknirnar vórðu útflýggjaðar, og at hetta er metingin hjá setanarbólkinum av, hvussu stóran týdning ymisku viðurskiftini hava fyri leiðslustarvið á Løgmansskrivstovuni. Skjalið er soljóðandi:

„**Profilspurningar** MASTER (*Mín viðmerking:* Skrivað við hond)

| | Spurningar/ Týdningur | ongan | lítlan | miðal | stóran | Sera stóran |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Skal duga at samla sínar tankar um smálutir í arbeiðinum | | | X | | |
| 2 | Skal vera førur fyri at taka illa umtóktar avgerðir | | | X | | |
| 3 | Skal áhaldandi torga/orka støðugt handahógvsarbeiði | | | | X | |
| 4 | Skal duga at fyriskipa og leiða fólk | | | | | X |
| 5 | Skal vera diplomatiskur og samstarvsfúsur | | | | | X |
| 6 | Skal duga at gera nakað tá einki fordømi finst | | | X | | |
| 7 | Skal hava hugflog at evna nýggj hugskot | | | X | | |
| 8 | Skal duga at fara um fremmandafólk | | | | X | |
| 9 | Skal støðugt duga at fylgja einum avtalaðum arbeiðsmynstri | | | | X | |
| 10 | Skal arbeiða undir beinleiðis eftirliti | | X | | | |
| 11 | Skal vera sjálvsikkur og duga at málbera seg | | | | | X |
| 12 | Skal duga at fylgja einum kanningarhátti lýtaleyst | | X | | | |
| 13 | Skal vera førur fyri at loysa menniskjaligar trupulleikar hjá øðrum | | | | X | |
| 14 | Skal hava tol at verða verandi á einum arbeiðsstaði og/ella øki *(ongin meting gjørd)* | | | | | |
| 15 | Skal duga at samskipa og fremja handahógvsarbeiði | | | | X | |
| 16 | Skal klára órógv og avbrot í arbeiðsgongd og broytingar | | | | | X |
| 17 | Skal verða varin, tá ábyrgdarvandi verður mettur *(ongin meting gjørd)* | | | | | |
| 18 | Skal duga at skapa eitt spennandi og avbjóðandi umhvørvi | | | | X | |
| 19 | Skal kunna mæla ímóti atfinningum | | X | | | |
| 20 | Skal hava hugflog og hugskot um framtíðarætlanir | | | | X | |
| 21 | Skal duga at yvirtala onnur | | | | X | |
| 22 | Skal verða varin tá ið bindandi avtalur verða gjørdar | | | | X | |
| 23 | Skal tolin fylgja nágreiniligum forskriftum | | | | X | |
| 24 | Skal góðtaka, at tað ikki eru uppflytingarmøguleikar | | | | x | |



Millum skjølini er eisini teldubrævasamskifti við fyrrverandi arbeiðsgevarar/ starvsfelagar hjá A og B.

16. desember 2008 samskifta formaðurin í setanarnevndini og G, fyrrverandi starvsfelagi hjá A. Spurningar og svar eru soljóðandi:

„Spurningar:
1. Hvussu dugir A at samstarva?
2. Hvussu dugir A at fáa úrslit?
3. Hvussu dugir A at loysa trupulleikar/konfliktir?
4. Hvussu heldur tú, at A fer at roynast sum deildarstjóri á Løgmansskrivstovuni?

Ad. 1
Tað haldi eg hon dugir væl. Hon er greið. Okkara samstarv byrjaði í Mentamálaráðnum, har hon kom í starv eftir at eg hevði verið har í uml. 2 ár, og vit arbeiddu saman í uml. 1 ½ ár. Hon yvirtók nakrar av… (*Mín viðmerking:* Tekstur manglar)

Ad.2
Eg haldi at hon eisini hevur megnað at fáa úrslit, har hon hevur verið. Sjúkrasystraskúlin bleiv fluttur yvir í Mentamálaráðið, Heilsurøktarútbúgvingin bleiv sett á stovn. Hetta var høvuðsuppgávuøki hennara í fyrstani. H flutti heilsurøktaraútbúgvingina til Suðuroynna, tað kom rættiliga óvart á. Haldi at hon kláraði hetta væl. Haldi at hon fekk tað besta burtur úr. Kemur á mál.

Ad.3
Eg veit at tað hava verið nakrir trupulleikar við Heilsuskúlanum í Suðuri. A er ikki bangin fyri konfliktum, torir væl at fara inn í eina konflikt. Haldi at hon megnar at loysa tær. Eg havi tó ikki verið so tætt uppá. Veit bara at tað hava verið nakrir trupulleikar, sum hon hevur tikið sær av.

Ad.4
Haldi at hon fer at roynast væl sum deildarstjóri. Haldi at hon

er greið. Haldi at hon dugir væl at fara við starvsfólki. Dugir væl at útdelegera. Dugir væl at geva fólki uppgávur, ið tey trívast í. Í tí tíðini vit starvaðust saman á Løgmansskrivstovuni var hon effektiv og hevði gott álit millum starvsfólkini. Hevur roynst væl í deildarstjórastarvinum."

16. desember 2008 samskifta formaðurin í setanarnevndini og I, fyrrv. formaður í Grundlógarnevndini. Spurningar og svar eru soljóðandi:

„Spurningar:

5. Hvussu dugir B at samstarva?
6. Hvussu dugir B at fáa úrslit?
7. Hvussu dugir B at loysa trupulleikar/konfliktir?
8. Hvussu heldur tú, at B fer at roynast sum deildarstjóri á Løgmansskrivstovuni?

Alt gott at bera manninum.

Ad. 1
Samstarvið var við meg og allar limirnar í Grundlógarnevndini. Einki at finnast at. Var loyalur og arbeiðssamur, fekk tingini frá hondini.

Ad.2
Gjørdi tað hann skuldi gera, dugir væl at skriva. Úrslitini vóru góð.
…

Góður máti at loysa trupuleikan uppá. Á ein stillføran máta. B segði sum var. Erligur maður. Ikki bangin fyri at siga sína meining.

Ad.4
Vanur við at skipa fyri, bæði á fjalli og í bergi. Og eisini í núverandi starvið á Almannastovuni. Valdi hann sum student.



Útvaldur. Kann siga sína meining á ein stillføran hátt. Manglar bert høvuðsritgerðina, so er hann tvífaldur kandidatur.

Trúgvi at ikki at hann rímur úr núverandi starvið. Trúgvi at hann søkir hetta starvið av áhuga. Haldi at hann brennir fyri hesum.

Dugir at fáast bæði við vanligum og akademiskum starvsfólki. Dugir eisini væl sosialt saman við vinfólkum. …

Reistu runt landið fyri at greiða frá um grundlógina. Var glaður fyri at vera saman við honum. Dugir eisini væl við KT og hevur kunnleika til bókaútgávu. Her skipaði hann fyri øllum tí praktiska, í samband við at grundlógaruppskotið bleiv givið út í bók.

Eg kenni hann sum positivan. Eingin kritikkur, ið eg minnist til.

Góð analytisk evnir. Er ein akademikus.

Eg hevði ikki ivast í at sett hann í starvið, um tað var eg. Eg gevi honum fult tal á øllum økjum."

18. desember 2008 samskifta formaðurin í setanarnevndini og L, fyrrverandi deildarstjóri í Mentamálaráðnum. Spurningar og svar eru soljóðandi:

„Spurningar:

1. Hvussu dugir A at samstarva?
2. Hvussu dugir A at fáa úrslit?
3. Hvussu dugir A at loysa trupulleikar/konfliktir?
4. Hvussu heldur tú, at A fer at roynast sum deildarstjóri á
5. Løgmansskrivstovuni?

Ad. 1
Heildarmetingin er positiv. Hon er kend fyri gott samstarv.

Góð til dialog, góð til at lurta og góð til at finna út av hvat fólk veruliga meina. Respekt er lyklaorðið her.

Ad.2
Hon er semjusøkjandi, dugir at halda fast í sjónarmiðunum hjá t.d. landsstýrismanninum. Var skrivari í nógvum stórum nevndum t.d. í arbeiðinum við fólkakirkjuni og sjúkrarøktarskúlanum. Dugdi væl. Hevði altíð eitt mál og var væl fyrireikað. Skjót at skriva fundarfrágreiðingar. Álitisvekjandi persónur.
Fakliga sterk og málkøn.
Dugir væl at argumentera sakliga.
Hartil socialt ansvarlig.

Ad3.
Góð til konfliktir. Serliga hugsi eg um málið um sjúkrarøktarskúlan og yvirtøkuna av fólkakirkjuni. Dugdi væl at fáa partarnar at síggja hvar møguleikarnir vóru fyri eini loysn. Var væl fyrireika og ógvuliga arbeiðssom. Fór ikki heim fyrr enn hon var liðug. Eisini í nevndini til nýggja lærara og pedagogútbúgving gjørdi hon eitt stórt arbeiði.
Í heila tikið hevði hon eitt konfliktfylt øki, sum hon altíð kom sera væl frá.

Ad.4
Kenni hana ikki sum leiðara, við tað at hon ikki hevði nakað leiðarastarv í Mentamálaráðnum. Stabilur persónur, hevur humor er opin og erlig. Informativ. Eg haldi at hon er ein leiðaratypa við einum natúrligum mynduleika, men samstundis ein vinarlig persónligheit.
Eg ivist ikki í, at hon blívur ein góður leiðari. Hon dugir at taka avgerðir, og hon hevur gott politiskt tev. Respekterar kommandovegirnar.
Man veit altíð, hvar man hevur hana. Dugir at siga frá uttan at sára tann, sum „má hava ein óbehagiligan sannleika at vita".
Hon er altíð toppprofessionell og dugir væl at skilja millum „ta professionellu meiningina og ta privatu meiningina". Sera saklig."



Í teldubrævi sama dag leggur L hetta aftrat:

> „Afturat til 4.
> Hon dugir væl at takla broytingar og at halda høvdið kalt, tá tingini hava hug at „kóka yvir" altso hon missir ikki pippið, men hevur altíð bæði beinini á jørðini."

Setanarbólkurin skrivað soljóðandi setanartilmæli, sum er dagfest 18. desember 2008:

> **„Tilmæli at seta deildarstjóra á Løgmansskrivstovuni**
> Søkt hevur verið eftir deildarstjóra á Løgmansskrivstovuni. Starvið fevnir í høvuðsheitum um at skipa fyri landsstýrisfundum og øðrum politiskum samstarvsfora, at skipa fyri stjóraráðsfundum, aðrar fyrisitingarligarligar samskipanaruppgávur, starvsfólkamenning og lønarmál.
>
> Til starvið krevst útbúgving á kandidatstøði ella onnur samsvarandi útbúgving. Tann, ið settur verður, skal hava ábyrgd av at fremja og/ella samskipa aðrar uppgávur og tvørvegis verkætlanir, ið løgmaður hevur sett sær fyri. Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, vera tænastuhugaður, miðvísur og ágrýtin av lyndi. Harumframt er neyðugt at viðkomandi dugur at arbeiða sjálvstøðugt eins væl og saman við øðrum og eigur at kunna virka til lítar í einum umhvørvi, har mál hava stóran skund. Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur arbeiðsroyndir innan tær uppgávur og øki, sum liggja í starvinum. Eisini skal viðkomandi verða stinnur í enskum og føroyskum máli. Setanarnevndin hevur lagt dent á førleikan at skriva, bæði á føroyskum og enskum, og hevur tí skipað fyri skrivligum royndum. Føroyska royndin er gjørd við atliti at førleikanum at orða seg og at lýsa eitt evnið á lættan, skilligan og góðan hátt. Umsetingarroyndin frá føroyskum til enskt er gjørd við atliti at førleikanum til enska málið. Skrivliga royndin er partur av heildarmetingini av umsøkjarunum.
>
> Í setanarnevndini vóru: C, Uttanríkisráðið, E, Innlendismálaráðið,

F, Vinnumálaráðið og D, Uttanríkisráðið. Sjey umsøkjarar vóru til starvið. Fýra hava verið til setanarsamrøðu.

… (*Mín viðmerking:* Endurtøka av CV'num hjá A og B)

**B**
Starvast í løtuni sum deildarleiðari á Almannastovuni í Tórshavn. Hann er útbúgvin sum stjórnmálafrøðingur frá Fróðskaparsetur Føroya. Undir lesnaðinum hevur hann fingist við at skriva akademiskar greinar, ið allar eru um ymisk føroysk politisk viðurskifti. Umframt hetta, var hann samskipari og ritstjórn í stjórnarskipanarnevndini.

Tað kann til hansara fyrimun nevnast, at hann er ágrýtin av lyndi og er sera fyrikomandi. Eisini skal viðmerkjast, at hann er tann umsøkjarin, ið hevur ta mest viðkomandi útbúgvingina til starvið. Hartil eigur at verða nevnt, at prógvið hjá honum er framúrskarandi gott, og at hann bert manglar eina serritgerð fyri at verða tvífaldur kandidatur. Til setanarsamrøðuna var hann eisini tann, ið sýndi størsta vilja til at fáa starvið. Hann er ungur og hevur longu megnað at gera stór avrik. Tískil vil hann vera eitt stórt aktiv fyri Løgmansskrivstovuna.

Førleikin at tosa enskt var sera góður eins og umsetingin úr føroyskum máli til enskt eisini var góð.

Føroyska uppgávan var góð og vísti, at umsøkjarin var væl struktureraður og hevði visjónir til starvið.

**A**
Starvast í løtuni sum fyribils settur deildarstjóri á løgmansskrivstovuni. Hon er útbúgvin cand.mag. í enskum við evropa studium á Aalborg Universiteti við hjágrein í sálarfrøði frá Århus Universiteti.

Til hennara fyrimun kann nevnast, at hon hevur royndir í starvinum sum deildarstjóri á Løgmansskrivstovuni, tí hon



í løtuni er avloysari í starvinum. Hon hevur nógvar royndir innan miðfyrisitingina, serliga frá Mentamálaráðnum. Til setanarsamrøðuna hevði hon tó ikki so greiðar visjónir um deildarstjórastarvið, men hevði holla vitan um politisku skipanina. Hon virkaði at vera strukturerað og kunna arbeiða við nógvum bóltum í luftini í senn. Tískil er hon væl egnað til deildarstjórastarvið.

Førleikin at tosa enskt var sera góður eins og umsetingin úr føroyskum máli til enskt eisini var góð.

Føroyska uppgávan var góð og hon vísti, at hon veit hvat starvið inniber og hvussu politiska skipanin virkar.

**M**
…

**N**
…

**Niðurstøða**
Setanarnevndin er samd um, at bæði B og A eru best skikkaði til starvið. Bæði lúka tey formligu setanarkrøvini, herundir útbúgving á kandidatstøði. Tey kláraðu seg bæði væl til setanarsamrøður, og høvdu sum heild bestu skrivligu svarini uppá skrivligu uppgávunar. Bæði fingu sera positiv ummæli frá teimum referansupersónum, sum tey høvdu víst á.

Tveir limir í setanarnevndini velja at innstilla B sum nummar eitt og A sum nummar tvey, meðan hinir tveir limirnir velja at innstilla A sum nummar eitt og B sum nummar tvey. Orsøkin til hetta tilmælið er, at tveir limir sóu B sum eitt størri aktiv við meiri viðkomandi útbúgving og leiðsluroyndum sum deildarleiðari á Almannastovuni síðani 1. februar 2007 og hin parturin sá A sum besta boð, tí hon hevur meira viðkomandi leiðsluroyndir, sum avloysari í núverandi starvi síðani 1. september 2007, umframt drúgvari arbeiðsroyndir innan miðfyrisitingina.

18. desember 2008

C E

F D“

*Skrivað við hond:*

„Við hesum avgjørt at seta B í starvið.

29.12.2008

O (*Mín viðmerking:* Varaløgmaður)
V

Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum kunnaði Løgmansskrivstovuna um setanina í soljóðandi skrivi, dagfest 30. desember 2008:

> „Vísandi til bræv tygara frá 13. novembur 2008 viðvíkjandi at seta leiðslustarv í Løgmansskrivstovuni, har heitt verður á meg, um at avgreiða nevndu starvssetan, verður við hesum gjørt tygum kunnugt, at málið er avgreitt sum ásett í hjálagda avrit av setanarbrævi.“

Setanarbrævið til B, dagfest 30. desember 2008, er soljóðandi:

> „Víst verður til umsókn tína frá 26. oktober 2008 um leiðslustarv á Løgmansskrivstovuni. Við hesum verður boðað frá, at avgjørt er at seta teg í starv við gildi frá 1. februar 2009 ella eftir nærri semju við Løgmansskrivstovuna.
>
> Avgerðin er serstakliga grundað á tína rúmu akademisku útbúgving innanfyri politiska vísindi. Eisini er dentur lagdur á tínar leiðsluroyndir og persónligu eginleikar.



> Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við starvinum og gleða okkum til gott samstarv.“

Viðheft einum teldubrævi sendi Uttanríkisráðið sama dag A soljóðandi svar uppá umsókn hennara:

> „Víst verður til umsókn tína frá 2. novembur 2008 um leiðslustarv á Løgmansskrivstovuni. Við hesum verður boðað frá, at avgjørt er at seta annan umsøkjara í hetta starv.
>
> Avgerðin er serstakliga grundað á rúma akademiska útbúgving innanfyri politiska vísindi. Eisini er dentur lagdur á leiðsluroyndir og persónligar eginleikar.
>
> Vit takka fyri umsóknina.“

A sendi sama dag Uttanríkisráðnum soljóðandi teldubræv:

> „Sum partur av málinum verður biðið um innlit í alt málið um setan av leiðslustarvi til Løgmansskrivstovuna.
>
> Somuleiðis verður biðið um, at Uttanríkisráðið kemur við betur grundgeving fyri avgerðini til at seta annan umsøkjara í hetta starv.“

Við teldubrævi 7. januar 2009 svaraði Uttanríkisráðið A, at hon fekk innlit í øll viðkomandi skjøl í málinum um setanina av leiðslustarvi á Løgmansskrivstovuni.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 5. januar 2009, varð klagan send Uttanríkisráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Uttanríkisráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns. Umboðsmaðurin kunnaði samstundis Løgmansskrivstovuna um klaguna.

Tann 29. januar 2009 sendi Uttanríkisráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„**Viðvíkjandi klagu frá A, dagsett 2. januar 2009**
Í brævi dagsett 5. januar 2009 frá Løgtingsins Umboðsmanni verður heitt á Uttanríkisráðið um at gera frágreiðing til klagu dagsetta 2. januar 2009 frá A um viðgerðina hjá Uttanríkisráðnum av setan av leiðslustarvi á Løgmansskrivstovuni, umframt at biðið verður um øll skjøl í málinum. Um málið er niðanfyristandandi at siga.

Q, løgmaður heitti í brævi dagsett 13. novembur 2008 á O, varaløgmann, um at avgreiða málið vegna tess, at løgmaður metti seg vera ógegnigan í málinum.

Síðst í novembur mánaða varð nýggj setanarnevnd skipað við tveimum umboðum úr Uttanríkisráðnum og einum umboði úr ávikavist Innlendismálaráðnum og Vinnumálaráðnum. Setanarnevndin fór til verka at viðgera málið og valdi undir málsviðgerðini einans at halda seg til starvslýsing og umsóknir og tískil ikki skjøl, ið Løgmansskrivstovan hevði fyrireikað eftir at freistin at søkja var farin, haruppií tilmælið, ið Løgmansskrivstovan hevði gjørt. Sostatt varð málið byrjað heilt av nýggjum.

Setanarnevndin ráðførdi seg fyrst við J fyrrverandi leiðara í lýsta starvinum viðvíkjandi at gera ein setanarprofil til starvið. Síðani fór nevndin undir at gera eina profilering, áðrenn farið var undir at lesa umsóknirnar til starvið. Dentur varð lagdur á viðkomandi útbúgving, leiðsluroyndir og persónligar eginleikar. Eftir gjølla viðgerð av øllum umsóknunum, varð avgjørt at taka fýra umsøkjarar inn til samrøðu. Hesir vóru N, M, B og A. Hesi fýra høvdu øll leiðsluroyndir og útbúgving á master støði. Eftir at setanarsamrøðurnar vóru loknar skuldu allir fýra umsøkjararnir til skrivliga roynd í føroyskum og enskum. Hetta varð gjørt við serligum fyriliti fyri førleikanum at hugsa bygnaðarliga og førleikanum at skriva á føroyskum og enskum.



Við hesum amboðum kom setanarnevndin fram til eitt deilt tilmæli dagfest 18. desembur 2008, har tveir limir innstillaðu B sum nummar eitt og A sum nummar tvey og hinir báðir limirnir innstillaðu A sum nummar eitt og B sum nummar tvey. Tilmælið varð síðan undirritað og latið setanarmyndugleikanum.

Beint eftir jól boðaði varaløgmaður aðalstjóranum í Uttanríkisráðnum frá, at hann var komin til ta niðurstøðu, at B var best skikkaði umsøkjarin til starvið. Tilmælið var síðan áteknað 29. desembur 2008 og málið var eftir hetta endaliga avgreitt 30. desembur 2008, har B fekk at vita at hann var settur í starvið og hinir umsøkjararnir fingu avslag uppá umsóknir sínar.

Í brævi dagsett 30. desembur 2008 boðaði O, varaløgmaður, somuleiðis Q, løgmanni, frá, at málið var avgreitt hansara vegna.

Um málið er annars at siga, at øll sentanartilgongdin hevur tikið støði í setanarpolitikki landsins. Annars eru øll skjøl í málinum hjá Uttanríkisráðnum hjáløgd.“

Við skrivi, dagfest 30. januar 2009, vórðu viðmerkingarnar hjá Uttanríkisráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við teldubrævi 16. februar 2009 bað R, advokatur, vegna A um, at freistin at gera viðmerkingar varð longd til 20. februar. Hesum játtaði umboðsmaðurin.

Tann 20. februar 2009 heitti advokatur klagarans á umboðsmannin um enn einaferð at leingja freistina at gera viðmerkingar. Orsøkin til umbønina var, at advokaturin ikki hevði fingið skjølini í málinum frá Uttanríkisráðnum. Umboðsmaðurin játtaði umbønini og longdi freistina til 6. mars 2009.

Tann 6. mars 2009 sendi R, advokatur umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

**„Viðv. tykkara j. nr. 200900001: Kæra frá A**
A hevur vent sær til mín í sambandi við kæru, sum hon sendi Løgtingsins umboðsmanni 2. januar 2009.

Eg havi í hesum sambandi fingið avrit av kæruni umframt avrit av skrivi frá Uttanríkisráðnum til Løgtingsins umboðsmann frá 29. januar 2009.

Eg havi eisini fingið avrit av teimum skjølum, sum A hevur fingið frá Uttanríkisráðnum, umframt at eg havi fingið skjalayvirlit umframt avrit av tilfari í málinum frá Uttanríkisráðnum. Afturat hesum havi eg lisið onnur skjøl av týdningi í málinum, herundir skjøl hjá Landsstýrismálanevndini.

**Stutt um málið**
Við brævi 13. november 2008 til Uttanríkisráðið heitti Q, løgmaður, á varaløgmann, O, um at leggja starvssetanina av leiðslustarvi á Løgmansskrivstovuni til annað aðalráð at gera av. Í brævi frá Uttanríkisráðnum frá 19. november 2008 til A varð boðað frá, at starvssetanin var løgd til Uttanríkisráðið sjálvt at gera av.

Við brævi, sum varð sent við telduposti 30. desember 2008, fekk A boð um, at avgjørt var at seta annan umsøkjara í starvið.

Eftir at hava gjøgnumgingið málið meti eg, vísandi til § 3, stk. 1, nr. 5, í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg at tað vegna ógegni var skeivt av Uttanríkisráðnum sjálvt at avgreiða setanarmálið heldur enn sum umbiðið av løgmanni at leggja setanina til annað aðalráð at avgreiða.

Afturat hesum meti eg eisini, at aðrir málsviðgerðarfeilir eru gjørdir í sambandi við viðgerðina hjá Uttanríkisráðnum av setanini.

**Ógegni**
Fyri kortum var mikið stríð millum Løgmansskrivstovuna øðrumegin og Uttanríkisráðið hinumegin. Hetta stríðið endaði sum kunnugt við, at tásitandi CHE-samgongan slitnaði, og hetta hevði somuleiðis við sær, at tásitandi uttanríkisráðharrin misti starv sítt.

A hevur í starvinum, sum hon søkti, og sum hon hevur røkt í hálvtannað ár, frammanundan at starvið varð lýst leyst, m.a. havt ábyrgd av hølismálum og ognum í Tinganesi, eins og A hevði ábyrgd av starvsfólkamálum og harvið eisini av húsavørðinum, sum samstundis varð nevndur í teimum skjølum, sum eru til skjals í sambandi við sonevnda „lásagølumálið,“ her undir í sambandi við viðgerðina hjá Landsstýrismálanevndini av málinum.

A var einasti deildarstjóri, sum var eftir á Løgmansskrivstovuni eftir málsøkjabýtið millum Løgmansskrivstovuna og Uttanríkisráðið undir CHE-samgonguni, og hon var tí ein av nærmastu ráðgevum hjá S, løgmansstjóra, og tí eisini eitt leiðandi starvsfólk á Løgmansskrivstovuni.

Í sambandi við lásagølumálið skrivaði A upprit um hendingarnar viðvíkjandi tí skrivstovu, sum lásagølumálið snúði seg um, og í tí sambandi nevndi hon m.a. leiklutin hjá setta aðalstjóranum í Uttanríkisráðnum. Hetta sæst í skjølunum hjá Landsstýrismálanevndini. (*Mín viðmerking:* Uppritið er endurgivið eftir hetta skriv.)

Tá A sostatt røkti eitt starv á Løgmansskrivstovuni, sum hevði beinleiðis samband við stríðið í sambandi við „lásagølumálið,“ og tá hon samstundis hevði ein leiklut í sambandi við hetta málið, sum elvdi til so mikið stríð millum Løgmansskrivstovuna og Uttanríkisráðið, er eyðsæð, at tað ikki var rætt av Uttanríkisráðnum at viðgera eitt setanarmál á Løgmansskrivstovuni, har A var ein umsøkjari.

Í sambandi við málið um skrivstovuna í Tinganesi tosaði A eisini tann 5. september 2008 við setta aðalstjóran í Uttanríkisráðnum,

V, men hesin segði tá við A: „Eg tosi ikki við teg“ og noktaði síðani at hava samrøðu við A. At setti aðalstjórin í Uttanríkisráðnum beinleiðis hevur noktað at tosa við A merkir, at eingin ivi kann vera um, at setti aðalstjórin hevur verið beinleiðis ógegnigur til at medvirka til at avgreiða setanarmálið.

Tað skal eisini viðmerkjast, at tá talan er um innanhýsis umsøkjarar, sum søkja størv og ikki fáa størvini, skal viðkomandi umsøkjari sambært almenna starvsfólkapolitikkinum hava beinleiðis og persónlig boð um hetta frá leiðsluni hjá setanarmyndugleikunum.

Í hesum málinum valdi Uttanríkisráðið at senda boðini til A um, at hon ikki fekk starvið, við telduposti. Umframt at hetta er klárt brot á almenna setanarpolitikkin, stuðlar hetta eisini undir, at setti aðalstjórin í Uttanríkisráðnum ikki hevur viljað tosað við A og givið henni boðini persónliga.

At setti aðalstjórin í Uttanríkisráðnum hevur verið ógegnigur at viðgera málið merkir eisini, at alt starvsfólkið, sum starvast undir honum í Uttanríkisráðnurn, hevur verið ógegnugt at luttaka í viðgerðini av málinum. Fyri hetta málið merkir tað, at tveir limir í setanarbólkinum, sum starvaðust í Uttanríkisráðnum, og sum gjørdu tilmæli í sambandi við setanina, hava verið ógegnigir.

Afturat hesum skal eg viðmerkja, at vanliga fylgjan av, at persónar, sum hava luttikið í viðgerðini av einum setanarmáli, eru ógegnigir, er sambært siðvenju, at viðkomandi avgerð um setan verður mett at vera ógildug.

**Ósamsvar millum lýsing og grundgevingar**
Í svarinum frá Uttanríkisráðnum til Løgtingsins umboðsmann frá 29. januar 2009 verður víst á, at tá Uttanríkisráðið fekk setanarmálið til viðgerðar, varð nýggj setanarnevnd skipað við tveimum umboðum úr Uttanríkisráðnum og einum umboði úr ávikavist Innlendismálaráðnum og Vinnumálaráðnum. Málið varð byrjað heilt av nýggjum.



Setanarnevndin ráðførdi seg sambært brævinum frá Uttanríkisráðnum fyrst við J, fyrrverandi leiðara í lýsta starvinum, at gera ein setanarprofil til starvið, og nevndin fór síðani undir at gera eina profilering, áðrenn farið varð undir at lesa umsóknirnar til starvið.

Brævið frá Uttanríkisráðnum til Løgtingsins umboðsmann vísir, at setanarnevndin hevur viðgjørt setanarmálið út frá øðrum fortreytum enn teimum, sum hava verið umsøkjarunum kunnugar, tá umsøkjararnir søktu starvið. At setanarnevndin velur at gera nýggjan setanarprofil til starvið uttan at kunna umsøkjararnar um hetta, er greitt brot á fyrisitingarligar reglur um hoyring, og tá setanarnevndin valdi at gera hetta, er spurningurin, um ikki starvið átti at verið lýst leyst av nýggjum, grundað á nýggja setanarprofilin, sum setanarnevndin hevði gjørt.

At samsvar ikki er millum tey krøv, sum eru sett í lýsingini um leiðslustarvið, og tær grundgevingar, sum víst er til í bæði grundgevingini til tann, sum fekk starvið, umframt í avslagnum til A, bendir greitt á, at setanarnevndin hevur broytt krøvini til starvið.

Í lýsingini varð víst á, at tað var ein fyrimunur, at umsøkjari hevði arbeiðsroyndir innan tær uppgávur og øki, sum lógu í starvinum, og hevði kunnleika til almennu fyrisitingina. Hesi atlit, sum dentur verður lagdur á í lýsingini av starvinum, verða ikki nevnd í grundgevingini til tann, sum fekk starvið, umframt í avslagnum til A.

Tað varð í brævinum til A skrivað, at „avgerðin er serstakliga grundað á rúma akademiska útbúgving innan fyri politiska vísindi. Eisini er dentur lagdur á leiðsluroyndir og persónligar eginleikar.“ Í brævi frá sama degi til tann, sum fekk starvið, varð víst á somu grundgevingar fyri, at viðkomandi fekk starvið.

Verður hugt at lýsingini um leiðslustarvið, sæst, at talan í

høvuðsheitum er um eitt fyrisitingarligt starv, har talan er um at skipa fyri landsstýrisfundum og øðrum politiskum samstarvsfora, skipa fyri stjóraráðsfundum, umframt at talan er um eitt starv, sum hevur við starvsfólkamál at gera.

Til tær uppgávur, sum upprunaliga vórðu nevndar í lýsingini fyri starvið, hevur A bæði góða útbúgving og drúgvar og viðkomandi royndir. Hon hevur serligar fyrimunir út frá arbeiðsroyndum innan tey uppgávuøki, sum lógu í starvinum, og kunnleika til almennu fyrisitingina, men hetta verður sum omanfyri nevnt als ikki nevnt í grundgevingunum.

Hetta kundi eisini bent á, at setanarnevndin hevur valt at síggja burtur frá hesum viðurskiftum í sambandi við viðgerð sína av málinum.

**Samanumtikið**
Samanumtikið er eftir mínum tykki greitt, at setti aðalstjórin í Uttanríkisráðnum hevur verið ógegnigur at viðgera málið. Av hesi orsøk hevur Uttanríkisráðið sum heild eisini verið ógegnugt og hevur ikki kunnað tikið avgerð í málinum.

Afturat hesum benda grundgevingarnar í brævinum til A og til tann, sum fekk starvið, á, at dentur hevur verið lagdur á onnur viðurskifti enn tey, sum vórðu nevnd í lýsingini, tá avgerð er tikin um at seta starvið.

Eg havi sum nevnt fingið avrit av teimum skjølum, sum A hevur fingið innlit í frá Uttanríkisráðnum, og eg havi eisini fingið viðlagda skjalayvirlit frá Uttanríkisráðnum.

Eg skal í hesum sambandi viðmerkja, at eg ikki havi fingið avrit av ávikavist setanarprofili og profilering, sum sambært brævinum frá Uttanríkisráðnum til Løgtingsins umboðsmann vórðu gjørd, tá nýggja setanarnevndin fór undir arbeiði sítt.

Eg havi heldur ikki fingið avrit av referansum frá teimum referansupersónum, sum A vísti til í sambandi við umsókn sína um starv, og eg síggi heldur ikki, at hesi skjøl eru skrásett í skjalayvirlitinum, sum eg havi fingið frá Uttanríkisráðnum.

Eg havi tí sent Uttanríkisráðnum nýtt bræv, sum eg leggi við avrit av. (*Mín viðmerking:* Skrivið er ikki endurgivið í álitinum.)

Eg havi biðið ráðið um at lata meg fáa avrit av hesum skjølum, og um neyðugt fari eg at venda aftur til Løgtingsins umboðsmann við fleiri viðmerkingum til málið, tá eg havi fingið avrit av hesum skjølum.

Sum tað sæst á viðlagda brævi til Uttanríkisráðið, hevur ráðið eisini fingið avrit av hesum brævinum."

Umrødda uppritið, sum advokatur klagarans vísir á at A skrivaði, er dagfest 4. september 2008 og er soljóðandi:

„***Um hending í sambandi við læsta skrivstovu 1. september 2008***
Sunnudagin 31. august 2008 gav løgmaður boð um at gera skrivstovu klára til T, fyrrverandi aðalstjóra, og at tað skuldi vera skrivstovan, sum U, fulltrúi, var fluttur inn í. S, løgmansstjóri, skuldi tosa við V, virkandi aðalstjóra, og biðja hann geva U boð. Til tess at geva U møguleika at flyta síni ting sjálvur, varð bíðað til seinni um kvøldið, áðrenn tingini hjá U vóru flutt í grannaskrivstovuna, har U hevði havt skrivstovu beint frammanundan.

Mánamorgun 1. september (umleið kl. 8.30) hoyrdi eg áhaldandi larm á ovaru hæddini. Eg fór tí upp at vita, hvat var áfatt. Tá stendur ein lásasmiðjur og borar í lásið til skrivstovuna, sum var fyrireikað til T. U hyggur at. Eg spurdi hvat var áfatt, og at soleiðis var ikki rætt at bera seg at. U segði, at hann hevði fingið boð frá sínum stjóra at bora lásið upp, so hann kundi sleppa inn á skrivstovu sína, og at hann var sera ónøgdur og illur, at hansara lutir uttan hansara samtykki vóru fluttir. Eg spurdi um hann

ikki hevði fingið nøkur boð um hetta, tí eg visti, at P, løgmaður, hevði givið boð til Z, landsstýrismann, og at S hevði tosað við V. Tað kendi U einki til, men fór í staðin eftir avtaluni millum løgmann og Z frá februar mánað. Tá eg fekk at vita, at V og Z vóru inni á skrivstovuni, fór eg yvir at spyrja, um løgmaður ikki hevði tosað við Z. Jú, løgmaður hevði sent sms, men Z var ikki samdur við løgmann, segði hann.

V og eg fóru út á gongina, har U bað lásasmiðin halda fram at bora, meðan eg bað hann steðga til málið var greitt. Sylindarin í lásinum var nú oyðilagt, og ongin slapp sostatt inn á tómu skrivstovuna. V bað lásasmiðin senda rokningina til UR. Víðari segði V við einum smíli, at løgmaður fór at hava ein trupulleika, tá fjølmiðlarnir fingu at vita um hetta mál."

Við skrivi, dagfest 10. mars 2009, varð Uttanríkisráðið biðið um at gera viðmerkingar til tað, sum klagarin hevði ført fram um tvídrátt millum klagaran og aðalstjóran í Uttanríkisráðnum og greiða frá, um gegnisspurningurin varð viðgjørdur í ráðnum í sambandi við setanarmálið. Aðalstjórin varð somuleiðis biðin um at greiða frá faktuellu viðurskiftunum av týdningi fyri gegnisspurningin í sambandi við nevndu ósemjuna.

Umboðsmaðurin kunnaði harumframt ráðið um, at A hevði vent sær til umboðsmannin og gjørt vart við, at hon ikki hevði fingið partsinnlit í tvey ummæli av henni, sum ein fyrrverandi leiðari ávikavist starvsfelagi høvdu latið Uttanríkisráðnum undir viðgerðini av málinum. Umboðsmaðurin bað ráðið um at lata umboðsmanninum avrit av umrøddu skjølunum.

Tann 19. mars 2009 sendi Uttanríkisráðið umboðsmanninum soljóðandi skriv:

„**Viðvíkjandi klaguni frá A**
Løgtingsins Umboðsmaður vísir á, at A hevur í telefonsamrøðu greitt umboðsmanninum frá, at hon ikki hevur fingið innlit í ummælini sum ein fyrrverandi stjóri og ein fyrrverandi starvsfelagi, eftir umbøn hava latið Uttanríkisráðnum í sambandi við viðgerð av setanarmálinum.

Uttanríkisráðið hevur nú eftirkannað málið og er komið til ta niðurstøðu, at hesi skjøl vóru latin skjalaskrásetingini hjá Løgmansskrivstovuni at skráseta í málið, ið eisini er virkandi skjalaskráseting hjá Uttanríkisráðnum meðan Uttanríkisráðið er undir skipan og til tað fær sína egnu skjalaskráseting. Skjølini hava sostatt verið setanarnevndini tøk frá byrjan og tí partur av viðgerðini.

Hinvegin eru nevndu skjøl av misgáum ikki komin við í elektroniska yvirlitið, tá ið tey vórðu latin skjalaskrásetingini hjá Løgmansskrivstovuni at skráseta. Og er tað nú rættað.

Nevndu skjøl saman við starvslýsing verða send tygum saman við hesum brævi og fara vit hiðani at biðja tygum um at halda okkum til góðar.

Somuleiðis senda vit hiðani avrit av hesum brævi og hjáløgdu skjølum til A og hennara sakførara."

Saman við skrivinum sendi Uttanríkisráðið teldubrævasamskifti millum formannin í setanarbólkinum og G ávikavist L um A umframt eitt skjal við heitinum „Profilspurningar". Skjølini eru endurgivin undir Málsgongdini.

Tann 24. mars 2009 hevur Uttanríkisráðið sent umboðsmanninum soljóðandi skriv:

„Eg fari at vísa til bræv tygara frá 10. mars 2009 viðvíkjandi klagu frá A, dagfest 2. januar 2009. Í avriti av brævi, hjáløgdum tygara brævi, førir R, sakførari – eftir hetta nevndur „sakførarin" – fram nøkur sjónarmið, ið eg við hesum fari at gera viðmerkingar til niðanfyri.

Sakførarin førir fram tað sjónarmið, at løgmaður bað varaløgmann

leggja setanarmálið til annað stjórnarráð enn Uttanríkisráðið at avgreiða. Her er talan um misskiljing, tí at tað, ið løgmaður sum ógegnigur myndugleiki í málinum bað varaløgmann um, var at leggja málið fyri annað stjórnarráð enn Løgmansskrivstovuna at avgreiða. Hesum var Uttanríkisráðið eisini munnliga kunnað um, beint áðrenn brævið var fyrireikað og handað Uttanríkisráðnum, og somuleiðis var hetta endurváttað beint eftir at brævið var handað, har lagt var afturat, at Løgmansskrivstovan sum ógegnigur myndugleiki ikki vildi viðmerkja málið annars.

Sakførarin førir eisini fram tað sjónarmið, at undirritaði noktaði at tosa við A. Her er eisini talan um misskiljing, ið krevur nærri frágreiðing. Tá ið løgfrøðiligi ráðgevin í Uttanríkisráðnum kom á stongdar dyr á síni egnu skrivstovu í Uttanríkisráðnum og samstundis gjørdist varugur við, at loyniskjøl og persónlig ting lógu grýtt runt um í grannaskrivstovuni, heitti hann á serkøna hjálp fyri at sleppa inn á sína skrivstovu til tess at tryggja viðurskiftini á staðnum. Tá kom A á staðið og setti seg upp ímóti at løgfrøðiligi ráðgevin slapp inn á sína egnu skrivstovu í Uttanríkisráðnum. Løgfrøðiligi ráðgevin vendi sær tá til mín, og kom eg beinanvegin og sá A uttanfyri skrivstovuna hjá løgfrøðiliga ráðgevanum, ikki sørt í sinni.

Fyri at tryggja frið bað eg serkønu hjálpina fara úr Uttanríkisráðnum og senda rokning fyri veittu tænastuna. Beint eftir hetta, avráddi eg við Z, táverandi uttanríkisráðharra, at einans hann og eg skuldu hava við málið at gera mótvegis Løgmansskrivstovuni, og at einans vit báðir skuldu samskifta við ávikavist løgmann og løgmansstjóran til tess at forða fyri stríði og misskiljingum millum starvsfólkini hjá Uttanríkisráðnum og Løgmansskrivstovuni, ið frammanundan høvdu og framvegis hava sera góð viðurskifti sínámillum. Ikki minst boðaði løgmaður staðiliga frá á fundi við uttanríkisráðharran, har eg sjálvur eisini luttók, at einans hann sjálvur og eingin annar í Løgmansskrivstovuni hevði heimild at viðgera hetta mál við Uttanríkisráðið.

Eg kann í hesum sambandi vísa á, at bæði undan og aftaná hesa hending var A ongantíð á nøkrum fundi um hetta mál, ið eg hevði við løgmansstjóran, ella tá eg sjálvur var saman við uttanríkisráðharranum á fundi við løgmann um tað sama. Tá ið A kom inn á mína skrivstovu hin 5. septembur 2008 og tók hetta mál upp við meg, segði eg við hana, at hetta var eitt politiskt mál millum uttanríkisráðharran og løgmann, ið eg ikki fór at viðgera saman við starvsfólki á Løgmansskrivstovuni, undantikin tó løgmansstjórin, sum er mín starvsbróður.

Í øllum øðrum málum og viðurskiftum bar eg meg ongantíð undan at tosa við A. Mest av øllum er týdningarmikið at hava í huga, at sama dag nýtt landsstýri tók við hin 26. septembur 2008 vóru øll óloyst hølisviðurskifti millum Uttanríkisráðið og Løgmansskrivstovuna beinanvegin loyst á ein nøktandi hátt, har uttanríkisráðharrin á fyrsta sinni fekk eina ráðharraskrivstovu.

At sakførarin førir fram tað sjónarmið, at sambært almenna starvsfólkapolitikkinum skulu innanhýsis umsøkjarar, ið søkja størv, sum teir ikki fáa, hava beinleiðis og persónlig boð um hetta frá leiðsluni hjá setanarmyndug-leikanum er ikki rætt í mun til tað, sum er ásett í starvsfólkapolitikki landsins. Har stendur nevniliga, at „Leiðari skal tosa við innanhýsis umsøkjarar, ið ikki fáa starvið, áðrenn boðað verður frá, at starvið er sett.“ Eisini er vert at leggja sær í geyma, at nevnda starv var ikki eitt innanhýsis starv í Uttanríkisráðnum, ið jú var setanarmyndugleiki í hesum máli, og at ongar neyvar reglur eru fyri tílíkum støðum í setanarpolitikki landsins. Hinvegin er eingin ivi um, at tað var ein óheppin støða, at A ikki frammanundan var munnliga kunnað um, at hon ikki varð sett í starvið, sum hon hevði virkað í sum avloysari, áðrenn hon fekk bræv um hetta.

Samanumtikið kann tí verða staðfest, at A var ongantíð mín mótpartur í Løgmansskrivstovuni í hesum málið, og at málið var loyst í sátt og semju í somu løtu nýtt landsstýri tók við, tí at hetta mál var, tá ið avtornaði, eitt politiskt mál millum fyrrverandi løgmann og fyrrverandi uttanríkisráðharran og sostatt als ikki eitt mál millum meg og A.

Sakførarin førir somuleiðis fram, at dentur var lagdur á onnur viðurskifti enn tey, sum vóru nevnd í lýsingini, tá ið avgerð var tikin um at seta starvið. Her er somuleiðis talan um misskiljing, ið krevur nærri frágreiðing. Løgmansskrivstovan er sjálv meginfyrisitingin í Føroyum fyri allari politiskari samskipan í sambandi við landsstýrisfundir. At verða deildarstjóri á Løgmansskrivstovuni, og serstakliga sum skrivari á landsstýrisfundi, krevur *flair* fyri og rætta fatan av hvussu stórpolitisk mál verða samskipað og viðgjørd annars, sum ein av fremstu politisku ráðgevum hjá løgmanni. Eingin ivi er um, at hesin partur av starvinum er ein tann týdningarmesti.

Umsøkjarin, ið er settur í starvið hevur í mun til A omanfyri nevndu førleikar bæði frá síni rúmu akademisku útbúgving innan politiska vísindi, ið er serstakliga grundað á føroysk politisk viðurskifti. Harafturat hevur umsøkjarin, ið er settur í starvið drúgvar royndir annars frá stjórnarskipanar-nevndini. Somuleiðis var metingin tann, at leiðsluroyndir og persónligu eginleikar hjá umsøkjaranum, ið fekk starvið, á ongan hátt lógu aftanfyri nevndu førleikar hjá A, tá ið ræður um málsøkið hjá Løgmansskriv-stovuni og tær uppgávur, ið annars vóru endurgivnar í starvslýsingini.

Um hendan táttin er harumframt at siga, at eg skrivaði bræv hin 19. novembur 2008 til allar umsøkjararnar, har eg kunnaði teir um, at nú Løgmansskrivstovan er ógegnig í málinum, hevur varaløgmaður gjørt av, at nevnda starvsetan verður løgd til Uttanríkisráðið at gera av, ið skipar nýggja setanarnevnd, sum fer til verka í næstum. Sostatt var alt tilfar í málinum, ið umsitingin hjá Løgmansskrivstovuni og tess setanarnevnd høvdu fyrireikað lagt til viks, uttan sjálv starvslýsingin og umsóknirnar til starvið, eina tí, at hesi fólk vóru ógegnig í málinum. Annars er at siga til nevnda bræv eg sendi umsøkjarunum, at hvørki A ella annar umsøkjari hevði nakrar viðmerkingar til nevndu mannagongd."



Tann 27. mars 2009 vórðu skrivini hjá Uttanríkisráðnum, dagfest 19. og 24. mars 2009 send klagaranum til viðmerkingar.

Skriv Uttanríkisráðsins, dagfest 19. mars 2009, varð somuleiðis sent Løgmansskrivstovuni til møguligar viðmerkingar við atliti at viðmerkingum ráðsins um skjalaskrásetingina, eins og umboðsmaðurin bað um at fáa skjølini í setanarmálinum hjá Løgmansskrivstovuni til láns.

Tann 27. mars 2009 bað umboðsmaðurin Uttanríkisráðið greiða nærri frá skjalinum við heitinum „Profilspurningar". Umboðsmaðurin bað harumframt Uttanríkisráðið um at lata sær somu skjøl (ummæli) viðvíkjandi B, sum ráðið hevði latið umboðsmanninum viðvíkjandi A og annars øll skjøl, sum hoyrdu til málið, tað verið seg upprit, teldubrævasamskifti o.a.

Tann 3. apríl 2009 sendi Uttanríkisráðið umboðsmanninum soljóðandi svar:

> „**Viðvíkjandi klagu frá A**
> Víst verður til bræv dagfest 27. mars 2009, har Løgtingsins Umboðsmaður ynskir skjøl, ið Uttanríkisráðið av misgáum ikki hevur sent áður, tað verður við hesum gjørt.
>
> Skjalið við heitinum Profilspurningar við áskriftini Master, er eitt skjal, ið setunarbólkurin gjørdi áðrenn tey fingu útflýggjað umsóknirnar, tvs. hetta er teirra meting av, hvussu stóran týdning ymisku viðurskiftini hava fyri leiðslustarvið á Løgmansskrivstovuni."

Saman við skrivinum sendi Uttanríkisráðið teldubrævasamskifti millum formannin í setanarnevndini og I, fyrrv. formann í Grundlógarnevndini um B. Teldubrævasamskiftið er endurgivið undir Málsgongdini.

Við skrivi, dagfest 16. apríl 2009, sendi R, advokatur, umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„**Viðv. tykkara j. nr. 200900001; Kæra frá A**
Eg vísi til bræv frá Løgtingsins umboðsmanni til mín frá 27. mars 2009 saman við avriti av skrivum frá Uttanríkisráðnum, dagfest ávikavist 19. og 24. mars 2009.

Eg skal gera nakrar viðmerkingar til skrivið frá Uttanríkisráðnum, sum er dagfest 24. mars 2009.

Brævið frá Uttanríkisráðnum, sum er dagfest 24. mars 2009, broytir ikki meting mína, sum var og framvegis er, at Uttanríkisráðið ikki átti at viðgjørt setanarmálið, sum hetta málið snýr seg um. Eg meti tí framvegis, at Uttanríkisráðið átti at havt gjørt, sum løgmaður bað um, nevniliga lagt setanina til annað aðalráð enn Uttanríkisráðið at avgreiða.

Í brævinum hjá aðalstjóranum í Uttanríkisráðnum frá 24. mars 2009 er skrivað, at Løgmansskrivstovan munnliga hevur kunnað Uttanríkisráðið um, at umbønin frá Løgmansskrivstovuni skuldi skiljast sum, at málið skuldi leggjast til annað stjórnarráð enn Løgmansskrivstovuna at avgreiða.

Um Løgmansskrivstovan hevur givið hesi munnligu boðini, er tað brot á § 6, stk. 1, 1. pkt., í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, at hesar upplýsingar ikki eru noteraðar og at innlit ikki er givið í tær. At munnlig boð skulu vera givin, sæst nevniliga ikki á skjalayvirlitinum, sum er framlagt av Uttanríkisráðnum í málinum, og eg havi ikki fingið innlit í nakað notat, sum bendir á, at hesi munnligu boð eru givin.

Sama um hesi munnligu boð eru givin Uttanríkisráðnum frá Løgmansskrivstovuni, átti Uttanríkisráðið ikki at tikið avgerð í málinum, eftirsum at ráðið var ógegnugt at taka støðu í málinum.

Út frá svarinum frá Uttanríkisráðnum frá 24. mars 2009 kann staðfestast, at ósemja ikki er um, at setti aðalstjórin í Uttanríkisráðnum hevur noktað at tosa við A um málið. Nú verður skrivað, at aðalstjórin skal hava tosað við táverandi uttanríkisráðharran, og at hesin skal hava sagt, at bert uttanríkisráðharrin og aðalstjórin skuldu hava við málið at gera mótvegis Løgmansskrivstovuni, og at einans hesir báðir skuldu samskifta við ávikavíst løgmann og løgmansstjóran.

Eg eri av tí áskoðan, at hóast tann frágreiðing, sum nú kemur frá Uttanríkisráðnum, verður løgd til grund, broytir hetta ikki niðurstøðuna um, at framferðarhátturin hjá aðalstjóranum, tá hesin uttan nærri frágreiðing noktaði at tosa við A, objektivt er egnaður til at skapa iva um, hvørt aðalstjórin hevur verið gegnigur at taka støðu í einum setanarmáli, har A var ein umsøkjari.

Tá aðalstjórin beinleiðis noktar at tosa við tað starvsfólkið, sum hevði hølisviðurskifti í Tinganesi um hendi, er eftir mínum tykki greitt skaptur ivi um, hvørt viðkomandi er gegnigur til seinni at taka støðu í einum setanarmáli, sum viðvíkur A.

Um tað veruliga var so, at aðalstjórin hevði gjørt hesa avtaluna við táverandi uttanríkisráðharran, átti A at fingið frágreiðing um hetta, tá aðalstjórin noktaði at tosa við hana, og hetta átti eisini at verið noterað í viðkomandi mál. Hetta er tí eisini brot á § 6, stk. 1,1. pkt., í lóg um innlit í fyrisitingina.

Eftir stendur undir øllum umstøðum, at aðalstjórin uttan nærri frágreiðing hevur avvíst at tosa við A, og hetta í sær sjálvum ger, at grundaður ivi má metast at vera um, hvørt aðalstjórin í Uttanríkisráðnum var gegnigur til seinni at taka støðu í einum setanarmáli, har A var ein av umsøkjarunum.

Tað skuldi ikki verið neyðugt at gjørt viðmerkingar til tað, at Uttanríkisráðið eftir øllum at døma ikki metir, at A var at meta sum innanhýsis umsøkjari til starvið, sum hon sjálv hevði røkt í hálvtannað ár frammanundan, at hetta varð sett.

Í brævinum frá Uttanríkisráðnum frá 24. mars 2009 verður nú

boðað frá, at starvið, sum A søkti, kravdi „flair" fyri og rætta fatan av, hvussu stórpolitisk mál verða samskipað og viðgjørd annars, og at eingin ivi er um, at hesin parturin av starvinum er tann týdningarmesti. Síðani verða gjørdar nakrar viðmerkingar um, at umsøkjarin, sum fekk starvið, var betri skikkaður til starvið enn A.

Eg eri av tí fatan, at hesar viðmerkingarnar frá Uttanríkisráðnum undirbyggja og staðfesta viðmerkingar mínar í brævinum frá 6. mars 2009, nevniliga at setanarnevndin undir Uttanríkisráðnum hevur viðgjørt setanarmálið út frá øðrum fortreytum enn teimum, sum hava verið umsøkjarunum kunnugar, tá umsøkjararnir søktu starvið.

Eg meti tí eisini, at tað kann leggjast til grund, at starvið er sett grundað á onnur atlit enn tey, sum vórðu fráboðað í lýsingini, og sum umsøkjararnir hildu seg til, tá umsóknirnar vórðu skrivaðar.

Tað er nevniliga einki skrivað í starvslýsingini um, at hetta „flair" var avgerandi fyritreyt fyri starvinum, og tá nú Uttanríkisráðið í brævinum frá 24. mars 2009 skrivar, at hetta hevur verið avgerandi fortreytin fyri starvinum, kann ikki vera ivi um, at fortreytirnar fyri starvinum hava verið broyttar, frá tí at umsóknirnar vórðu skrivaðar grundað á upprunaligu starvslýsingina, og til at starvið varð sett.

Eg skal í hesum sambandi viðmerkja, at kæran hjá A ikki viðvíkur tí persóninum, sum fekk starvið, men viðvíkur málsviðgerðini í sambandi við, at starvið varð sett.

Tað, sum kært verður um, hvat viðvíkur hesum partinum, er, at Uttanríkisráðið, uttan at kunna ið hvussu er A um tað, hevur broytt fortreytirnar fyri starvinum frá tí, at starvið upprunaliga varð lýst leyst, til hetta varð sett. Hetta er ein munandi og eftir mínum tykki sera álvarsligur málsviðgerðarfeilur.



Eg skal annars viðmerkja, at eg framvegis ikki havi sæð setanarprofilin til starvið og profileringina, sum setanarnevndin hjá Uttanríkisráðnum gjørdi eftir at hava spurt seg fyri hjá einum fyrrverandi leiðara í lýsta starvinum.

Tørvar Løgtingsins umboðsmanni fleiri upplýsingar frá A til at taka støðu í málinum, ella eru spurningar annars, frætti eg fegin.

Eg havi sent avrit av hesum brævinum til Uttanríkisráðið, og eg leggi við avrit av brævi mínum til ráðið í hesum sambandi."

Tann 27. apríl 2009 vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Uttanríkisráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Uttanríkisráðið varð samstundis biðið um lata umboðsmanninum avrit av samskifti millum setanarbólkin og táverandi arbeiðsgevararnar hjá A og B.

Tann 12. mai 2009 sendi Uttanríkisráðið umboðsmanninum soljóðandi skriv:

„Í brævi frá Løgtingsins Umboðsmanni, dagsettum 27. apríl 2009, viðvíkjandi klagu frá A, dagfest 2. januar 2009, verður avrit av hjáløgdum brævi frá R, sakførara sent Uttanríkisráðnum til ummælis. Og verða hesar viðmerkingar gjørdar.

Sakførarin førir fram, at frágreiðing mín til Løgtingsins Umboðsmann frá 24. mars 2009 ikki broytir hansara fatan, at Uttanríkisráðið ikki gjørdi eftir boðum løgmans, tá ið Uttanríkisráðið tók við sum setanarmyndugleiki í samsvar við áheitanina frá Løgmansskrivstovuni í brævi til Uttanríkisráðið firá 13. november 2008. Til hesa álvarsomu ákæru havi eg tó ikki fleiri viðmerkingar enn tær, ið eg longu havi ført fram í brævi mínum til Løgtingsins Umboðsmann frá 24. mars 2009.

Sakførarin førir síðani fram, at tað er brot á grein 6, stk. 1,1. pkt.

í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993, um innlit í fyrisitingina, at munnliga kunningin um, at Løgmansskrivstovan í næstum fór, orsaka av ógegni, at lata avvarðandi starvssetan til Uttanríkisráðið at avgreiða, ikki varð skrásett í avvarðandi mál.

Fyrst er at siga, at grein 6, stk. 1, 1. pkt. í lógini um alment innlit meira hevur at gera við ta støðuna, at ein myndugleiki í avgerðarmálum hevur skyldu til at skriva upp upplýsingar av týdningi fyri avgerðina í málinum. Í hesum máli er ikki talan um móttøku av upplýsingum av týdningi fyri málið.

Eisini skal sigast, eins og kemur fram í brævi mínum frá 24. mars 2009, at Uttanríkisráðið var kunnað um omanfyrinevnda, „áðrenn brævið var fyrireikað og handað Uttanríkisráðnum". Tískil varð henda kunningin ikki skrásett av tí einføldu orsøk, at hetta mál einans varð sett á stovn eftir, at Uttanríkisráðið varð biðið um at avgreiða hesa starvssetan í brævi frá 13. november 2008. Harafturat er greitt, at sambært grein 6, stk. 1, 1. punkt í lógini um alment innlit, er omanfyrinevnda skylda at skriva upp „ikki galdandi, um upplýsingarnar annars síggjast í skjølunum í málinum." Tískil er tað eiheldur brot á grein 6, stk. 1, 1. pkt. í lógini um alment innlit, at endurváttanin um at Uttanríkisráðið varð lutað setanarmyndugleikan í avvarðandi starvssetan ikki varð skrivað upp eftir at brævið frá Løgmansskrivstovuni til Uttanríkisráðið frá 13. november 2008 var handað Uttanríkisráðnum.

Sakførarin førir somuleiðis fram, at Uttanríkisráðið skal hava sagt í brævi frá 24. mars 2009, at tað er eingin ivi um, at tað at hava „flair" fyri og rætta fatan av, hvussu stórpolitisk mál verða samskipað og viðgjørd annars er tann „parturin av starvinum, ið er tann týdningarmesti." Sakførarin førir víðari fram, at hesi viðurskifti undirbyggja og staðfesta viðmerkingar hansara í brævi frá 6. mars 2009, „nevniliga at setanarnevndin undir Uttanríkisráðnum hevur viðgjørt setanarmálið út frá øðrum fortreytum enn teimum, sum hava verið umsøkjarunum kunnugar, tá umsøkjararnir søktu starvið."



Til hetta er at siga, at tilvísingin til „flair" í brævi mínum frá 24. mars 2009 var einans ein lýsing av pørtum av uppgávunum, ið vóru ítøkiliga nevndar í lýsingini, nevniliga at „hava ábyrgd av at fremja og/ella samskipa aðrar uppgávur og tvørvegis verkætlanir, ið løgmaður hevur sett sær fyri" og „vera til reiðar at broyta virksemisøki og/ella taka á seg ábyrgd av nýggjum fakøkjum umframt at vera til reiðar at taka hond í á øðrum virksemisøkjum."

Henda lýsingin fevndi sostatt somuleiðis um fakligu og persónligu førleikarnar, ið mettir vóru neyðugir til starvið, nevniliga at umsøkjarin skuldi „hava góð samstarvsevni, vera tænastuhugaður, miðvísur og ágrýtin." Ikki skuldi verið neyðugt at gjørt fleiri viðmerkingar til omanfyrinevndu sjónarmið sakførarans hesum viðvíkjandi. Tó meti eg tað at vera týdningarmikið at leggja afturat, at tað er í ósamsvar við veruleikan, at Uttanríkisráðið í omanfyrinevnda brævi frá 24. mars 2009, skal hava fráboðað, at tað at hava „flair" fyri og rætta fatan av, hvussu stórpolitisk mál verða samskipað og viðgjørd annars er tann mest týdningarmesti parturin av starvinum. Í omanfyrinevnda brævi frá Uttanríkisráðnum til Løgtingsins Umboðsmann varð tvørturímóti sagt, at tað at hava „flair" fyri slíkum er „ein tann týdningarmesti" parturin av starvinum og sostatt ikki tann týdningarmesti parturin.

Viðvíkjandi avriti av møguligum samskifti millum setanarnevndina og táverandi arbeiðsgevaran hjá umsøkjaranum, sum er settur í starvið, hevur formaðurin í setanarnevndini boðað mær frá, at einki slíkt samskifti hevur verið. Setanarnevndin metti tað ikki at vera neyðugt at biðja táverandi arbeiðsgevaran hjá umsøkjaranum, ið er settur í starvið um viðmæli. Táverandi arbeiðsgevarin hjá A, ið jú var ógegnigur, var sjálvsagt eiheldur biðin um viðmæli."

Tann 19. mai 2009 vórðu viðmerkingarnar hjá Uttanríkisráðnum sendar klagaranum til ummælis við eini freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 27. mai 2009, boðaði R, advokatur, vegna klagaran frá, at hann ikki hevði fleiri viðmerkingar til málið.

Tann 2. juni 2009 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um handfaringina hjá Uttanríkisráðnum av setanini av einum deildarstjórastarvi á Løgmansskrivstovuni. Av tí at løgmaður var ógegnigur at viðgera setanarmálið, heitti hann á varaløgmann um at leggja málið til annað aðalráð at gera av. Varaløgmaður, sum eisini er landsstýrismaður í uttanríkismálum, gjørdi av, at Uttanríkisráðið skuldi viðgera málið. Klagað er um, at aðalstjórin í Uttanríkisráðnum var ógegnigur at viðgera málið og um málsviðgerðina annars.*

*Klagarin, sum søkti men ikki fekk starvið, hevði verið fyribils sett í starvinum í meira enn eitt ár, tá tað varð lýst leyst.*

***Áheitan løgmans á varaløgmann***

*Eg fari fyrst at gera viðmerkingar til tað, sum klagarin hevur ført fram um, at løgmaður heitti á varaløgmann um at leggja málið til annað aðalráð enn Uttanríkisráðið at gera av. § 55, stk. 1 í fráboðan nr. 84 frá 30. september 2008 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar er soljóðandi:*

> *„§ 55. Um so er, at landsstýrismaður er ógegnigur í ávísum máli sambært fyrisitingarlógini, boðar hann løgmanni frá hesum, og løgmaður ger tá av, hvør av hinum landsstýrismonnunum tá røkir skyldur landsstýrismansins í málinum."*

*Ásetingin umrøður tey føri, har ein landsstýrismaður er ógegnigur og verður nýtt samsvarandi, tá løgmaður er ógegnigur, tó soleiðis at varaløgmaður kemur í stað løgmans. Sum áheitan løgmans var orðað, haldi eg ikki grundarlag vera fyri sjónarmiði klagarans, og vísandi til § 55, stk. 1 í málsøkjabýtisfráboðanini kundi løgmaður ikki gera av, at Uttanríkisráðið ikki skuldi viðgera málið.*



***Gegni***

*Klagað er um, at aðalstjórin í Uttanríkisráðnum var ógegnigur at viðgera málið sambært § 3, stk. 1, nr. 5 í fyrisitingarlógini. Orsøkin til hetta var álvarsligur og persónligur tvídráttur millum klagaran og aðalstjóran undir eini ósemju millum Løgmansskrivstovuna og Uttanríkisráðið um skrivstovuhøli á heysti 2008. Ósemjan fekk drúgva umrøðu í fjølmiðlunum aftaná, og stutt eftir helt samstarvið millum politisku flokkarnar í landsstýrinum uppat.*

*Advokatur klagarans hevur í skrivi, dagfest 6. mars 2009, víst á, at klagarin í starvi sínum hevði ábyrgd av hølismálum og ognum í Tinganesi, og at klagarin í einum uppriti viðgjørdi leiklutin hjá aðalstjóranum í sambandi við eina ítøkiliga hending undir ósemjuni. Advokaturin metir tað vera eyðsæð, at tað ikki var rætt av Uttanríkisráðnum at viðgera starvssetanina, tá starv klagarans hevði beinleiðis samband við ósemjuna, og hon samstundis hevði ein leiklut í sambandi við hetta málið. Harumframt skal aðalstjórin í einum føri hava noktað at tosa við klagaran um viðurskifti í sambandi við ósemjuna.*

*Aðalstjórin í Uttanríkisráðnum sigur í skrivi, dagfest 24. mars 2009, at talan er um eina misskiljing, tá ført verður fram, at hann noktaði at tosa við klagaran. Sambært honum avráddu hann og táverandi uttanríkisráðharrin eftir eina hending 1. september 2008, at einans teir báðir skuldu samskifta við løgmansstjóran og løgmann um málið, og at hann hevði svarað klagaranum, at hann ikki viðgjørdi málið við annað starvsfólk á Løgmansskrivstovuni enn løgmansstjóran. Aðalstjórin vísir eisini á, at løgmaður hevði boðað frá, at einans hann sjálvur hevði heimild at viðgera hetta mál við Uttanríkisráðið, og at klagarin og aðalstjórin ongantíð vóru á nøkrum fundi saman um hetta mál.*

*Reglurnar um gegni eru at finna í fyrsitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg) kap. 2, §§ 3 – 6, og endamálið við reglunum er at tryggja, at avgerðir eru sakligar og ikki bygdar á óviðkomandi atlit. Kann persónur hugsast at hava serstøk áhugamál í málinum, kann hann ikki luttaka í viðgerðini.*

*§§ 3, stk. 1, nr. 5, stk. 2 – 3 og 4, stk. 1 eru soljóðandi:*

*„§ 3. Persónur, sum virkar innan almennu fyrisitingina, er ógegnigur um so er, at ...*
*5) tað annars eru viðurskifti, sum kunnu hugsast at vekja iva um, at viðkomandi heldur við einum av pørtunum.*
*Stk. 2. Persónur er tó ikki ógegnigur, um tað má metast, at áhugamál hansara eru soleiðis háttað ella so veik, ella at málið ella virksemi hansara í samband við viðgerðina av málinum, er soleiðis háttað, at eingin vandi má metast at vera fyri, at avgerðin í málinum kann fara at verða ávirkað av óviðkomandi fyriliti.*
*Stk. 3. Hann, sum er ógegnigur í einum máli, má ikki taka avgerð, vera við til at taka avgerð ella á annan hátt vera við í viðgerðini av málinum."*

*§ 4. Ásetingarnar í § 3 eru ikki galdandi, um tað verður ógjørligt ella fer at viðføra stórar trupulleikar ella ivingarsemi at lata ein annan koma í hansara stað undir viðgerðini av málinum.*
*Stk. 2. ..."*

*§ 3, stk. 1, nr. 5 tekur samanum áhugamál, sum ikki eru fevnd av nr. 1 – 4, og í sínum orðaljóði treytar ásetingin, at tað í minsta lagi eru tveir partar í einum fyrisitingarligum máli, og at myndugleikapersónurin heldur við einum teirra. Ásetingin tekur ikki hædd fyri øðrum viðurskiftum, sum kunnu hava við sær ógegni. Fyrimyndin fyri fyrisitingarlógini er danska Forvaltnings-loven, og tá eingin innihaldsligur munur er tilætlaður í mun til donsku lógina, tulki eg ásetingina samsvarandi teirri donsku at fevna um tey føri, har ivi kann vera um, hvørt ein myndugleikapersónur er ópartískur.*

*Sambært § 3, stk. 1, nr. 5 kunnu t.d. vinskapur ella óvinskapur millum myndugleikapersónin og ein part í málinum hava við sær ógegni. Viðvíkjandi óvinskapi verður sambært siðvenju sett sum krav, at talan er um ein persónligan tvídrátt, sum kann staðfestast og hevur eina ávísa styrki (álvarsligur). Tað er ikki nóg mikið, at annar heldur, at talan er um ein tvídrátt, um útsøgnir ella gerðir frá hinum partinum ikki kunnu (skjal)prógvast. Um siðvenju í sambandi við § 3, stk. 1, nr. 5 fari eg at vísa til m.a. Hans Gammeltoft-Hansen, Forvaltningsret, 2.*



*udgave, s. 257 f, og niðurstøðurnar hjá danska umboðsmanninum í FOB 1982.267, FOB 1992.222, FOB 1995.112, FOB 2007.333 og j.nr. 2008-17-1.*

*Umboðsmansviðgerðin av málinum fer fram á einum skrivligum grundarlag, og í mun til nevndu ósemju verður einans viðgjørt, um grundarlag er fyri at siga, at viðurskiftini millum klagaran og aðalstjóran vóru av slíkum slag, at aðalstjórin má metast at vera ógegnigur.*

*Klagarin og aðalstjórin umrøða í frágreiðingum sínum tvær ítøkiligar hendingar. Eftir fyrru hendingina skrivaði klagarin eitt upprit um, hvat aðalstjórin skal hava sagt, og undir seinnu hendingini boðaði aðalstjórin klagaranum frá, at hann bert viðgjørdi ósemjuna við løgmansstjóran. Eg meti ikki umrøddu hendingarnar og skrivligu frásøgnina vera tekin um ein persónligan tvídrátt, og grundað á at viðurskiftini millum klagaran og aðalstjóran ikki eru nevnd aðrastaðni í skrivliga tilfarinum í málinum, haldi eg ikki grundarlag vera fyri at siga, at nakar álvarsligur tvídráttur var millum klagaran og aðalstjóran í Uttanríkisráðnum. Grundað á skjalatilfarið í málinum meti eg heldur ikki onnur viðurskifti vera, sum kunnu hava við sær, at aðalstjórin eftir eini objektivari meting má haldast at vera ógegnigur.*

***Skyldan at upplýsa málið***
*Fyrisitingarmyndugleikar hava sambært offisialprinsippinum ábyrgdina av, at eitt mál er lýst á nøktandi og fullgóðan hátt, tá myndugleikin tekur avgerð. Undir viðgerðini av málinum valdi setanarnevndin at síggja burtur frá skjølunum í málinum hjá Løgmansskrivstovuni, og tá setanarprofilur skuldi gerast, vendi nevndin sær til ein fyrrverandi leiðara í lýsta starvinum. Uttanríkisráðið hevur greitt frá, at orsøkin til at sæð varð burtur frá skjølunum hjá Løgmansskrivstovuni var, at starvsfólkini á Løgmansskriv-stovuni vóru ógegnig at viðgera málið.*

*Í ítøkiliga málinum var tað løgmaður, sum var persónliga ógegnigur, og í hansara stað kom varaløgmaður, sum tók endaliga avgerð í málinum. Tað var sostatt hvørki Løgmansskrivstovan sum myndugleiki ella einstøku starvsfólkini, sum upprunaliga vóru ógegnig at viðgera*

*málið. Starvsfólkini vórðu mett ógegnig, tí løgmaður var ógegnigur. Beinleiðis avleiðingin av at persónur er ógegnigur er, at viðkomandi ikki má taka avgerð ella vera við til at taka avgerð ella á annan hátt vera við í viðgerðini av málinum, uttan so at tað er ógjørligt ella sera trupult ella ivasamt at lata ein annan koma í hansara stað, jbr. § 3, stk. 3 og § 4, stk. 1 í fyrisitingarlógini. Í einum føri, har tað er ovasti fyrisitingarligi leiðarin, løgmaður ella landsstýrismaður, sum er ógegnigur, er eingin forðing fyri, at embætisfólk teirra viðgera ella luttaka í viðgerðini av málinum, um hetta er neyðugt til tess at tryggja neyðuga kunnleikan til viðgerðina av málinum. Hesin spurningur er viðgjørdur í løgfrøðiligu bókmentunum, og fari eg m.a. at vísa til Hans Gammeltoft-Hansen, Forvaltningsret, 2. útgáva, bls. 282 og Jens Garde v.fl, Forvaltningsret, Sagsbehandling, 6. útgáva, bls. 126 – 127.*

*Málið, sum klagað er um, snýr seg um at seta eitt leiðslustarv á Løgmansskrivstovuni, og er tað hesin myndugleikin, sum hevur neyðuga kunnleikan og innliti í, hvørjar uppgávur liggja í starvinum, og hvørjar treytir tann, sum verður settur í starvið, skal lúka. Eg meti tað tískil vera ein álvarsaman feil í viðgerðini hjá setanarnevndini, at hon ikki útvegaði sær upplýsingar um starvið frá Løgmansskrivstovuni. Eg haldi tað somuleiðis vera ivasamt at byggja setanarprofilin á upplýsingar frá einum fyrrverandi leiðara í starvinum, sum ikki kann sigast at umboða neyðugu vitanina um starvið, av tí at viðkomandi ikki starvast á Løgmansskrivstovuni longur. Tað ger ikki støðuna betri, at einki er niðurskrivað frá samrøðuni við fyrrverandi leiðaran um setanarprofilin, og eg fari vísandi til § 6, stk. 1 í innlitslógini at átala, at Uttanríkisráðið ikki hevur skrivað niður innihaldið av hesi samrøðu.*

*Eg havi sum so onga viðmerking til, at Uttanríkisráðið tilnevndi starvsfólk í Uttanríkis-, Vinnu- og Innlendismálaráðnum í setanarnevndina, men havandi í huga at talan er um eitt deildarstjórastarv ivist eg í, hvørjar fortreytir og førleikar ávikavist ein fulltrúi og ein skrivari, sum ikki starvast á Løgmansskrivstovuni, hava fyri at gera starvsprofil og innstilla umsøkjarar til eitt leiðslustarv á Løgmansskrivstovuni.*

*Í aðramáta er einki skrivligt tilfar í málinum viðvíkjandi setanarprofilinum annað enn eitt skjal, har setanarnevndin hevur mett um týdningin av ymiskum eginleikum fyri starvið. Tað framgongur tó ikki av málinum, um setanarnevndin hevur brúkt hetta sum grundarlag undir eini meting og samanbering av umsøkjarunum.*

*Í starvslýsingini varð sagt, at tað var ein fyrimunur, at umsøkjari hevði arbeiðsroyndir innan tær uppgávur og øki, sum lógu í starvinum. Hóast hetta kannaði setanarnevndin ikki, hvørjar royndir Løgmansskrivstovan hevði av A, sum tá hevði røkt starvið í stívliga eitt ár. Eisini í hesum føri hevur Uttanríkisráðið greitt frá, at setanarnevndin ikki vendi sær til løgmansstjóran av teirri orsøk, at hon var ógegnig. Vísandi til tað, sum eg frammanfyri havi nevnt um gegnisspurningin og at embætisfólk hjá ógegnigum landsstýrismanni luttaka í málsviðgerðini, kann eingin ivi vera um, at luttøkan hjá løgmansstjóranum eisini í hesum føri er av stórum týdningi fyri at upplýsa málið. Løgmansstjórin var sum stjóri hjá A tann einasta, sum hevði neyðugu vitanina um og kundi úttala seg um, hvussu hon hevði roynst í starvinum. Eg meti tað vera ein álvarsaman feil, at eitt slíkt ummæli ikki var útvegað.*

*Hóast setanarnevndin ikki metti tað vera neyðugt at biðja um ummæli frá táverandi stjóranum hjá B, innstilla 2 limir í setanarnevndini hann sum nr. 1 til starvið og grundgeva m.a. við leiðsluroyndunum frá Almannastovuni. Eg havi torført við at skilja hesa grundgeving, tí setanarnevndin hevði ongar upplýsingar um leiðsluroyndir hansara og heldur ongar upplýsingar, sum talaðu ímóti tí fyrimuni, sum A sambært starvslýsingini hevði.*

*Samanumtikið haldi eg grundarlagið undir tilmælinum hjá setanarnevndini vera ófullfíggjað, og hetta átti setanarmyndugleikin at havt varnast og gjørt vart við. Setanarnevndin var ikki samd um innstillingina, og tað sæst ikki, hvør teirra innstillaði hvønn sum nr. 1 og 2. Av hesi orsøk og av tí at A sambært starvslýsingini hevði ein fyrimun, sum ikki bleiv viðgjørdur nærri, haldi eg tað vera átaluvert, at setanarmyndugleikin ikki grundgav nærri fyri avgerðini at seta B í starvið.*

***Grundgeving***
*Sambært § 21 í fyrisitingarlógini hevði Uttanríkisráðið skyldu til at geva klagaranum eina grundgeving fyri avgerðini um ikki at seta hana*

*í starv. Uttanríkisráðið grundgav avgerðina við, at tann ið settur var, hevði rúma akademiska útbúgving innanfyri politiska vísindi, og at dentur eisini varð lagdur á leiðsluroyndir og persónligar eginleikar.*

*Sambært § 23 skal grundgevingin geva eina frágreiðing um, hví avgerðin fekk ta innihald, hon fekk. Hvussu neyv grundgevingin skal vera valdast m.a. leiklutin hjá klagaranum undir málsviðgerðini og umstøðurnar í málinum annars. Eg haldi ikki, at grundgevingin mótvegis klagaranum lýkur krøvini í § 23 í fyrisitingarlógini, og hetta grundi eg serliga á, at hon hevði røkt starvið í meira enn eitt ár, at hon hevði verið til setanarsamrøðu, og at limirnir í setanarnevndini innstillaðu hana sum ávikavist nr. 1 og nr. 2 til starvið. Hon hevði tí skil krav uppá eina neyvari grundgeving. Eg haldi tað somuleiðis vera sera átaluvert, at Uttanríkisráðið ikki lat við seg koma, tá klagarin vendi sær til ráðið vð umbøn um eina neyvari grundgeving. Sum Uttanríkisráðið eisini ásannar, var tað heldur ikki nøktandi, at umboð fyri ráðið ikki tosaði við klagaran, áðrenn starvssetanin varð fráboðað, soleiðis sum umrøtt er í setanarpolitikki landsins um innanhýsis umsøkjarar.*

***Latan av skjølum til umboðsmannin og partsinnlit***
*Klagarin gjørdi undir viðgerð míni av klaguni vart við, at hon ikki fekk partsinnlit í ummælini, sum ein fyrrverandi deildarleiðari og ein starvsfelagi høvdu latið Uttanríkisráðnum. Ráðið lat heldur ikki umboðsmanninum hesi skjøl, fyrr enn gjørt varð vart við hetta. Í einum øðrum føri lat ráðið heldur ikki umboðsmanninum eitt ávíst skjal, fyrr enn biðið varð um tað.*

*Sambært § 8, stk. 1 í umboðsmanslógini hevur Uttanríkisráðið skyldu til at lata umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt. Fær umboðsmaðurin ikki allar upplýsingar frá myndugleikum, verður málið ikki nøktandi upplýst. At fáa nøktandi upplýsingar frá myndugleikunum er grundarlagið undir málsviðgerðini hjá umboðsmanninum, og eg meti tað tí vera sera átaluvert, at Uttanríkisráðið ikki gav mær allar upplýsingarnar í málinum beinanvegin.*

*Uttanríkisráðið hevur greitt frá, at tað var eitt mistak, at skjølini (teldubrævasamskifti) ikki vóru skrásett í málinum. Skráseting av skjølum er, umframt at vera ein fortreyt fyri at málsviðgerðin kann eftirkannast, eisini ein fortreyt fyri, at reglurnar um innlit virka til fulnar sambært endamálinum, og sambært góðum fyrisitingarsiði áliggur tað einum myndugleika at skráseta inn- og útgangandi skriv, eisini teldubrøv, skjótast gjørligt.*

***Samanumtikið***
*Samanumtikið haldi eg talan vera um so grundleggjandi feilir í málsviðgerðini, at eg fari at geva Uttanríkisráðnum eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av málinum.*

*Eg havi gjølliga umhugsað, um eg skuldi mæla Uttanríkisráðnum til at taka málið uppaftur til nýggja viðgerð. Eg havi tó valt ikki at gera hetta, og orsøkin er, at bæði Løgmansskrivstovan og setanarnevndin metti A og B vera skikkaði til starvið. Eg geri tí skil ikki meira við málið.*

*Av tí at eg haldi talan hevur verið um álvarsom brek við viðgerðini av hesum máli, havi eg samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini boðað formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum í uttanríkismálum frá niðurstøðu mínari.*

# VI. Skjøl

## Skjal 1

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

**1. Partur**
**Umboðsmaðurin og Løgtingið**

**§ 1.** Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

*2. stk.* Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.

*3. stk.* Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2.** Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3.** Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**
**Heimildir**

**§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu).

*2. stk.* Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um almennar skráir.

*3. stk.* Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.

*4.stk.* Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.

*5. stk.* Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5.** Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

## 3. Partur
## Kærumál og egin mál

**§ 6.** Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.

*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.

*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

*5. stk.* Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.

## 4. Partur
## Kanningar

**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina kæru til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í kæruni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.

*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

**§ 9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.



## 5. Partur
## Niðurstøður

**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.

*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.

*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.

*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. Partur
## Lønar- og eftirlønarviðurskifti

**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.

*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

**7. Partur**
**Fyrisiting**

**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

**8. Partur**
**Ígildisreglur**

**§ 18.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.

*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.



# *Skjal 2*

***Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann***

**Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um**

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingarmyndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndugleikarnir, sum t.d. løgreglan hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar. Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

**Hvussu kunnu tygum klaga**

Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, **hvønn** og **hvat** tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað lættir um málsviðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndugleikunum osv.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

**Hvat kann umboðsmaðurin gera**

Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin ikki sjálvur kann broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í hesum sambandi skulu tygum

hava í huga, at umboðsmaðurin hevur avmarkaðar møguleikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

**Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu**

Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

1. Klagan verður kannað nærri.
2. Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

*1. Klagan verður kannað nærri.*
Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

*2. Klagan verður avvíst.*
Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

„*Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum...*“ (§ 6, stk. 3)

Um tað er møguligt at kæra eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.

„...Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.“ (§ 6, stk. 2)

Orðingin „viðurskifti“ fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðsmannin, t.d. viðgerðina av einum máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í málinum, atburðin o.s.v. Klaga tygum um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

*3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.*
Í umboðsmanslógini stendur:

„*Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.*“ (§ 6, stk. 4)

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar**

Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

**Um umboðsmannin og embætið**

Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løgtingsins umboðsmann. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu 2/3 av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00 ella venda tygum til skrivstovuna í Traðagøtu 43, Argir, um tygum hava spurningar.